# Fiskimálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 01-11-2019
Mál nr.: 19/00494-43
Málsviðgjørt: AK/KM
Eftirkannað: 24-10-2019

**Løgtingsmál nr. 15/2019: Uppskot til løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**sjófeingi**
**(Sjófeingislógin)**

## Kapittul 1
## Lógarøki og allýsingar

**§ 1.** Løgtingslógin fevnir um at gagnnýta livandi sjófeingi í føroyskum sjógvi og uttan fyri føroyskan sjógv og at fáast við slíkt virksemi sum at umskipa, leggja upp, taka ímóti, flyta, goyma, virka og selja ella umseta sjófeingi og úrdrátt úr hesum.
*Stk. 2.* Løgtingslógin er somuleiðis galdandi á føroyskum førum, á føroyska landgrunninum, á landi í Føroyum og í føroyskum áum, vøtnum, ósum og løkum.
*Stk. 3.* Løgtingslógin fevnir ikki um at gagnnýta havsúgdjór, fugl og um fisk, djór og plantur í aling og annað sjófeingi, ið er fevnt av aðrari lóggávu.

**§ 2.** Í hesi løgtingslóg merkir:
1) Føroyskur sjógvur: Sjóleiðirnar innan fyri føroyska fiskimarkið, soleiðis sum tað er ásett í fyriskipan um fiskiveiðiumveldi Føroya.
2) Altjóða sjógvur: Sjóleiðirnar uttan fyri fiskiveiðiløgdømið hjá strandarlondum.
3) Vinnuligur fiskiskapur: Fiskiskapur, ið ikki er til húsbrúks.
4) Fiskiár: Álmanakkaárið, um annað ikki er ásett.
5) Veiðiloyvi: Góðkenning, ið landsstýrismaðurin veitir ávísum fiskifari við ávísum eigara at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi.
6) Fiskiloyvi: Tann rættur, sum eigari av ávísum fiskifari fær at veiða av ávísum livandi sjófeingi á ávísum leiðum í einum fiskiári.
7) Fiskidagaskipan: Skipan av fiskiskapi, har rættindi verða útlutað sum tal av fiskidøgum til ávísan fiskiskap á ávísari leið.
8) Felags fiskidagar: Tal av fiskidøgum, sum rættindahavarar ella bólkur av fiskiførum undir einum hevur rætt at veiða.

9) Egnir fiskidagar: Tann partur av felags fiskidøgum, sum persónur ella felag ella eigari av ávísum fiskifari hevur rætt at veiða á ávísari leið.
10) Ein fiskidagur: Ein fiskidagur í føroyskum sjógvi er hvørjar 24 tímar, fiskifarið hevur verið til fiskiskap í fiskiárinum. Hvør túrur verður roknaður at byrja, tá farið verður úr havn, og at enda, tá komið er aftur í havn. Hvør byrjaður túrur telur tó minst 24 tímar. Fyri fiskifør í bólki 5 telur hvør túrur ein fiskidag, hóast túrurin er longri enn 24 tímar.
11) Veiðievni: Veiðievni hjá fiskifari er veiðitrýstið, hvørt fiskifar fremur hvønn fiskidag.
12) Kvotuskipan: Skipan av fiskiskapi, har rættindi verða útlutað sum nøgd av ávísum livandi sjófeingi at fiska á ávísari leið.
13) Mest loyvda veiða, MLV: Tann nøgd av ávísum livandi sjófeingi, í tonsum, sum veiðast kann í einum fiskiári.
14) Heildarkvota: Tann nøgd av livandi sjófeingi, í tonsum, sum persónar ella feløg, ella eigarar av fiskifari undir føroyskum flaggi hava rættindi at veiða av í kvotuskipan í einum fiskiári. Kvota, ið er sett av til hjáveiðu, rannsóknir, vinnuligar royndir og verkætlanir, verður ikki roknað upp í heildarkvotu. Egin árskvota, sum rættindahavara er loyvt at flyta millum ár, og felagskvotur, sum verða fluttar rættindahavarum millum ár, eru ikki at rokna sum partur av heildarkvotuni tað árið, sum kvotan verður flutt til.
15) Felags kvotupartur: Tann prosentpartur av heildarkvotu av ávísum livandi sjófeingi, ið rættindahavarar ella ein bólkur av fiskiførum undir einum hevur rætt at veiða.
16) Felags árskvota: Felags kvotuparturin, roknaður um til tons.
17) Egin kvotupartur: Tann prosentpartur av felags árskvotu, ið persónur ella felag, ella eigari av fiskifari hevur rætt at veiða á ávísari leið.
18) Egin árskvota: Egni kvotuparturin, roknaður um til tons.
19) Felagskvota við hámarki: Felags árskvota, sum persónur, felag ella eigari av fiskifari hevur rætt at veiða av, tó so, at hámark verður sett fyri, hvussu nógv hvør persónur ella felag ella fiskifar kann veiða.
20) Egin hjáveiðikvota: Kvota, ið persónur ella felag, ella eigari av fiskifari hevur rætt at veiða, ásett í tonsum.

**§ 3.** Livandi tilfeingi, harundir arvafrøðiligt tilfar, í føroyskum sjógvi, og tey rættindi Føroyar eiga uttan fyri føroyskan sjógv, er ogn Føroya fólks.
*Stk. 2.* Rættindi latin sambært hesi løgtingslóg veita ikki privatan ognarrætt, men verða latin sum brúksrættindi í avmarkaða tíð, sambært reglunum í hesi løgtingslóg.
*Stk. 3.* Rættindi, sambært hesi løgtingslóg, kunnu ikki setast í veð, og eru vard fyri úttøku ella aðrari rættarsókn frá ognarum.
*Stk. 4.* Rættindi til fiskiskap kunnu takast aftur uttan endurgjald.

## Kapittul 2
## Almennar ásetingar um atgongd til fiskiskap

*Veiðiloyvi*

**§ 4.** Fyri at reka vinnuligan fiskiskap krevst, at fiskifar hevur veiðiloyvi og fiskiloyvi, uttan so at annað er ásett í hesi løgtingslóg.
*Stk. 2.* Fiskifør, minni enn 15 tons, nýtast tó ikki veiðiloyvi fyri at reka vinnuligan fiskiskap.

**§ 5.** Veiðiloyvi verður latið eigara av fiskifari til ávíst fiskifar. Treyt fyri at fáa veiðiloyvi er,
1) at eigarin hevur ræðið á rættindum at veiða sambært løgtingslógini, og at

hesi rættindi vera knýtt at tí ávísa fiskifarinum í fiskiloyvi,

2) at eigarin lýkur treytirnar í §§ 11 og 12,
3) at fiskifarið er skrásett í skipaskránni ella farskránni, sambært løgtingslóg um skráseting av skipum,
4) at fiskifarið hevur siglingarloyvi frá avvarðandi føroyskum myndugleika, og
5) at fiskifarið ikki er skrásett á lista hjá økisbundnum fiskiveiðifelagsskapi sum far, ið hevur framt ólógligan, ófráboðaðan ella óskipaðan fiskiskap, ella sum hevur stuðlað slíkum fiskiskapi.

**§ 6.** Fiskiloyvi verður latið eigara av fiskifari til egið fiskifar við veiðiloyvi.
*Stk. 2.* Í fiskiloyvið kunnu setast nærri treytir viðvíkjandi fiskiskapinum.

**§ 7.** Veiðiloyvið er galdandi til 1. januar 2032. Tá veiðiloyvið fer úr gildi, fara øll fiskiloyvi samstundis úr gildi.
*Stk. 2.* Rætturin til fiskiloyvi í bólki 5 og rætturin til onnur fiskiloyvi hjá fiskifari í hesum bólki er galdandi til 1. januar 2032.
*Stk. 3.* Á hvørjum ári leggur landsstýrismaðurin uppskot fyri Løgtingið, um gildistíðin á rættindum, sambært stk. 1 og 2, skal leingjast við einum ári.

*Atgongd og skifti*

**§ 8.** Persónur ella felag, sum í 2019 hevði rætt at fiska av øðrum rættindum enn teimum, ið eru fevnd av §§ 9 og 10, og teimum, ið bert høvdu gildi í 2019, kann við gildiskomu løgtingslógarinnar halda fram og fáa fiskiloyvi til ávíst fiskifar.
*Stk. 2.* Rættindahavari kann, fram til 1. januar 2022, fáa rættindi tillutað í fiskiloyvið til egið fiskifar, treytað av, at fiskifarið lýkur treytirnar sambært § 5. Fiskifarið fær tá veiðiloyvi, um fiskifarið frammanundan ikki hevur veiðiloyvi, og rættindini verða knýtt at tí ávísa fiskifarinum í fiskiloyvi. Rættindahavarin kann tó, fram til 1. januar 2022, velja, at rættindini, sum eru knýtt at egnum fiskifari við veiðiloyvi, ístaðin skulu knýtast at øðrum fiskifari, ið viðkomandi eigur og lýkur treytirnar fyri at fáa veiðiloyvi.
*Stk. 3.* Rættindahavari kann, fram til 1. januar 2022, eisini velja at gagnnýta rættindini við fiskifari, sum viðkomandi ikki eigur, treytað av, at fiskifarið lýkur treytirnar sambært § 5, nr. 2-5. Fiskifarið fær ikki veiðiloyvi við støði í hesum rættindum. Rættindahavarin kann, fram til 1. januar 2022, avhenda rættindini endaliga, sum eru skipað sum egnar kvotur ella egnir fiskidagar, til eigara av fiskifari við veiðiloyvi, og rættindini vera tá knýtt at fiskifarinum, sum rættindini verða flutt til.
*Stk. 4.* Frá 1. januar 2022, skulu rættindi vera knýtt at egnum fiskifari við veiðiloyvi. Talið av veiðiloyvum hjá viðkomandi rættindahavara verður tá lagt endaliga fast.
*Stk. 5.* Ásetingarnar í hesi grein fevna ikki um veiðirættindi hjá útróðrarbátum undir 15 tons.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann í serligum førum víkja frá freistini í stk. 4.

**§ 9.** Persónur ella felag, sum í 2018 ella 2019 hevur keypt 3 ella 8 ára rættindi á uppboði, kann við gildiskomu løgtingslógarinnar halda fram og fær í 2020 tillutað veiðirættindi, samsvarandi ásetingum í § 19, stk. 5 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Frá 1. januar 2020 fylgja rættindini lutfalsliga vøkstrinum og niðurskurðinum í heildarkvotuni eins og kvotur sambært § 14, stk. 1.
*Stk. 2.* Rættindahavari kann, í gildistíðini á uppboðssølurættindunum, fáa rættindini tillutað í fiskiloyvið til egið fiskifar, treytað av, at fiskifarið lýkur treytirnar sambært § 5. Fiskifarið fær tá veiðiloyvi, um fiskifarið frammanundan ikki hevur veiðiloyvi, og rættindini vera knýtt at tí ávísa fiskifarinum í fiskiloyvi.
*Stk. 3.* Rættindahavari kann, í gildistíðini á uppboðssølurættindunum, eisini velja at gagnnýta rættindini við fiskifari, sum viðkomandi ikki eigur, treytað av, at

fiskifarið lýkur treytirnar sambært § 5, nr. 2-5. Fiskifarið fær ikki veiðiloyvi við støði í hesum rættindum. Rættindahavarin kann, í gildistíðini á uppboðssølurættindunum, avhenda rættindini endaliga til eigara av fiskifari við veiðiloyvi, og rættindini vera tá knýtt at fiskifarinum, sum rættindini verða flutt til.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um gjaldstreytir fyri rættindi sambært hesi grein.
*Stk. 5.* Tá gildistíðin á uppboðssølurættindunum er runnin, verða rættindini útlutað sum egnar árskvotur. Treytin, fyri at fáa útlutað rættindi sum egnar árskvotur, er, at rættindahavari, áðrenn gildistíðarskeiðið er runnið, kann vísa á egið fiskifar við veiðiloyvi, ella sum lýkur treytirnar fyri at fáa veiðiloyvi. Um rættindahavari ikki, innan fyri gildistíðina á uppboðssølurættindunum, lýkur treytina sambært 2. pkt., falla rættindini aftur til landið.

**§ 10.** Persónur ella felag, sum í 2018 hevur tilsøgn um 4 ára menningarkvotu, ella sum í 2019 hevur fingið tilsøgn um menningarkvotu, kann halda fram sambært treytum í tilsøgnini og eftir treytunum í hesi grein.
*Stk. 2.* Tað er ikki ein treyt, fyri at fiska av menningarkvotu, at fiskifarið hevur veiðiloyvi. Fiskifarið skal tó lúka treytirnar sambært § 5, nr. 2-5 fyri at fáa fiskiloyvi. Fiskifarið fær ikki veiðiloyvi við støði í hesum rættindum.
*Stk. 3.* Verandi menningarkvotur verða eftirmettar, og landsstýrismaðurin kann í loyvistíðarskeiðinum taka avgerð um at leggja hesi rættindi um til egnar árskvotur, um landsstýrismaðurin metir, at tær eru virðisskapandi og burðardyggar. Avgerðin, um at leggja kvoturnar um, hevur gildi frá tí degi, at landsstýrismaðurin hevur fráboðað partinum avgerðina. Treytin fyri at fáa fiskiloyvi til umløgdu rættindini er, at rættindahavarin, í seinasta lagi 31. desember 2021, vísir á egið fiskifar, sum hevur veiðiloyvi ella lýkur treytirnar fyri at fáa veiðiloyvi sambært hesi løgtingslóg. Hevur fiskifarið ikki veiðiloyvi, fær tað tá tillutað veiðiloyvi, og rættindini vera knýtt at fiskifarinum.
*Stk. 4.* Tekur landsstýrismaðurin avgerð um at leggja tillutaðu nøgdirnar av menningarkvotum um til egnar árskvotur, verður ásetti prosentparturin til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, stk. 2, minkaður samsvarandi.

## Kapittul 3
## Ognarviðurskifti og miðsavnan

**§ 11.** Fyri at reka vinnuligan fiskiskap krevst, at eigarin av fiskifarinum er persónur ella felag, sum til einhvørja tíð er heimahoyrandi í Føroyum og lýkur treytirnar í hesi grein.
*Stk. 2.* Persónur er at skilja sum likamligur persónur, undir hesum einstaklingavirki og einkultpersónar í felagsskapi, sum heftir persónligt, solidariskt og beinleiðis. Felag er at skilja sum partafelag ella smápartafelag.
*Stk. 3.* Persónur er heimahoyrandi í Føroyum, um hesin:
1) er skrásettur í fólkayvirlitinum í Føroyum,
2) hevur verið skrásettur í fólkayvirlitinum í Føroyum seinastu 2 árini,
3) er fult skattskyldugur í Føroyum, og
4) ikki verður mettur heimahoyrandi í øðrum landi sambært skattalóggávuni.

*Stk. 4.* Felag er heimahoyrandi í Føroyum, um hesar treytir eru loknar:
1) Felagið er skrásett í Føroyum hjá Skráseting Føroya ella er fráboðað Skráseting Føroya sum undir stovnan.
2) Kapitalpartarnir eru givnir út við navni.
3) Felagið hevur høvuðssætið í Føroyum, og veruliga leiðslan hevur sætið í Føroyum.
4) Eigararnir av í minsta lagi 3/4 av øllum eginpeninginum, harundir partapeninginum, sum somuleiðis eiga í minsta lagi 3/4 av atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, eru heimahoyrandi í Føroyum og lúka

treytirnar í stk. 3. Skal felagið luta út vinningsbýti, skal føroyski parturin í minsta lagi fáa útlutað 3/4.
5) Felagið ikki hevur skuld til persón ella felag, sum ikki lýkur treytirnar í hesi grein, um skuldin stendur aftan fyri aðrar kravánarar, ella um rentur ella afturgjald av skuldini er knýtt at yvirskotinum í felagnum.
6) Meirilutin av limunum í nevndini, um felagið hevur eina nevnd, ella meirilutin av limunum í eftirlitsráðnum, um felagið hevur eitt eftirlitsráð, er heimahoyrandi í Føroyum, og hesi lúka treytirnar í stk. 3.
7) Stjórar felagsins lúka treytirnar í stk. 3, nr. 1, 3 og 4.

*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann geva undantak viðvíkjandi treytunum í hesi grein fyri fiskifør til royndarveiðu ella undirvísingarætlanir. Landsstýrismaðurin kann somuleiðis geva tíðaravmarkað undantak til treytirnar í hesi grein fyri fiskifar, sum skal nýtast fyri fiskifar, sum hevur veiðiloyvi og fiskiloyvi, sum, orsakað av bráðfeingis óhappi, ikki kann fara til fiskiskap.

*Stk. 6.* Feløg, ið hava rættindi at fiska sambært hesi løgtingslóg, og sum hava avreiðingarvirði yvir 4 mió. kr., skulu, í seinasta lagi 1. juli á hvørjum ári, lata landsstýrismanninum upplýsingar, váttaðar við trygd frá grannskoðara um, hvør ábyrgdarpeningur er í felagnum, hvør skuld er, sum stendur aftan fyri aðrar kravánarar, ella har rentur ella afturgjald er knýtt at yvirskotinum í felagnum, umframt upplýsingar um vinningsbýti, ið er lutað út til útlendskan partaeigara.

*Stk. 7.* Broytingar eru bert loyvdar í ognarviðurskiftunum, harundir partapeninginum, atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, og kann felagið bert gera avtalu um, at skuld stendur aftan fyri aðrar kravánarar, ella at rentur ella tað, sum skal rindast aftur, er knýtt at yvirskotinum í felagnum, við loyvi frá landsstýrismanninum. Tílíkar broytingar skulu fráboðast landsstýrismanninum, áðrenn broytingarnar fara fram, og landsstýrismaðurin skal góðkenna slíkar broytingar, áðrenn tær kunnu fremjast.

*Stk. 8.* Í sambandi við eftirkanning av treytunum í hesi grein kann landsstýrismaðurin krevja upplýsingar og váttanir frá eigaranum av fiskifarinum og krevja, at eigarin av fiskifarinum útvegar upplýsingar og váttanir frá nevndarlimum, stjórn, ráðgevum, fíggingarstovnum o.ø. Landsstýrismaðurin kann krevja føroyska týðing av skjølum.

*Stk. 9.* Eru treytirnar í hesi grein ikki loknar, fellur veiðiloyvið aftur til landið. Landsstýrismaðurin kann tó loyva, at viðurskiftini koma í rættlag innan ávísa tíðarfreist og kann áseta nærri treytir fyri virkseminum í tíðarskeiðinum.

*Stk. 10.* Landsstýrismaðurin kann almannakunngera, hvør persónur ella felag beinleiðis ella óbeinleiðis ræður yvir rættindum at veiða ella reka vinnuligan fiskiskap og teirra eigaraparti í virkseminum.

*Verandi feløg*

**§ 12.** Felag, ið ikki er partafelag ella smápartafelag, sum í 2017 hevur rikið fiskifar, kann halda fram við virkseminum, hóast § 11, stk. 1 og 2, um felagið er heimahoyrandi í Føroyum, sambært § 11, stk. 4.

*Stk. 2.* Grunnur, sum í 2017 hevur rikið fiskifar, kann halda fram við virkseminum, hóast § 11, stk. 1-2. Grunnurin skal tó, fyri at kunna halda fram við virkseminum, lúka treytirnar í § 11, stk. 4, nr. 1 og 3-7, tó undantikið treytina í § 11, stk. 4, nr. 4 fyri sjálvsognargrunn ella fyri grunn, sum landið eigur. Landsstýrismaðurin kann í serligum førum geva undantak frá felagsforminum og ognarviðurskiftunum sambært hesi grein.

*Stk. 3.* Feløg, sum í 2019 hava havt ræði á rættindum at veiða, kunnu halda áfram við verandi virksemi, hóast ásetingarnar í § 11, stk. 4, nr. 4 og 5, treytað av, at eigarar av í minsta lagi 2/3 av eginpeninginum,

harundir partapeninginum, umframt ábyrgdarpeninginum, sum somuleiðis eiga í minsta lagi 2/3 av atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, lúka treytirnar í § 11, stk. 3. Skal felagið luta út vinningsbýti, skal føroyski parturin í minsta lagi fáa útlutað 2/3. Tá partabrøv ella kapitalpartar verða seldir, skal keyparin lúka treytirnar í § 11, stk. 4, nr. 4. Avtala um skuld, sum ikki er í samsvari við § 11, stk. 4, nr. 5, kann ikki gerast eftir, at henda løgtingslóg er komin í gildi.

*Miðsavnan av veiðirættindum*

**§ 13.** Feløg og persónar, sum reka vinnuligan fiskiskap sambært hesi løgtingslóg, kunnu einsamallir ella saman við nærstandandi, beinleiðis ella óbeinleiðis í mesta lagi hava ræði á:

1) Bólkur 2, sambært § 19, stk. 1: 20% av ásetta fiskidagatalinum í bólkinum.
2) Bólkur 3, sambært § 19, stk. 1: 20% av ásetta fiskidagatalinum í bólkinum.
3) Bólkur 4 A, sambært § 19 stk. 1: 20% av ásetta fiskidagatalinum í bólkinum.
4) Bólkur 4 B, sambært § 19, stk. 1: 20% av ásetta fiskidagatalinum í bólkinum.
5) Bólkur 4 T, sambært § 19, stk. 1: 30% av ásetta fiskidagatalinum í bólkinum.
6) Botnfiskur í Íslandi: 35% av føroysku botnfiskakvotunum í íslendskum sjógvi.
7) Botnfiskur í russiskum sjógvi, norskum sjógvi og við Svalbard: 35% av føroysku botnfiskakvotunum í russiskum sjógvi, norskum sjógvi og við Svalbard.
8) Uppsjóvarfiskiskapur í Norðuratlantshavi: 35% av heildarkvotuni av hvørjum fiskaslagi sær.

*Stk. 2.* Tá avgerast skal, um markið í stk. 1 er rokkið, verður egin árskvota, sum ein rættindahavari sambært heimildunum í hesi løgtingslóg flytur millum ár, roknað upp í egnu árskvotuna hjá rættindahavaranum tað árið, kvotan er flutt frá, og er ikki at rokna sum partur av egnu árskvotuni tað árið, sum kvotan verður flutt til.
*Stk. 3.* Tá avgerast skal, um markið í stk. 1 er rokkið, vera egnir fiskidagar, egin kvotupartur ella egin árskvota, sum verða avhend fyri eitt ár í senn eftir ásetingunum í hesi løgtingslóg, roknað upp í rættindini hjá tí, ið avhendir.
*Stk. 4.* Nærstandandi er at skilja sum hjúnafelagi, skyld í stígandi ella fallandi linju, systkin, hjúnafelagi hjá teimum nevndu persónunum og aðrir persónar, ið hava staðið hvørjum øðrum serliga nær.
*Stk. 5.* Virksemi, har felag og persónur, sum einsamallir ella saman við nærstandandi, beinleiðis ella óbeinleiðis, høvdu ræðið á meira enn ásett í stk. 1, áðrenn 1. januar 2020, kann halda fram, men kann ikki økjast.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann í serligum førum geva undantak frá ásetingunum í stk. 1.
*Stk. 7.* Broytingar í ognarviðurskiftunum, sambært §§ 11 og 12, skulu góðkennast av landsstýrismanninum. Ætlaðar broytingar skulu fráboðast landsstýrismanninum, áðrenn broytingarnar fara fram. Broytast viðurskiftini soleiðis, at eigarar fara upp um hámarkið í stk. 1, kann landsstýrismaðurin krevja, at viðurskiftini koma í rættlag innan ávísa tíðarfreist. Koma viðurskiftini ikki í rættlag innan tíðarfreistina, fellur tann parturin av samlaðu rættindunum, sum er ov nógv, til landið aftur.
*Stk. 8.* Í sambandi við viðgerðina av málum sambært stk. 7 kann landsstýrismaðurin krevja upplýsingar og váttanir frá persóni ella felag og krevja, at persónur ella felag útvegar upplýsingar frá nevndarlimum, stjórn, ráðgevum, virkjum o.ø. um ognarviðurskiftini og um veiðu fyri at tryggja, at treytirnar í stk. 1 eru loknar.
*Stk. 9.* Landsstýrismaðurin kann almannakunngera, hvør persónur ella

felag, beinleiðis ella óbeinleiðis, hevur ræðið á veiðirættindum, og hvussu stóran part av rættindunum hesi hava ræði á.

**Kapittul 4**
**Uppboðssøla í 2020**

**§ 14.** Av tí parti av heildarkvotuni í 2020, sum er lægri ella ájavnt við ásettu nøgdirnar í nr. 1-3, verða ávikavist 14,5%, 8,7% og 8,7% av nøgdini bjóðað út sum sølukvota:

1) 350.000 tons av svartkjafti.
2) 90.000 tons av makreli.
3) 65.000 tons av norðhavssild.

*Stk.* 2. Er heildarkvotan í 2020 størri enn nøgdirnar, ásettar í stk. 1, nr. 1-3, skal landsstýrismaðurin, umframt nøgdina í stk. 1, bjóða ta nøgd, sum er omanfyri, út á uppboði sum uppboðsárskvotu og seta nøgd av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, samanber tó stk. 3.

*Stk. 3.* Er heildarkvotan í 2020 størri enn nøgdirnar í stk. 1, nr. 1-3, skulu nøgdirnar, sum verða bodnar út sum sølukvota og uppboðsárskvota, og nøgdin, sum verður sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir, íroknað kvotu sambært § 49, stk. 2, vera tveir javnt stórir partar; tó kann á uppboði, sambært stk. 1-2 í mesta lagi bjóðast út ein nøgd, sum samsvarar við lutfallið av 1 ára kvotum seldar á uppboði í 2019 í mun til heildarkvotuna í 2019.

**§ 15.** Kvota, sambært § 14, stk. 1 og 2, verður í 2020 boðin út sum langtíðar rættindi við 12 ára gildistíð. Tá uppboðssølutíðarskeiðið er runnið, verða rættindini útlutað sum egnar árskvotur til eigara av fiskifari við veiðiloyvi, sum rættindini eru á, tá gildistíðarskeiðið er runnið.

*Stk. 2.* Rættindi at veiða, sambært § 14, stk. 1 og 2, kunnu verða boðin út til persón ella felag, sum lýkur treytirnar í §§ 11-13 í løgtingslógini.

*Stk. 3.* Treyt fyri at fáa fiskiloyvi er, at keyparin, áðrenn 3 mánaðir eftir keypið, kann vísa á egið fiskifar, sum hevur veiðiloyvi ella lýkur treytirnar fyri at fáa veiðiloyvi, ella á bát við fiskiloyvi í bólki 5 sambært § 19. Er treytin ikki lokin, falla rættindini aftur til landið og verða boðin út av nýggjum sambært hesi grein.

*Stk. 4.* Kvota, sambært § 14, stk. 1 og 2, kann ikki avhendast í 2020, men kann frá 1. januar 2021 avhendast sambært treytunum í § 31.

*Stk. 5.* Viðurskifti, sambært §§ 11-13, skulu vera góðkend av landsstýrismanninum frammanundan ætlaðum keypi á uppboði. Broytast hesi viðurskifti eftir keyp á uppboði, soleiðis at treytirnar ikki longur eru loknar, verður farið fram sambært ásetingunum í § 11, stk. 9 og § 13, stk. 7.

*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um góðkenning frammanundan av keypara og tíðarfreist fyri at lata inn upplýsingar fyri at fáa góðkenning frammanundan.

*Stk. 7.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um, hvussu uppboð fer fram og um gjaldstreytir til keyparan, harundir um rættindini verða seld í einum, um tey verða seld so líðandi í serium, um minstu nøgd sum kann keypast, tá keypari ikki hevur veiðiloyvi, um rættindini verða boðin øllum ella bólkum av fiskiførum, hvar keyptu rættindini kunnu veiðast, um rættindini verða boðin út at fiska við ávísum reiðskapi, hvørjum treytum sølan fer fram undir o.a. Keyparin ber sølukostnaðin.

*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin kann gera avtalu við ein uttan fyri standandi veitara, at hesin stendur fyri søluni.

*Stk. 9.* Gjaldið fyri rættindini, keypt á uppboði, fer í landskassan.

**§ 16.** Fyri rættindi, boðin út sambært § 14, stk. 1, fylgir nøgdin lutfalsliga vøkstrinum og niðurskurðinum í heildarkvotuni upp til mørkini ásett í § 14, stk. 1, nr. 1-3.

*Stk. 2.* Er heildarkvotan í 2020 ájavnt ella undir mørkunum, ásett í § 14, stk. 1, nr. 1-3, fylgir nøgdin frá 2021 lutfalsliga vøkstrinum og niðurskurðinum í

heildarkvotuni, eisini tá heildarkvotan er oman fyri mørkini.
*Stk. 3.* Er heildarkvotan í 2020 oman fyri mørkini sambært § 14, stk. 1, nr. 1-3, fær keypari av kvotu sambært § 14, stk. 1, fyri tann partin av heildarkvotuni, sum frá 2021 er oman fyri heildarkvotuna í 2020, ein lutfalsligan part, sum samsvarar við tann partin av kvotuni, sum hann hevði av heildarkvotuni í 2020.
*Stk. 4.* Fyri rættindi, boðin út sambært § 14 stk. 2, fylgir nøgdin lutfalsliga vøkstrinum og niðurskurðinum í heildarkvotuni, tá kvotan er oman fyri heildarkvotuna í 2020. Lækkar heildarkvotan undir heildarkvotuna í 2020, lækkar uppboðsárskvotan við somu nøgd, sum heildarkvotan lækkar, til heildarkvotan er á markinum sambært § 14, stk. 1, nr. 1-3. Hækkar heildarkvotan upp um markið, sambært § 14, stk. 1, nr. 1-3, hækkar uppboðsárskvotan við somu nøgd, sum heildarkvotan hækkar oman fyri markið, til heildarkvotan er ájavnt við heildarkvotuna í 2020.

**§ 17.** Rættindi, ið falla aftur til landið eftir hesi løgtingslóg, kunnu setast av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49 ella royndarfiskiskap o.a. sambært § 50.

## Kapittul 5
## Skipan í fiskiskapinum hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi í føroyskum sjógvi

*Fiskidagaskipan í føroyskum sjógvi*

**§ 18.** Fiskidagaskipan og fiskidagatal verður ásett fyri botnfiskaveiðu í føroyskum sjógvi frá 1. januar 2020 til 31. desember 2020 fyri fiskifør undir føroyskum flaggi.
*Stk. 2.* Rættindi at fiska í fiskidagaskipanini, sambært stk. 1, verða latin teimum, sum í 2019, og tá lógin fær gildi, hava rætt til fiskidagar. Rættindi at fiska vera latin í fiskiloyvi samsvarandi ásetingum og mannagongd í § 8 og undir treytunum í §§ 19 og 21.
*Stk. 3.* Frá og við fiskiárinum 2021 verður fiskidagatalið ásett við kunngerð. Hetta skal gerast innan fyri karmarnar av eini umsitingarætlan, sum setir meginreglur og mannagongd í sambandi við at áseta árliga fiskidagatalið.

**§ 19.** Innan fyri hvønn av hesum bólkum av fiskiførum verður fiskidagatal í 2020 ásett soleiðis:
1) Bólkur 2: Trolarar 501-3000 HK:
    a) Innara fiskidagaleið: 4.386 fiskidagar.
    b) Ytra fiskidagaleið: 1.530 fiskidagar.
2) Bólkur 3: Línuskip yvir 110 tons: 2.029 fiskidagar.
3) Bólkur 4 A: Útróðrarbátar 15-40 tons á veiðu við línu: 791 fiskidagar.
4) Bólkur 4 B: Útróðrarbátar 40-110 tons á veiðu við línu: 1.437 fiskidagar.
5) Bólkur 4 T: Útróðrarbátar størri enn 40 tons og framtøku minni enn 500 HK á veiðu við troli: 1.178 fiskidagar.
6) Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 tons á veiðu við húki 8.879 fiskidagar, umframt 2.150 fiskidagar markaðir til ikki fult riknar útróðrarbátar.

*Stk. 2.* Ásetta fiskidagatalið fyri hvønn bólk sær í stk. 1 er galdandi fyri fiskiskap á innaru fiskidagaleið, ásett í § 20, tó undantikið fiskidagar, ásettir fyri ytru fiskidagaleið í bólki 2, sambært stk. 1. Ásetta fiskidagatalið fyri bólk 2 á ytru fiskidagaleið kann bert nýtast til fiskiskap á ytru fiskidagaleið. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um umbýti av fiskidøgum frá innaru til ytru fiskidagaleið. Verður fiskað á ytru fiskidagaleið, uttan fráboðan til Vørn um umbýti av døgum frammanundan, verða dagarnir roknaðir av fiskidagatalinum, tillutað til fiskiskap á innaru fiskidagaleið.
*Stk. 3.* Ásettu fiskidagarnir fyri hvønn bólk í stk. 1 kunnu bert nýtast til fiskiskap við fiskifari, ið er innan fyri avmarkingarnar fyri stødd ella framtøkumegi, ið eru ásettar fyri hvønn bólkin og við tí reiðskapi, ið er

tilskilað fyri bólkin. Somuleiðis er treyt, at fiskidagarnir bert verða brúktir til fiskiskap á leiðum, har fiskifør við teimum tilskilaðu avmarkingunum fyri støðd ella framtøkumegi hava loyvi at royna.
*Stk. 4.* Fiskidagar, tillutaðir bólki 2, 3, 4 A, 4 B og 4 T sambært stk. 1, verða latnir sum egnir fiskidagar.
*Stk. 5.* Fiskidagar, tillutaðir bólki 5 sambært stk. 1, verða latnir sum felags fiskidagar. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur fyri, hvør er at meta sum fult rikin og ikki fult rikin útróðrarbátur, og reglur um inntøkumørk og veiðinøgdir, og hvussu ásetta fiskidagatalið hjá bólkinum verður brúkt og býtt millum fult riknar og ikki fult riknar útróðrarbátar.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann seta nærri reglur um, at fiskidagatalið, tillutað hvørjum fiskifari í bólki 4 A og 4 B, kann roknast um í lutfallinum 1:2, um fiskað verður við snellu.
*Stk. 7.* Landsstýrismaðurin kann í 2020 fyri bólk 2, sambært stk. 1, tilluta 177 fiskidagar og fyri bólkarnar 3 og 4, sambært stk. 1, tilluta ávikavist 61 og 101 fiskidagar tilsamans at lata fiskiførum, sum avreiða livur. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð treytir fyri at fáa lut í hesum fiskidøgum.
*Stk. 8.* Umframt fiskidagar sambært stk. 1 verða, fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2020 til 31. desember 2020, ásettir felags fiskidagar til hvønn av bólkunum í § 19, stk. 1, nr. 1-5, ið er javnt við talið av fiskidøgum, sum hvør bólkur sær ikki brúkti í fiskiárinum 2019.
*Stk. 9.* Fiskiførini í bólkunum í § 19, stk. 1, nr. 1-5 kunnu eftir 1. oktober 2020 brúka av fiskidøgunum sambært stk. 8, tá fiskidagarnir, tillutaðir fiskifarinum í fiskiloyvinum, eru brúktir.
*Stk. 10.* Fiskidagar, ið verða avhendir sambært § 30, stk. 1, vera ikki roknaðir sum brúktir fiskidagar, sambært stk. 9 í hesi grein.
*Stk. 11.* Fiskifar, í bólkunum sambært stk. 1, verður verandi í tí bólki, tað er í, og kann ikki flyta bólk, hóast tað verður mált upp av nýggjum, ella broytingar verða gjørdar, sum ávirka støðd ella framtøkumegi.

*Innara og ytra fiskidagaleið*

**§ 20.** Innara fiskidagaleiðin er sjógvurin innan fyri beinar linjur, drignar gjøgnum hesi støð í hesi raðfylgju:
1) 62°47'00"N, 07°12'00"W.
2) 62°47'30"N, 06°30'00"W.
3) 62°42'00"N, 06°00'00"W.
4) 62°28'00"N, 05°00'00"W.
5) 62°00'00"N, 04°30'00"W.
6) 61°30'00"N, 04°50'00"W.
7) 61°15'00"N, 05°00'00"W.
8) 61°15'00"N, 06°00'00"W.
9) 60°35'00"N, 06°09'00"W.
10) 60°26'00"N, 06°10'00"W.
11) 60°26'00"N, 06°32'00"W.
12) 60°35'00"N, 06°35'00"W.
13) 61°23'00"N, 07°30'00"W.
14) 61°25'25"N, 08°01'00"W.
15) 61°32'48"N, 08°20'30"W.
16) 61°49'00"N, 08°41'48"W.
17) 62°18'00"N, 08°45'00"W.
18) 62°38'00"N, 08°03'00"W.
19) 62°47'00"N, 07°12'00"W.
*Stk. 2.* Ytra fiskidagaleiðin er sjógvurin millum 200 fjórðinga føroyska fiskimarkið og innaru fiskidagaleiðina, ásett í stk. 1, tó verður Føroyabanki ikki tikin við.

*Reglur um fiskiorku*

**§ 21.** Fiskiorkan fyri fiskifør í bólkunum sambært § 19, stk. 1 og í fiskiskapi eftir botnfiski í føroyskum sjógvi, sum er skipaður við heimild í § 22, undantikin fiskiskapur, sum er skipaður við mest loyvdu veiðu og egnum árskvotum, skal ikki økjast, tá broytingar verða gjørdar við fiskifarið, sum ávirka metingarvirðið fyri fiskiorku, og í sambandi við flytingar av veiðiloyvum ella avhendingar av fiskidøgum, sambært §§ 28 og 30.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um fiskiorku, og hvussu fiskiorka verður ásett og útroknað, grundað á veiðievni, og mannagongd fyri umsiting av stk. 1.

*Stk. 3.* Fiskiorkan í bólkunum, sambært § 19 stk. 1, skal ikki gerast størri, tá rættindahavarin í tillagingartíðini í § 8 ger av, hvat fiskifar skal hava fiskiloyvi at gagnnýta fiskidagarnar. Tá mett verður um fiskiorku, er grundarlagið metingarvirðið fyri fiskiorku hjá fiskifarinum, ið fiskidagarnir verða fluttir frá ella seinast vóru á.

*Aðrar skipanir í fiskiskapi í føroyskum sjógvi*

**§ 22.** Fyri fiskiskap í føroyskum sjógvi, undantikin fiskiskapur skipaður sambært §§ 18 og 19, kann landsstýrismaðurin áseta kvotuskipan, fiskidagaskipan ella aðra skipan og nærri reglur um atgongd, býti av tøkum fiskimøguleikum millum bólkar av fiskiførum, einstøk fiskifør og veiðihættir, og hvussu fiskiskapurin skal fara fram.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um at skipa fiskiskapin eftir botnfiski og øðrum djórasløgum á Føroyabanka og um, hvørjir bólkar av fiskiførum ella veiðihættir kunnu gerast partar av skipanini.

## Kapittul 6
## Fiskiskapur við føroyskum skipum uttan fyri føroyskan sjógv

**§ 23.** Fiskiskapur hjá føroyskum fiskiførum, uttan fyri føroyskan sjógv, verður skipaður samsvarandi sínámillum fiskiveiðiavtalum, samtyktum í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum og eftir millumlanda avtalum. Eru Føroyar ikki partar av avtalu ella samtykt, ella eingin samtykt er um fiskiskap í altjóða sjógvi, ásetir landsstýrismaðurin kvotur, fiskidagar ella aðra skipan.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um býti av tøkum fiskimøguleikum, ið ikki eru bodnir út á uppboði, og hvussu fiskiskapurin skal fara fram.
*Stk. 3.* Reglur og treytir fyri fiskiskapi hjá føroyskum fiskiførum í fiskiveiðiløgdøminum hjá teimum londum, Føroyar hava sínámillum fiskiveiðiavtalu við, eru tær, sum eru galdandi í fiskiveiðiløgdøminum hjá viðkomandi landi.
*Stk. 4.* Føroyskt fiskifar kann ikki fara til fiskiskap í fiskiveiðiløgdøminum hjá londum, Føroyar ikki hava sínámillum fiskiveiðiavtalu við, ella fiska av rættindum, ið ikki eru fevnd av slíkari avtalu, uttan við loyvi og góðkenning frá landsstýrismanninum.
*Stk. 5.* Føroyskt fiskifar kann ikki fara til fiskiskap uttan fyri fiskiveiðiløgdømið hjá strandarlondum uttan fiskiloyvi frá landsstýrismanninum.
*Stk. 6.* Fyri øll før undir føroyskum flaggi og á øllum leiðum krevst loyvi frá Fiskiveiðieftirlitinum fyri at fáast við slíkt, ið knýtt er at fiskiskapi, so sum at umskipa veiðu, uppskipa veiðu, virka umborð, pakka ella á annan hátt handfara veiðu ella úrdrátti úr veiðu, umskipa útgerð ella ankra við tí í hyggju at taka lut í umskiping av veiðu ella taka inn útgerð.

**§ 24.** Landsstýrismaðurin kann loyva eigara av fiskifari undir føroyskum flaggi, fyri eitt fiskiár í senn, og uttan mun til ásetingarnar í §§ 30 og 31, at býta um rættindi til fiskiskap, avmarkað til altjóða sjógv, sum eru tillutað sum egin árskvota ella egnir fiskidagar, við eigara av fiskifari undir fremmandum flaggi. Treyt er, at slíkt umbýti av rættindum er skipað við sáttmálum ella samtyktum í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum, sum Føroyar eru partur av, og at myndugleikarnir í báðum londum hava góðkent umbýtið.
*Stk. 2.* Veiðirættindi, ið eru partar av umbýti sambært stk. 1, verða ikki tikin við í uppgerð sambært § 36.
*Stk. 3.* Veiðirættindi, avmarkað til altjóða sjógv, sum eru fingin í umbýti sambært samtyktum í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum, verða ikki roknað upp í føroysku heildarkvotuna av viðkomandi fiskaslagi.

## Kapittul 7
## Fiskiskapur í føroyskum sjógvi við fiskiførum undir fremmandum flaggi

**§ 25.** Í føroyskum sjógvi er bannað førum undir fremmandum flaggi at reka fiskiskap uttan við loyvi frá landsstýrismanninum.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann loyva vinnuligum fiskiskapi í føroyskum sjógvi við fiskiførum, sum eru undir fremmandum flaggi, um fiskiskapurin er sambært sínámillum fiskiveiðiavtalum ella millumtjóðaavtalum, sum Føroyar eru partur av.
*Stk. 3.* Fiskifør undir fremmandum flaggi hava loyvi at reka fiskiskap í føroyskum sjógvi sambært teimum treytum, sum eru avtalaðar millum myndugleikarnar í hesum londum og í Føroyum.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um fiskiskap hjá fiskiførum undir fremmandum flaggi í føroyskum sjógvi samsvarandi § 34.

**§ 26.** Í føroyskum sjógvi og í føroyskum havnum er bannað førum undir fremmandum flaggi at fáast við at umskipa veiðu, uppskipa veiðu, virka umborð, pakka ella á annan hátt handfara veiðu ella úrdrátt úr veiðu, umskipa útgerð ella ankra við tí í hyggju at taka lut í umskiping av veiðu ella taka inn útgerð.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann geva undantak frá forboðnum í stk. 1 og áseta nærri treytir hesum viðvíkjandi.

**§ 27.** Bannað er førum undir fremmandum flaggi at koma í føroyska sjóumveldið ella í føroyska havn, hava tey framt ólógligan, ófráboðaðan ella óskipaðan fiskiskap, ella hava stuðlað slíkum fiskiskapi uttan fyri føroyskan sjógv, tó undantikið í skaðaleysari gjøgnumsigling. Eru førini komin í føroyskt sjóumveldi ella í føroyska havn, kann bann setast fyri at veita teimum tænastur, eitt nú olju, útgerð, flutning av veiðu, manningarskifti, vistir og viðlíkahald.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um forboðið, sambært stk. 1, og um treytir og mannagongd, tá før undir fremmandum flaggi koma í føroyska sjóumveldið ella í føroyska havn.

## Kapittul 8
## Flyting og avhending av veiðirættindum

*Flyting og samanlegging av veiðiloyvum*

**§ 28.** Veiðiloyvi hjá fiskifari kann við loyvi frá landsstýrismanninum verða flutt á annað fiskifar við veiðiloyvi ella á fiskifar uttan veiðiloyvi. Tá veiðiloyvi verður flutt, verða samstundis flutt øll veiðirættindi, fiskifarið hevur rætt til. Fiskifarið, ið veiðiloyvið verður flutt á, skal lúka treytirnar í § 5, nr. 3-5.
*Stk. 2.* Treyt fyri at loyva flyting av veiðiloyvum hjá fiskiførum í bólkunum sambært § 19, stk. 1 og fiskiførum, sum fiska botnfisk í føroyskum sjógvi sambært reglum ásettum við heimild í § 22 er, at fiskiorkan ikki økist.
*Stk. 3.* Veiðiloyvi hjá fiskifari í bólkunum, sambært § 19, stk. 1 kann ikki flytast til annan bólk.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um fiskiorku, og hvussu fiskiorka verður ásett og útroknað, grundað á veiðievni, og um mannagongd og treytir fyri flyting av veiðiloyvum sambært hesi grein.
*Stk. 5.* Skiftir fiskifar við veiðiloyvi eigara, fylgir veiðiloyvið fiskifarinum, um nýggjur eigari av fiskifarinum lýkur treytirnar fyri at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi í hesi løgtingslóg.

*Tilsøgn um at varðveita veiðiloyvið*

**§ 29.** Landsstýrismaðurin kann eftir umsókn veita eigara av fiskifari, sum verður tikið úr vinnuligum fiskiskapi, tilsøgn um, at veiðiloyvið innan 2 ár kann verða flutt á annað fiskifar eftir ásetingunum í § 28.
*Stk. 2.* Tilsagnarhavari kann avhenda øðrum tilsøgnina við teimum treytum og rættindum, ið eru knýtt at tilsøgnini.
*Stk. 3.* Í tíðini, tilsøgnin stendur við, og veiðiloyvið ikki er á ávísum fiskifari, kann fiskiloyvi ikki skrivast út til tilsagnarhavara.

*Stk. 4.* Frá tí, at veiðiloyvi í tilsøgn sambært stk. 1 er flutt á fiskifar, kann eigarin av fiskifarinum ikki fáa tilsøgn sambært stk. 1, fyrr enn eitt ár er gingið.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann í serligum førum víkja frá 2 ára tíðarfreistini í stk. 1.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um mannagongd og treytir fyri at varðveita veiðiloyvið.

*Avhending av fiskidøgum*

**§ 30.** Egnir fiskidagar kunnu avhendast øðrum fiskifari undir føroyskum flaggi við veiðiloyvi fyri eitt ár í senn ella endaliga. Loyvt er ikki at avhenda fiskidagar millum bólkarnar sambært § 19, stk. 1. Treyt er, at fiskifarið, sum dagar verða avhendir til, er innan fyri tey mørk fyri stødd ella framtøkumegi, ið skilmarka bólkin.
*Stk. 2.* Fyri at avhenda fiskidagar, skulu í minsta lagi 60% av tillutaðu døgunum fiskiárið frammanundan vera brúktir við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari.
*Stk. 3.* Fiskidagar, sum eru avhendir endaliga, skulu stillast í sama lutfalli, sum felags fiskidagarnir í bólkinum verða stillaðir.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um mannagongd fyri avhending av fiskidøgum sambært hesi grein, harundir reglur sum áseta tað lutfalsliga virðið á fiskidøgum, grundað á veiðievni.

*Avhending av kvotum*

**§ 31.** Egin kvotupartur og egin árskvota kunnu avhendast øðrum fiskifari undir føroyskum flaggi við veiðiloyvi fyri eitt fiskiár í senn ella endaliga. Undantiknar eru egnar árskvotur hjá fiskiførum undir 15 tons ella fiskiskapur, ið er skipaður við heimild í § 22.
*Stk. 2.* Fyri at avhenda egnan kvotupart, ella egna árskvotu, skulu í minsta lagi 60% av tillutaðu kvotuni av fiskaslagnum, ið verður avhendað, vera fiskað fiskiárið frammanundan við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari.
*Stk. 3.* Kvotur, sum eru avhendar endaliga, skulu stillast í sama lutfalli, sum felags árskvotan broytist hvørt ár, ella eftir reglum ásettar í hesi løgtingslóg.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um mannagongd fyri avhending av kvotum sambært hesi grein.

*Avhending og flyting av loyvum og rættindum í bólki 5, smábátar*

**§ 32.** Fiskiloyvi til fiskiskap í bólki 5, sambært § 19, stk. 1, nr. 6, kann flytast á annan bát uttan fiskiloyvi í sambandi við, at bátur verður skiftur út, treytað av, at fiskiorkan ikki økist.
*Stk. 2.* Skiftir bátur við fiskiloyvi eigara, fylgir fiskiloyvið bátinum, um nýggi eigarin lýkur treytirnar fyri at reka vinnuligan fiskiskap sambært løgtingslógini.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann eftir umsókn veita eigara av fiskifari í bólki 5, sambært § 19, stk. 1, nr. 6, sum verður tikið úr vinnuligum fiskiskapi, tilsøgn um, at fiskiloyvið innan tvey ár kann flytast á annað fiskifar við somu ella minni fiskiorku. Landsstýrismaðurin kann í serligum førum víkja frá 2 ára tíðarfreistini.
*Stk. 4* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um mannagongd og treytir fyri umsiting av hesi grein.

**§ 33.** Onnur rættindi enn fiskidagar sambært § 19, stk. 1, nr. 6, sum eru latin fiskiførum undir 15 tons, kunnu flytast ella avhendast eftir nærri reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir.

## Kapittul 9
## Almennar ásetingar fyri fiskiskapi

**§ 34.** Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um:
1) Økisfriðingar og friðingartíðir.
2) Minstamát á fiski og vernd av ungfiski.
3) Fiskireiðskap og veiðihættir.
4) Hjáveiðu av fiski og øðrum djórum.

5) Vernd av ávísum djórum, fugli og plantum og vistskipanum.
6) Nýtslu og virking av veiðu.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur, sum áleggja teimum, ið fiska, at taka ímóti, umskipa, flyta, leggja upp, goyma, virka og selja fisk og fiskaúrdrátt:

1) Skyldu at føra veiðidagbók og framleiðslubók.
2) Skyldu at lata inn veiðitøl, dagbøkur, vektarseðlar, upplýsingar um avreiðingar, uppruna og aðrar upplýsingar um fiskiskap til eftirlitsendamál, uppgerð av veiðigjøldum og avreiðingargjøldum ella til hagtalsendamál, og treytir um, hvussu hesar skulu sendast myndugleikanum.
3) Treytir um, at veiða bert kann landast um innvigingarskipan, sum er góðkend av Fiskiveiðieftirlitinum.
4) Skyldu at hava umborð eygleiðarar at gera kanningararbeiði í sambandi við fiskiveiðu. Farið ber útreiðslurnar til kost og innivist. Eygleiðarar hava loyvi at nýta samskiftisútgerðina umborð til tess at hava samband við Fiskiveiðieftirlitið og við aðrar myndugleikar.
5) Treytir um at hava umborð og at brúka útgerð, sum til einhvørja tíð kann samskifta og regluliga senda knattstøður, veiðifráboðanir o.tíl. til eftirlitsendamál, og at fiskifarið ber útreiðslur fyri útgerð og samskifti.
6) Treytir um innrætting og útbúnað í sambandi við hagreiðing, virking og goymslu av veiðu umborð og krav um, at skip hava góðkendar tekningar av lastarrúmum og skipinum annars.
7) Treytir um at skráseta og merkja veiðu og úrdrátt úr veiðu umborð, lastarplan o.tíl.
8) Treytir um, hvussu reiðskapur, sum ikki verður brúktur, skal goymast.
9) Umrokning av fiski og fiskaúrdrátti til runda vekt.
10) Skyldu at taka sýni ella stakroyndir av veiðu.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at upplýsingar skulu skrásetast og sendast myndugleikanum elektroniskt, og kann áseta nærri reglur um elektroniska samskiftið.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann loyva, at upp til 10% av egnari árskvotu hjá ávísa fiskifarinum kunnu flytast til árið eftir, og at upp til 10% kunnu fiskast upp um egna árskvotu í einum fiskiári. Ov nógv fiskað í einum ári verður mótroknað í egnu árskvotuni fiskiárið eftir. Landsstýrismaðurin kann loyva, at meiri enn 10% av egnu árskvotuni hjá ávísum fiskifari verða flutt millum ár, og at felags árskvotur verða fluttar millum ár.

*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann skipa fyri fiskiskapi út frá landi og í áum, vøtnum, ósum og løkum, og áseta nærri reglur um minstamát, friðað øki, friðingartíðir, fiskireiðskap og nýtslu teirra, fiskihættir, avmarkingar av veiðinøgd, veiðiorku og onnur tiltøk.

*Veiða til húsbrúks og ferðavinnufiskiskapur*

**§ 35.** Veiða til húsbrúks er ikki loyvd við fiskifari skrásett undir fremmandum flaggi. Tað er ikki loyvt at avreiða ella á annan hátt selja veiðu til húsbrúks. Minni stuttleikafiskikapping, har veiðan verður seld, og møguligur peningaligur vinningur av sølu fer til vælgerandi endamál, krevur ikki loyvi.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um veiðu til húsbrúks, m.a. reiðskap, fiskileiðir, friðað øki, veiðinøgd, bann fyri at fiska ávíst fiskaslag, ella um serligt loyvi krevst til ávíst djóraslag ella fiskaslag.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann geva serstakt loyvi til fiskiskap í føroyskum sjógvi í sambandi við ferðavinnu og kann áseta nærri reglur um treytir fyri fiskifari, fiskiskapi, fiskileiðir, friðað øki, veiðinøgdir, reiðskapi o.a. Loyvt er ikki at avreiða veiðu frá slíkum fiskiskapi.

*Brúksskylda*

**§ 36.** Veiðiloyvi og fiskiloyvi hjá fiskifari, bólkur 5, sambært § 19, stk. 1, undantikin, sum ikki hava verið brúkt við tí í loyvinum nevnda fiskifari í tvey ár á rað, falla aftur til landið. Tá veiðiloyvi falla aftur til landið, falla veiðirættindini, knýtt at tí ávísa fiskifarinum í fiskiloyvi, eisini aftur til landið.
*Stk. 2.* Hevur fiskifar ikki gagnnýtt rættin til egnar fiskidagar ella egnar kvotur við meira enn 30% við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari í fiskiárinum, fellur munurin millum tað, ið er brúkt, og 30%, aftur til landið.
*Stk. 3.* Í serstøkum førum kann landsstýrismaðurin geva undantak fyri einstøk fiskifør í stk. 2.
*Stk. 4.* Nýtslan, sambært stk. 2, verður roknað av fiskidøgum ella kvotum, íroknað fiskidagar ella kvotur, keyptar, og frároknað fiskidagar ella kvotur, seldar, sambært §§ 30 og 31.
*Stk. 5.* Veiðirættindi, ið eru partar av umbýti sambært § 24, vera ikki tikin við í uppgerðina sambært stk. 1-3.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann í uppgerðini av nýtsluni, sambært stk. 2, síggja burtur frá keyptum og seldum veiðirættindum, um hesi eru keypt og seld fyri at sleppa undan, at hesi falla aftur til landið.
*Stk. 7.* Brúksskyldan, sambært stk. 1 og 2, fevnir ikki um rættindi sambært § 9 og § 14, stk. 1 og 2, í uppboðssølutíðarskeiðinum.

*Forboð fyri útblaking*

**§ 37.** Tað er bannað at blaka veiðu fyri borð.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann geva undantak frá banninum sambært stk. 1.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um skyldu at føra til lands onnur djór, plantur, havsúgdjór og sjófugl ella skyldu at boða frá ella skráseta tílíka hjáveiðu.

*Virking umborð*

**§ 38.** Tað er ikki loyvt at virka veiðu umborð á fiskiførum undir føroyskum flaggi í føroyskum sjógvi uttan við loyvi frá Fiskiveiðieftirlitinum.
*Stk. 2.* Avgerðir um góðkenning, sambært stk. 1, skulu leggja dent á, um útlit eru fyri virking og virðisøking á landi í Føroyum.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um, hvat virking umborð fevnir um, og um mannagongd og treytir fyri umsiting av stk. 1.

*Umskiping*

**§ 39.** Tað er ikki loyvt at umskipa, taka veiðu úr reiðskapi hjá øðrum fiskifari ella taka inn reiðskap, sum annað fiskifar hevur tóvað ella sett, uttan við loyvi frá Fiskiveiðieftirlitinum.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um mannagongd og treytir fyri umsiting av stk. 1.

*Alt í land*

**§ 40.** Landsstýrismaðurin kann gera reglur, sum áleggja fiskiførum at føra til lands innvøl, rygg, skræðu, høvd o.tíl. av fiski. Reglurnar skulu hava ásetingar um, hvat skyldan fevnir um, og ásetingar um tillagingartíð.

*Landing í Føroyum*

**§ 41.** Øll veiða á fiskiførum undir føroyskum flaggi skal landast um bryggjukant í Føroyum.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvørji fiskasløg, fiskaúrdráttir ella fiskiskapur, heilt ella lutvíst, ella í avmarkað tíðarskeið, eru undantikin kravinum sambært stk. 1.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann somuleiðis eftir umsókn geva undantak frá kravinum í stk. 1.
*Stk. 4.* Reglur og avgerðir sambært stk. 2 og 3 skulu vera grundaðar á meting um m.a. sølumøguleikar fyri ávís fiskasløg og

ávísan fiskaúrdrátt í Føroyum, virðisøking í Føroyum og fjarstøðu frá fiskileiðum.
*Stk. 5.* Er veiða landað uttanlands í ósamsvari við stk. 1 og 2, skal eigarin av fiskifarinum rinda eitt gjald til landskassan, sum samsvarar við 30% av søluvirðinum av tí nøgd, sum er avreidd uttanlands.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um uppgerð, gjaldfreist og rentu. Gjaldið, saman við rentu og møguligum innkrevjingarkostnaði, kann krevjast inn við panting. TAKS fremur panting eftir reglunum um innkrevjing av skattum.

*Uppboðssøla av veiddum fiski*

**§ 42.** Landsstýrismaðurin kann gera reglur um, at veiða hjá føroyskum fiskifari skal bjóðast út um góðkenda uppboðssølu í Føroyum. Undantikið er veiða av rættindum latin bólki 5 sambært § 19, stk. 1, nr. 6. Reglurnar skulu áseta, hvørji fiskasløg og hvussu stórur partur av veiðuni er fevndur av kravinum, og hvørji tíðarskeið veiðan verður gjørd upp.

*Manningarviðurskifti*

**§ 43.** Skipari og manning á fiskifari undir føroyskum flaggi, sum fiskar av føroyskum veiðirættindum, og manning á móttøkuskipi undir føroyskum flaggi, sum tekur ímóti fiski, skulu lønast samsvarandi sáttmálum við føroysk manningarfeløg.
*Stk. 2.* Áðrenn fiskiloyvi verður latið, skal eigari av fiskifari, sum søkir um fiskiloyvi, vátta, at skipari og manning á fiskifari í tí ávísa fiskiskapinum verða lønt samsvarandi sáttmálum við føroysk manningarfeløg. Er ávísur fiskiskapur ikki fevndur av sáttmálum við føroysk manningarfeløg, skal tann, sum søkir fiskiloyvi, í hvørjum einstøkum føri vátta, at lønarviðurskiftini hjá skipara og manning eru staðfest í skrivligari avtalu millum avvarðandi manningarfeløg og ábyrgdaran av fiskifarinum, sum ávíst í fiskiloyvinum.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri treytir um, at skipari og manning á fiskifari undir føroyskum flaggi, sum fiskar av føroyskum veiðirættindum, og manning á móttøkuskipi undir føroyskum flaggi, sum tekur ímóti fiski, skulu hava arbeiðsloyvi og uppihaldsloyvi í Føroyum.

## Kapittul 10
## Annað sjófeingi

**§ 44.** Reglurnar í §§ 45-48 fevna um gagnnýtslu av øðrum sjófeingi, ið kemur úr føroyskum sjógvi.

**§ 45.** Sum annað sjófeingi er í hesari løgtingslóg at skilja alt lívfrøðiligt, evnafrøðiligt og alisfrøðiligt tilfar, sum stavar frá livandi verum, t.d. djórum, plantum og smáverum.
*Stk. 2.* Við marina bioprospektering er at skilja málrættað leiting, innsavning og goymsla av sjófeingi við tí endamáli at finna fram til eginleikar ella úrdráttir úr tilfarinum, sum kunnu gagnnýtast vinnuligt.

**§ 46.** At gagnnýta annað sjótilfeingi, t.d. arvatilfar, sum stavar úr føroyskum sjógvi, kann bara gerast við loyvi frá landsstýrismanninum.
*Stk. 2.* Marin bioprospektering í føroyskum sjógvi kann bara fara fram við loyvi frá landsstýrismanninum.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri treytir fyri loyvum sambært hesi grein.

**§ 47.** Í loyvum, givin eftir § 46, kunnu setast treytir um:
1) at framíhjárættindi, sum eru vunnin í sambandi við gagnnýtslu av sjófeingi, funnið í føroyskum sjógvi, skulu falla til landið, og
2) at annað sjófeingi, og úrslit av bioprospektering, ikki kann avhendast ella breiðast út uttan loyvi og eftir nærri tilskilaðum treytum.

**§ 48.** Er annað sjófeingi, sum stavar úr føroyskum sjógvi, gagnnýtt uttan loyvi,

kann landsstýrismaðurin áleggja treytir sambært § 47.

## Kapittul 11
## Vinnuligar royndir, royndarfiskiskapur o.a.

*Vinnuligar royndir og verkætlanir*

**§ 49.** Av tøku føroysku kvotuni av svartkjafti, norðhavssild og makreli kann landsstýrismaðurin lata umsøkjarum kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir, ið hava virðisøking við sær, eitt menningarmál og eitt nýskapanarmál í gagnnýtsluni av nevndu fiskasløgum, samanber stk. 2 og 3. Umsóknin skal vera knýtt at ávísum fiskifari undir føroyskum flaggi við veiðiloyvi ella við fiskiloyvi í bólki 5, sambært § 19, stk. 1, nr. 6.
*Stk. 2.* Uttan so, at lagt verður um til egnar árskvotur, sambært § 10, stk. 3, skulu 8,5% av tøku føroysku kvotuni av svartkjafti, norðhavssild og makreli setast av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Verður lagt um til egnar árskvotur, sambært § 10, stk. 3, verður mongdin tikin av nøgdini sambært 1. pkt. Landsstýrismaðurin letur fiskifari undir føroyskum flaggi við veiðiloyvi ella við fiskiloyvi í bólki 5, sambært § 19, stk. 1, nr. 6, serstakt fiskiloyvi til nevndu endamál.
*Stk. 3.* Umframt nøgdina, sambært stk. 2, kann kvota, sambært § 14, stk. 2 og 3, av svartkjafti, norðhavssild og makreli, verða sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Kvota sambært hesum stykki fylgir broytingum í heildarkvotuni eins og kvota sambært § 16, stk. 4.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann, í serligum førum, geva undantak frá kravinum um føroyskt skrásett fiskifar og veiðiloyvi sambært stk. 1.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um mannagongd og treytir í sambandi við umsóknir, og landsstýrismaðurin kann í loyvinum áseta treytir um fiskileiðir, veiðihættir, tíðarskeið o.a., og aðrar treytir samsvarandi § 34.

*Royndarfiskiskapur o.a.*

**§ 50.** Fyri sjófeingi, ið ikki er fevnt av § 49, stk. 1, kann landsstýrismaðurin, uttan mun til galdandi avmarkingar eftir hesi løgtingslóg, eftir ummæli frá Havstovuni, lata fiskifari undir føroyskum flaggi við veiðiloyvi, ella við fiskiloyvi í bólki 5, sambært § 19, stk. 1, nr. 6, serstakt fiskiloyvi til royndarfiskiskap ella til fiskiskap, sum er liður í eini undirvísingarætlan.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann, í serligum førum, geva undantak frá kravinum um føroyskt skrásett fiskifar og veiðiloyvi sambært stk. 1.
*Stk. 3.* Loyvi til royndarfiskiskap kann latast til somu royndarverkætlan og víðarimenning av hesi í samanlagt trý ár. Hvørt loyvisskeið kann tó í mesta lagi vara eitt ár í senn, og neyðugt er at søkja um nýtt loyvi til hvørt loyvisskeið.
*Stk. 4.* Er loyvi givið til royndarveiðu eftir ávísum fiskaslagi í samanhangandi tíðarskeið áljóðandi í minsta lagi 5 ár, kann landsstýrismaðurin eftir umsókn lata fiskiloyvi til ávísa fiskaslagið, um mett verður, at grundarlag er fyri varandi og burðardyggum fiskiskapi, og treytirnar í royndarloyvinum annars hava verið loknar, og loyvishavari lýkur vanligu treytirnar ásettar í §§ 11-13.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur um mannagongd og treytir í umsitingini av stk. 1-3 og kann í loyvinum áseta treytir um fiskasløg, fiskileiðir, veiðihættir, tíðarskeið o.a., og aðrar treytir samsvarandi § 34.

## Kapittul 12
## Fiskirannsóknir og havrannsóknir

**§ 51.** Havstovan ger kanningar av livandi tilfeinginum og umhvørvi tess í føroyskum sjógvi og á teimum havleiðum, har føroyska fiskivinnan hevur áhugamál, luttekur í menning av reiðskapi og

fiskiskapi, kunnar landsins myndugleikar, vinnu og almenning um granskingarúrslit, og ráðgevur um gagnnýtslu av tilfeinginum.
*Stk. 2.* Uttan mun til galdandi avmarkingar eftir hesi løgtingslóg hevur Havstovan loyvi at gera vísindaligar rannsóknir í føroyskum sjógvi.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann lata fiskiloyvi at troyta ávís veiðirættindi upp til eitt ár í senn, sum samsýning fyri at gera rannsóknir fyri Havstovuna. Landsstýrismaðurin kann lata rættindini sum egnar árskvotur ella egnir fiskidagar upp til eitt ár í senn. Henda kvota kann flytast at verða fiskað fiskiárið eftir.
*Stk. 4.* Havstovan kann gera neyðugar kanningar av øllum landingum í Føroyum.

## Kapittul 13
## Avgreiðslugjøld

**§ 52.** Landsstýrismaðurin ásetir reglur um gjald fyri avgreiðslu av loyvum sambært hesi løgtingslóg, flyting og avhending av veiðiloyvum og fiskiloyvum, kvotum og fiskidøgum, og loyvi til umskiping og til móttøkuskip.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um gjald fyri endurrindan av útreiðslum í sambandi við tænastur, sum verða veittar eftir áheitan.

## Kapittul 14
## Fiskiveiðieftirlit

**§ 53.** Fiskiveiðieftirlitið hevur eftirlit við, at reglurnar í hesi løgtingslóg, og reglur ásettar við heimild í hesi løgtingslóg, verða hildnar, tó § 43, stk. 1 og 2 undantikið. Um neyðugt kann Fiskiveiðieftirlitið gera samstarvsavtalur við aðrar myndugleikar um at útinna fiskiveiðieftirlitsuppgávur eftir hesi løgtingslóg.

**§ 54.** Fiskiveiðieftirlitið kann áleggja fiskiførum at taka reiðskap inn beinanvegin, kann steðga fiskiførum, fiskaflutningsførum og fiskaframleiðsluførum, og kann við samleikaváttan og uttan rættarúrskurð fara umborð at gera tænastukanningar, harundir kanna skipsskjøl, skipsdagbøkur, veiðidagbøkur, lastarbøkur, framleiðslubøkur og framleiðsluuppgerð, útgerð, harundir elektroniska útgerð og dátur úr hesum, reiðskap og veiðu og kann krevja, at skipið, skjøl, útgerð, reiðskapur og veiða verða tikin í føroyska havn til nærri kanningar.
*Stk. 2.* Fiskiveiðieftirlitið kann við samleikaváttan og uttan rættarúrskurð fara inn á øki og hartil krevja atgongd til høli tilhoyrandi góðkend móttøkuvirki og framleiðsluvirki at gera tænastukanningar, harundir gera stakroyndir, kanna framleiðslutøl og innvigingartøl og uppgerðir, útgerð, harundir elektroniska útgerð og dátur úr hesum og kann krevja, at skjøl, dátur, útgerð og rávøra verða tikin til nærri kanningar.
*Stk. 3.* Verður eigari av fari, ella skipari á fari, dømdur fyri lógarbrot ella góðtekur eina fyrisitingarliga avgerð í sambandi við lógarbrot, grundað á kanningar, gjørdar í havn, skal eigarin av farinum gjalda kostnaðin av kanningunum.
*Stk. 4.* Fiskiveiðieftirlitið hevur til einhvørja tíð við samleikaváttan og uttan rættarúrskurð atgongd til fiskifør, fiskaflutningsfør og fiskaframleiðslufør, sum liggja í havn, ella eru í føroyskum sjóøki, og harumframt á øllum støðum, har veiða ella partar av hesi verður goymd, flutt og viðgjørd o.a.
*Stk. 5.* Fiskiveiðieftirlitið kann gera kanningar ella lata kanningar gera, harundir staksýniseftirlit og innvigingareftirlit, innheinta skjøl og upplýsingar, geva boð og forboð í tí vavi og á teimum økjum, har tað verður mett neyðugt fyri at fremja eftirlitið.

**§ 55.** Skipari og eigari av fiskifari hava til einhvørja tíð skyldu at tryggja atkomumøguleikarnar til farið samsvarandi ásetingunum í løgtingslóg um trygd á sjónum, og hava skyldu at hava umborð leytara til nýtslu, tá Fiskiveiðieftirlitið ynskir at koma umborð. Sama er galdandi,

tá eftirlitsmyndugleikar úr øðrum londum ynskja at koma umborð fyri at fremja eftirlit í fiskiveiðiløgdøminum hjá viðkomandi landi, ella tá eftirlit verður framt í altjóða sjógvi sambært avtalum ella sáttmálum, sum Føroyar eru partur av.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um atkomumøguleikar og treytir til leytarar.

**§ 56.** Tey, sum hava ábyrgd av tí, ið kannað verður, hava skyldu til at hjálpa Fiskiveiðieftirlitinum í tænastuligu kanningum sínum, og hava rætt til at vera hjástødd undir slíkum kanningum. Er sannlíkt, at revsiákæra verður reist, skal Fiskiveiðieftirlitið upplýsa viðkomandi, at hann ikki hevur skyldu at úttala seg.
*Stk. 2.* Skipari á fiskifari, fiskaflutningsfari og fiskaframleiðslufari undir føroyskum flaggi hevur skyldu til at hjálpa eftirlitsmyndugleikum úr øðrum londum í tænastuligu kanningum sínum, tá eftirlit verður framt í fiskiveiðiløgdøminum hjá viðkomandi landi, ella tá eftirlit verður framt í altjóða sjógvi sambært avtalum ella sáttmálum, sum Føroyar eru partur av. Eftirlitsfólk skulu frítt kunna nýta samskiftisútgerðina umborð í tann mun, tað er neyðugt fyri at útinna starv teirra.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um skyldurnar hjá skipara, tá eftirlitsmyndugleikar úr øðrum londum fremja eftirlit.

**§ 57.** Veiða, sum er fiskað í ósamsvari við reglurnar um fiskiskap, ella sum ikki er fráboðað ella fráboðað skeivt, skal ikki goymast, flytast ella viðgerast o.a.
*Stk. 2.* Keyparar ella móttakarar av nøgdum av veiðu ella pørtum av hesi, sum er fiskað í ósamsvari við reglurnar um fiskiskap, ella hvørs innihald er í ósamsvari við reglurnar um veiðisamanseting, og sum kunnu metast at vera ólógligar, sambært stk. 1, kunnu bera seg undan ábyrgd við móttøkuni við at siga Fiskiveiðieftirlitinum frá, og geva upp metta veiðinøgd, slag og samanseting við navni og bústaði á tí, sum letur nøgdina. Fráboðað nøgd av veiðu, ella partar av hesi, skal goymast soleiðis, at eftirlit kann fremjast, og skal veiðan ikki flytast ella viðgerast uttan við samtykki frá Fiskiveiðieftirlitinum.
*Stk. 3.* Koma fyri nøgdir av veiðu, ella partar av hesi, veiddar í ósamsvari við galdandi reglur, verður øll nøgdin at meta sum veidd soleiðis.

**§ 58.** Fiskiveiðieftirlitið kann krevja, at fiskifar, fiskaflutningsfar og fiskaframleiðslufar verður verandi á eini knattstøðu í ásetta tíð, til tess at kanningar kunnu fremjast. Knattstøða og tíðarskeið skal so vítt gjørligt avtalast við skiparan á avvarðandi fari.

**§ 59.** Fiskiveiðieftirlitið kann lýsa bráðfeingis veiðibann fyri ávísan fiskiskap á ávísum leiðum í føroyskum sjógvi, har íblandingin av ungfiski ella hjáveiða er meira enn ásetta hámarkið. Bráðfeingis veiðibann verður ásett fyri upp til 4 vikur hvørja ferð.
*Stk. 2.* Fiskiveiðieftirlitið kann somuleiðis loyva einstøkum fiskiførum at gera royndir á bráðfeingis stongdari leið til tess at staðfesta, um bráðfeingis veiðibann skal ásetast av nýggjum ella avlýsast.
*Stk. 3.* Fiskiveiðieftirlitið lýsir bráðfeingis veiðibann alment.

**§ 60.** Fiskiveiðieftirlitið kann geva fiskiførum loyvi til royndir við spølum, fiskireiðskapi o.a. upp til eitt samdøgur í senn og at seta serstakar treytir hesum viðvíkjandi.

**§ 61.** Fiskifør skulu hava allan fiskireiðskap burturstúgvaðan innanborða á sínum natúrliga staði, tá tey eru stødd á eini leið, har tað ikki er loyvt fiskifarinum at fiska. Tað sama er galdandi, tá fiskifarið liggur í havn.

**§ 62.** Upplýsingar, harundir viðkvæmar og trúnaðarupplýsingar, sum hava týdning fyri eftirlitið við fiskiskapi og veiðu, kunnu, treytað av trygd og trúnaði,

útflýggjast myndugleikum í øðrum londum, altjóða felagsskapum og økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum.

## Kapittul 15
## Reglur um kærur

**§ 63.** Avgerð, sum Fiskiveiðieftirlitið tekur eftir hesi løgtingslóg ella eftir reglum, givnum við heimild í hesi løgtingslóg, tó undantikið avgerð sambært kapitlunum 14 og 16, kann verða kærd til landsstýrismannin í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann leggja kærumyndugleika sín sambært løgtingslógini til eina kærunevnd, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um val av nevndarumboðum, samanseting av nevnd og kæruviðgerð hjá kærunevndini, sambært stk. 2.

## Kapittul 16
## Revsireglur o.a.

*Revsing*

**§ 64.** Er ikki harðari revsing ásett eftir aðrari lóg, verður tann revsaður við sekt, ið:
1) brýtur § 3, stk. 3, § 4, stk. 1, § 8, stk. 3, 3. pkt., §§ 11-12, § 13, stk. 1, 5 og 7, § 15, stk. 4 og 5, § 19, stk. 2, 2. og 4. pkt, og stk. 3, § 21 stk. 1 og 3, § 23, stk. 4-6, § 25, stk. 1 og 3, § 26, stk. 1, § 27, stk. 1, § 30, stk. 1-2, § 31, stk. 1-2, § 35, stk. 1, 1. og 2. pkt., § 37, stk. 1, § 38, stk. 1, § 39, stk. 1, § 43, stk. 1, § 46, stk. 1 og 2, § 55, stk. 1, § 56, stk. 1 og 2, § 57, stk. 1 og § 61,
2) ikki steðgar fiskiskapi, tá kvota er uppfiskað, hámark er rokkið, ella fiskidagar hjá fiskifari ella bólki eru nýttir,
3) fiskar á leiðum, har bráðfeingis veiðibann er ásett við heimild í § 59,
4) ikki fylgir treytum, knýttar at loyvum, latin sambært løgtingslógini ella reglum við heimild í løgtingslógini,
5) ikki fylgir banni ella boðum, givin sambært løgtingslógini, ella reglum við heimild í løgtingslógini, ella
6) letur ósannar ella villleiðandi upplýsingar ella heldur aftur upplýsingum til nýtslu í próvførslu eftir løgtingslógini, ella sum eru kravdar sambært løgtingslógini, ikki letur neyðug skjøl, skjalprógv ella upplýsingar, sum skylda er eftir løgtingslógini ella við reglum, ásettar við heimild í løgtingslógini.

*Stk. 2.* Í reglum, ásettar við heimild í § 9, stk. 4, § 15, stk. 6 og 7, § 19, stk. 2, 3. pkt., stk. 5, 2. pkt, stk. 6 og stk. 7, 2. pkt., § 21, stk. 2, § 22, stk. 1 og 2, § 23, stk. 1, § 25, stk. 4, § 26, stk. 2, § 27, stk. 2, § 28, stk. 4, § 29, stk. 6, § 30, stk. 4, § 31, stk. 4, § 32, stk. 4, § 33, § 34, § 35, stk. 2, § 37, stk. 3, § 38, stk. 3, § 39, stk. 2, § 40, § 41, stk. 2 og 6, § 42, § 46, stk. 3, § 49, stk. 5, § 50, stk. 5, § 52, stk. 1 og 2, § 55, stk. 2, § 56, stk. 3, § 71, 2. pkt., kunnu verða ásettar reglur um sekt.
*Stk. 3.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.
*Stk. 4.* Mál, sum verða viðgjørd eftir reglum í hesum kapitli, ella eftir reglum, sum eru givnar við heimild í stk. 2 í hesi grein, verða viðgjørd sum løgreglumál, samanber tó § 66. Rættartiltøkini í rættargangslógini í kapitli 72 um at leggja hald á og í kapitli 73 um rannsókn kunnu nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum.
*Stk. 5.* Sekt fyri ólógligan fiskiskap, sambært stk. 1 og 2, skal taka støði í avreiðingarvirðinum í viðkomandi fiskiskapi, um brotið kann metast at vera framt við vinningi ella sparing fyri eyga, umframt at dentur verður lagdur á grovleikan á brotinum.
*Stk. 6.* Er brot, sambært stk. 1, nr. 6, framt fyri at sleppa undan gjaldi sambært løgtingslógini, ella reglum við heimild í løgtingslógini, skal sekt áleggjast við støði í gjøldunum, sum roynt er at sleppa undan.

**§ 65.** Hevur fiskifar fiskað meir enn loyvt er sambært fiskiloyvinum, fær eigarin tríggjar dagar freist at boða Fiskiveiðieftirlitinum frá, at hann við umsiting av fiskidøgum, egnari árskvotu ella egnari hjáveiðikvotu hevur lokið treytirnar.
*Stk. 2.* Fiskiveiðieftirlitið kann mótrokna nøgdina av mettu veiðuni, sum blakað er útaftur, í egnari árskvotu ella felags árskvotu.

*Fyrisitingarlig sektaruppskot*

**§ 66.** Í málum um brot sambært § 64, stk. 1 og 2, har Fiskiveiðieftirlitið metir, at nøktandi greidleiki er á veruligu umstøðunum í málinum, at brotið ikki kemur undir strangari revsing enn sekt, kann Fiskiveiðieftirlitið við einum sektaruppskoti boða frá, at málið kann verða avgjørt uttan rættarmál, um tann, ið hevur framt brotið, játtar seg sekan í brotinum og váttar at gjalda sektina sambært sektaruppskotinum innan nærri ásetta freist.
*Stk. 2.* Krøv um inndrátt, her ímillum inndrátt av virðum ella ólógligum reiðskapi, kunnu á sama hátt verða avgjørd uttan rættarmál.
*Stk. 3.* Reglurnar í rættargangslógini um innihald í ákæruriti í løgreglumálum og reglurnar um, at ein ákærdur ikki hevur skyldu at geva frágreiðing, verða samsvarandi nýttar viðvíkjandi sektaruppskotum.
*Stk. 4.* Góðtekur tann, ið hevur framt brotið, sektina, fellur rættarsóknin burtur.
*Stk. 5.* Somuleiðis kunnu tey, sum hava verið við til at fremja brot, fáa fráboðan um, at málið kann verða avgjørt uttan rættarmál við góðtøku av sektaruppskoti sambært stk. 1.

**§ 67.** Sektarpeningur, álagdur við heimild í hesi løgtingslóg, verður býttur eftir galdandi avtalu millum donsku stjórnina og landsstýrið.

**§ 68.** Fyri inndrátt eru reglurnar í revsilógini galdandi.
*Stk. 2.* Veiða, ella virði av veiðu, kann inndragast, hóast tað ikki kann staðfestast, at øll veiðan er fiskað ólógliga.
*Stk. 3.* Ólógligur reiðskapur, ella virði av reiðskapi, kann inndragast, harundir net, lemmar, vektir, veirar, elektronisk útgerð, sondur, sondukáplar, línur, uppstandarar, vørp, boyur, gørn o.a., líkamikið hvørs ogn hetta er, og hóast tað ikki er endaliga staðfest, at allur reiðskapurin er nýttur í ólógligum fiskiskapi.
*Stk. 4.* Verður komið fram á ólógligan reiðskap í sjónum, ella reiðskap, sum ikki er merktur sambært galdandi reglum, kann reiðskapurin verða tikin upp. Sama er galdandi fyri reiðskap, ið er settur ella stendur, har fiskiskapur við hesum reiðskapi ikki er loyvdur, ella ikki er settur ella ikki stendur sambært galdandi reglum. Sama er galdandi fyri reiðskap, sum er latin eftir á plássum, har fiskiskapur við hesum reiðskapi ikki er loyvdur. Fiskiveiðieftirlitið kann krevja, at eigarin sjálvur dregur reiðskap inn ella kann draga reiðskap inn fyri rokning eigarans.

**§ 69.** Er revsiábyrgd staðfest eftir reglunum í hesi løgtingslóg, ella reglum, ásettar við heimild í hesi løgtingslóg, kunnu skip haldast aftur av eftirlitsmyndugleikanum, ella av løgregluni vegna eftirlitsmyndugleikan, til falnar sektarupphæddir og sakarmálskostnaður eru goldin, ella til trygd er fingin fyri gjaldingini. Er ikki goldið 2 mánaðir eftir, at málið er endaliga avgjørt, kann fulnaður takast í skipinum.
*Stk. 2.* Um nevndu myndugleikar halda skipi aftur, verða reglurnar í kapitli 72 í rættargangslógini um at leggja hald á lutir, ið tað verður hildið rætt at taka inn, at nýta samsvarandi. Afturhald kann bara fremjast, um tað er neyðugt fyri at tryggja, at nevndu upphæddir verða goldnar.

*Afturtøka av loyvum*

**§ 70.** Fiskiveiðieftirlitið kann beinanvegin taka aftur rættin til at reka vinnuligan fiskiskap, um brot er framt á reglurnar í hesi løgtingslóg, ella reglur, ásettar við heimild í hesi løgtingslóg, um fiskað er meira enn loyvt sambært fiskiloyvinum, ella um fiskifar ikki heldur seg til treytir ásettar í fiskiloyvinum.
*Stk. 2.* Rætturin at reka vinnuligan fiskiskap kann takast aftur upp til 4 vikur hvørja ferð. Fiskiveiðieftirlitið ger av, hvat tíðarskeið rætturin at reka vinnuligan fiskiskap verður tikin aftur. Í tíðarskeiðinum, rætturin at reka vinnuligan fiskiskap verður tikin aftur, kann eigarin av fiskifarinum ikki gagnnýta rættindini í fiskiloyvinum, og skipið, ið brotið er framt við, kann ikki reka vinnuligan fiskiskap, heldur ikki, um skipið verður selt øðrum eigara.

**§ 71.** Fyri grov brot, ella endurtøku av brotum, kann landsstýrismaðurin avgera, at givin rættindi verða tikin aftur fyri ásett tíðarskeið ella endaliga.
Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um afturtøku av loyvum.

**§ 72.** Avgerðir eftir § 70 eru endaligar innan fyrisitingina.
*Stk. 2.* Avgerðir eftir §§ 70 og 71 kunnu leggjast fyri dómsvaldið. Avgerðir eftir §§ 70 og 71 skulu innihalda upplýsingar um rættin til at leggja avgerðina fyri dómsvaldið og um kærufreist. Áheitan um at leggja málið fyri dómsvaldið skal fráboðast Fútanum í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er boðað viðkomandi. Málið verður lagt fyri dómsvaldið eftir reglunum í § 78, stk. 3 í revsilógini. Áheitanin, um at leggja málið fyri dómsvaldið, hevur ikki steðgandi virknað.

## Kapittul 17
## Gildiskoma og skiftisreglur

**§ 73.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2020, samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi.
*Stk. 2.* § 30, stk. 2, § 31, stk. 2 og § 36 koma í gildi 1. januar 2022.
*Stk. 3.* Kunngerðir við heimild í løgtingslógini um fyrisiting av sjófeingi hava framvegis gildi í tann mun, tær ikki eru í ósamsvari við ásetingarnar í hesi løgtingslóg. Kunngerðir fara úr gildi sambært ásetingum um gildistíð í hesum kunngerðum ella við kunngerðum, sum koma í staðin fyri verandi kunngerðir.
*Stk. 4.* Kunngerðir við heimild í løgtingslógum, sum vóru settar úr gildi við løgtingslógini um fyrisiting av sjófeingi, ella løgtingslógini um vinnuligan fiskiskap, men sum hava verið galdandi, vera framvegis í gildi. Kunngerðir fara úr gildi við kunngerðum, sum koma í staðin fyri verandi kunngerðir.

**§ 74.** Brot á løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, ið eru framd, áðrenn løgtingslógin kemur í gildi, verða revsað eftir §§ 81-89 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi og eftir reglum við heimild í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.
*Stk. 2.* Brot á løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, ið eru framd áðrenn 1. januar 2018, verða revsað eftir §§ 40-47 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap og eftir reglum við heimild í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið
Samgongan, sum tók við í september 2019, hevur greið fiskivinnupolitisk mál í samgonguskjalinum, og hevur sett sær fyri, at vit skulu hava eina fiskivinnuskipan, ið elvir til búskaparliga, vinnuliga, lívfrøðiliga og umhvørvisliga burðardygd, og sum stuðlar undir virðisøking og menning í Føroyum.

Hetta lógaruppskotið miðar eftir at fremja settu málini hjá samgonguni. Ítøkiliga snýr tað seg um at broyta verandi lóg viðvíkjandi gildistíð á veiðirættindum, hvussu landið útlutar veiðirættindi, harundir at avtaka ásetingarnar um uppboðssøluna í galdandi lóg, at veiðirættindi frameftir vera knýtt at skipinum, at linka treytirnar um útlendskan ognarskap, reglum um umsetiligheit, brúksskyldu, fiskidagaskipan og reglum um at avreiða veiðu.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Lógin um fyrisiting av sjófeingi kom í gildi 1. januar 2018. Lógin setir lógarkarmar fyri, hvussu gagnnýtslan av sjófeingi verður skipað og umsitin. Lógin hevur skipanir fyri atgongd at fiska, reglur um útlendskan ognarskap í vinnuni, heimildir at skipa sjálvan fiskiskapin, reglur um avreiðing av veiðu, reglur, sum skulu forða fyri, at rættindi verða miðsavnað á fáar hendur og reglur um avhending av veiðirættindum.

Yvirhøvur er talan um eitt lógarverk, ið lýkur tey krøv, ið verða sett eini nútímans og framkomnari fiskiveiðilóggávu.

Tær skipanir og stýringaramboð, ið eru í galdandi lóg, hava verið mett at vera tey frægastu fyri at røkka settu málunum í fiskivinnupolitikkinum hjá meirilutanum, ið samtyktu lógina í 2017.

Funnist hevur verið at nógvum av hesum skipanum og stýringaramboðum.

Serliga hevur ásetingin, um at ein partur av tøku føroysku kvotunum skal seljast á uppboði, staðið fyri skotum.

Somuleiðis hevur verið ført fram, at gildistíðin á veiðirættindunum er ov stutt til, at vinnan skal hava umstøður at tillaga seg.

Meginreglan í galdandi lóg um, at veiðirættindini eru leys av ávísum fiskifari, hevur eisini verið fyri atfinningum, serliga frá manningarfeløgunum.

Harafturat halda fleiri, at tað ikki er skilagott, at útlendskur ognarskapur heilt er útihýstur úr vinnuni.

Reglurnar um, hvussu veiðirættindi kunnu avhendast, eru av nógvum mettar at vera ov avmarkandi og stirvnar.

Við støði í hesum hevur samgongan, sum tók við um miðjan september 2019, sett sær fyri at broyta og dagføra nógvar av skipanunum í galdandi lóg. Broytingarnar í lógaruppskotinum eru ætlaðar at geva vinnuni tryggar karmar at virka undir.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Yvirskipaða endamálið við lógaruppskotinum er at hava eina dagførda lóg, sum setir greiðar lógarkarmar fyri, hvussu høvuðsvinna og høvuðstilfeingi okkara verður skipað og umsitið.

Uppskotið byggir á, at livandi tilfeingið í føroyskum sjógvi, og tey rættindi, sum Føroyar við samráðingum hava rokkið ella eftir altjóða rætti eiga uttan fyri føroyskan sjógv, eru ogn Føroya fólks.

Dentur er lagdur á at varðveita sjófeingið, lógin fevnir um, og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt, lívfrøðiliga og búskaparliga, til tess at tryggja besta samfelagsbúskaparliga íkastið frá fiskivinnuni.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Høvuðsnýskipanirnar í lógaruppskotinum eru hesar:

1) Uppboðssøla av veiðirættindum verður avtikin. Tey, ið hava keypt sær rættindi á uppboði, sum hava gildi, tá hendan løgtingslógin tekur við, varðveita hesi rættindi, og tá gildistíðin er farin, verða rættindini løgd um til vanlig rættindi.

2) Galdandi skipan við menningarkvotum verður somuleiðis avtikin. Tey, ið hava tilsøgn um menningarkvotu, tá hendan løgtingslógin fær gildi, kunnu halda fram við sínum verkætlanum. Menningarkvoturnar vera lagdar um til vanlig rættindi, um ásettar treytir eru loknar.

3) Reglurnar um gildistíð á veiðirættindum vera broyttar soleiðis, at rættindini fáa eina gildistíð upp á 12 ár, ístaðin fyri tey átta árini í galdandi løgtingslóg.

4) Farið verður frá eini skipan, har rættindini eru knýtt at persóni ella felag, til eina skipan, har rættindini eru knýtt at ávísum fiskifari, sum skal hava veiðiloyvi. Rættindahavarar fáa eina tíð at laga seg til nýggju skipanina.

5) Fiskidagaskipan í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi heldur fram.

6) Í verandi løgtingslóg er ásett, at tann triðingurin av útlendskum ognarskapi, sum var loyvdur undir gomlu lógini um vinnuligan fiskiskap, sum frá líður skal heilt út úr vinnuni. Hetta verður við hesum uppskotinum broytt til, at verandi útlendskur ognarskapur kann halda fram samstundis, sum nýggjur útlendskur ognarskapur kann vera upp til 1/4 í feløgum í fiskivinnuni.

7) Við hesum uppskotinum verða reglurnar, um hvussu veiðirættindi kunnu skifta hendur, grundleggjandi broyttar. Tað verða munandi rúmari ræsur hjá rættindahavara á privatum grundarlagi at avhenda øðrum rættindahavara veiðiloyvi, egnar kvotur ella egnar fiskidagar, enn undir verandi løgtingslóg.

Niðanfyri er tikið samanum hesar høvuðsbroytingar saman við øðrum broytingum, uppskotið hevur við sær, sammett við galdandi lóg um fyrisiting av sjófeingi:
- Virkisøki og endamál lógarinnar
- Veiðirættindi - tillaging og skifti frá verandi lóg
- Onnur rættindi enn uppboðssølukvotur og menningarkvotur
- 1, 3 ella 8-ára rættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019
- Menningarkvotur

- Veiðiloyvi og fiskiloyvi
- Veiðirættindi á uppboð í 2020
- Útlendskur ognarskapur
- Reglur at forða fyri miðsavnan av veiðirættindum
- Skipan í fiskiskapi eftir botnfiski í føroyskum sjógvi
- Brúksskylda á veiðirættindi
- Reglur um at avhenda og at flyta veiðirættindi
- Útblakingarbann og skylda at føra allan fiskin til lands
- Alt av fiskinum í land
- Reglur um, at øll veiða skal um bryggjukant í Føroyum
- Uppboðssølukrav til veiddan fisk
- Vinnuligar royndir og verkætlanir
- Rannsóknir, royndarfiskiskapur og menningarætlanir

**Virkisøki og endamál lógarinnar**

*Virkisøki*
Orðingarnar um virkisøki eru óbroyttar, sammett við galdandi lóg. Lógin fevnir um alla gagnnýtslu av øllum livandi sjófeingi. Livandi sjófeingi er fiskur, krabbadýr, skeljadýr, plantur og aðrar livandi verur í sjónum og á ella í havbotninum. Undantikin eru havsúgdjór og fuglur, og fiskur og onnur dýrasløg í aling, ið er skipað í aðrari lóggávu.

Lógin er galdandi fyri alla gagnnýtslu, har fiskiveiða er tann týdningarmesta. Tað merkir m.a., at lógin eisini fevnir um virksemi, ið ikki er beinleiðis vinnuligur fiskiskapur, eitt nú ferðavinnufiskiskapur og veiða til egna nýtslu. Loyvi krevst tó ikki til at fiska til húsbrúk. Hinvegin kann tørvur vera á at áseta nærri, hvat fiskiskapur til egna nýtslu er, eins og tørvur kann vera á at áseta tekniskar reglur fyri fiskiskapi, ið ikki er vinnuligur, eitt nú at avmarka nýtslu av ávísum reiðskapi á ávísum leiðum, at friða ávísar sjóleiðir fyri øllum fiskiskapi o.tíl. Í sambandi við ferðavinnufiskiskap er heimild at geva undantak frá høvuðsregluni, sum bannar fremmandum fiskiførum at reka fiskiskap í føroyskum sjógvi, og at seta treytir til ferðavinnufiskiskap um veiðinøgdir, hvussu nógv kann takast við av landinum, reiðskap, tal av reiðskapi o.tíl.

Lógin er galdandi á føroyskum førum, í føroyskum sjógvi, á føroyska landgrunninum og uttan fyri føroyskan sjógv, á landi í Føroyum og í føroyskum áum og vøtnum.

Lógin er galdandi fyri øll før undir føroyskum flaggi – ikki bert fiskifør, men eisini t.d. føroysk skrásett skip, sum taka ímóti fiski og úrdrátti, flutningsskip og onnur før, ið veita tænastur og veitingar til fiskifør. Yvirskipaða endamálið er at tryggja, at øll gagnnýtsla av livandi sjófeingi við førum undir føroyskum flaggi fer fram undir skipaðum viðurskiftum, og at byrgja fyri, at før undir føroyskum flaggi taka lut í virksemi, ið kann vera flokkað sum ólógligur, óskipaður og ófráboðaður fiskiskapur, stytt ÓÓÓ-fiskiskapur (á enskum Illegal, Unreported, and Unregulated fishery, IUU).

*Endamálsorðingar*
Sammett við galdandi lóg eru ongar beinleiðis endamálsorðingar í sjálvum lógartekstinum í hesum uppskoti. Hildið verður, at endamálsorðingar, ið ikki staðfesta ávís rættindi ella skyldur, men einans greiða frá tí yvirskipaða endamálinum við løgtingslógini, eiga ikki at verða skrivaðar inn í sjálvan lógartekstin. Endamálsorðingar eru í sjálvum sær ikki regulering, men eru ofta mest at rokna sum politiskar yvirlýsingar við málum, sum eru lítið

ítøkiligar og sum ikki kunnu røkkast til fulnar samstundis. Tá ið av tornar er tað ein spurningur um, hvussu raðfest verður politiskt og um, hvørjar fyriskipanir og stýringaramboð ein annars velur at hava í lógini, og – ikki minst - hvussu hesi til einhvørja tíð verða brúkt í verki.

Endamálsorðingar eru tí ikki skrivaðar í sjálva lógina, men í viðmerkingunum til lógaruppskotið er víst á, hvørji fyrilit skulu takast í fyrisitingini av lógini.

*Fyrilit í fyrisitingini*
Tá lógin verður fyrisitin og heimildirnar í henni brúktar, skulu fyrilit takast fyri nógvum ymiskum viðurskiftum. Fyrisitingin av lógini skal stuðla undir góða og burðardygga stovnsrøkt. Komandi ættarlið skulu eisini kunna liva av sjónum. Regluverkið skal eisini lúka rakstrar- og samfelagsbúskaparlig krøv. Rakstrarbúskaparliga kravið er, at fiskiveiðan ber seg, útvegar fiskimonnum rímiliga úrtøku, at nóg mikið er til rakstur, kapitalkostnað og nýíløgur. Samfelagsbúskaparliga kravið er, at veiðan gevur so stórt íkast til tjóðarúrtøkuna sum gjørligt. Regluverkið skal tryggja, at mest møguligt av virðisøkingini í sambandi við gagnnýtsluna av fiskatilfeinginum er í Føroyum, og kemur føroyska samfelagnum til góðar.

Fyrivarnisreglan hevur týdning í umsitingini av øllum náttúrutilfeingi yvirhøvur, og er eisini ein partur av t.d. ST-avtaluni um ferðandi fiskastovnar frá 1995 og millumtjóða sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi.

Umsitingin av fiskatilfeinginum eigur eisini at taka støði í vistskipanarregluni (eco-system approach). Hetta merkir í stuttum, at fyriskipanir í fiskiveiðuni skulu hava virðing fyri sambandinum millum ymisku dýra- og plantustovnarnar í havinum og meingi teirra.

Í fyrisitingini av lógini kann dentur leggjast á onnur viðurskifti, enn vinnuligt ella samfelagsbúskaparligt lønsemi. Yvirskipaða endamálið við lógini er tí eisini at stuðla undir arbeiðs- og inntøkumøguleikum og møguleikum fyri vinnuligum virksemi um alt landið. Sjófeingið er ogn Føroya fólks, og allir partar av landinum eiga at fáa møguleika at troyta livandi tilfeingið í sjónum og fáa ágóða av tí.

Í fyrisitingini av fiskiskapi skulu fyrilit takast fyri ásetingum og meginreglum í teimum avtalum, sum Føroyar gera við onnur lond. Her er t.d. talan um avtalur, ið verða gjørdar millum strandarlond um ferðandi ella felags fiskastovnar og samtyktir í millumtjóða fiskiveiðifelagsskapum sum t.d. NEAFC, NAFO og SPRFMO.

Fyrilit skulu takast fyri altjóða sáttmálum, sum Føroyar hava staðfest. Føroyar hava tikið undir við Havrættarsáttmála Sameindu Tjóða. Havrættarsáttmálin gevur strandarlondum rætt til at gagnnýta livandi náttúrutilfeingi í heimasjógvi, men áleggur eisini strandarlandinum eina skyldu at tryggja, at livandi tilfeingið ikki verður trároynt, og at seta í verk tiltøk til tess at tryggja, at stovnarnir vera varðveittir á eini legu, sum gevur mest varandi úrtøkuna.

Sáttmálin um varðveiting og umsiting av millumøkja- og víðferðandi fiskastovnum frá 1995, sum Løgtingið hevur tikið undir við, setti í verk ásetingarnar í Havrættarsáttmálanum um ferðandi og víðferðandi fiskasløg. Hesin sáttmálin er fyrst og fremst ein rammuavtala, sum leggur dent á samstarv millum strandarlond og fjarfiskitjóðir um at fyrisita og gagnnýta ferðandi fiskastovnar burðardygt.

Millumtjóða sáttmálin um lívfrøðiligt margfeldi frá 1992 hevur ásetingar um vernd av lívfrøðiligum margfeldi og burðardyggari gagnnýtslu, og at hetta skal fara fram í samsvari við skyldurnar og rættindini, sum lond hava eftir ásetingunum í havrættinum.

Tað snýr seg eisini um at hava munadygt eftirlit, sum er fyritreyt fyri góðari røkt og fyrisiting av fiskastovnum og øðrum livandi sjófeingi. Føroyar hava ræði á nógvum sjófeingi, og føroysk skip fiska eisini aðrastaðni. Gott eftirlit stuðlar undir, at virksemið er í samsvari við galdandi reglur, eins og tað er eitt almannagagnligt mál  at tryggja, at tey vinnurekandi kunnu virka undir líka treytum í øllum liðum.

Føroyar eru virknar í millumtjóða samstarvi um eftirlit við fiskiskapi og hava tikið undir við samtyktum í NAFO og NEAFC, sum hava sum endamál at tryggja betri fiskiveiðieftirlit í Norðuratlantshavi og á tann hátt basa ÓÓÓ-fiskiskapi. Somuleiðis hava hava Føroyar tikið undir við og staðfest FAO-sáttmálan um at banna, fyribyrgja og forða ólógligum, óskipaðum og ófráboðaðum fiskiskapi - ÓÓÓ-sáttmálin - (Agreement on Port State Measures to Prevent, Deter and Eliminate Illegal, Unreported and Unregulated Fishing).

Afturat hesum kann nevnast, at FAO, sum er mat- og landbúnaðarstovnurin hjá ST, hevur tikið stig til at gera sjálvbodnar leiðreglur um stovnsrøkt, gagnnýtslu av sjófeingi og eftirlit. Føroyar hava, sum atlimur í FAO, havt ein virknan leiklut í hesum arbeiði.

**Veiðirættindi - tillaging og skifti frá galdandi lóg**
Rættindahavarar, sum undir verandi løgtingslóg hava rættindi, ið ikki eru keypt á uppboði ella latin sum menningarkvotur, kunnu halda fram undir at kalla somu kørmum sum fyrr. Allir rættindahavarar fáa eina tíð at laga seg til broyttu fyritreytirnar. Serligar skiftisreglur verða gjørdar fyri rættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019 og fyri menningarkvotur, so at hesi, sum frá líður, verða løgd um til rættindi við 12 ára gildistíð.

Í verandi lóg er ein meginregla, at rættindahavari sjálvur kann gera av, hvat fyri fiskifar og hvussu nógv fiskifør viðkomandi velur at brúka (undantikið fiskifør í bólki 5 undir fiskidagaskipanini). Farið verður nú frá hesi skipan og aftur til eina skipan, har rættindini verða tengd at ávísum fiskifari, eins og støðan var undir løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

Treytirnar, um at knýta rættindi at ávísum fiskifari, verða tó ikki settar í gildi frá degi til dags, tí fyrilit má takast fyri, at vinnan seinastu tvey árini kann hava innrættað seg og tillagað seg til ein nýggjan veruleika, har møguleikin er fyri at brúka onnur fiskifør enn tey, man sjálvur eigur.

Lagt verður tí upp til, at rættindahavarar fáa eina tíð at laga seg til broyttu fyritreytirnar, har serligar skiftisreglur vera galdandi. Skiftisreglurnar eru ymiskar, alt eftir hvør upprunin er hjá rættindunum, sum ein persónur ella felag hevur við sær inn í ta nýggju lógina. Skilt verður ímillum rættin til kvotur, keyptar á uppboði sum 3 og 8 ára rættindi undir løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi; menningarkvotur, sum eru latnar til verkætlanir fyri avmarkað tíðarskeið, og sum framvegis eru í gildi 1. januar 2020; og onnur rættindi, t.e. rættindi til t.d. eginkvotur, rætturin til fiskidagar undir fiskidagaskipanini og rætturin til felagskvotur.

**Onnur rættindi enn uppboðssølukvotur og menningarkvotur**
Tey, ið undir verandi lóg hava rættindi, ið ikki eru seld á uppboði ella latin sum menningarkvotur, kunnu í høvuðsheitum halda fram undir somu umsitingarligu og skipanarligu kørmum sum frammanundan. Talan er her um teir rættindahavarar, sum t.d. hava

fingið tillutað egnar kvotur og egnar fiskidagar undir løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, ella sum hava rætt til at luttaka í fiskiskapinum eftir felagskvotum ella í øðrum loyvisskipanum.

Hesir rættindahavarar kunnu við nýggju lógini halda fram, men skulu, áðrenn 1. januar 2022, hava knýtt síni rættindi at egnum fiskifari.

Í tillagingartíðini fram til 1. januar 2022 kann rættindahavarin velja at brúka egin fiskiför, ella fiskiför, sum viðkomandi ikki eigur. Verður fiskiloyvi útskrivað til fiskifar, sum viðkomandi ikki eigur, vera rættindini ikki knýtt at fiskifarinum, og fiskifarið fær ikki veiðiloyvi við støði í hesum rættindum.

Velur rættindahavarin at fáa fiskiloyvi útskrivað til egið fiskifar, tá fær fiskifarið veiðiloyvi, um tað ikki longu hevur veiðiloyvi, og rættindini vera knýtt at fiskifarinum. Rættindahavarin er tá eigari av fiskifari við veiðiloyvi og fevndur av ásetingunum í lógini hesum viðvíkjandi. Fram til 1. januar 2022, kann rættindahavarin tó velja, at rættindini frameftir skulu gagnnýtast við fleiri fiskiførum, og í hesum sambandi biðja um, at rættindi, sum eru knýtt at einum fiskifari, skulu knýtast at øðrum fiskifari í staðin.

Frá 1. januar 2022 kann rættindahavarin ikki eins og fyrr velja at fáa fleiri fiskiför, ella at flyta rættindi ímillum síni fiskiför. Skulu rættindi eftir tað leggjast á annað fiskifar, skal tað gerast eftir ásetingum um flyting og avhending av veiðirættindum í løgtingslógini.

**1, 3 ella 8-ára rættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019**
Ein av høvuðsbroytingunum við hesum lógaruppskoti er, at farið verður frá árligu uppboðssølunum av rættindum. Lagt er upp til, at umleggingin frá uppboðssølu verður gjørd so skjótt, sum til ber.

Tann parturin av kvotunum, sum undanfarna ár hevur verið seldur sum 1 ára rættindi, verður beinanvegin lagdur um til egnar kvotur.

Uppboðssølurnar av botnfiski í Barentshavinum, toski á Flemish Kap og botnfiski í Eysturgrønlandi verða tiknar av. Tann prosentpartur av heildarkvotuni, sum í 2019 var boðin út sum 1 ára rættindi av botnfiski í Barentshavinum, verður 1. januar 2020 útlutaður sum egnar kvotur til teir rættindahavarar, sum undanfarna ár hava havt rætt at luttaka í hesum fiskiskapi (undantikið tey, sum hava luttikið við støði í 1 ára uppboðssølukvotu). 1 ára rættindini av botnfiski á Flemish Kap, sum í 2019 vóru seld á uppboði, verða í 2020 útlutað og løgd afturat kvotuni, sum undanfarin ár hevur verið latin til bólk 3 at fiska.

Tey rættindi, sum undir løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi í 2018 og 2019 eru seld sum 3 og 8 ára rættindi, halda áfram undir nýggju lógini og vera í eini tillagingartíð framvegis fevnd av ásetingum tengdar at løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, hvat viðvíkur gjaldstreytum.

Lagt verður upp til, at tey, sum undir galdandi lóg hava keypt 3 og 8 ára uppboðssølukvotur, í gildistíðini fyri uppboðssølurættindunum, framvegis kunnu virka sum undir treytunum í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Har í liggur, at rættindahavarin, alt gildistíðarskeiðið, kann velja at gagnnýta síni rættindi við fiskifari, sum hann ikki eigur.

Rættindahavarin kann eisini velja at fáa fiskiloyvi til uppboðssølurættindini útskrivað í fiskiloyvið til egið fiskifar. Verður fiskiloyvi útskrivað til egið fiskifar, fær fiskifarið

samstundis eitt veiðiloyvi, um tað ikki longu hevur eitt, og rættindini vera knýtt at hesum fiskifari.

Tá rættindini verða knýtt at fiskifari við veiðiloyvi, fangar borðið soleiðis at skilja, at rættindahavarin kann tá ikki seinni velja at gagnnýta rættindini við fiskifari, sum viðkomandi ikki eigur. Rættindini kunnu tó avhendast sambært ásetingunum í lógini, og tí stendur tað eigaranum frítt at avhenda rættindini til annað fiskifar við veiðiloyvi at fiska fyri eitt ár í senn ella endaliga.

Ein rættindahavari, sum ikki hevur egið fiskifar at knýta rættindini á, hevur eisini eitt ávíst rásarúm, tí umframt, at viðkomandi í gildistíðini fyri rættindunum kann lata annað fiskifar fiska fyri seg, kann hann eisini velja at avhenda síni rættindi endaliga til eigara av fiskifar við veiðiloyvi. Rættindini vera tá knýtt at fiskifarinum, sum móttekur rættindini.

Tá gildistíðin á uppboðssølukvotunum er runnin, verða rættindini umløgd til egnar árskvotur. Nær rættindini verða umløgd veldst um, nær rættindini eru keypt, og hvat áramál talan er um. Fyri 3 ára rættindi, sum vóru boðin út í 2018, er gildistíðin t.d. til 1. januar 2021, ímeðan tað fyri 8 ára rættindini, sum vóru boðin út í 2019, er 1. januar 2027. Ein treyt, fyri at fáa fiskiloyvi til umløgdu rættindini, er, at rættindini, í seinasta lagi tá gildistíðarskeiðið á uppboðssølurættindunum er runnið, eru á fiskifari við veiðiloyvi.

**Menningarkvotur**
Menningarkvotur, ið eru galdandi, tá ið henda lóg kemur í gildi, kunna halda fram undir somu treytum og tillagingum, sum áður fráboðað. Tað er ikki ein treyt, at fiskifarið, sum verður nýtt í sambandi við hesar menningarverkætlanir, hevur veiðiloyvi, men fiskifarið skal tó lúka ávísar treytir, t.d. viðvíkjandi ognarviðurskiftum. Eisini er krav, at skipið er skrásett í skipaskránni. Viðkomandi er at vísa á, at eitt fiskifar, sum fær fiskiloyvi til menningarkvotu, fær ikki veiðiloyvi við støði í hesum rættindum. Fiskifarið kann tó í sambandi við umlegging av menningarkvotum til vanligar egnar árskvotur fáa tillutað veiðiloyvi, um tað ikki longu hevur tað.

Lagt er upp til, at menningarverkætlanirnar verða eftirmettar í sambandi við, at støða skal takast til, um menningarkvota skal leggjast um til egnar árskvotur. Eftirmetingin tekur støði í, um menningarkvoturnar eru virðisskapandi og burðardyggar. Um mett verður, at menningarkvoturnar eru virðisskapandi og burðardyggar, kunnu tær í loyvistíðarskeiðinum leggjast um til vanligar egnar árskvotur eftir lógini. Treytin, fyri at umløgdu rættindini kunnu útskrivast í fiskiloyvi, er tó, at rættindahavarin, áðrenn árslok 2021, er eigari av fiskifari, sum hevur veiðiloyvi ella lýkur treytirnar fyri at fáa veiðiloyvi.

**Veiðiloyvi og fiskiloyvi**
Í galdandi sjófeingislóg er grundreglan, at veiðirættindi verða latin persóni ella felag. Rættindini eru ikki knýtt at ávísum fiskifari. Tey eru leys av stálinum.

Hetta verður broytt við hesum uppskotinum. Frameftir vera øll veiðirættindi knýtt at eigara av ávísum fiskifari. Loyvisskipanin verður broytt samsvarandi, so at tað, tá tillagingartíðin er farin, vera tvey sløg av loyvum: Veiðiloyvi og fiskiloyvi.

*Veiðiloyvi* er góðkenning, ið landsstýrismaðurin veitir ávísum fiskifari við ávísum eigara at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi. Veiðiloyvi verður latið eigara av fiskifari

til hetta fiskifarið. Veiðiloyvið fylgir skipinum. Eitt skip kann bert hava eitt veiðiloyvi, men kann hava fleiri fiskiloyvi.

*Fiskiloyvi* er tann rættur, sum eigari av ávísum fiskifari við veiðiloyvi fær at veiða av ávísum livandi tilfeingi á ávísum leiðum fyri eitt ávíst fiskiár. Allýsing av fiskiloyvi er sostatt tann sama, sum vit kenna tað frá verandi lóg. Fiskiloyvi er enn sum áður tann rættur, sum eigari av ávísum fiskifari fær at veiða ávís fiska- ella djórasløg undir kvotuskipan, fiskidagaskipan ella aðrari skipan.

Veiðiloyvi gevur sostatt atgongd til vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi yvirhøvur, meðan fiskiloyvi er meira neyvt og gevur atgongd til ávísan fiskiskap og at troyta ávís veiðirættindi.

Veiðiloyvi hava fyrr verið partur av føroyskari fiskiveiðiumsiting. Fyrsta skipanin var sett í verk í 1987 og broytt nakað í 1993. Hetta var fyrst og fremst gjørt við fyriliti fyri stovnsrøkt undir Føroyum, og at loyva skynsamari nýtslu av veiðirættindum uttan fyri føroyskan sjógv. Høvuðsendamálið var at avmarka atgongdina við at fyriskipa veiðiorkuna og harvið veiðitrýstið á fiskastovnarnar í føroyskum sjógvi. Vert er at nevna, at um tað mundið vóru ongar aðrar lógarásettar avmarkingar, eitt nú við kvotum ella fiskidøgum. Tað kom ikki fyrr enn við lógini um vinnuligan fiskiskap í 1994.

Við hesum lógaruppskotinum vera rættindini knýtt at ávísum fiskifari, og ein skipan við veiðiloyvum verður sett í verk. Veiðiloyvið er eitt generelt loyvi, ið eigari av ávísum fiskifari fær at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi.

Treyt fyri at fáa veiðiloyvi er:

1) at eigarin hevur ræðið á rættindum at veiða sambært hesi lóg,
2) at eigarin lýkur treytirnar um ognarviðurskifti,
3) at fiskifarið er skrásett í skipaskránni ella farskránni, sambært løgtingslóg um skráseting av skipum,
4) at fiskifarið hevur siglingarloyvi frá avvarðandi føroyskum myndugleika, og
5) at fiskifarið ikki er skrásett á lista hjá økisbundnum fiskiveiðifelagsskapi, sum far, ið hevur framt ólógligan, ófráboðaðan ella óskipaðan fiskiskap, ella sum hevur stuðlað slíkum fiskiskapi.

Veiðiloyvið hevur eisini týdning í sambandi við, at reglurnar um avhending av veiðirættindum verða broyttar, so at tað verða munandi rúmari møguleikar at avhenda og at útvega sær veiðirættindi á privatum grundarlagi enn frammanundan. Uppskotið hevur við sær, at tað er loyvt at avhenda kvotur ella fiskidagar til øll føroysk fiskifør, sum hava veiðiloyvi. Eftir hesum kunnu t.d. egnir fiskidagar í føroyskum sjógvi avhendast fiskiførum, sum hava veiðiloyvi, men sum í dag ikki eru partar av fiskidagaskipanini í føroyskum sjógvi, undir teimum til einhvørja tíð galdandi treytum og avmarkingum, eitt nú treytum um skipastødd og fiskiorku. Egnar kvotur í t.d. Barentshavinum kunnu avhendast fiskiførum, sum í dag ikki eru partar av skipanini har. Tann, ið móttekur, fær fiskiloyvi, sum gevur viðkomandi rætt til at brúka egnar fiskidagar ella fiskiloyvi at fiska av egnari kvotu.

Veiðiloyvið er sostatt eisini eitt atgongumerki til tann veiðirættindamarknað, sum uppskotið leggur upp til.

Gildistíðin av veiðirættindum verður longd úr 8 árum til 12 ár. Løgtingið skal, eins og í galdandi lóggávu, á hvørjum ári taka støðu til, um gildistíðin skal leingjast fyri eitt ár í senn.

**Veiðirættindi á uppboð í 2020**
Við hesum uppskotinum verður farið frá árligu uppboðssølunum av veiðirættindum. Lagt er tó upp til, at fyri svartkjaft, makrel og norðhavssild verður ein síðsta uppboðssøla í 2020. Samgonguskjalið ásetir, at prosentparturin av 1 ára rættindum av svartkjafti, makreli og norðhavssild, sum í 2019 vóru seld á uppboði, verður saman við menningarkvotunum samlaður og býttur í tveir partar. Harav skal annar parturin setast av til at bjóða út sum langtíðarloyvi, ímeðan hin verður tøkur til royndar – og verandi menningarkvotur. Lagt er tó upp fyri, at tann parturin, sum verður boðin út, ikki má vera størri enn tann parturin, sum var boðin út í 2019.

Í nýggju lóggávuni verður hetta skipað soleiðis, at skilt verður ímillum tær nøgdir, sum stava frá 1 ára sølukvotu og 1 ára uppboðsárskvotunum eftir løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Tær nøgdir, sum sambært galdandi lóggávu, høvdu verið bodnar út sum sølukvota (frádrigið ta nøgd, sum longu er sett av til 3 og 8 ára rættindi), verða bodnar út sum 12 ára rættindi við heitinum sølukvota. Tær nøgdir, sum undir galdandi lóg høvdu verið bodnar út sum uppboðsárskvota, verða annaðhvørt bodnar út sum 12 ára uppboðsárskvota, ella settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Hetta verður tó bert aktuelt, um heildarkvoturnar eru oman fyri ávíst hámark, sum nærri útgreinað niðanfyri.

Heildarkvotuhugtakið er óbroytt frá galdandi lóg. Heildarkvotan er tað, sum er eftir, tá kvotabýtið er gjørt við onnur lond, og tá kvota, ið er sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir, gransking og hjáveiðu, er drigið frá.

Lagt verður upp til, at seld verður ein nøgd, sum kann teingjast at lutfallinum av 1 ára sølukvotunum í 2019, t.e.:

- 8,7% av eini heildarkvotu av makreli upp til 90.000 tons,
- 14,5% av eini heildarkvotu av svartkjafti á 350.000 tons og
- 8,7% av eini heildarkvotu av norðhavssild á 65.000 tons.

Rættindi verða seld sum kvotur við 12 ára gildistíð og verða eftir keypið til ein kvotapart av heildarkvotuni, sum flytur seg við broytingum í heildarkvotuni.

Eru heildarkvoturnar av makreli, svartkjafti og norðhavssild í 2020 oman fyri ávikavist 90.000 tons, 350.000 tons og 65.000 tons, verður nøgdin omanfyri markið boðin út sum uppboðsárskvota við 12 ára gildistíð og/ella sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir.

Hvussu stór nøgd skal til ávikavist uppboðsárskvotu og vinnuligar royndir og verkætlanir verður gjørt upp við útgangsstøði í, at parturin, sum verður boðin út, og parturin, sum verður settur av til vinnuligar royndir og verkætlanir, skal vera javnt stórur. Við í hesa meting skal takast tann nøgd, sum sambært § 49, stk. 2 verður sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir.

Uppboðsárskvotur/kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir bera við sær størri óvissu fyri keyparan enn aðrar eginkvotur. Sølukvoturnar fáa part av heildarkvotuni, uttan mun til, um heildarkvotan er lítil ella stór. Uppboðsárskvoturnar fáa hinvegin einans part av heildarkvotuni, tá ið heildarkvotan er oman fyri ásett mørk. Tá heildarkvotan er ájavnt ella hægri enn heildarkvotan í 2020, varðveita hesar kvotur sítt lutfall av heildarkvotuni og fylgja

hækkingum og lækkingum í kvotuni. Tá heildarkvotan er lægri enn heildarkvotan í 2020, eru tað bert hesar kvotur, sum lækka, til heildarkvotan er ájavnt við markvirðið.

Sølukvoturnar og uppboðsárskvoturnar skulu í 12 ár gjaldast sambært teimum gjaldstreytum, sum kvoturnar eru keyptar undir. Eftir 12 ára tíðarskeiðið verða tær lutaðar út til eigara av fiskifari, sum kvoturnar tá eru á, sum aðrar egnar árskvotur.

Umframt heimildina at selja svartkjaft, makrel og norðhavssild í 2020, heimilar lógin eisini landsstýrismanninum at seta av rættindi, sum eru fallin aftur til landið, til vinnuligar royndir og verkætlanir. Talan kann t.d. vera um rættindi, sum eru fallin aftur til landið umvegis brúksskylduna.

**Útlendskur ognarskapur**
Í galdandi løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi vóru reglurnar um útlendskan ognarskap broyttar soleiðis, at útlendingar ikki longur kundu eiga í ella hava avgerðarrætt í feløgum, sum ráða yvir føroyskum veiðirættindum. Samstundis bleiv ein skiftisskipan gjørd fyri tey feløg, sum høvdu útlendskar partaeigarar samsvarandi løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. Feløg, sum virkaðu samsvarandi galdandi reglum, fingu eina skiftistíð upp á 6 ár at laga seg til broyttu treytirnar, og frá 1. januar 2024 skuldu eingir útlendingar longur vera í føroyskari fiskiveiðu.

Við hesum uppskotinum verða hesar treytir broyttar.

Útlendskur ognarskapur verður við uppskotinum aftur loyvdur í føroyskari fiskiveiðu, tó við í mesta lagi 1/4. Tað er sostatt ein treyt hjá nýggjum feløgum, at eigararnir av í minsta lagi 3/4 av øllum eginpeninginum, harundir partapeninginum, sum somuleiðis eiga í minsta lagi 3/4 av atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, eru heimahoyrandi í Føroyum og lúka treytirnar um at vera heimahoyrandi í Føroyum.

Tað hava verið atfinningar ímóti ásetingunum í verandi lóggávu um fyrisiting av sjófeingi um at fáa útlendskan ognarlut úr føroysku fiskiveiðuni. Víst hevur m.a. verið á, at ein búskapur, sum tann føroyski, hevur tørv á beinleiðis íløgum uttanífrá og ikki á forðingum. Harumframt hevur verið víst á, at útlendskir íleggjarar kunnu geva føroyskum fiskivinnufyritøkum vitan um tøkni, prosessir, branding, fiskifør o.s.fr.

Mett verður, at tað ber til at tryggja, at virðið av livandi tilfeinginum kemur føroyska samfelagnum til góðar, uttan at tað er neyðugt, at allur útlendskur ognarskapur í feløgum, sum reka føroyska fiskiveiðu, verður koyrdur burtur. Av hesum orsøkum verður útlendskur ognarskapur aftur loyvdur í føroyskari fiskiveiðu, tó við í mesta lagi 1/4.

Sambært uppskotinum kunnu verandi feløg, sum hava útlendskar partaeigarar, ið ikki lúka treytina um 1/4 ognarlut, halda áfram við verandi virksemi. Í verandi virksemi liggur, at útlendski partaeigarin kann halda áfram við tí ognarluti, sum hesin hevur í felagnum, tá løgtingslógin fær gildi. Ognarluturin kann tó ikki vaksa. Treyt fyri at kunna halda áfram við virkseminum er tó, at reglurnar í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap um útlendskan ognarlut framhaldandi eru loknar. Hesar reglur eru, at eigarar av í minsta lagi 2/3 av eginpeninginum, harundir partapeninginum, umframt ábyrgdarpeninginum, sum somuleiðis eiga í minsta lagi 2/3 av atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum lúka treytirnar um at vera heimahoyrandi í Føroyum sambært § 11, stk. 3.

Treytirnar til útlendskan ognarskap eru annars tær somu sum í løgtingslóg um sjófeingi, tó so er treytin frá løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, um at skal felagið luta út vinningsbýti, skal føroyski parturin í minsta lagi fáa útlutað vinningsbýti, ið samsvarar við ognarlutin hjá føroyska partinum, sett innaftur. Eisini er hetta sett inn í ásetingina viðvíkjandi verandi feløgum soleiðis, at verandi eigarar ikki kunnu luta út vinningsbýti til útlendska eigaran við meira enn tí, sum samsvarar við ognarlutin hjá útlendska partaeigaranum. Eigur útlendski partaeigarin t.d. 27% av einum felagi, kann felagið luta útlendska partaeigaranum í mesta lagi 27% av vinningsbýtinum.

Endamálið við at avmarka útlendskan ognarlut og avgerðarrætt í føroyskum fiskiførum er at tryggja, at avkastið av fiskatilfeinginum kemur samfelagnum til góðar, og at forða fyri, at stýringin og ræðið á fiskiflotanum verður flutt til útlandið, og at tryggja, at strategiskar avgerðir viðvíkjandi fiskiflotanum verða tiknar út frá fyrilitum, sum gagna føroysku fiskivinnuni.

**Reglur at forða fyri miðsavnan av veiðirættindum**
Reglurnar, sum avmarka, hvussu nógv veiðirættindi ein einstaklingur ella felag kann ráða yvir, eru eisini partur av hesum lógaruppskotinum, men verða broyttar nakað, sammett við galdandi lóg.

Orsøkin er, at við hesum uppskotinum broytast fyritreytirnar fyri at gera regluverkið á økinum. Verandi lógartekstur sigur t.d., at kvotuskipan skal setast í verk frá 1. januar 2020 í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi. Hetta lógaruppskotið leggur upp til, at fiskidagaskipanin heldur fram. Tí eru miðsavningarreglurnar tillagaðar hesum.

Broyttu fyritreytirnar gera samanumtikið, at reglurnar á økinum mugu skipast øðrvísi, og at heitini á bólkunum av rættindum, sum reglurnar galda fyri, mugu dagførast. Talva 1.1 vísir bólkauppbýtið eftir hesum lógaruppskotinum og hámørkini fyri loyvdari miðsavnan í hvørjum bólki.

**Talva 1.1: Bólkar í reglunum fyri miðsavnan og hámørk fyri loyvdari miðsavnan í hvørjum bólki**

| | |
|---|---|
| Bólkur 2, í fiskidagaskipanini | 20% av ásetta fiskidagatalinum í bólkinum |
| Bólkur 3, í fiskidagaskipanini | 20% av ásetta fiskidagatalinum í bólkinum |
| Bólkur 4 A, í fiskidagaskipanini | 20% av ásetta fiskidagatalinum í bólkinum |
| Bólkur 4 B, í fiskidagaskipanini | 20% av ásetta fiskidagatalinum í bólkinum |
| Bólkur 4 T, í fiskidagaskipanini | 30% av ásetta fiskidagatalinum í bólkinum |
| Botnfiskur í íslendskum sjógvi | 35% av føroysku kvotunum í íslendskum sjógvi |
| Botnfiskur í russiskum sjógvi, norskum sjógvi og við Svalbard | 35% av føroysku kvotunum í russiskum sjógvi, norskum sjógvi og við Svalbard |
| Uppsjóvarfiskiskapur í Norðuratlantshavi | 35% av heildarkvotuni av hvørjum fiskaslagi sær |

Viðmerkjast skal, at virksemi, har felag og persónur høvdu ræðið á meira enn ásettu hámørkum, áðrenn 1. januar 2020, kann halda fram, men kann ikki økjast.

Grundgevingarnar fyri at hava reglur, sum avmarka ræðisrættin á veiðirættindum, eru fleiri. Politiskt er ynskiligt at tryggja ein fjølbroyttan og breiðan eigaraskara í vinnuni.

Ein onnur grundgeving er, at tað er gagnligt við kapping í vinnuni. Ætlanin við nógvum fyriskipanum í fiskivinnulógini er, at vinnan skal vera effektiv. Í hesi tilgongd er samanlegging av veiðirættindum oftani ein partur av tillagingini. Ov nógv miðsavnan av vinnuni kann tó hava óhepnar avleiðingar, tí eru fáar fyritøkur á marknaðinum kann tað hava við sær, at kappingin viknar.

Fiskivinnan er bulurin í føroyska búskapinum, og eigarar av feløgum í fiskivinnuni hava stóra ávirkan á føroyska samfelagið. Um ognarskapurin í fiskivinnuni verður savnaður á fáum hondum, kann tað hava við sær, at valdið í vinnulívinum somuleiðis verður savnað á fáum hondum. Politiska skipanin kann verða ávirkað til at taka avgerðir, sum ikki eru til gagns fyri samfelagið sum heild.

Fyri at forða fyri, at fiskivinnan verður miðsavnað, verður tí skotið upp, at tað framhaldandi er eitt ovara mark fyri, hvussu nógv einstaklingur ella felag kann ráða yvir av veiðirættindum í ávísum fiskiskapi.

**Skipan í fiskiskapi eftir botnfiski í føroyskum sjógvi - fiskidagaskipanin**
Fiskidagaskipanin í føroyskum sjógvi verður varðveitt. Hetta er ein broyting sammett við galdandi lógartekst, sum sigur, at frá og við 2020 verður skipan við mest loyvdu veiðu og kvotum sett í verk fyri trolarar í bólki 2 og línuskip í bólki 3, meðan útróðrarflotin framhaldandi skal virka undir dagaskipan.

Eftir lógaruppskotinum kunnu tey, ið høvdu rætt til fiskiloyvi í fiskidagaskipanini í 2019, halda fram undir nýggju lógini og í tí bólki, sum rættindini vóru í. Lagt er eisini upp til, at tillutaða fiskidagatalið í 2020 er tað sama sum í 2019.

Hildið verður fram við eini skipan, har fiskiførsum eru komin í uppisetur við fiskidøgum, eftir ávísan dato kunnu fiska av felags fiskidøgum. Felags fiskidagarnir eru tað talið av fiskidøgum, sum bólkurin ikki brúkti árið fyri. Skipanin fevnir um allar bólkar í fiskidagaskipanini, eisini bólk 2, trolarar 501-3000 HK, sum ikki var við í skipanini í galdandi lóg.

Undir galdandi sjófeingislóg er *rætturin* at fiska undir fiskidagaskipanini ikki knýttur at ávísum fiskifari, men at einstaklingi ella felag. Undir hesi skipan kann rættindahavarin í prinsippinum sjálvur gera av, hvat fiskifar ella hvussu nógv fiskifør hann brúkar til sínar fiskidagar.

Við hesum uppskoti skulu rættindini knýtast at ávísum fiskifari, sum samstundis skal fáa eitt veiðiloyvi.

Ein tillagingartíð er fyri tey, ið hava rættindi at fiska í fiskidagaskipanini, tá hendan lógin fær gildi, soleiðis, at tey kunnu laga seg til skiftið frá eini skipan, har veiðirættindini eru knýtt at ávísum persóni ella felag, til eina skipan, har rættindini eru knýtt at ávísum skipi, sum síðani fær veiðiloyvi. Hetta merkir í stuttum, at ta fyrstu tíðina er ikki treyt, at fiskifarið hevur veiðiloyvi. Tann, ið hevur rættindi í dagaskipanini, kann fáa fiskiloyvi til fiskifar, sum lýkur somu treytir, ið verða settar til veiðiloyvi, og halda fram at fiska longu frá 1. januar 2020. Men rættindahavarin fær eina freist at velja og gera av, hvat skip varandi skal hava fiskidagarnar á sær og fáa veiðiloyvi. Tá tað er gjørt, er tillagingartíðin av. Rættindini eru tá knýtt at ávísum fiskifari, sum fer at virka undir vanligu reglunum í lógini.

Fiskiloyvið til fiskidagaskipanina verður enn sum áður latið eigara av ávísum fiskifari, og í hvørjum fiskiloyvi verður ásett, hvussu nógvar fiskidagar viðkomandi fiskifar hevur í fiskiárinum.

Ein onnur grundleggjandi broyting við hesum uppskotinum er, at heitið á hvørjum bólki verður umorðað. Samstundis verða nýggjar reglur settar inn, sum áseta, hvørjar skipastøddir eru í hvørjum bólki, og at tillutaðu dagarnir bert skulu brúkast við hesum skipastøddum. Fyri allar bólkar verður sett eitt ovara mark og eitt niðara mark fyri stødd ella framtøkumegi. Fyri línuskip er tó einki ovara støddarmark. Fiskidagarnir í hvørjum bólki kunnu bert brúkast við fiskiførum, ið eru innan fyri mørkini fyri stødd ella framtøkumegi, og við tí reiðskapi, ið er tilskilaður fyri bólkin. Somuleiðis er treyt, at fiskidagarnir bert verða brúktir til fiskiskap á leiðum, har fiskifør við teimum tilskilaðu avmarkingunum fyri stødd ella framtøkumegi í hvørjum bólki hava loyvi at royna.

**Talva 1.2: Samanbering, bólkaheiti í verandi lóg og í uppskotinum til nýggja lóg**

| | *Uppskotið* | *Verandi lóg* |
|---|---|---|
| Bólkur 2: | Trolarar 501-3000 HK: | Trolarar |
| Bólkur 3: | Línuskip yvir 110 tons | Línuskip yvir 110 tons |
| Bólkur 4 A: | Útróðrarbátar 15-40 tons á veiðu við línu | Útróðrarbátar millum 15-40 tons á línuveiðu |
| Bólkur 4 B: | Útróðrarbátar 40-110 tons á veiðu við línu | Útróðrarbátar størri enn 40 tons á línuveiðu |
| Bólkur 4 T: | Útróðrarbátar størri enn 40 tons og framtøku minni enn 500 HK á veiðu við troli | Útróðrarbátar størri enn 40 tons á trolveiðu |
| Bólkur 5: | Útróðrarbátar undir 15 tons á veiðu við húki | Útróðrarbátar undir 15 tons á húkaveiðu |

Ein orsøk til hesar broytingar er, at hetta lógaruppskotið leggur upp til heilt nýggjar reglur fyri avhending av fiskidøgum. Frameftir verður loyvt at avhenda fiskidagar til fiskifør við veiðiloyvi, eisini tey, ið frammanundan ikki eru í fiskidagaskipanini. Mett verður, at við fríari umsetiligheit kann vandi vera fyri, at ein ger seg ov nógv inn á bólkauppbýtið og flotabygnaðin, skipanin byggir á. Tí er skotið upp at hava avmarking inni, sum forðar fyri, at fiskidagaskipanin verður skeiklað. Hetta verður sum sagt gjørt við ásetingum, sum neyvari skilmarka hvønn bólkin, og sum siga, at fiskidagar í hvørjum bólki bert kunnu brúkast við teimum skipastøddum, ið eru innan fyri mark í hvørjum bólki.

Hetta verður eisini gjørt, tí at í skipanini í fiskiskapinum undir Føroyum eru reguleringar ásettar í kunngerð, sum siga, hvar fiskifør við ávísari stødd ella við ávísari framtøkumegi hava loyvi at royna. Hesar reglur eru ikki partar av fiskidagaskipanini sum so, men hava týdning fyri, hvar fiskidagarnir kunnu brúkast. Eitt nú er ásett, at fiskifør størri enn 90 tons ikki hava loyvi at royna við línu innan fyri seks fjórðingar. Annað dømi er skipanin við sonevndu 500 HK kassunum, sum sigur, at í summum kassum á landgrunninum, hava bert trolbátar við 500 HK og minni loyvi at royna. Verða ongar avmarkingar fyri avhending av døgum millum bólkarnar ella eingin avmarking fyri skipastøddir, kann vandi vera fyri, at fiskidagar hjá størru skipunum verða fluttir inn á grunnin, samstundis sum fiskidagaskipanin kann skeiklast.

Ein onnur broyting við sama endamáli er, at skotið er upp at strika sonevndu 3-mánaðir-regluna. Henda regla sigur, at tá tríggir mánaðir eru eftir av fiskiárinum, er loyvt at avhenda fiskidagar millum lógarásettu bólkarnar, undantikið frá bólki 5. Hinar nýggju mánaðirnar kunnu fiskidagar avhendast millum fiskifør í sama bólki í fiskidagaskipanini.

Í stuttum er endamálið við øllum hesum at forða fyri, at tillutaðir dagar í hvørjum bólki verða brúktir við øðrum skipastøddum og øðrum fiskiskapi, enn teir eru ætlaðir til. Avmarkingin skal eitt nú tryggja, at fiskidagar og veiðiorka á djúpum vatni ikki verður flutt inn á grynri vatn.

Fiskidagatalið í 2020 verður við hesum uppskotinum ásett við løgtingslóg, men ætlanin er, at frá og við fiskiárinum 2021 verður regluverkið og mannagongdin broytt soleiðis, at tað verður landsstýrismaðurin, sum við kunngerð ásetir fiskidagar við heimild frá Løgtinginum. Tá verður eisini ásett nærri, hvussu farið verður fram, tá fiskidagar skulu ásetast, og hvussu vísindalig ráðgeving, vinnulig ráðgeving, ráðførsla o.tíl. verður ein partur av skipanini. Ætlanin er somuleiðis, at fyrisitingin av fiskidagaskipanini verður skipað við eini veiðireglu og umsitingarætlan, sum er ein politisk langtíðarsemja um, hvussu fiskidagaskipan skal umsitast yvir longri áramál. Endamálið við slíkari ætlan er ikki bara at stuðla undir góða stovnsrøkt og lívfrøðiliga burðardygd; umsitingarætlanin skal eisini taka vinnulig atlit, til dømis at tryggja vinnuni ávísan stabilitet í fiskimøguleikunum, við at fiskidagatalið ikki sveiggjar ov nógv frá ári til ár ella, at fiskidagatalið verður ásett fyri meira enn eitt ár í senn.

Eins og í galdandi lóg fær landsstýrismaðurin í hesum uppskoti heimild at skipa annan fiskiskap í føroyskum sjógvi, ið ikki er fevndur av fiskidagaskipanini, í kunngerð. T.d. fiskiskap eftir uppsjóvarfiski, fiskiskap við gørnum eftir svartkalva og havtasku, fiskiskap eftir gulllaksi og trolveiðu innan fyri 12 fjórðingar.

**Brúksskylda á veiðirættindi**
Eins og í galdandi lóg verður við uppskotinum lagt upp til, at tann, ið fær brúksrættindi frá landinum, hevur skyldu at brúka tey. Einstakar broytingar eru tó í ásetingunum í mun til galdandi lóg.

Hetta lógaruppskotið ber í sær eina brúksskyldu, sum er í tveimum:

- Um eigari av fiskifari, størri enn 15 tons, als ikki hevur brúkt møguleikan at reka vinnuligan fiskiskap (veiðiloyvi) í tvey ár á rað, t.v.s. ikki er skrásettur at hava avreitt veiðu, fellur rætturin aftur til landið. Fiskifarið missir tá eisini rættin til at fáa útskrivað fiskiloyvi.
- Um loyvishavari ikki hevur gagnnýtt rættin til egnar fiskidagar ella egnar kvotur við meira enn 30%, fellur munurin millum tað, sum er brúkt og 30%, aftur til landið.

Í mun til galdandi lóg er talan um eina herðing av treytunum í mun til fyrru ásetingina, tí í galdandi lóg skulu trý ár ganga, áðrenn rættindi, sum als ikki hava verið brúkt, falla aftur til landið. Í mun til seinnu ásetingina viðvíkjandi nýtslu av egnum døgum og egnum kvotum er talan um eina linking av brúksskylduni frá 60% í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi til 30% í hesum lógaruppskotinum.

Ein onnur broyting í mun til galdandi lóggávu er, at brúksskyldan nú verður knýtt aftur at fiskifarinum. Hetta er tengt at, at rættindini nú aftur vera knýtt at fiskifari við veiðiloyvi.

Heilt serligar umstøður kunnu føra við sær, at fiskifar ikki gagnnýtir síni rættindi. Tí kann landsstýrismaðurin í heilt serligum førum geva undantak frá brúksskylduni. Talan skal tá vera um umstøður, sum eigarin av fiskifarinum ikki sjálvur hevur ræðið á ella kundi lagt upp fyri við skynsomum rakstri.

Grundgevingin fyri brúksskyldu er m.a., at rætturin at reka vinnuligan fiskiskap er ein framíhjárættur, soleiðis at skilja, at tað ikki eru øll, ið eru sloppin upp í part, tá landið lutar út. Tí er rímiligt at áleggja loyvishavara skyldu at brúka hendan rættin. Um ikki, falla loyvini aftur til landið og kunnu verða atkomulig hjá øðrum.

Orsakað av, at ein tillagingartíð er, har veiðirættindini vera knýtt at fiskiførunum, er ásett, at ásetingarnar um brúksskyldu ikki koma í gildi fyrr enn 1. januar 2022.

**Reglur um at avhenda og at flyta veiðirættindi**
Lógaruppskotið broytir nógvar av galdandi reglum um at avhenda og flyta veiðirættindi millum rættindahavarar. Í stuttum bera broytingarnar í sær, at farið verður frá lógarkørmum, sum eru ætlaðir at avmarka keyp og sølu av rættindum á privatum grundarlagi, til eina skipan, har nógv rúmari ræsur eru fyri, at privat beinleiðis avhenda rættindi sínámillum.

Síðani 1994, tá vit fingu fyrstu lógina um vinnuligan fiskiskap, eru reglurnar um flyting og avhending av veiðirættindum broyttar fleiri ferðir. Skiftandi samgongur hava skert ella víðkað møguleikarnar fyri umsetiligheit. Lógarverkið hevur tó ongantíð loyvt heilt fríari umsetiligheit.

Sjófeingislógin frá 2018 broytti nógvar fyritreytir fyri avhending, sum árini frammanundan høvdu verið í lógarverkinum. Ein broyting var, at rættindini at fiska ikki longur skuldu vera knýtt at ávísum fiskifari. Rætturin at fiska er ístaðin hjá ávísum persóni ella felag, sum sjálvt kann gera av, hvat fyri fiskifar hann/tað brúkar síni rættindi við. Samstundis datt skipanin við veiðiloyvum burtur.

Hetta uppskotið broytir lógarkarmarnar fyri at avhenda veiðirættindi.

Hetta hevur lutvíst samanhang við, at loyvisskipanin verður broytt, og at farið verður frá eini skipan, har rættindi eru knýtt at persóni ella felag, til eina skipan, har rættindi at fiska eru knýtt at ávísum fiskifari, og at tað í tí sambandi verður sett í verk ein skipan við veiðiloyvum.

Men broytingin er eisini eitt politiskt ynski um, at rættindahavarar skulu hava fríari møguleikar at avhenda sínámillum tey rættindi, landið hevur latið teimum. Eftir verandi lóg skulu allar endaligar avhendingar av útlutaðum rættindum fara fram um ein almennan marknað, har øll, sum lúka ásettar treytir, kunnu bjóða seg fram. Hetta verður við hesum broytt, so at t.d. egnar kvotur og egnir fiskidagar kunnu avhendast øðrum á privatum grundarlagi.

*Veiðiloyvi – flyting og avhending*
Eftir galdandi lóg eru veiðirættindi knýtt at ávísum persóni ella felag. Ein týdningarmikil broyting við hesum lógaruppskoti er, at rættindini at fiska vera knýtt at ávísum fiskifari; rættindini vera latin eigara av ávísum fiskifari.

Saman við hesi broyting verður ein skipan við veiðiloyvum sett í verk. Veiðiloyvið er góðkenning av ávísum fiskifari at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi. Tað er ein góðkenning, sum eigarin av ávísum fiskifari fær.

Skotið er upp, at frameftir verður *eitt* slag av veiðiloyvi, sum er eitt generelt loyvi at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi.

Lógaruppskotið leggur upp til, at tað skal bera til at flyta og leggja saman veiðiloyvi.

Í sambandi við útskifting av fiskiførum kunnu veiðiloyvi flytast á skip við ongum veiðiloyvi, uttan at rættindini at fiska skifta hendur. Veiðiloyvi kunnu somuleiðis leggjast saman við fiskifari, ið frammanundan hevur veiðiloyvi, ella at tvey ella fleiri veiðiloyvi verða flutt á fiskifar við ongum veiðiloyvi. Í slíkum førum kunnu rættindi skifta hendur. Ongin avmarking er fyri, hvussu nógv veiðiloyvi kunnu flytast í senn.

Grundreglan í sambandi við at flyta veiðiloyvi hjá fiskiførum í fiskidagaskipanini í føroyskum sjógvi er, at tá fiskifør verða skift út, skal fiskiorkan ikki gerast størri.

Treytin um fiskiorku hevur ikki sama týdning í fiskiskapi, sum er skipaður við egnum kvotum, eitt nú uppsjóvarfiskur og botnfiskur í Barentshavinum. Tí er eingin treyt um fiskiorku, tá hesi veiðiloyvi verða flutt, men hevur eitt av hesum fiskiførum eisini útvegað sær rættindi til fiskidagar undir Føroyum, sum letur seg gera við hesum lógaruppskotinum, er treytin um fiskiorku galdandi.

Skotið er upp, at heimild er at lata loyvishavara tilsøgn um at varðveita veiðiloyvi í tvey ár, uttan at hava fiskifar. Hetta er sama áramál, sum var undir gomlu skipanini við veiðiloyvum. Heimild er at geva undantak frá tvey ára freistini. Tá skal talan vera um serligar umstøður, sum tilsagnarhavarin ikki sjálvur hevur ræðið á ella hevur møguleika at leggja upp fyri.

*Avhending av fiskidøgum*
Reglurnar um avhending av fiskidøgum snúgva seg um, hvussu fiskidagar kunnu skifta hendur, eftir at teir eru útlutaðir.

Eftir galdandi lóg er loyvt at avhenda fiskidagar fyri eitt ár í senn millum fiskifør í sama bólki í fiskidagaskipanini treytað av, at rættindahavarin hevur brúkt í minsta lagi 60% av sínum døgum undanfarna fiskiár. Eftir galdandi lóg skal frá og við 2020 bera til at avhenda fiskidagar endaliga. Fiskidagar, sum skulu avhendast endaliga, skulu bjóðast út alment.

Við hesum lógaruppskotinum verður farið burtur frá nógvum av verandi meginreglum og skipanum, sum eru fyri avhending av fiskidøgum.

Sum tað fyrsta broytast fyritreytirnar fyri avhending, tí frameftir verður grundreglan, at veiðirættindi eru knýtt at ávísum fiskifari, og ikki sum í verandi lóg at ávísum persóni ella felag. Tað verður eigarin av ávísum fiskifari við veiðiloyvi, sum avhendir fiskidagar til annan eigara av fiskifari við veiðiloyvi fyri eitt ár í senn ella endaliga.

Høvuðsbroytingin í reglunum um avhending av egnum fiskidøgum er, at skotið er upp, at fiskidagar kunnu avhendast øllum føroyskum fiskiførum við veiðiloyvi. Hetta ber í sær, at egnir fiskidagar eisini kunnu avhendast fiskiførum, sum hava veiðiloyvi, men sum í dag ikki eru partar av fiskidagaskipanini í føroyskum sjógvi.

Eins og í verandi lóg verður ein brúkstreyt knýtt at møguleikanum at avhenda fiskidagar. Frá og við 2022 er treyt, at tann, ið avhendir, skal hava brúkt í minsta lagi 60% av tillutaðu døgunum fiskiárið frammanundan við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari.

Reglurnar um, at tað ikki ber til at flyta fiskidagar frá húki til trol og øvugt, og tvørtur um 110-tons, verða í høvuðsheitum varðveittar, men lagaðar til broyttu fyritreytirnar, og skipaðar øðrvísi í lógarverkinum.

Ein grundleggjandi broyting við hesum uppskotinum, sum hevur týdning fyri avhending av fiskidøgum, er, at ásett verður neyvari, hvørjar skipastøddir eru í hvørjum bólki í fiskidagaskipanini, og at tillutaðu dagarnir eru ætlaðir til og skulu brúkast við hesum skipastøddum. Fyri allar bólkar verður sett eitt ovara mark og eitt niðara mark fyri støðd ella framtøkumegi. Fyri línuskip er tó einki ovara støddarmark. Hugsanin er so, at fiskidagarnir í hvørjum bólki bert kunnu brúkast við fiskiførum, ið lúka hesar støddaravmarkingar.

Samanumtikið leggur hetta lógaruppskotið upp til, at egnir fiskidagar kunnu avhendast, treytað av:

- at  tann, ið avhendir, hevur brúkt í minsta lagi 60% av sínum fiskidøgum fiskiárið frammanundan,
- at tann, ið avhendað verður til, hevur veiðiloyvi,
- at fiskidagar, ætlaðir til veiðu við troli, ikki kunnu avhendast til at vera brúktir til veiðu við línu og øvugt,
- at fiskidagar bert kunnu brúkast við fiskifari, ið er innan fyri tær avmarkingar um støðd ella framtøkumegi, ásettar fyri hvønn bólkin, og
- at fiskiorkan ikki verður størri, tá fiskidagar verða avhendir.

*Avhending av egnum kvotum*
Við hesum lógaruppskotinum verða reglurnar um at avhenda egnar kvotur og egnan kvotupart broyttar. Galdandi lóg ásetir , at tað, ið ætlanin er at avhenda endaliga, skal bjóðast út alment, har øll, sum hava áhuga og lúka ásettar treytir, fáa høvi at bjóða. Eisini er í verandi lóg ein avmarking, ið sigur, at upp í 20% av egnum kvotuparti ella egnari árskvotu kunnu avhendast fyri eitt ár í senn.

Hetta uppskotið broytir allar hesar meginreglur og skipanir. Ístaðin er lagt upp til, at rættindi, latin sum egnar kvotur, kunnu avhendast øllum føroyskum fiskiførum við veiðiloyvi. Er talan um avhending fyri eitt ár, verður egin árskvota ella egin hjáveiðikvota avhendað, men er talan um endaliga avhending, verður egin kvotupartur ella egin hjáveiðipartur avhendaður. Avhendast kunnu partar av tillutaðum kvoturættindum ella allur rætturin.

Frá og við 2022 verður ein brúkstreyt knýtt at møguleikunum at avhenda egnar kvotur. Tann, ið avhendir, skal hava brúkt í minsta lagi 60% av tillutaðu kvotuni av viðkomandi fiskaslagi fiskiárið frammanundan við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari.

*Avhending og flyting av rættindum hjá smærru útróðrarbátunum*
Eins og í galdandi lóg hevur hetta uppskotið reglur um, hvussu rættindi hjá útróðrarbátum í bólki 5 í fiskidagaskipanini og onnur rættindi hjá smærru útróðrarbátum kunnu flytast og avhendast. Talan er ikki um grundleggjandi broytingar, sammett við galdandi lóg, eitt nú tí at

í galdandi lóg er meginreglan, at rættindini í bólki 5 eru knýtt at ávísum báti við ávísum eigara.

Grundsjónarmiðið hevur í nógv ár verið, at lógarkarmarnir fyri fyrisiting av rættindunum hjá smábátunum eiga at vera øðrvísi enn hjá størru skipunum, serliga tí at vinnuligu og rakstrarligu fyritreytirnar hjá smæstu útróðrarbátunum eru øðrvísi. Hetta sjónarmið er eisini grundarlagið undir ásetingunum á økinum í hesum lógaruppskoti.
Fyri smærru bátarnar er ikki krav um veiðiloyvi. Bátarnir skulu bert hava fiskiloyvi, sum í ávísan mun fær líknandi støðu sum veiðiloyvi.

Eftir uppskotinum kann rættindahavari flyta síni rættindi á annan bát, tá bátur verður skiftur út, t.v.s., at rættindi ikki skifta hendur. Treyt er, at fiskiorkan ikki verður størri. Rættindahavari kann somuleiðis selja bát og lata veiðirættindini fylgja við bátinum.

**Útblakingarbann og skylda at føra allan fiskin til lands**
Útblakingarbann hevur verið ein aðalregla í føroysku fiskivinnulóggávuni seinastu nógvu árini, og við hesum lógaruppskoti verður hildið fast við hetta bann.

Í lógini um vinnuligan fiskiskap var ásett, at tað ikki er loyvt at blaka veiðu fyri borð. Í somu lóg var heimilað landsstýrismanninum at gera reglur um bann fyri at blaka veiðu út aftur, og hvørji dýra- og plantusløg koma undir hetta bann. Hesar ásetingar hava verið óbroyttar síðani tær í 1994 vóru settar inn í lógina við tí endamáli "at tryggja, at ikki meira verður veitt burturúr fiskastovnunum, enn tað sum er lívfrøðiliga forsvarligt".

Aðalreglan í hesum lógaruppskoti er eisini, at tað er bannað at blaka veiðu útaftur. Alt, sum verður veitt, skal førast til lands, so tað kann verða grundarlag undir vinnuligum virksemi.

Bannið um at blaka veiðu út aftur er eisini partur av løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi (§ 44).

Uppskotið leggur upp til, at høvuðsreglan er, at tað er bannað at blaka veiðu fyri borð. Eitt slíkt bann kann tó ikki vera ein regla, ið ikki kann víkjast frá. Landsstýrismaðurin hevur tí heimild til í kunngerð at gera reglur um, hvørji fiskasløg ella onnur djórasløg eru undantikin hesum banni. Tað kunnu vera lívfrøðiligar, búskaparligar og praktiskar grundir til at geva undantak frá banninum, tað vil siga, at ein kann loyva, at veiða kann sleppast útaftur. Til dømis er í fiskiskapi eftir hummara beinleiðis álagt, at hummarar, sum eru undir minstamát, og hummarar við rognum, skulu sleppast útaftur. Eitt annað dømi er, at Føroyar í millumtjóða semju um eftirlit við fiskiskapinum eftir makreli, sild og rossamakreli hava tikið undir við, at tá líkindi eru fyri, at fiskurin yvirlivir, kann veiða sleppast útaftur. Her er ofta talan um, at veiða verður slept beinleiðis út aftur úr reiðskapi, áðrenn hon er komin um lúnningina – mest í veiðu við snurpinót.

Somuleiðis kann undantakið galda fyri fisk og djór, sum ikki hevur handilsvirði. Eitt triðja dømi er, at undantak kann fevna um fisk og aðra veiðu, sum er partvíst uppetin av ránsdýrum, ella á annan hátt forferst undir fiskiskapinum.

Tí er skotið upp, at landsstýrismaðurin fær heimild til í kunngerð at áseta nærri reglur um, hvussu hetta bannið verður umsitið, og t.d. áseta reglur um, hvørjir partar av veiðuni eru undantiknir kravinum og harvið eisini, hvat kann blakast útaftur.

Eitt útblakingarbann er í sjálvum sær eingin trygd fyri burðardyggum fiskiskapi, ella at veiða ikki verður blakað út aftur, og eigur tí at verða brúkt saman við øðrum amboðum og reglum, sum kunnu vera við til at minka um útblaking. Her kann talan vera um at brúka selektivan reiðskap, eitt nú við at hava ásetingar um meskastødd og skiljirist, sum kann gera, at óynskt veiða verður skild frá í sjónum. Eisini ber til at friða ella steingja leiðir, har líkindi eru fyri íblanding av óynsktari veiðu. Talan kann vera um leiðir, sum eru stongdar alt árið ella partar av árinum. Annað dømi er bráðfeingis veiðibann á leiðum við ov nógvari íblanding av ungfiski, ella hjáveiðan fer upp um ásett mørk.

**Alt av fiskinum í land**

Galdandi lóggáva ásetir, at innvølur, ryggur, skræða, høvd o.tíl. av fiski skal førast til lands, umframt at í minsta lagi 20% av fiskinum skal førast til lands við høvdi. Ásetingin kom tó ongantíð at virka í verki, tí eitt generelt undantak frá ásetingini var galdandi í bæði 2018 og 2019.

Ynski er framhaldandi, at alt av fiski við tíðini verður gagnnýtt, og at slógv og annað lívfrøðiligt burturkast av fiski, sum í dag vanliga verður blakað út aftur, skal førast til lands. Grundgevingarnar, fyri at gagnnýta hjávøruna betur, eru fleiri. Sum tað fyrsta er tað ein etiskur spurningur um matvørutrygd o.tíl. Fólkatalið í heiminum veksur, og tørvur er á proteinum at matføða øll hesi fólk. Talan er eisini um, at  brúkarin í alt størri mun hugsar um burðardygga gagnnýtslu, og at alt av fiskinum kemur til høldar, og at hetta telur nógv, tá hann velur, hvønn fisk hann vil keypa.

Ein onnur grundgeving er, at økt gagnnýtsla og virking av hávirðisvørum, burtur úr higartil lítið gagnnýttum tilfeingi, kunnu skapa størri virði fyri samfelagið.

Atgongd til rávøru er ein grundleggjandi fortreyt fyri at menna nýggjar framleiðslur av hjávørum úr fiski, og tí mugu stig takast fyri at fáa hesa rávøruna í land fyri at tryggja, at fyritøkur á landi kunnu skapa virðir burtur úr hesum higartil lítið gagnnýtta tilfeingi.

Heldur enn at varðveita orðingarnar frá galdandi lóggávu, verður við nýggju lógini ístaðin lagt upp til, at landsstýrismanninum verður heimilað at gera reglur, sum áleggja fiskiførunum at føra til lands innvøl, rygg, skræðu, høvd o.tíl. av fiski.

Ásannandi, at tað tekur tíð hjá vinnu at laga seg til slíka treyt, ber ikki til frá degi til dags at krevja alt í land. Tí er ætlanin, at heimild er hjá landsstýrismanninum at áseta, hvat skyldan fevnir um, og so líðandi fáa meira til lands so hvørt, sum umstøðurnar og fyritreytirnar eru til tað, og soleiðis at vinnan fær eitt rímiligt skotbrá til at gera neyðugar tillagingar í mun til íløgur, mannagongd, sølu o.s.fr.

**Reglur um, at øll veiða skal um bryggjukant í Føroyum**

Fiskur um bryggjukant í Føroyum skapar virksemi og arbeiðspláss á landi í Føroyum, og gevur virkjum á landi í Føroyum betri atgongd til rávøru. Yvirskipað snýr tað seg um at stuðla undir, at virðisøkingin er í Føroyum, og at samfelagið Føroyar fær sum mest burtur úr virðisøkingini. Ikki bert í sjálvum fiskiskapinum, men eisini í allari virðisketuni – virking, sølu og útflutningi av fiski og fiskavørum.

Samgonguskjalið staðfestir tí, at allur fiskur skal um føroyskan bryggjukant. Slíkt krav skal tó setast við skili, og lagt verður tí afturat, at undantøk skulu gerast. Undantak skal vera fyri fjarfiskiskapi, har umstøður, so sum góðska og/ella kostnaður, tala fyri tí. Eisini skal

undantak vera fyri fiskiskapi, har móttøkukapasiteturin í Føroyum er avmarkaður. Dentur verður eisini lagdur á, at um serligar støður taka seg upp, skal eisini møguleiki vera fyri at geva undantak.

Hetta lógaruppskot leggur upp til, at sum høvuðsregla skal allur fiskur hjá føroyskum skipum upp á land í Føroyum.

Lagt verður tó samstundis upp til, at landsstýrismaðurin bæði í reglum og við ítøkiligari avgerð kann geva undantak frá hesum kravi, har umstøður, so sum m.a. sølumøguleikar í Føroyum, møguleikar fyri at virðisøkja fiskin og fjarstøða frá fiskileiðum, tala fyri tíð. Fiskasløg, fiskaúrdráttir ella fiskiskapir kunnu undantakast í síni heild, men møguleiki skal eisini vera fyri at geva lutvíst undantak og fyri ávís tíðarskeið. Hetta skal stuðla undir at finna mest hóskandi loysnirnar, sum taka neyðugu fyrilitini í mun til góðsku, kostnað og móttøkumøguleikar, uttan í ov stóran mun at nerva sjónarmiðið um, at fiskurin sum høvuðsregla skal um føroyskan bryggjukant.

Føroyar hava í handilssáttmálum við onnur lond m.a. bundið seg til frælsa flyting av vørum og til ikki at avlaga handil og kapping landanna millum. Fyrilit má takast fyri hesum fríhandilssáttmálum, tá nærri reglur á økinum verða gjørdar í kunngerð. Nevnast kann tó í hesum sambandi, at í t.d. Noregi og ES-londum, sum vit hava handilssáttmála við, hava tey treytir um, at øll veiðan, ella partar av veiðuni, skal landast í flagglandinum hjá fiskifarinum ella í ávísum parti av landinum. Endamálið við hesum skipanum er at stuðla undir fiskavirking og búskaparligum virksemi á landi í landspørtum, har fiskivinna hevur stóran týdning.

**Uppboðssølukrav til veiddan fisk**
Í undanfarnu lóg, løgtingslógini um vinnuligan fiskiskap, var ásett ein heimild hjá landsstýrismanninum í kunngerð at áseta, hvussu stórur partur av veiðuni hjá føroyskum fiskiførum skuldi um góðkenda uppboðssølu.

Hildið verður, at heimildin at skipa eitt krav um uppboðssølu í kunngerð eins og í undanfarnu lóggávu gevur ein møguleika fyri at gera hóskandi og smidligar loysnir, bæði hvat viðvíkur hvørji fiskasløg skulu vera fevnd av einum slíkum kravi, hvussu stórur partur av veiðuni hóskandi skal krevjast um uppboðssøluna fyri ymisku fiskasløgini, og eisini um serligar ásetingar skulu vera um tíðarskeið.

Farið verður tí við hesum uppskotinum frá kravinum í galdandi lóg um, at 25% av allari veiðu hjá føroyskum fiskiførum skulu bjóðast út alment á góðkendari uppboðssølu í Føroyum, til at lógin ístaðin heimilar landsstýrismanninum at gera hóskandi reglur í kunngerð hesum viðvíkjandi.

Mett verður, at endamálið við uppboðssølu av veiddum fiski, sum m.a. er, at føroysk fiskavirki fáa møguleika at bjóða upp á fisk undan Føroyum, at tryggja kapping millum fiskakeyparar, og at stuðla undir, at serliga botnfiskur undan Føroyum verður virkaður á landi í Føroyum, eins væl verður rokkið eftir hesum leisti.

**Vinnuligar royndir og verkætlanir**
Farið verður frá skipanini við menningarkvotum, sambært løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, sum kom í gildi 1. januar 2018. Skipanin við menningarkvotum tók serlig

økisrættarlig fyrilit í umsitingini, og tað var ein nevnd, Metingarnevndin, ið gjørdi tilmæli til landsstýrismannin, ið lá til grund fyri givnu tilsagnunum.

Sambært samgonguskjalinum verður prosentparturin, sum samsvarar við 1 ára uppboðssølukvotur í 2019 saman við menningarkvotunum, samlaður og býttur í tveir partar. Annar parturin verður tøkur til royndarkvotur og verandi menningarkvotur, meðan hin verður avhendaður sum loyvir við 12 ára gildistíð.

Skotið verður upp, at tær menningarkvotur, ið eru galdandi, tá ið henda lóg kemur í gildi, verða eftirmettar við støði í galdandi treytum. Um mett verður, at treytirnar í nóg stóran mun eru loknar í 2020, tá ið tær fyrstu av galdandi menningarkvotum fara úr gildi, kunnu tær leggjast um til egnar árskvotur. Tó skulu rættindahavararnir, áðrenn árslok 2021, lúka kravið um veiðiloyvi o.a., og tað merkir m.a., at teir skulu vera eigarar av fiskifari, og skulu lúka allar aðrar vanligar treytir, s.s. treytir um ognarviðurskifti, miðsavnan o.a.

Nýggja skipanin við vinnuligum royndum og verkætlanum, ið fevnir um svartkjaft, makrel og norðhavssild, verður latin umsøkjarum til verkætlanir, sum hava eitt menningar- og nýskapanarmál í gagnnýtsluni av nevndu fiskasløgum. Tó er tað ein grundleggjandi treyt, at umsóknin skal vera knýtt at ávísum fiskifari undir føroyskum flaggi við veiðiloyvi, ella við fiskiloyvi í bólki 5.

Nøgdirnar, ið talan er um, eru 8,5% av tøku føroysku kvotuni av nevndu fiskasløgum t.e., áðrenn býtið er gjørt við onnur lond. Tó so, at um verandi menningarkvotur verða lagdar um til egnar árskvotur, verður tikið av teimum 8,5% og latið verandi feløgum við menningarkvotum, sbr. skiftisregluna í § 10. Tað verður umsitingin í Fiskimálaráðnum, ið fer at viðgera hetta.

Umframt nevndu nøgdir kann landsstýrismaðurin seta kvotu, sambært § 14, stk. 2 og 3, av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Hesin parturin av kvotuni fylgir tó eftir 2020 flytingunum í heildarkvotuni, t.v.s., um heildarkvotan okkurt ár fer undir heildarkvotuna í 2020, eru tað hesar kvoturnar, ið tað fyrst verður tikið av. Fer heildarkvotan undir mørkini í § 14, stk. 1, falla tær heilt burtur, inntil heildarkvoturnar aftur eru oman fyri mørkini.

Landsstýrismaðurin fær við uppskotinum heimild til at áseta nærri reglur um mannagongd og treytir í sambandi við umsóknir, og landsstýrismaðurin kann í loyvinum áseta treytir um fiskileiðir, veiðihættir, tíðarskeið o.a.

**Rannsóknir, royndarfiskiskapur og menningarætlanir**
Ásetingin fevnir um annað sjófeingi enn makrel, norðhavssild og svartkjaft, sum er fevnt av ásetingini um vinnuligar royndir og verkætlanir.

Flestu ásetingarnar í lóg og kunngerðum eru ætlaðar vinnuligum fiskiskapi. Ein partur av hesum lógaruppskotinum er um Havstovuna og vísindaligar rannsóknir, royndarfiskiskap og vinnuligar fiskivinnuroyndir og verkætlanir.

Praktiskar og vísindaligar fiskiroyndir eru ein týdningarmikil liður í menning og nýskapan í vinnuni. Talan kann t.d. vera um at royna reiðskap, at royna eftir ótroyttum fiska- ella djórasløgum ella at fiska á nýggjum leiðum.

Til slíkar royndir, ella í fiskiskapi, sum er nýggjur ella á byrjanarstigi, er neyðugt við eini heimild í lógini til serlig royndarloyvi, sum t.d. geva undantak frá teimum avmarkingum, sum annars eru í lógini og kunngerðum. Hendan heimildin kann eisini brúkast til fiskiskap, sum liður í undirvísingar- ella menningarætlanum, ætlað skúlum, har fiskiveiða, virking av fiski o.tíl. er ein partur av undirvísingini, umframt verkætlanum, sum ikki beinleiðis eru tengdar at praktiskum fiskiroyndum, og sum so ikki hava vinnuligan fiskiskap sum endamál.

Við hesum lógaruppskotinum er heimild at seta ein part av teimum veiðirættindum, Føroyar ráða yvir, av til rannsóknir, royndarfiskiskap, vinnuligar royndir og verkætlanir.

Eins og í lógini um vinnuligan fiskiskap kann kvota setast av til at brúka at samsýna skipum, ið gera vísindaligar rannsóknir fyri Havstovuna. Seinastu árini hevur kvota verið latin til skip, sum hava verið við í kanningum av uppsjóvarfiski í føroyskum og altjóða sjógvi.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið varð sent til ummælis hjá Fiskivinnuráðnum, Felagnum Trolbátar, Vørn, Havstovuni, Føroya Landfúta, Føroya Reiðarafelag, Vinnuhúsinum, Sjóvinnustýrinum/Skipaskrásetingini, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Umhvørvisstovuni, Dátueftirlitinum, Advokatfelag Føroya, Felagnum fyri føroyskar peningastovnar, Búskaparráðnum, Fróðskaparsetri Føroya, Hummarafelagnum og stjórnarráðunum, umframt at uppskotið hevur verið tøkt á heimasíðuni hjá Fiskimálaráðnum.

Fiskivinnuráðið, Vørn, Havstovan, Føroya Reiðarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Sjóvinnustýrið, Hummarafelagið, Føroya Fiskimannafelag, Felagið Nótaskip, Reiðaríið hjá m/s Sandshavið, Spf. ANRU, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Jógvan Elias Winther Poulsen, Eivind Jacobsen, Maskinmeistarafelagið, P/F Enniberg, Búskaparráðið, Umhvørvisstovan, Felagið Garnaskip, P/F Thor og Dátueftirlitið sendu viðmerkingar inn.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur svarað, at ongar viðmerkingar eru til uppskotið.

Øll hoyringarsvarini eru løgd saman við hesum uppskoti, og niðanfyri er ein stuttur samandráttur av teimum høvuðsevnum, sum koma fyri í fleiri av innkomnu viðmerkingunum:

Viðvíkjandi hugtakinum veiðiloyvi vísa fleiri hoyringarpartar á, at innihaldið í hesum ásetingum er ógreitt. Meginfelag Útróðrarmanna førir fram, at hugtakið veiðiloyvi ofta verður nevnt í ymiskum høpum í lógaruppskotinum, men tað verður ikki nágreinað, hvat innihaldið av *góðkenning av ávísum fiskifari* er. Vørn vísir somuleiðis á, at tað er ógreitt, um veiðiloyvi bert er ein góðkenning av fiskifari, ella um rættindi eru knýtt at veiðiloyvinum, og mæla til at nágreina hetta.

Um gildistíðina á rættindunum mæla Reiðarafelagið, Felagið Garnaskip og P/F Thor til, at rættindini verða latin við 12 ára gildistíð. Felagið Garnaskip og P/F Thor vísa í hesum sambandi á, at ein 12 ára gildistíð hóskar betur til teir fíggingarmøguleikar, sum eru, tá talan t.d. er um at byggja nýggj skip.

Um miðsavnan førir Reiðarafelagið fram, at reglurnar um miðsavnan fyri bólkarnar í heimaflotanum møguliga eru ov strangar, og møguleiki eigur at vera at hava ræði á nakað meiri enn 20% av tillutaðu døgunum í bólkinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag saknar grundgevingar fyri ásettu mørkini í uppskotinum.

Viðvíkjandi uppboðssøluni fyri 2020 førir Felagið Nótaskip fram, at ásetta markið fyri norðhavssild eigur at vera broytt frá 65.000 tons til 95.000 tons. Felagið heldur, at ásetta markið fyri norðhavssild fer at gera, at alt ov stórar nøgdir av norðhavssild skulu ávikavist seljast og útlutast til vinnuligar royndir. Grundarlag er ikki fyri, at markið fyri norðhavssild skal vera so munandi lægri enn fyri makrel. Reiðarafelagið metir ikki, at uppboðssøla er ein skynsamur háttur at útluta og býta kvotur, og aðrir útlutingarhættir áttu at verið umhugsaðir. Mælt verður tó til, at serligu viðmerkingarnar til ásetingar um uppboðssølu verða tillagaðar, soleiðis at tøka kvotan eisini framgongur av talvunum. Hetta hevði gjørt tað greiðari at skilt. Hetta seinasta verður eisini viðmerkt av Fiskivinnuráðnum. P/F Thor viðmerkir eisini, at uppboðssøla ikki er rættur háttur at útluta loyvir, og víst verður til, at tað eru tey við útlendskum kapitali aftan fyri seg, sum fara at vinna rættindini á uppboðssølu. Tað rættasta fyri samfelagið hevði verið at útluta loyvir til bólkar. Føroya Arbeiðsgevarafelag setir spurnartekn við, um uppboðsárskvoturnar eru nóg trygg rættindi. Fleiri hoyringarpartar mæla til, at uppboðssølurnar verða skipaðar sum opnar uppboðssølur. Búskaparráðið mælir frá at avtaka almennu uppboðssøluna av veiðirættindum. Heldur skal víðkast um uppboðssøluna, so øll veiðirættindi verða boðin út.

Viðvíkjandi uppskotinum um fiskidagatal í 2020 hava fleiri hoyringarpartar viðmerkingar um burðardyggleikan í ásetta dagatalinum. Havstovan vísir á, at eyka dagarnir til bólk 5 B økja um trýstið á toskastovnarnar. Orsøkin er, at bátarnir í hesum bólki í løtuni brúka nógv fleiri av sínum døgum enn vanligt, og harafturat, at toskurin í størri mun enn annars er nær landi og léttur at fáa við húki. Buffaraskipanin í § 19, stk. 8 fer væntandi eisini at økja um veiðitrýstið á tosk og hýsu, tí viðkomandi skipabólkar hava undanfarin ár bert brúkt góða helvt av tillutaðu døgunum. Samanumtikið metir Havstovan, at lógaruppskotið leggur upp til ov stórt veiðitrýst á tosk, og at hetta ikki er í samsvari við burðardygga umsiting av fiskastovnunum. Føroya Arbeiðsgevarafelag undrast á, at eyka fiskidagar aftur í 2020 vera latnir teimum ikki fult riknu útróðrarbátunum. Felagið heldur, at um Havstovan heldur, at grundarlag er fyri at lata fleiri dagar, eiga tey, sum dríva hetta sum vinnu, at fáa ágóðan av eyka døgunum.

Fiskivinnuráðið mælir til, at tann umsitingarætlanin, sum semja var um í vár, verður gjøgnumførd. Reiðarafelagið, Føroya Arbeiðarafelag og Maskinmeistarafelagið hava líknandi viðmerkingar.

Vørn mælir til at seta treytir fyri avhending av tilsagnum um at varðveita veiðiloyvi uttan at hava skip, so at forðað verður fyri, at tilsagnir verða avhendar bara fyri at leingja tíðarfreistina á tilsagnum.

Um skylduna at hava eygleiðarar umborð í sambandi við fiskiveiðu, mælir Vørn til, at heimild verður sett í lógina til Fiskiveiðieftirlitið at krevja, at fiskifarið ber allar útreiðslur av eygleiðaranum, eins og heimild upprunaliga var fyri í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Føroyar hava í millumtjóðaavtalum bundið seg til at hava eygleiðarar umborð á skipum í ávísum fiskiskapi, t.d. á Flemish Kap. Vørn vísir á, at eygleiðaraskipanin fall burtur vegna manglandi fígging, tá heimildin at krevja allar útreiðslur bornar av fiskifarinum fall burtur við eini lógarbroyting í mai 2019.

Viðvíkjandi brúksskylduni eru viðmerkingar frá fleiri hoyringarpørtum. Reiðarafelagið mælir til, at yvirskipaða brúksskyldan ikki verður herd, men verður sett til 3 ár sum í galdandi lóg. Hóast brúksskyldan fyri egnar fiskidagar/kvotur er linkað, mælir Reiðarafelagið til at strika hesa. Tey halda, at slík brúksskylda eggjar til fíggjarliga óskynsaman fiskiskap, og í summum

førum til veiðu eftir fiskastovnum, sum eru illa fyri. Ein alternativ loysn, um ásetingin ikki verður strikað, er, at landsstýrismaðurin fær eina breiðari heimild at geva undantak frá brúksskylduni. Fiskivinnuráðið vísir í sínum viðmerkingum eisini á, at brúksskyldan í ávísum førum kann hava við sær óhepnar fíggjarligar avleiðingar, tá endamálið við fiskiskapinum verður at varðveita rættindini, heldur enn at gagnnýta rættindini við vinnuligum endamáli.

P/F Enniberg mælir somuleiðis til, at yvirskipaða brúksskyldan verður 3 ár, og at reglurnar vera smidligar, soleiðis at møguleiki verður at brúka annað fiskifar. Víst verður á, at tað kann vera ein trupulleiki at lúka brúksskylduna hjá felagi, sum ikki eigur skip og í sambandi við útvegan av nýggjum skipi, tí hetta kann taka longri enn 2 ár. Mælt verður eisini til, at landsstýrismaðurin fær heimild at geva undantak frá brúksskylduni í øðrum førum, umframt teimum í uppskotinum nevndu, t.d., tá smáar kvotunøgdir gera tað trupult at lúka brúksskylduna. Felagið Garnaskip vísir eisini á hesa støðu og mælir til, at brúksskyldan verður longd til minst 3 ella 4 ár.

Um landingarkravið í Føroyum eru eisini viðmerkingar frá fleiri hoyringarpørtum. Onkur mælir til at seta í gildi ta gomlu skipanina, har loyvt var at landa upp til 25% uttanlands. Skipara- og Navigatørfelagið mælir til, at tað skal vera einum og hvørjum skipi/reiðaríi frítt at gera av, hvar veiðan verður landað fyri at tryggja besta marknaðarprís.

Viðvíkjandi ásetingini um manningarviðurskifti mæla Vørn og Reiðarafelagið til at strika hesa grein. Vørn vísir á, at ásetingin kann strikast, nú ætlanin er at venda aftur til eina skipan við veiðiloyvum, og at tað harafturat er talan um eina umsitingarliga tunga grein, serliga fyri tey, sum skulu søkja um fiskiloyvi. Reiðarafelagið førir fram, at ásetingin var sett inn av Løgtinginum í síni tíð, og at grundarlagið fyri henni, sum víst varð á í viðmerkingunum, er ikki rætt. Lagt verður afturat, at Løgtingið eigur ikki at meta um, nær ein sáttmáli er galdandi ella ikki. Skipara- og Navigatørfelagið tekur hinvegin undir við ásetingini og hevur ítøkiligt uppskot um at tillaga ásetingina.

Reiðarafelagið førir fram, at tørvur er á serstakari fígging til skipabygging. Viðmerkt verður, at tað eigur at vera umhugsað, hvørjar skipanir kunnu eggja til bygging av nýggjum skipum. Ein møguleiki er at eftirmeta núverandi føroysku skipan við stuðli til skipasmíð, soleiðis at hon kann nýtast til bygging av føroyskum skipum. Víst verður eisini á dømi um útlendska skipan.

Havstovan og Umhvørvisstovan mæla til, at endamálsorðingar verða settar inn aftur í lógartekstin. Havstovan viðmerkir, at tað at burðardygg gagnnýtsla er nevnd sum eitt endamál í viðmerkingunum hevur ikki somu støðu, sum tá tað verður nevnt í lógartekstinum. Felagið Nótaskip vísir í sínum viðmerkingum á, at reglurnar, sum áseta, at serligt loyvi krevst til virking av veiðu umborð, eiga ikki at vera galdandi fyri tey fiskifør, ið tá lógin kemur í gildi, eru innrættað til at virka veiðu umborð.

Spf. ANRU heitir í sínum viðmerkingum á landsstýrismannin um at geva teimum, sum virka í bólki 5 A somu møguleikar, sum hinir fullriknu bólkarnir hava. Teir nevna serliga at fáa møguleika at leggja bátar/loyvi saman í sambandi við endurnýgging.

Hummarafelagið nevnir í sínum viðmerkingum fleiri viðurskifti, ið hava týdning fyri teirra virksemi. Eitt nú heitir felagið á landsstýrismannin um at seta í lógina, at veiða eftir hummara til húsbrúks ikki skal vera loyvd, og at ein loysn verður funnin á trupulleikanum við ankring av skipum á hummaraleiðum.

**Fiskimálaráðið skal viðmerkja til innkomnu hoyringarsvarini:**

Landsstýrismaðurin og Fiskimálaráðið hava viðgjørt innkomnu viðmerkingarnar. Fleiri av viðmerkingunum hava verið orsøk til broytingar og tillagingar í lógaruppskotinum. Tað framgongur av viðmerkingum landsstýrismansins, hvørjar broytingar talan er um. Landsstýrismaðurin viðmerkir, at viðvíkjandi hugtakinum veiðiloyvi eru viðmerkingarnar tiknar til eftirtektar, og tillagingar eru gjørdar í lógarteksti og lógarviðmerkingum, sum gera hugtakið greiðari.

Viðvíkjandi gildistíðini á rættindunum hava fleiri skotið upp eina skipan við 12 ára gildistíð fyri rættindini. Landsstýrismaðurin hevur gjørt av at halda fast við leistin í verandi lóg, men at 8 ára gildistíðin verður broytt til 12 ár.

Um miðsavnan hevur Reiðarafelagið ført fram, at reglurnar um miðsavnan í lógaruppskotinum møguliga eru ov strangar. Landsstýrismaðurin metir, at um endamálið við miðsavningarreglunum skal røkkast, má haldast fast við tey mørk fyri miðsavnan, sum eru sett í lógaruppskotinum.

Viðvíkjandi uppboðssøluni eru viðmerkingarnar til lógaruppskotið nágreinaðar fyri at ganga á møti viðmerkingunum um at gera tekstin greiðari at skilja. Hildið verður annars fast við ásetingarnar um uppboðssølu.

Viðvíkjandi brúksskylduni eru øll samd um, at ein brúksskylda eigur at vera, tó verður viðmerkt, at hendan er ov strong. Landsstýrismaðurin viðmerkir, at hóast brúksskyldan viðvíkjandi nýtslu av rættindunum sum heild er herd, so er brúksskyldan viðvíkjandi nýtslu av egnum døgum og kvotum samstundis linkað. Harumframt er møguleiki at geva undantak frá brúksskylduni, tá talan er um heilt serligar umstøður. Landsstýrismaðurin metir, at her er funnin ein hóskandi javnvág millum rættindi og krøv viðvíkjandi nýtslu av rættindum.

Viðvíkjandi umsitingarætlanini er at siga, at við hesum uppskotinum verða fiskidagar í 2020 ásettir við lóg. Ætlanin er, at frá og við 2021 verður regluverkið og mannagongdin broytt soleiðis, at tað verður landsstýrismaðurin, sum í kunngerð ásetir fiskidagar. Tá er ætlanin eisini at skipa fyrisitingina av fiskidagaskipanini í eini umsitingarætlan.

Viðmerkingin frá Vørn um at seta treytir fyri avhending av tilsagnum er tikin til eftirtektar. Áseting er sett inn, sum er ætlað at forða fyri, at tilsagnir verða avhendar bara fyri at leingja tíðarfreistina á tilsagnum.

Viðvíkjandi viðmerkingunum frá Havstovuni og Umhvørvisstovuni um endamálsorðingar er støða landsstýrismansins, at endamálsorðingar, ið ikki staðfesta ávís rættindi ella skyldur, men einans greiða frá yvirskipaða endamálinum við løgtingslógini, eiga ikki at verða skrivaðar inn í sjálvan lógartekstin.

Viðvíkjandi tørvi á serstakari fígging til skipabygging viðmerkir landsstýrismaðurin, at hetta er ikki partur av hesum uppskoti, tí stundir hava ikki verið at viðgera spurningin í hesum umfari. Landsstýrismaðurin viðurkennir, at tørvur er á skipanum, sum eggja til nýbygging av skipum, og ætlanin er at taka spurningin upp til viðgerðar í næstum.

Viðmerkingar av tekniskum slagi til einstakar ásetingar eru í stóran mun tiknar til eftirtektar. Her skal serliga vísast til viðmerkingar frá Vørn um eitt nú ásetingarnar um ognarviðurskifti. Viðvíkjandi viðmerkingum um miðsavnan, fiskidagatali í 2020, landingartreytum, eygleiðarum, manningarviðurskiftum og virking umborð, er gjørt av at halda fast við orðingarnar í uppskotinum. Viðvíkjandi viðmerkingunum frá Spf. ANRU viðmerkir landsstýrismaðurin, at stundir ikki hava verið at viðgera slíkar spurningar í hesum umfari. Málið fer at vera tikið upp í sambandi við møguliga endurskoðan av allari skipanini hjá útróðrarflotanum.

Viðmerkingarnar frá Hummarafelagnum eru skrásettar, og landsstýrismaðurin fer í næstum at taka hesi mál upp, eisini við aðrar myndugleikar.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Bæði viðvíkjandi inntøkumøguleikum til landskassan og tí, at uppskotið broytir umsitingarligu fyritreytirnar og krøvini.

Heimildin hjá landinum, á hvørjum ári at bjóða út partar av veiðirættindunum, verður við hesum uppskotinum strikað. Henda søla hevur seinastu tvey árini givið landskassanum inntøkur: í 2018 143 mió. kr. og í 2019 188 mió. kr. Alt annað óbroytt er tí talan um ein inntøkumiss hjá landskassanum.

Heimildin hjá landsstýrismanninum í hesum lógaruppskotinum at selja kvoturættindi í 2020 kann geva landinum inntøkur. Torført er at tó meta um, hvørjar inntøkur henda søla fer at geva landinum. Fleiri viðurskifti hava týdning fyri, hvussu leikur fer, eitt nú, hvat og hvussu nógv verður selt, hvussu stórur áhugin er fyri at keypa, hvussu sølan verður skipað, og hvørjar treytir verða settar.

Við lógaruppskotinum fylgja øðrvísi krøv og treytir til umsiting og eftirlit, sum gera, at orka ta fyrstu tíðina má setast av til at umleggja mannagongd, telduskipanir og skrásetingar. Mett verður tó, at hetta kann gerast innan fyri verandi fíggjarkarmar og tøku arbeiðsorkuna.

Mett verður samanumtikið, at uppskotið ikki førir við sær meirútreiðslur og størri fíggjartørv, hvørki ta fyrstu tíðina ella sum frá líður. Summar av teimum skipanum í verandi lóg, sum hava verið orkukrevjandi at umsita, eru ikki partar av hesum uppskotinum, eitt nú uppboðssøla av veiðirættindum og menningarkvotur vera við hesum uppskotinum avtiknar.

Mett verður ikki, at stórvegis eykaútreiðslur standast av at umsita brúksskylduna, sum tekur við, tá lógin fær gildi. Neyðugu upplýsingarnar vera skrásettar, sum er, og kunnu við smávegis umskipanum lagast til eftirkanningarnar í sambandi við brúksskylduna.

Tað fer framvegis at krevja nógva arbeiðsorku og fígging at eftirkanna ognarviðurskifti í feløgum, og at eftirkanna og tryggja reglurnar, sum skulu forða fyri, at rættindi verða miðsavnað.

Uppskotið hevur í sjálvum sær ikki fíggjarligar avleiðingar fyri føroyskar kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður, at uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Eftir uppskotinum verða nýggjar treytir og skipanir settar í verk, eitt nú brúksskylda og reglur, sum skulu forða fyri miðsavnan av veiðirættindunum. Hetta krevur, at ávísar umleggingar og tillagingar skulu gerast í umsitingarligu mannagongdini. Hetta leggur øðrvísi og størri byrðar á verandi umsiting ta fyrstu tíðina; byrðar, sum tó vera mettar at kunna berast við verandi fígging og arbeiðsorku.

Sum frá líður verður mett, at uppskotið fer at lætta um onkrar av byrðunum hjá umsitingini. Summar av teimum skipanum, sum eru í galdandi lóg, og sum hava kravt nógva umsitingarliga orku, verða við hesum uppskotinum broyttar ella avtiknar, eitt nú uppboðssøla og menningarkvotur.

Mett verður eisini, at sæð úr einum umsitingarligum sjónarhorni, er uppskotið, um at knýta rættindini at ávísum fiskifari og ein skipan við veiðiloyvum, gagnligt, tí tað fer at gera umsiting og skrásetingar í sambandi við loyvisskipanina lættari og smidligari.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Hetta uppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna.

Skipanin við árligari uppboðssølu av veiðirættindum verður avtikin. Hetta ger øðrumegin, at lógarásettu treytirnar hjá nýggjum aktørum at bjóða seg fram í vinnuni ikki eru tær somu, sum í galdandi lóg. Hinumegin fer hendan broytingin væntandi at gera – alt annað óbroytt – at meira verður at luta teimum, sum eru í vinnuni.

Skipanin við menningarkvotum í verandi líki verður avtikin, og ein skipan við vinnuligum royndum og verkætlanum, ið fevnir um fiskasløgini svartkjaft, makrel og norðhavssild, verður sett ístaðin. Har kunnu aktørar við ætlanum, sum hava eitt menningar- og nýskapanarmál í gagnnýtsluni av nevndu fiskasløgum, bjóða seg fram.

Uppskotið, um at knýta rættindi at ávísum fiskifari og seta í verk eina skipan við veiðiloyvum, broytir fyritreytirnar hjá vinnuni. Fyri partar av vinnuni er tað helst gagnligari, at veiðirættindini ikki eru knýtt at ávísum fiskifari, tí slíkur lógarkarmur gevur betri møguleikar at gagnnýta tøka tilfeingið skynsamt og optimalt.

Víðkaðir møguleikar at avhenda veiðirættindi millum fiskifør ger skipanina liðiligari við tað, at vinnan fær betri møguleikar at laga virksemið til tøku fiskimøguleikarnar. Hetta fer væntandi at gagna vinnuni.

Í verandi lóg er ásett, at útlendskur ognarskapur, sum undir lógini um vinnuligan fiskiskap kundi vera ein triðingur, innan ávíst áramál skal vera heilt burtur úr feløgunum. Uppskotið broytir hetta og loyvir, at upp til 1/4 ognarlutur kann vera í felagi, sum eigur fiskifar. Feløg, sum eru í vinnuni í dag og hava útlendskan ognarlut, kunnu tó halda fram við verandi virksemi. Henda broyting verður mett at vera gagnlig fyri vinnuna, bæði í sambandi við fígging og nýíløgur, og í sambandi við at geva føroyskum fiskivinnufyritøkum vitan um tøkni, branding, sølu o.tíl. Nevnast kann í hesum sambandi, at føroysku peningastovnarnir virka undir reglum um ikki at taka ov stóran váða við at seta ov nógv í ein og sama vinnugeira, og tí kann verða avmarkað, hvussu nógvan pening okkara fiskivinna kann læna í Føroyum.

Ásetingin í lógini um, at ein ávísur partur av veiðuni skal um uppboðssølu í Føroyum, verður eisini broytt. Hvørjar fíggjarligar avleiðingar hetta fær fyri vinnuna, veldst í fyrstu atløgu um, hvussu landsstýrismaðurin brúkar heimildina at gera reglur á økinum. Inntriv og treytir í fyrstuhondssøluni av veiðu við kravi um uppboðssølu kann øðrumegin bøta um atkomuligheitina hjá føroyskum fiskavirkjum og fiskakeyparum til veidda fiskin, men skerjir samstundis møguleikan hjá skipum frítt at velja, hvar tey landa veiðuna.

Væntað verður ikki, at brúksskyldan fer at hava fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna, tá veiðirættindi falla fyri brúksskylduni.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur í sjálvum sær ikki avleiðingar fyri umhvørvið. Eins og í lógini undan hesari skulu fyrilit takast fyri umhvørvinum, tá livandi tilfeingi í sjónum verður fyrisitið og gagnnýtt, eitt nú soleiðis, at sjálvur fiskiskapurin ikki ger seg inn á umhvørvið hjá fiski o.ø., og at veiðitólini eru umhvørvisvinarlig.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið verður ikki mett at hava fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum. Ilt er at meta um, hvørjar avleiðingar tað fær fyri serstøk øki í landinum at taka av galdandi skipan við menningarkvotum. Henda skipan hevur eisini eitt økispolitiskt sikti.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur sosialar ella aðrar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Føroyar eru partur av fleiri millumtjóðasáttmálum um fisk og fiskivinnu. Hetta er nærri lýst í almennu viðmerkingunum. Yvirhøvur kann sigast, at eins og í galdandi lóg miðar hetta uppskotið eftir, at meginreglur og skyldur í t.d. millumtjóðasáttmálum, vit hava tikið undir við, gerast sjónligari í føroyska lógarverkinum.

Mett verður ikki, at tað eru bindingar til millumtjóðasáttmálar, sum gera, at uppskotið fær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella vinnuna.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, harundir Evropeiska mannarættindasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.
Mett verður ikki, at treytin um, at manningar umborð á fiskiskipum og á móttøkuskipum undir føroyskum flaggi, skulu lønast sambært sáttmálum við føroysk manningarfeløg, er í ósamsvari við ILO-konventiónir ella Evropeiska mannarættindasáttmálan, tí ásetingin skerjir ikki felagsfrælsið ella kollektiva samráðingarrættin. Manningar verða eftir ásetingini ikki tvungnar at vera í ávísum manningarfelagi, og ásetingin forðar heldur ikki fyri, at manningar ikki eru í nøkrum felag yvirhøvur.

**1) Hoyvíkssáttmálin**

Uppskotið verður ikki mett at vera í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan. Sáttmálin skipar Føroyar og Ísland sum eitt búskaparøki, har tað innan fyri innihaldsvídd sáttmálans er bannað at gera mismun vegna tjóðskap, virkisstað ella vegna vøruuppruna. Í løgtingslógini um fyrisiting av sjófeingi var serstøk áseting við 7 ára skiftistíð galdandi fyri persónar og feløg, fevnd av Hoyvíkssáttmálanum. Síðani er sáttmálin uppsagdur at fara úr gildi 1. januar 2020. Harafturat kunnu feløg, sambært hesum uppskotinum, sum hava útlendskan ognarlut, og sum eru í vinnuni, halda fram við verandi virksemi við tí útlendska ognarlutinum, feløgini hava í dag. Tó kunnu nýggj feløg í mesta lagi hava 1/4 útlendskan ognarskap.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**
Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við Evropeiska mannarættindasáttmálan.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Fríhandilssáttmálarnir við ávikavist Noreg, Sveis og Evropasamveldið avmarka seg í vavi einans til vørustreymar, har útflutningsgjøld og avgjøld við samsvarandi ávirkan eru bannað.

Spurningar um møguligt ósamsvar við sáttmálar vera eftir vanligu mannagongdini fyrst tiknir upp í felagsnevndum, sum eru skipaðar í hesum sáttmálum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ásetingar um revsing, útpanting og sekt.

Yvirskipað verður mett, at tørvur er á at halda fast við herdu reglurnar um eftirlit í verandi lóg, og skotið er tí upp, at hesar halda fram. Hildið verður eisini fast við reglurnar um, hvussu inndráttur, revsing av ólógligari veiðu og svik viðvíkjandi gjøldum kunnu revsast rættarliga eins og uttanrættarliga.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Í verandi lóg er heimild til landsstýrismannin at áseta avgreiðslugjøld og gjøld til endurrindan av ávísum útreiðslum. Henda heimild er óbroytt í hesum uppskoti.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið í sjálvum sær áleggur ikki fólki fleiri skyldur enn tær, sum eru í galdandi lóg um fyrisiting av sjófeingi. Tað verður framhaldandi soleiðis, at t.d. loyvi krevst til vinnuligan fiskiskap. Umframt, at verandi skyldur framhaldandi vera galdandi, áleggur uppskotið fólki aðrar skyldur, eitt nú at søkja um loyvi í sambandi við, at annað havtilfeingi skal gagnnýtast. Flestu upplýsingarskyldur og skyldur í sambandi við veiðifráboðanir eru tær somu sum í galdandi lóg.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**

Uppskotið gevur landsstýrismanninum heimildir at gera nærri reglur at skipa fiskiskap. Somuleiðis eru heimildir lagdar til Vørn í sambandi við eftirlit og umsiting. Havstovan hevur fingið heimildir, sum hava týdning fyri teirra dagliga arbeiði við fiskirannsóknum. Uppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann, stovn ella kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur almenna eftirlitsmyndugleikanum atgongd til skip, tað kunnu vera fiskifør, fiskaflutningsfør og fiskaframleiðslufør, og harumframt á øllum støðum, har sum veiða ella partar av hesi vera goymd, flutt, viðgjørd o.a.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur skipanir og heimildir at gera reguleringar, sum kunnu stuðla undir at fremja tey 17 heimsmálini hjá Sameindu Tjóðum fyri burðardygga menning. Serliga mál 14, um at varðveita og á burðardyggan hátt nýta høvini, allan sjógv og sjófeingi til burðardygga menning. Mál 14 er eisini eitt lið í at røkka at nógvum av hinum ST-málunum. Lógin hevur karmarnar fyri góða og burðardygga stovnsrøkt í heimasjógvi. Somuleiðis hevur lógin tær heimildir, ið skulu til fyri at fremja í verki avtalur og semjur, sum Føroyar nógvu seinastu árini hava verið ein virkin partur í at fáa í lag í millumtjóða samstarvi, bæði í regiónalum fiskiveiðifelagsskapum (NEAFC og NAFO) og í FAO, sum serliga miða eftir at basa ólógligari, ófráboðaðari og óskipaðari fiskiveiðu, sum er ein stórur trupulleiki nógva staðni í heiminum, og sum er við at máa støðið undan royndunum at røkka heimsmálunum hjá ST fyri burðardygga menning.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3: Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Kapittul 1. Lógarøki og allýsingar**

**Til § 1.**
Virkisøkið er tað sama sum í galdandi lóg. Lógin fevnir um at gagnnýta alt livandi sjófeingi. Sjófeingi er í hesi lóg fiskur, skeljadýr, krabbadýr, plantur o.a. livandi verur, sum eru í sjónum ella í ella á havbotninum, og sum natúrliga hoyra heima har. Lógin fevnir eisini um at gagnnýta arvafrøðiligt tilfar, ið stavar frá tilfeingi, lógin fevnir um.

Undantikin eru havsúgdjór og fuglur. Gagnnýtsla av hesum er skipað í aðrari lóggávu, so sum grindalógini og fuglaveiðilógini. Undantikið er eisini fiskur, onnur djórasløg og plantur í aling, har virksemið er fevnt av og skipað í lógini um aling av fiski o.a.

Lógin fevnir eisini um annað virksemi, ið ikki hevur við sjálvan fiskiskapin at gera, men knýtt at vinnuliga virkseminum víðari í virðisketuni. Hetta er serliga fyri at kunna hava munagott eftirlit og sporføri í øllum liðum í virðisketuni – landing, umskiping, móttøka, flutningur, goymsla og keyp og søla – og á tann hátt tryggja, at gagnnýtslan fer fram á ein hátt, sum er í samsvari við ásetingarnar og heimildirnar í lógini. Hetta er eisini ein fyritreyt fyri at leggja upp fyri fólkarættarligu og altjóða skyldum okkara um stovnsrøkt og eftirlit. Hesar skyldur eru í bindandi millumtjóða avtalum, samstarvi og samtyktum í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum. Yvirskipað snýr tað seg um at basa ólógligum, óskipaðum og ófráboðanum fiskiskapi (ÓÓÓ), tí at slíkt virksemi ger seg inn á tey, ið virka undir skipaðum viðurskiftum.

Lógin er galdandi á føroyskum førum, í føroyskum sjógvi, á føroyska landgrunninum og uttan fyri føroyskan sjógv, á landi í Føroyum og í føroyskum áum og vøtnum. “Føroysk før” eru før, sum eru skrásett í føroysku skipaskrásetingunum, sambært lóg um skráseting av skipum. Talan er ikki bert um fiskifør, men eisini um før, ið taka ímóti og flyta veiðu, ella sum taka ímóti ella lata veitingartænastur og stuðulstænastur. Lógin ger tað møguligt at seta krøv til onnur enn fiskifør um skyldu at lata upplýsingar, skjalprógv o.tíl. í sambandi við t.d. at taka ímóti og at flyta fisk og fiskavørur.

Lógin er galdandi í føroyskum sjógvi. Talan er um leiðirnar innan fyri føroyska fiskimarkið, sum tað er ásett við Anordning nr. 598 frá 21. desember 1976, sum seinast broytt við Anordning nr. 888 frá 17. september 2009.

Lógin fevnir eisini um at gagnnýta livandi tilfeingi á føroyska landgrunninum. “Landgrunnurin” er havbotnurin og undirgrundin á økjum, sum eisini røkka út um føroyskan sjógv sum eitt natúrligt framhald av føroyska landgrunninum. Ytra markið fyri landgrunnin verður ásett eftir serligari fólkarættarligari mannagongd, samsvarandi § 76 í Havrættarsáttmála Sameindu Tjóða. Í § 77 í Havrættarsáttmálanum eru eisini ásetingar um rættindi hjá strandarlondunum, harundir at gagnnýta livandi sjófeingi á landgrunninum.

Lógin fevnir eisini um at gagnnýta livandi sjófeingi á leiðum uttan fyri føroyskan sjógv. Hetta er altjóða sjógvur og sjóleiðir, ið eru undir løgdømi hjá øðrum londum. Grundreglan er, at far undir føroyskum flaggi ikki kann fiska ella taka lut í øðrum virksemi, ið er knýtt at fiskiveiðu, uttan loyvi frá føroyskum myndugleikum. Endamálið er at tryggja, at virksemi undir føroyskum flaggi fer fram undir skipaðum viðurskiftum. Regluverkið skal leggja upp fyri altjóða skyldum okkara sum flaggland, og á tann hátt forða fyri, at før undir føroyskum flaggi taka lut í ólógligum, óskipaðum og ófráboðanum fiskiskapi, eisini innan fyri fiskimørk hjá øðrum londum, sum Føroyar ikki hava fiskiveiðiavtalu við.

Orðingin, um at lógin eisini er galdandi á landi í Føroyum, hevur samanhang við, at hóast tað virksemið, ið lógin regulerar, fyrst og fremst er á sjónum, er eisini neyðugt at hava hetta við í virkisøkinum hjá lógini fyri at tryggja gott eftirlit og sporføri í allari virðisketuni, so at gagnnýtslan av livandi sjófeinginum fer fram sum fyriskrivað.

Lógin fevnir eisini um fiskiskap eftir laksi, sílum o.ø. í føroyskum áum, vøtnum, ósum og løkum. Rættarstøðan á hesum øki verður ikki broytt við hesi lóg. Eins og í undanfarnum lógum á økinum hevur landsstýrismaðurin heimild at gera fyriskipanir við kunngerð. Fyritreytirnar og umstøðurnar her eru øðrvísi enn á sjónum, og meginparturin av ásetingunum um fiskiskap í sjógvi hava ikki týdning. Nevnast kann, at lógarheimildin á økinum hevur verið brúkt til kunngerð um friðing av ósanum við Leynar (2006) og kunngerð um síla- og laksaveiðu (1990).

Her kann verða lagt afturat, at sambært § 4 í lov nr. 169 af 18. Maj 1937 for Færøerne om Benyttelse af Indsøer og Vandløb, som senest ændret ved lagtingslov nr. 110 af 29. juni 1995, kunnu jarðareigarar á grannastevnu gera viðtøkur um fisking í áum og vøtnum.

Lógin fevnir um alla gagnnýtslu av livandi tilfeingi – eisini, tá hon ikki er beinleiðis vinnulig. Tað verður framvegis so, at serstakt loyvi ikki krevst at fiska til húsbrúks. Einasta treytin er, at veiðan ikki verður avreidd ella seld. Við hesum verður aldargamli rætturin at søkja sjógvin og fiska til egið brúk ikki skerdur. Hinvegin kann tørvur vera á at nágreina, hvat fiskiskapur til egna nýtslu er, eins og tørvur kann vera á at hava møguleika at regulera, tá fiskiskapur ikki er beinleiðis vinnuligur, eitt nú at seta avmarkingar fyri at nýta ávísan fiskireiðskap og at friða ávísar sjóleiðir fyri øllum fiskiskapi.

Heimild er at skipa ferðavinnufiskiskap. Í sambandi við, at útlendsk ferðafólk ella ferðaskrivstovur koma higar við egnum fari og ætla sær at fiska, má heimild vera fyri at víkja frá høvuðsregluni, sum bannar fremmandum fiskiførum at reka fiskiskap í føroyskum sjógvi. Tí er heimild at lata serstøk loyvi í sambandi við ferðavinnu og fiskiveiðu, har treytir kunnu setast um veiðinøgdir, og hvussu nógv kann takast við av landinum, reiðskap, tal av reiðskapi o.tíl., umframt at seta treyt um, at farið lýkur lógarásettu trygdarkrøvini fyri at sigla við ferðafólki, og hevur fingið formliga góðkenning til tess frá Sjóvinnustýrinum. Grundleggjandi snýr tað seg um, at veiða ikki verður avreidd ella brúkt á annan hátt við peningaligum vinningi ella ágóða fyri eyga.

**Til § 2.**
Í hesi grein vera nøkur hugtøk, sum verða nýtt í lógini, allýst. Talan er í høvuðsheitum um somu allýsingar sum í verandi lóg.

Nr. 1. Føroyskur sjógvur eru sjóleiðirnar innan fyri føroyska fiskimarkið, sum ásett í kongligari fyriskipan nr. 598 frá 21. desember 1976 om fiskeriterritoriet ved Færøerne, sum seinast broytt við kongligari fyriskipan nr. 888 frá 17. september 2009. Hetta er økið út á 200 fj. úr grundlinjunum ella til ”miðlinjurnar”, har tað er styttri enn 400 fj. millum londini. Lógin um vinnuligan fiskiskap nýtti heitið landleiðirnar. Innihaldsliga er eingin broyting í hesum. Ytra landleiðin og innara landleiðin er tað sama sum sjóleiðirnar innan fyri føroyska fiskimarkið.

Nr. 2. Altjóða sjógvur eru sjóleiðirnar uttan fyri fiskiveiðiløgdømið hjá strandarlondum.

Nr. 3. Vinnuligur fiskiskapur verður allýstur sum fiskiskapur, har veiðan ikki verður brúkt til húsbrúks. Tað vil siga, at um veiðan verður seld, ella um fiskað verður við tí endamáli at selja veiðuna heilt ella partvíst, so er talan um vinnuligan fiskiskap. Hetta merkir eisini, at veiða til húsbrúks er ikki vinnuligur fiskiskapur. Tað er ikki avgerandi eftir hesi lóg, um fiskiskapurin út frá einum búskaparligum sjónarmiði er vinnuligur, tað vil siga, gevur yvirskot og ber íløguna. Avgerandi er bert eftir hesi lóg, um veiða verður avreidd ella seld.

Nr. 4. Fiskiárið er álmanakkaárið, t.v.s. frá 1. januar til 31. desember. Farið verður við hesum burtur frá at áseta fiskiár frá 1. september til 31. august. Í summum førum er gildistíðin á føroyskum rættindum sett fyri annað tíðarskeið enn álmanakkaárið. Tí eigur møguleiki at vera at laga fiskiárið eftir hesum.

Nr. 5. Veiðiloyvi er góðkenning, ið landsstýrismaðurin veitir  ávísum fiskifari við ávísum eigara at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi við hesum fiskifarinum. Einki fiskifar kann tí reka vinnuligan fiskiskap uttan hetta loyvið, uttan har annað er ásett í løgtingslógini. Bólkur 5, útróðrarbátar undir 15 tons, tó undantikin. Veiðiloyvið er knýtt at fiskifarinum og fylgir skipinum.

Nr. 6. Fiskiloyvi er tann rættur, sum eigari av ávísum fiskifari fær at veiða ávíst livandi sjófeingi á ávísum leiðum í ávísum fiskiári við ávísum fiskifari. Fiskiloyvi verða vanliga útskrivað á hvørjum ári, tá fiskiárið byrjar. Fiskiloyvið ásetir ítøkiligu veiðirættindini hjá einstaka rættindahavaranum tað árið, og er avmarkað til bara tað eina árið.

Undir galdandi lóg vóru rættindini hjá rættindahavaranum, og fiskiloyvið varð útskrivað, tá eigarin hevði boðað frá, hvørjum fiskifari rættindini skulu fiskast við. Nú verður farið aftur til skipanina undir løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, har veiðirættindini eru knýtt at einum ávísum fiskifari, sum hevur veiðiloyvið. Fyrsta tíðin er ein tillagingartíð, har veiðirættindini vera knýtt at ávísa fiskifarinum. Í útróðrarflotanum eru veiðirættindini eins og áður knýtt at ávísum fiskifari, og fiskiloyvi verður tí framhaldandi latið eigara av hesum fiskifari. Í fiskiskapi, har treyt er, at fiskiorkan ikki skal gerast størri, kann fiskiloyvi bert útskrivast tí fiskifarinum, sum veiðirættindini eru á, tá lógin fær gildi, eins og tað bert er loyvt at flyta rættindini á annað fiskifar við somu ella minni fiskiorku.

Nr. 7. Her er greinað, hvat ein fiskidagaskipan er. Í eini fiskidagaskipan er tað veiðiorkan, sum verður regulerað. Grundsjónarmiðið er, at eitt fiskifar fremur eitt ávíst veiðitrýst hvønn fiskidag, og fyri at avmarka veiðitrýstið, verður hámark sett fyri, hvussu nógvar dagar hvørt fiskifar, ella bólkur av fiskiførum, kann fiska. Fiskidagaskipan er t.d. í fiskiskapi eftir botnfiski í føroyskum sjógvi, í rækjuveiðuni við Svalbard og í fiskiskapinum eftir djúphavsfiski í altjóða sjógvi hjá NEAFC.

Nr. 8. Felags fiskidagar eru fiskidagar, sum ein bólkur undir einum hevur rætt at veiða.

Nr. 9. Egnir fiskidagar eru teir fiskidagar, sum eru latnir felag, persóni ella eigara av einum ávísum fiskifari at veiða.

Nr. 10. Ein fiskidagur í føroyskum sjógvi verður roknaður í tímum frá tí, at túrur byrjar, til túrur endar. Tó verður ein túrur altíð roknaður sum minst ein fiskidagur. Talið av brúktum fiskidøgum í fiskiárinum verður gjørt upp fyri allar túrarnar undir einum við at býta samlað brúkt tímatal við 24, tó so, at hædd verður tikin fyri, at hvør túrur telur minst ein fiskidag. Fiskidagar hjá teimum smærru útróðrarbátunum í bólki 5 verða gjørdir upp á tann hátt, at

hvør túrur telur ein fiskidag uttan mun til, hvussu nógvar tímar fiskifarið hevur brúkt. Tað merkir fyri bólk 5, at hóast báturin er úti í 2-3 dagar, telur hetta ein fiskidag.

Nr. 11. Veiðievni hjá fiskifari er veiðitrýstið, hvørt fiskifar fremur hvønn fiskidag.

Nr. 12-20. Í eini kvotuskipan er hámark sett fyri, hvussu nógv kann fiskast. Mest loyvda veiða er tann samlaða nøgdin av ávísum sjófeingi, sum lívfrøðiliga verður mett skynsamt at taka úr einum stovni í einum fiskiári. Heildarkvotan er tann nøgd av livandi sjófeingi, í tonsum, sum persónur ella felag, ella eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi, hevur rættindi at veiða av í kvotuskipan í einum fiskiári. Kvotabýtið við onnur lond og kvota, ið er sett av til hjáveiðu, rannsóknir, royndarfiskiskap og menningarætlanir, verður ikki roknað upp í heildarkvotu. Heildarkvotan verður síðani býtt út til bólkar av fiskiførum sum felags árskvota, sum felagskvota við hámarki ella sum egin árskvota.

Stórur partur av føroyska fiskiskipaflotanum hevur í nógv ár verið undir skipan við kvotum. Tey rættindi, ið føroyskir myndugleikar samráða seg til við onnur lond, eru í flestu førum egnar kvotur av ávísum fiskasløgum í norskum, russiskum, íslendskum, ES-sjógvi o.s.fr. Fiskiskapurin hjá uppsjóvarflotanum av ferðandi fiskastovnum (makrelur, sild og svartkjaftur) er skipaður við kvotum, sum vit hava eftir strandarlandasemjum, ella sjálvi hava ásett okkum. Fiskiskapurin eftir føroysku uppsjóvarkvotunum á øllum leiðum er fyri tað mesta skipaður við egnum árskvotum.

Einasti fiskiskapur, umframt fiskiskapin eftir uppsjóvarfiski, í føroyskum sjógvi, ið er skipaður við heildarkvotum og felags árskvotu/egnum kvotum, er fiskiskapur eftir gulllaksi og hummaraveiðan hjá smærru útróðrarbátunum.

**Til § 3.**
Stk. 1. Staðfest verður, eins og í løgtingslógini um vinnuligan fiskiskap og løgtingslógini um fyrisiting av sjófeingi, at livandi tilfeingi, fevnt av lógini, er ogn Føroya fólks. Tað, sum býr undir hesum orðingum er, at landið hevur løgfrøðiligt ræði. Talan er um at staðfesta, at viðkomandi tilfeingi ikki er privat ogn, at staðfesta heimildina, ið landsins myndugleikar, Løgtingið og landsstýrið, hava at skipa fyri gagnnýtsluni av tilfeinginum, og møguleikan at staðfesta ávísar brúksreglur.

Løgtingið hevur ræðisrættin til tilfeingið, og hevur við hesi lóg sett fortreytirnar fyri fiskiskapi og aðrari gagnnýtslu av tilfeinginum úr havinum, og letur landsstýrismanninum heimild at áseta nærri treytir og rættindi fyri fiskiskapi o.a.

At tilfeingið er ogn Føroya fólks merkir, at tilfeingið er ogn hjá føroysku tjóðini – ein samfelagsogn – sum eigur at verða gagnnýtt soleiðis, at virðið av hesum tilfeingi verður øllum tí føroyska samfelagnum at frama. Orðingin ”ogn Føroya fólks” førir ikki við sær, at allir borgarar landsins kunnu krevja sín part av tilfeinginum og krevja sín rætt til at gera nýtslu av hesum tilfeingi, men inniber, at gagnnýtslan skal tæna áhugamálunum hjá fjøldini. Fyri at tæna áhugamálunum hjá fjøldini, er neyðugt at avmarka atgongdina til at gagnnýta tilfeingið. Avmarkingin fer fram á tann hátt, at veitt verða rættindi til at troyta tilfeingið. Rættindini, talan er um, veita ikki ognarrætt til tilfeingið, men er ein rættur at gera brúk av tilfeinginum.

Stk. 2. Í lógini frá 1994 var orðingin, at ”rættindi fingin í fiskiloyvum gevur ikki einstaklingum ella samtøkum av einstaklingum ognarrætt” brúkt, og víðari varð sagt í

viðmerkingunum, at talan var um ein brúksrætt. Við hesum verður staðfest, at talan er um loyvisrættindi (licens) til fiskiskap. Hesi loyvisrættindi hava tann eginleika, at tey kunnu avhendast við teimum treytum, lógin setir, men tey kunnu ikki setast í veð. Tann, ið fær slíkan loyvisrætt, hevur eisini skyldu til at gagnnýta tey rættindi, ið fylgja við loyvinum. Ásetingin skal harumframt tryggja, at landið framhaldandi hevur ræðið á tilfeinginum, og at einstaklingar ella feløg ikki kunnu fáa privatan ognarrætt til tilfeingið, men loyvi at gagnnýta tilfeingið í avmarkað tíðarskeið.

Stk. 3. Hóast veiðirættindi eru umsetilig, verður positivt ásett í lógini, at veiðirættindi, givin í fiskiloyvum, kunnu ikki setast í veð. Orsøkin til hesa áseting er, at rætturin til at gagnnýta tilfeingið, sum er ogn Føroya fólks, skal ikki kunna setast í veð, og harvið møguliga ikki sjálvboðin verða flutt til annan persón enn tann, sum hevur fingið hesi rættindi. Ásetingin skal eisini undirstrika, at talan er um ogn Føroya fólks, sum einstaklingar fáa loyvisrætt at gagnnýta í ávíst tíðarskeið. Fyri at tryggja, at rættindini ikki sjálvboðin verða flutt til annan persón enn tann, sum hevur fingið hesi rættindi, er eisini neyðugt at verja rættindini fyri rættarsókn, so sum úttøku ella líknandi frá ognarum (kravánarum).

Stk. 4. Henda orðing er í innihaldi tann sama sum í galdandi lóg.

**Kapittul 2. Almennar ásetingar um atgongd til fiskiskap**

**Til § 4.**
Stk. 1. Ásett verður, at fyri at skip skal kunna reka fiskiskap, skal tað hava bæði veiðiloyvi og fiskiloyvi. Veiðiloyvi er allýst sum góðkenning, ið landsstýrismaðurin veitir ávísum fiskifari at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi. Fiskiloyvi er allýst sum tann rættur, sum eigari av ávísum fiskifari fær at veiða av ávísum livandi sjófeingi á ávísum leiðum í einum fiskiári.

Við hesum verður farið aftur til ásetingina í lógini um vinnuligan fiskiskap við kravi um veiðiloyvi fyri at fáa fiskiloyvi. Skipanin við veiðiloyvum, og at veiðirættindi vóru knýtt at ávísum fiskifari, varð strikað í lógini um fyrisiting av sjófeingi.

Støður kunnu koma, har veiðiloyvi ikki krevst. T.d. eru serligar ásetingar í §§ 8-10 fyri eitt tillagingartíðarskeið, har krav ikki er um, at fiskifør skulu hava veiðiloyvi. Eisini er møguligt í lógini at geva undantak fyri kravinum um veiðiloyvi í ávísum førum, t.d. í samband við royndarfiskiskap. Ásett er tí, at kravið um veiðiloyvi og fiskiloyvi er galdandi, uttan so at annað er ásett í løgtingslógini.

Stk. 2. Í hesi áseting verður frávik gjørt frá meginregluni um veiðiloyvi, so fiskifør í bólki 5 (tað eru útróðrarbátar undir 15 tons) ikki eru áløgd kravið um at hava veiðiloyvi fyri at kunna fáa fiskiloyvi og at reka vinnuligan fiskiskap. Hetta er sama regla, sum var í lógini um vinnuligan fiskiskap, og sum varð varðveitt í galdandi lóg.

**Til § 5.**
Veiðiloyvi verður latið einum ávísum fiskifari, men tað eru treytir við, ið skulu vera loknar, fyri at fiskifar kann fáa veiðiloyvi.

Sum tað fyrsta er treytin fyri at fáa veiðiloyvi, at eigarin av fiskifarinum hevur ræðið á rættindum at veiða sambært løgtingslógini, og at rættindini vera knýtt at hesum fiskifari í fiskiloyvi. Hetta skal skiljast soleiðis, at fyri at ein rættindahavari kann fáa eitt veiðiloyvi til

eitt fiskifar, skal hann sambært hesi løgtingslóg hava veiðirættindi at knýta at fiskifarinum, tað við siga, at hann skal hava rætt til fiskiloyvi at troyta ávís rættindi – egna árskvotu, egnar fiskidagar ella annað – tá løgtingslógin tekur við. Mannagongdin er, at viðkomandi skal biðja um, at hesi rættindi vera latin tí ávísa fiskifarinum í fiskiloyvi. Lýkur fiskifarið eisini hinar treytirnar fyri at fáa veiðiloyvi, sum umrøddar niðanfyri, tá fær fiskifarið eitt veiðiloyvi, samstundis sum veiðirættindini vera knýtt at fiskifarinum í fiskiloyvi.

Onnur treyt er, at eigarin av fiskifarinum lýkur treytirnar um ognarviðurskifti, sum eru ásettar í §§ 11 og 12 í lógini. Leggjast kann afturat, at ásetingarnar í §§ 11 og 12 í lógini um ognarviðurskifti skal eigari av fiskifari til einhvørja tíð lúka fyri at kunna reka vinnuligan fiskiskap.

Tað eru bara fiskifør, sum eru skrásett í føroysku skipaskránni ella í farskránni sambært løgtingslógini um skráseting av skipum, sum kunnu fáa veiðiloyvi. Saman við ásetingini um ognarviðurskiftini hevur hetta við sær, at skip, ið eru leiguskrásett sambært løgtingslógini um skráseting av skipum, men har eigarin framhaldandi er útlendskur, kunnu ikki fáa veiðiloyvi.

Fyri at fáa veiðiloyvi skal fiskifar hava siglingarloyvi frá avvarðandi føroyskum myndugleika. Í mun til lóggávuna frammanundan (lógina um vinnuligan fiskiskap og lógina um fyrisiting av sjófeingi) er hetta ein herðing. Nevndu lóggávur høvdu/hava ikki slíka áseting. Mett verður ikki, at tað er hóskandi, at skip, sum ikki hevur loyvi at sigla, kann fáa veiðiloyvi ella varðveita slíkt loyvi.

Fiskifar, sum er á listum hjá økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum, kann ikki fáa veiðiloyvi. Tað er uppgávan hjá eigaranum av farinum at tryggja, at tað ikki er skrásett ella fáa tað strikað, um tað lýkur treytirnar fyri tí. Kravið er galdandi fyri øll fiskifør, sum skulu hava veiðiloyvi sambært hesum lógaruppskoti. Líknandi áseting er í løgtingslóg um skráseting av skipum. Tí kunnu skip, sum eru skrásett á slíkum listum hjá økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum, ikki verða skrásett í føroysku skipaskránni.

**Til § 6.**
Stk. 1. Fiskiloyvið er tað skjalið, har ásett er, hvørji ávís veiðirættindi, ið eitt fiskifar hevur rætt at veiða eitt ávíst tíðarskeið á ávísari leið. Rættindi kunnu vera egnar kvotur, egnir fiskidagar ella eitt annað rættindaslag. Eitt fiskifar kann fáa tilskrivað meira enn eitt fiskiloyvi. Her kann hugsast, at tey ymisku rættindini, sum eitt fiskifar hevur, verða skrivað í eitt fiskiloyvi hvør sær. Samanborið við lógina um fyrisiting av sjófeingi verður farið frá skipanini at skriva fiskiloyvi til ein persón ella felag, óheft av ávísum fiskifari. Ístaðin verður farið aftur til skipanina undir lógini um vinnuligan fiskiskap, har fiskiloyvini vórðu skrivað einum eigara av ávísum fiskifari við veiðiloyvi at verða fiskað við hesum fiskifarinum.

Stk. 2. Heimild er at seta nærri treytir viðvíkjandi sjálvum fiskiskapinum í fiskiloyvið.

**Til § 7.**
Stk. 1. Veiðiloyvi eru sambært hesi áseting galdandi til 1. januar 2032 og fáa sostatt eina gildistíð upp á 12 ár. Hetta er ein broyting sammett við galdandi løgtingslóg, har gildistíðin er 8 ár.

Øll rættindini hjá tí einstaka fiskifarinum at fiska eru knýtt at fiskifarinum í fiskiloyvi. Treytin fyri at fáa fiskiloyvi er, at fiskifarið hevur veiðiloyvi. Fer veiðiloyvið úr gildi, falla øll veiðirættindi hjá fiskifarinum burtur.

Stk. 2. Fiskiførini í bólki 5 nýtast sambært lógini ikki veiðiloyvi, men tey skulu, eins og fiskiførini annars, vera vard við 12 ára gildistíð. Tí er ásett, at rætturin til fiskiloyvi í bólki 5, sambært § 19, stk. 1, og onnur fiskiloyvi hjá hesum bátum, er galdandi til 1. januar 2032, og hava sostatt eina gildistíð á 12 ár eins og veiðiloyvir. Onnur fiskiloyvi kunnu t.d. vera loyvi at fiska hummara.

Stk. 3 ásetir, at landsstýrismaðurin eins og í galdandi lóggávu á hvørjum ári skal leggja uppskot fyri Løgtingið, um gildistíðin á rættindunum skal leingjast fyri 1 ár í senn út yvir tað, sum upprunaliga er ásett.

**Til § 8.**
Hendan greinin skipar tillagingartíðina hjá teimum, sum hava onnur rættindi enn 3 ella 8 ára uppboðsrættindi ella tilsøgn um menningarkvotur, tá lógin fær gildi. Hetta fevnir sostatt um meginpartin av teimum veiðirættindum, ið eru undir galdandi lóg um fyrisiting av sjófeingi, og sum halda fram undir nýggju lógini. Grundreglan í hesum lógaruppskoti er, at rættindini at fiska skulu vera knýtt at ávísum fiskifari við veiðiloyvi. Hetta broytir verandi grundreglu, sum sigur, at rættindini eru knýtt at ávísum persóni ella felag.

Stk. 1 ásetir, at persónur ella felag, sum í 2019 hava rættindi at fiska og sum, tá hendan lógin fær gildi, framvegis hava hesi rættindi, kunnu halda fram við sínum virksemi frá 1. januar 2020. Undantikin eru rættindi, sum eru keypt sum 3 ella 8 ára rættindi á uppboði undir lógini um fyrisiting av sjófeingi og tilsagnir um menningarkvotur, latnar undir somu lóg. Hesi rættindi eru skipað fyri seg í §§ 9 og 10. Rættindi, sum sambært galdandi lóg bert høvdu gildi í 2019, so sum 1 ára uppboðssølukvotur og kvota latin sum samsýning fyri vísindaligar royndir, geva ikki rætt til fiskiloyvi frá 1. januar 2020.

Stk. 2. Ásett er, at rættindahavarin kann velja at gagnnýta rættindini við egnum fiskifari, sum lýkur treytirnar fyri at fáa veiðiloyvi. Hetta fiskifarið fær tá veiðiloyvi, um tað ikki framman undan hevur veiðiloyvi. Hevur rættindahavarin t.d. knýtt rættindini at fiska sína egnu árskvotu av makreli at ávísum fiskifari, so fær fiskifarið samstundis veiðiloyvi. Ger sami rættindahavari seinni av at knýta rættindini at fiska svartkjaft at sama fiskifari, verður veiðiloyvi ikki latið viðkomandi fiskifari, tí tað longu hevur veiðiloyvi. Rættindahavari kann í tillagingartíðarskeiðinum sjálvur gera av, hvat fiskifar skal gagnnýta veiðirættindini, men tá tillagingartíðin er av 1. januar 2022, skal hann hava tikið endaliga støðu til, hvørjum fiskifari rættindini skulu vera á. Hetta fiskifarið fær veiðiloyvið og fer at virka undir vanligu reglunum í lógini.

Í tillagingartíðini kann rættindahavari, sum við fiskiloyvinum hevur fingið rættindi knýtt at egnum fiskifari við veiðiloyvi, avhenda egnar árskvotur ella egnar fiskidagar fyri eitt fiskiár í senn ella endaliga eftir reglunum í kapitli 8 í løgtingslógini. Tá til dømis egnir fiskidagar verða avhendir, verður farið fram eftir reglunum um avhending av fiskidøgum. Hesar reglur fevna um ásetingarnar í § 19 í lógaruppskotinum, um at fiskidagar eru knýttir at bólkunum og reglum um, at fiskiorkan ikki skal gerast størri.

Stk. 3. Fyri at geva rættindahavaranum ávíst rásarúm at laga seg til broyttu treytirnar, er her ásett, at fram til 1. januar 2022, fær hann eisini møguleika at gagnnýta síni rættindi við fiskifari, sum annar eigur, treytað av, at fiskifarið lýkur treytirnar fyri at fáa veiðiloyvi sambært § 5, nr. 2-5. Hevur fiskifarið ikki veiðiloyvi frammanundan, fær tað í hesum føri ikki veiðiloyvi.

Rættindahavari, sum í tillagingartíðini ikki hevur knýtt síni rættindi at egnum fiskifari, men letur annað fiskifar fiska fyri seg, kann bert avhenda egnar árskvotur ella egnar fiskidagar endaliga til eigara av fiskifari við veiðiloyvi.

Stk. 4 ásetir, at tá tillagingartíðin er farin 1. januar 2022, skulu rættindi vera knýtt at egnum fiskifari við veiðiloyvi. Talið av veiðiloyvum hjá viðkomandi rættindahavara verður tá eisini lagt fast, og broytingar kunnu bert gerast hesum viðvíkjandi við støði í kapitli 8 í løgtingslógini.

Stk. 5. Ásett er, at reglurnar í hesi grein, sum skipa skiftið til, at veiðirættindi vera knýtt at ávísum fiskifari, ikki fevna um rættindini hjá útróðrarbátum undir 15 tons í bólki 5. Orsøkin er, at hesi veiðirættindi eftir galdandi lóg longu eru knýtt at ávísum báti.

Stk. 6. Landsstýrismaðurin kann í serligum førum loyva fráviki frá freistini, um at veiðirættindi, í seinasta lagi 1. januar 2022, skulu vera knýtt at ávísum fiskifari við veiðiloyvi. Víkjast kann bert frá tíðarfreistini, um rættindahavarin kann prógva, at hann innan rímiliga tíð fær fiskifar, sum lýkur treytirnar fyri at fáa veiðiloyvi. Treyt er, at gongd er í málinum, og at rættindahavarin arbeiðir við ítøkiligum ætlanum um at útvega sær fiskifar at knýta veiðirættindini at, men at tað tekur longri tíð at fáa viðurskiftini við fiskifarinum endaliga í rættlag. Grundreglan er, at freistin bert verður broytt, tá talan er um umstøður, sum rættindahavarin ikki sjálvur hevur ræðið á og kann gera nakað við. Umsókn, um at útseta freistina, skal vera latin inn, áðrenn 1. januar 2022.

**Til § 9.**
Hendan greinin skipar tillagingartíðarskeiðið hjá teimum, sum hava keypt 3 ella 8 ára rættindi á uppboði undir lógini um fyrisiting av sjófeingi.

Stk. 1 ásetir, at persónur ella felag, sum sambært løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi hevur keypt 3 og 8 ára rættindi, kann halda fram undir somu treytum sum áður, til gildistíðin fyri hesum rættinum er runnin. Veiðirættindi, sum verða tillutað í 2020, eru tey somu, sum rættindahavarin hevði fingið sambært løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Gildistíðin er gildistíðin av rættindunum sambært løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Eftir 2020 fylgja rættindini vøkstrinum og niðurskurðinum í heildarkvotuni eins og kvotur sambært § 14, stk. 1. Hetta hevur við sær, at rættindini fylgja lutfalsliga vøkstrinum og niðurskurðinum í heildarkvotuni upp til mørkini sambært § 14, stk. 1, nr. 1-3. Um heildarkvotan í 2020 er ájavnt ella undir hesum mørkum, fylgir nøgdin eisini lutfalsliga vøkstrinum og niðurskurðinum í heildarkvotuni, tá heildarkvotan seinni er oman fyri mørkini. Um heildarkvotan í 2020 er oman fyri hesi mørk, sambært § 14, stk. 1, nr. 1-3, fáa persónar og feløg við 3 og 8 ára rættindum lut í vøkstrinum á heildarkvotuni, sum er oman fyri heildarkvotuna í 2020. Hetta síðsta er ein broyting í mun til ásetingarnar fyri hesi rættindi sambært løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Sí annars viðmerkingarnar til § 16, sum lýsa, hvussu rættindi sambært § 14, stk. 1 flyta seg í mun til broytingar í heildarkvotuni.

Stk. 2. Her verður ásett, at rættindahavari kann biðja um at fáa síni rættindi tillutað í fiskiloyvið til egið fiskifar, sum lýkur treytirnar fyri at fáa veiðiloyvi. Í slíkum føri fær fiskifarið eitt veiðiloyvi, og rættindini vera knýtt at fiskifarinum. Um fiskifarið longu hevur veiðiloyvi, t.d. tí at rættindahavarin longu hevur knýtt onnur rættindi at fiskifarinum, tá fær fiskifarið ikki eitt veiðiloyvi afturat.

Ein rættindahavari, sum hevur knýtt síni rættini at egnum fiskifari við veiðiloyvi, verður fevndur av ásetingunum í lógini og kann hareftir flyta og avhenda síni veiðirættindi sambært kapitli 8 í løgtingslógini.

Stk. 3. Her er ásett, at rættindahavari, í tíðarskeiðinum rættindini keypt á uppboði eru galdandi, eins og undir galdandi lóg, kann velja at gagnnýta síni rættindini við fiskifari, sum viðkomandi ikki eigur. Treytin er tó, at fiskifarið, eins og í dag, lýkur treytirnar í § 5, nr. 2-5. Hetta hevur við sær, at eigarin av fiskifarinum skal lúka treytirnar um ognarviðurskifti, fiskifarið skal vera skrásett í skipaskránni, og fiskifarið má ikki vera skrásett á lista hjá økisbundnum fiskiveiðifelagsskapi, sum far, ið hevur framt ólógligan, ófráboðaðan ella óskipaðan fiskiskap, ella sum hevur stuðlað slíkum fiskiskapi. Sum nakað nýtt er eisini ásett, at fiskifarið skal hava siglingarloyvi.

Tilskilað verður, at tá rættindi verða gagnnýtt við fiskifari hjá øðrum, tá vera rættindini ikki knýtt at fiskifarinum, og fiskifarið fær tá heldur ikki tillutað veiðiloyvi við støði í hesum rættindum. Talan kann tó vera um eitt fiskifar við veiðiloyvi hóast tað, tí fiskifarið kann á annan hátt hava fingið veiðiloyvi. Hetta um eigarin av fiskifarinum hevur rættindi, sum eru knýtt at fiskifarinum.

Ein rættindahavari, sum í tillagingartíðarskeiðinum velur at gagnnýta síni veiðirættindi við fiskifari hjá øðrum, kann ikki nýta ásetingarnar í kapitli 8 í løgtingslógini, men kann hóast tað, sambært serligari áseting í skiftisreglunum, avhenda síni rættindi endaliga til eigara av fiskifari við veiðiloyvi. Rættindini vera tá knýtt at fiskifarinum, sum rættindini vera avhendað til. Harvið verður fyrilit tikið fyri, at kann ein rættindahavari ikki útvega sær skip, tá hevur hann til einhvørja tíð møguleika fyri at avhenda rættindini og harvið sleppa undan at liggja við rættindum, sum ikki verða gagnnýtt. Verða rættindini avhendað, tá yvirtekur móttakarin eisini tær gjaldstreytir, sum eru tengdar at rættindunum í gildistíðarskeiðinum.

Stk. 4 ásetir, at landsstýrismaðurin hevur heimild sambært hesi løgtingslóg at áseta nærri reglur um gjaldstreytir fyri 3 og 8 ára uppboðssølurættindini. Hendan ásetingin skal tryggja, at landsstýrismaðurin hevur heimild at gera tillagingar í galdandi kunngerðum um uppboðssølu, t.d. kann tørvur vera á at nágreina onkrar ásetingar. Lagt verður annars upp til, at treytir um gjald, sambært løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi og reglum við heimild í hesi løgtingslóg, eru galdandi, til gildistíðin á rættindunum er runnin, um annað ikki verður ásett. Harí liggur eisini, at gjaldast skal bert fyri ta nøgd, sum persónur ella felag hevur keypt sambært hesum reglum.

Verða rættindini avhend í gildistíðarskeiðinum, fylgja gjaldstreytirnar við.

Stk. 5. Tá gildistíðin á rættindunum er runnin, verða uppboðsølurættindini umløgd til eginkvotur. Talan er um ymisk tíðarskeið alt eftir, nær rættindini eru keypt, og hvat áramál talan er um. Fyri 3 ára rættindi, sum vóru boðin út í 2018, er gildistíðin t.d. til 1. januar 2021, og vera tey tí umløgd pr. 1. januar 2022, ímeðan tað fyri 8 ára rættindini, sum vóru boðin út í 2019, er 1. januar 2027. Treytin, fyri at rættindi kunnu leggjast um og útlutast í fiskiloyvi til tann, sum til ta tíð er rættindahavari, er, at rættindini vera latin í fiskiloyvi til eigara av fiskifari við veiðiloyvi. Hevur rættindahavari longu lagt rættindini á fiskifar við veiðiloyvi, sambært stk. 2, verður fiskiloyvið latið til eigara av fiskifarinum, sum rættindini tá eru knýtt at.

Ein rættindahavari, sum í gildistíðarskeiðinum fyri uppboðssølurættindunum hevur valt at gagnnýta síni rættindi við fiskifari, sum viðkomandi ikki eigur, skal sostatt fyri at fáa tillutað umløgdu rættindini, eftir at gildistíðarskeiðið er runnið, tryggja sær, at rættindini til ta tíð eru knýtt at fiskifari við veiðiloyvi.

**Til § 10.**
Hendan greinin skipar tillagingartíðarskeiðið hjá teimum sum, undir lógini um fyrisiting av sjófeingi, hava fingið tilsøgn um menningarkvotu, og sum er galdandi, tá hendan løgtingslógin fær gildi.

Talan er um eina skiftisreglu frá menningarkvotunum, sambært løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Skiftið merkir, at tey, sum høvdu endaligar tilsagnir um menningarkvotu, tá ið henda lóg kemur í gildi, kunnu halda fram og eru fevnd av áður galdandi reglum og ásettum treytum í tilsagnum við møguligum seinni tillagingum.

Stk. 2. Ásett verður í skiftisreglunum, at fiskifarið, sum verður nýtt í samband við hesar menningarætlanir, nýtist ikki at hava veiðiloyvi sambært lógini. Ásett er tó, at skipið skal lúka ávís krøv, harundir, at eigarin av fiskifarinum lýkur ognarviðurskiftini eftir lógini, at skipið er skrásett í skipaskránni, og at skipið hevur siglingarloyvi.

Viðkomandi er at gera greitt, at tey rættindi, sum í sambandi við eina menningarverkætlan verða gagnnýtt við fiskifari, geva ikki grundarlag fyri at lata fiskifarinum veiðiloyvi. Fiskiførini kunnu nýtast til verkætlanirnar, sum undir galdandi lóg, men fáa ikki veiðiloyvi at virka undir nýggju lógini við støði í hesum kvotunum. Í samband við, at verandi menningarkvotur kunnu verða lagdar um til egnar árskvotur, kann tó vera grundarlag fyri, at fiskiførini, sum fiska hesar kvotur til ta tíð, kunnu fáa veiðiloyvi, sí viðmerkingarnar til stk. 3.

Stk. 3. Samgongan hevur sett sær fyri at eftirmeta verandi menningarkvotur við møguleika fyri at leggja menningarkvoturnar um til vanlig loyvir við 12 ára gildistíð. Eftirmetingin kann fara fram í loyvistíðarskeiðinum, og tað merkir m.a. fyri fýra ára menningarkvoturnar frá 2018, sum fyrst fara úr gildi við árslok 2021, at hesar kunnu verða lagdar um til egnar árskvotur, áðrenn loyvistíðarskeiðið er farið.

Í metingini av, um verkætlanirnar eru virðisskapandi, skal dentur m.a. leggjast á virðið á framleiddum úrdráttum/marknaðarprísi í mun til rávøru, góðskustøði á rávøru og rávørupris.

Í metingini av burðardyggleika skal dentur m.a. leggjast á fíggjarligu styrkina í verkætlanini, framtíðarmeting um inntøkur og fíggjarligt avlop. Harnæst skal dentur leggjast á fíggjarligu váðarnar og framtíðar útlitini í síni heild.

Stk. 4. Verður menningarkvota løgd um til eginkvotu, verður tann nøgdin, sum verður løgd um, tikin av teimum 8,5% sambært § 49, stk. 2, og sostatt verður tað minni at lata til vinnuligar royndir og verkætlanir frameftir.

## Kapittul 3. Ognarviðurskifti og miðsavnan

**Til § 11.**
Ásett verður, sum krav fyri at reka vinnuligan fiskiskap, at eigarin av fiskifarinum fyrst og fremst er persónur ella felag og harumframt, at eigarar eru heimahoyrandi í Føroyum.

Tryggjað verður, at eigarar av fiskiførum, sum hava veiðirættindi, hava mest møguligt tilknýti til Føroyar, og at veiðirættindini fult út eru undir føroyskum ræði.

Í mun til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi verður útlendskur kapitalur aftur loyvdur í føroyskari fiskiveiðu, tó við í mesta lagi 1/4 og við nærri ásettum treytum í hesi grein.

Stk. 2. Fyri at reka vinnuligan fiskiskap krevst, at eigarin av fiskifarinum antin er persónur ella felag. Henda áseting nágreinar, hvat er fevnt av hesum hugtøkunum.

Persónur er at skilja sum likamligur persónur, undir hesum einstaklingavirki og einkultpersónur í felagsskapi, sum heftir persónligt, solidariskt og beinleiðis. Síðstnevndu eru t.d. íognarfeløg, har eigararnir eru likamligir persónar. Orðingin er tann sama, sum var galdandi í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap og løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.

Felag er at skilja sum partafelag ella smápartafelag. Ásett verður við hesum, hvørji sjálvstøðug løgfrøðilig feløg kunnu reka vinnuligan fiskiskap, nevniliga partafeløg og smápartafeløg. Sambært lóg um vinnuligan fiskiskap skal felagið vera partafelag, smápartafelag, lutafelag ella partsreiðarí. Við løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi varð nýtt krav sett inn, sum avmarkaði, hvørji sjálvstøðug løgfrøðilig feløg kundu reka vinnuligan fiskiskap. Hetta varð gjørt fyri at sleppa undan, at fyritøkur vórða skipaðar á ein hátt, har gjøgnumskygnið er lítið viðvíkjandi ognarviðurskiftunum o.a., umframt, at tað var lættari at hava eftirlit við, at reglurnar vórðu fylgdar. Hetta er sama áseting, sum er í alilóggávuni.

Við hesum uppskoti verður hildið fast við hesa broyting. Feløg, ið ikki eru partafeløg ella smápartafeløg, sum í 2017 hava rikið fiskifar, kunnu tó, eins og áður, halda fram við virkseminum sambært skiftisreglunum, um hesi eru heimahoyrandi í Føroyum. Nýggja kravið fer sostatt ikki at ávirka hvønn felagsform, feløg, sum í 2017 hava rikið fiskifar, reka sítt virksemi í.

Stk. 3. Treytirnar, ásettar fyri, at persónar til einhvørja tíð eru heimahoyrandi í Føroyum, vera við hesum uppskotinum óbroyttar.

Nr. 1-2). Ásett verður, at fyri at persónur skal vera mettur heimahoyrandi í Føroyum, skal persónurin vera skrásettur í Landsfólkayvirlitinum og hava verið skrásettur í Landsfólkayvirlitinum í Føroyum seinastu 2 árini. Hesi krøvini vóru eisini í løgtingslógini um vinnuligan fiskiskap og løgtingslógini um fyrisiting av sjófeingi. Krøvini eru sostatt óbroytt.

Nr. 3-4). Eisini verður kravt, at persónar skulu vera fult skattskyldugir í Føroyum og ikki skulu vera mettir heimahoyrandi í øðrum landi sambært skattalóggávuni. Hesi krøvini vóru eisini í løgtingslógini um vinnuligan fiskiskap og løgtingslógini um fyrisiting av sjófeingi. Krøvini eru sostatt óbroytt.

Kravið, um at persónar ikki skulu vera mettir heimahoyrandi í øðrum landi sambært skattalóggávuni, bleiv sett inn í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, og er sostatt ein broyting í mun til løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. Hetta varð gjørt fyri at tryggja, at persónar ikki verða skattaðir í øðrum landi av inntøku av fiskiveiðu. Tað kunnu vera støður, har persónar eru fult skattskyldugir í Føroyum og í øðrum landi í senn. Føroyar hava tá tvískattasáttmálar við fleiri lond, sum áseta, at persónar í slíkari støðu skattliga skulu viðgerast, sum teir bert eru heimahoyrandi í øðrum landinum. Hetta verður í fyrstu atløgu avgjørt við støði í, hvar persónurin hevur fastan bústað, og um hann hevur fastan bústað í

tveimum londum, so verður hugt eftir, hvar hann hevur sterkasta persónliga og økonomiska tilknýtið, t.e. har hann hevur høvuðsáhugamál síni. Eisini kann hyggjast eftir, hvar persónurin vanliga er, umframt, hvar hann er ríkisborgari. Alt hetta eru metingar, sum skattamyndugleikarnir gera við støði í ásetingum í tvískattasáttmálum. Um niðurstøðan hjá skattamyndugleikunum verður, at persónur skal viðgerast, sum hann er heimahoyrandi í øðrum landi enn Føroyum, kann ikki tryggjast, at inntøkurnar í øllum førum kunnu skattast í Føroyum. Avgerandi er, hvussu virksemið tá er skipað. Við hesi áseting verður hildið fast um, at treyt fyri at reka vinnuligan fiskiskap er, at persónur sambært skattalóggávuni ikki verður mettur heimahoyrandi í øðrum landi. Soleiðis verður eisini frameftir tryggjað, at inntøkurnar koma til skattingar í Føroyum og ikki í øðrum landi. Tað eru niðurstøðurnar hjá skattamyndugleikunum, sum eru avgerandi fyri, um persónur sambært skattalóggávuni verður mettur heimahoyrandi í øðrum landi ella í Føroyum.

Stk. 4 ásetir tær treytir, sum verða settar til partafeløg og smápartafeløg, fyri at verða mett heimahoyrandi í Føroyum.

Nr. 1). Fyri at verða mett sum felag, sum er heimahoyrandi í Føroyum, skal felagið vera skrásett í Føroyum hjá Skráseting Føroya ella fráboðað Skráseting Føroya sum undir stovnan. Henda treyt er tann sama, sum er í galdandi lóggávu.

Nr. 2). Kapitalpartar í partafelagnum ella smápartafelagnum skulu gevast út við navni. Henda treyt er óbroytt síðani løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap og skal tryggja, at møguleiki er fyri at fylgja við í, hvør eigur skipini, sum hava veiði- og fiskiloyvi.

Nr. 3). Felagið skal, eins og í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, hava høvuðssætið í Føroyum, umframt at veruliga leiðslan í felagnum skal hava sætið í Føroyum. Við hesi orðingini verður ikki bert tryggjað, at formliga høvuðssætið er í Føroyum, men eisini, at veruliga leiðslan hevur sætið í Føroyum. Í hesum sambandi skal viðmerkjast, at tvískattasáttmálar vanliga áseta, at um feløg hava heimstað í fleiri londum, skulu tey bert verða mett at hava heimstað í tí landi, har veruliga leiðslan hevur sætið. Um veruliga leiðslan er í øðrum landi, verður ikki tryggjað, at allar inntøkur felagsins koma til skattingar í Føroyum. Tá avgerast skal, um veruliga leiðslan hevur sætið í Føroyum í skattligum høpi, verður ein ítøkilig meting gjørd í hvørjum einstøkum føri, har dentur verður lagdur á veruligu viðurskiftini í sambandi við avgerðir um dagligu leiðsluna hjá felagnum. Praksis í skattahøpi verður avgerandi fyri, um treytin er lokin sambært hesi lóg um, at veruliga leiðslan í felagnum skal hava sætið í Føroyum.

Nr. 4). Í galdandi løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi vórðu reglurnar um útlendskan ognarskap broyttar soleiðis, at útlendingar ikki longur kundu eiga í ella hava avgerðarrætt í feløgum, sum ráða yvir føroyskum veiðirættindum. Við hesum uppskotinum verður hetta broytt.

Útlendskur ognarskapur verður við uppskotinum aftur loyvdur í føroyskari fiskiveiðu, tó við í mesta lagi 1/4. Tað er sostatt ein treyt hjá nýggjum feløgum, at eigararnir av í minsta lagi 3/4 av øllum eginpeninginum, harundir partapeninginum, sum somuleiðis eiga í minsta lagi 3/4 av atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, eru heimahoyrandi í Føroyum og lúka treytirnar um at vera heimahoyrandi í Føroyum sambært stk. 3.

Harafturat er treytin frá løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap um, at skal felagið luta út vinningsbýti, skal føroyski parturin í minsta lagi fáa útlutað 3/4, sett innaftur. Henda treyt

kom inn í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap við løgtingslóg nr. 68 frá 7. juni 2007 um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, sum ein herd treyt fyri at tryggja, at veiðirættindini eru undir føroyskum ræði. Hetta kravið verður við hesum aftur positivt nevnt í lóggávuni.

Eru eigararnir feløg, er neyðugt at hyggja afturum feløgini eftir øllum eigaraskaranum. Tað er ikki nóg mikið bert at hyggja eftir, um felagið, sum beinleiðis stendur sum eigari, lýkur treytirnar, men neyðugt er at leita aftur til teir likamligu persónarnar, sum eru við í slíkum felagsligum bygnaði, og um treytirnar um at vera heimahoyrandi í stk. 3 eru loknar fyri likamligu persónarnar, ið eiga minst 3/4 av felagnum.

Neyðugt er m.a. at tryggja, at tað ikki eru ásetingar í viðtøkum, partaeigaraavtalum ella øðrum avtalum, sum flyta rættin at taka avgerðir til onnur enn føroysku eigararnar. Eisini er neyðugt t.d. at hyggja eftir starvsreglugerðini fyri nevndina ella øðrum avtalum, fyri at tryggja, at meirilutin av nevndini, sum skal vera føroyskur, sambært ásetingunum í nr. 6, ikki reelt missir meirilutan, og at hyggja eftir lánsavtalum og øðrum skjølum fyri at tryggja, at treytir ikki eru avtalaðar, sum flyta avgerðarrættin frá eigarunum.

Nr. 5). Í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap var ásett, at ábyrgdarpeningur skuldi teljast uppí, tá uppgjørt varð, um útlendingar áttu meir enn 1/3 av felagnum.

Í verandi lóggávu varð krav sett inn um, at feløg ikki kunnu hava skuld til útlendingar, sum stendur aftan fyri aðrar kravánarar (ábyrgdarpening). Heldur ikki kunnu feløg hava skuld til útlendingar, har renturnar av skuldini ella tað, sum skal rindast aftur, er knýtt at yvirskotinum í felagnum. Ásett var sostatt eitt forboð ímóti summum lánum.

Mett verður, at slík skuld, sum her er umrødd, skuld, sum stendur aftan fyri aðrar kravánarar (ábyrgdarpeningur) og skuld, sum er knýtt at yvirskotinum í feløgunum, liggur tætt uppat partapeningi, og kann geva kravánara stóra ávirkan, eins og slík skuld ofta hevur stórar rentur. Við at tengja rentur ella afturgjald at yvirskoti í felagnum, verður mett, at møguleikin fyri at fáa yvirskot og vinning úr felagnum er stórur.

Fyri at tryggja, at útlendingar ikki fáa ov stóra ávirkan á felagið, og at yvirskot og vinningur ikki verður fluttur av landinum gjøgnum slík lán, verður hildið fast um forboðið fyri slíkum lánum frá feløgum, ið ikki vera mett, at vera heimahoyrandi í Føroyum.

Nr. 6). Lógin um vinnuligan fiskiskap kravdi, at 2/3 av nevndini skuldu lúka treytirnar um tilknýti til Føroyar. Í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi var sett sum krav, at meirilutin av limunum í nevndini ella eftirlitsráðnum, skulu lúka treytirnar í stk. 3 um tilknýti til Føroyar, eins og tað er gjørt í alilógini.

Við hesum uppskoti verður hildið fast um verandi áseting.

Nr. 7). Lógin um vinnuligan fiskiskap hevði ikki nakað krav um, at stjóri felagsins skuldi hava ávíst tilknýti til Føroyar. Í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi varð sett sum krav, at stjórin skal vera skrásettur í fólkayvirlitinum, og skal vera fult skattskyldugur í Føroyum, tá hann er stjóri. Hetta er eisini ein tillaging til treytirnar í alilógini, soleiðis at reglurnar, sum verða settar til leiðsluna í feløgum, sum reka fiskivinnu og alivinnu, eru eins. Við hesum uppskoti verður hildið fast um verandi áseting.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin hevur heimild til at geva undantak frá treytunum um ognarviðurskiftini, tá talan er um royndarveiðu ella undirvísingarætlanir. Talan kann eitt nú vera um at leiguskráseta skip til slík endamál. Undir vanligum umstøðum kann eitt leiguskrásett fiskifar ikki reka vinnuligan fiskiskap, tí tað ikki lýkur kravið um ognarviðurskifti. Ásetingin kann nýtast til t.d. útlendingar, sum hava áhuga at royna eftir fiskasløgum ella á leiðum, sum føroyska fiskivinnan ikki hevur áhuga í ella kunnleika til, men sum, hóast hetta, má metast at fáa týdning fyri føroysku fiskivinnuna seinni.

Undantak kann eisini veitast, um fiskifar, ið er til fiskiskap, er fyri óhappi, t.d. størri eldskaði ella størri maskinbrek. Í slíkum førum kann landsstýrismaðurin geva undantak, soleiðis at annað skip kann verða nýtt í fiskiskapinum, til upprunaliga skipið aftur er siglingarklárt.

Stk. 6. Fyri at tryggja, at ásetingarnar um skuld til útlendskan áognara og reglurnar um vinningsbýti eru í samsvari við lógina, verður við hesi áseting kravt, at feløgini eina ferð um árið lata inn upplýsingar, váttaðar við trygd frá grannskoðara um, hvør skuld er í felagnum, sum stendur aftan fyri aðrar kravánarar, ella har rentur, ella tað, sum skal rindast aftur, er knýtt at yvirskotinum í felagnum, og upplýsingar um vinningsbýti, ið er lutað út til útlendskan partaeigara. Kravið er tó bert galdandi fyri feløg, sum hava avreiðingarvirði yvir 4 mió. kr.

Tað er trupult og umsitingarliga krevjandi hjá Fiskimálaráðnum, ella stovnum undir Fiskimálaráðnum, at eftirkanna hesi viðurskifti. Neyðugt er at fara niður í roknskaparskjøl, ítøkilig lánsskjøl o.a. Mett verður, at treytirnar í lógini um ábyrgdarpening, um skuld, sum er knýtt at yvirskotinum í felagnum, og treytirnar til útlutan av vinningsbýti til útlendskan partaeigara, verða betur røktar við at krevja upplýsingar frá eigarunum av fiskiførunum, og at krevja váttan við trygd frá óheftum grannskoðara av hesum upplýsingum. Mett verður rætt og rímiligt, at feløg, sum fáa rætt at gagnnýta fiskatilfeingið, sjálvi lata hesar upplýsingar til myndugleikan, og at hesi eisini fáa til vega váttanir av upplýsingunum við trygd frá óheftum grannskoðara.

Krøvini til ábyrgdarpening, til skuld til útlendingar og til vinningsbýti til útlendskan partaeigara, skulu vera lokin til einhvørja tíð. Eina ferð um árið skulu upplýsingar um ábyrgdarpening, lán til útlendingar og um vinningsbýti til útlendskan partaeigara, latast myndugleikanum. Upplýsingarnar, váttaðar við trygd frá grannskoðara, skulu latast myndugleikanum tann 1. juli á hvørjum ári. Hetta er eisini freistin fyri feløg at lata inn sjálvuppgávu til TAKS við roknskapi og vanliga eisini freistin fyri feløg at lata inn ársfrásøgn til Skráseting Føroya.

Stk. 7. Fyri at hava møguleika at fylgja við, hvør hevur ræðið á rættindum í føroyskari fiskiveiðu, gerst hetta best við at krevja, at broytingar í ognarviðurskiftum og láníviðurskiftum skulu boðast landsstýrismanninum frá, áðrenn slíkar broytingar fara fram, og at landsstýrismaðurin skal góðkenna slíkar broytingar, áðrenn tær kunnu fremjast.

Stk. 8. Til at viðgera, um treytirnar eru loknar í hesi grein, eigur umsitingin at fáa til vega, fyri tað fyrsta, prógv fyri, hvørjir eigararnir eru, limir í nevnd ella limir í eftirlitsráði, hvussu nevndin ella eftirlitsráðið er skipað og viðtøkur felagsins. Eisini skulu fáast til vega upplýsingar um fígging, tá tað er neyðugt at eftirkanna møguligan ábyrgdarpening og skuld, sum er knýtt at yvirskotinum í felagnum, og eisini um møguligar ásetingar eru, sum ávirka atkvøðu- og avgerðarrættin o.a. Í eftirkanningini skal m.a. hyggjast at, hvussu viðurskiftini eru skipað millum ávísar eigarar og møguligar avtalur við aðrar partar, eitt nú lánveitarar,

eisini fyri at tryggja, at talan ikki er um ábyrgdarpening ella skuld, sum er knýtt at yvirskotinum í felagnum og fyri at tryggja, at treytirnar um atkvøðu- og avgerðarrættin í felagnum eru loknar.

Til at sanna, um viðurskiftini eru í samsvari við treytirnar í hesi grein, kann vera neyðugt, at eigarin av fiskifarinum útvegar upplýsingar og váttanir frá stjóra og nevndarlimum, umframt frá øðrum, so sum ráðgevum, fíggingarstovnum o.a.
Øll skjøl kunnu krevjast í føroyskari týðing. Umsøkjari ber útreiðslurnar av hesi týðing.

Stk. 9. Um treytirnar í hesi grein ikki eru loknar, fellur veiðiloyvið burtur. Staðfest verður tó, at landsstýrismaðurin kann loyva, at viðurskiftini koma í rættlag innan ávísa freist. Í hesum tíðarskeiði kann landsstýrismaðurin áseta nærri treytir fyri virkseminum, t.d. at veiðirættindi ikki kunnu verða flutt til annað fiskifar. Mett verður ikki, at tað er skynsamt neyvt at áseta, hvør freistin skal vera í lógina, tí tað veldst nógv um umstøðurnar og hvørji viðurskifti, talan er um. Koma viðurskiftini ikki í rættlag, fellur veiðiloyvið burtur.

Stk. 10. Ásetingin tryggjar gjøgnumskygni við eigaraviðurskiftunum í føroyskari fiskiveiðu. Tað, sum landsstýrismaðurin kann almannakunngera, eru allir persónar ella feløg, sum beinleiðis ella óbeinleiðis ráða yvir rættindum at veiða ella reka vinnuligan fiskiskap. Hetta merkir, at eisini feløg, sum eiga partabrøv í felagi, sum hevur ræðið yvir rættindum at veiða ella rekur vinnuligan fiskiskap, kunnu almannakunngerast, og eigarar í slíkum feløgum heilt aftur til likamligar persónar. Tað eru tó bert upplýsingar um, hvørjir eigararnir eru og teirra eigaralutfall, sum verða almannakunngjørdar.

**Til § 12.**
Stk. 1-2. Skiftisreglurnar í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi halda við hesum fram fyri tey feløg og grunnar, sum í 2017 hava rikið fiskifar og áttu í feløgum, sum ikki lúka treytirnar í § 11, stk. 1-2 um, at tað bert eru partafeløg og smápartafeløg, sum kunnu reka vinnuligan fiskiskap. Hesi feløg og grunnar kunnu, um hesi í 2017 hava rikið fiskifør, halda áfram við virksemi sínum. Møguleiki er ikki eftir verandi og hesi lóggávu at stovna nýggjar grunnar til at reka fiskiveiðu og eiga í feløgum.

Henda skiftisregla varð sett inn í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, soleiðis at nýggju krøvini ikki komu at ávirka, hvønn felagsform feløg og grunnar, sum í 2017 høvdu rikið fiskifør, reka sítt virksemi í. Við hesum uppskoti heldur henda skiftisregla fram. Mett var ikki í sambandi við, at nýggju krøvini vóru sett inn í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, at tað fór at hava stóra ávirkan við sær fyri vinnuna, tí flestu feløg, sum í dag eru í vinnuni, eru skipað í partafeløg og smápartafeløg, og hevur gongdin verið tann, at feløg hava umskipað seg meir og meir í antin partafelag ella smápartafelag.

Treyt hjá feløgunum, fyri at kunna halda áfram við virkseminum, er tó, at feløgini lúka treytirnar í § 11, stk. 4 um at vera heimahoyrandi í Føroyum. Henda skiftisregla er eisini galdandi fyri tey feløg, sum eru fevnd av § 12, stk. 3.

Treyt hjá grunnunum fyri at kunna halda áfram við virkseminum er, at grunnurin lýkur treytirnar í § 11, stk. 4, tó undantikið treytina í stk. 4, nr. 4 fyri sjálvsognargrunn ella fyri grunn, sum landið eigur.

Landsstýrismaðurin kann, eins og í verandi lóggávu, í serligum førum geva undantak frá felagsforminum og ognarviðurskiftunum, tá talan er um grunnar. Hugsað verður her t.d. um

tær heilt serligu støður, har grunnar við kapitali, frá eitt nú landinum, hava verið stovnaðir í tíðum við búskaparligari kreppu.

Stk. 3. Sambært galdandi lóg kunnu útlendingar ikki longur eiga nakran lut í feløgum, sum ráða yvir føroyskum veiðirættindum. Ein skiftisskipan var tó galdandi fyri verandi feløg soleiðis, at hesi feløg fingu eina 6 ára skiftistíð at laga seg til broyttu treytirnar. Endamálið var, at frá 1. januar 2025 skuldi eingin útlendskur eigarapartur vera í føroyskari fiskiveiðu.

Við hesi áseting verða reglurnar fyri verandi feløg við útlendskum ognarluti broytt. Tey feløg, sum í 2019 hava havt ræði á rættindum at veiða, og sum hava útlendskar partaeigarar, ið ikki lúka treytina um 1/4 ognarlut, kunnu, tá hendan lógin fær gildi, halda áfram við verandi virksemi, men nú uttan tíðaravmarking.

Í verandi virksemi liggur, at útlendski partaeigarin kann halda áfram við tí ognarluti, t.d. 1/3, sum hesin hevur í felagnum, tá løgtingslógin fær gildi. Feløgini kunnu virka fult út sum onnur feløg, t.d. við at keypa á uppboðssøluni í 2020, tó treytað av, at útlendski ognarluturin ikki veksur. Av tí, at endamálið við hesi løgtingslóg í mun til galdandi ikki longur er, at eingin útlendskur eigaralutur skal vera í føroyskari fiskiveiðu, kunnu verandi feløg við útlendskum ognarluti, fevnd av hesi áseting, virka við linari treytum enn teimum, sum eru galdandi í verandi lóggávu.

Tá partabrøv ella kapitalpartar verða seldir, skal keyparin tó lúka treytirnar í § 11, stk. 4, nr. 4. Feløgini, sum hava útlendskar partaeigarar, kunnu sostatt halda áfram við virkseminum, men verða partabrøv ella kapitalpartar seld, so skal keyparin av partabrøvunum ella kapitalpørtunum lúka treytirnar í lógini um at vera heimahoyrandi í Føroyum. Henda áseting skal m.a. tryggja, at um nýggir eigarar keypa eitt verandi felag, fevnt av § 12, stk. 3, skal treytin um, at útlendski ognarluturin ikki má vera meira enn 1/4 verða lokin.

Treyt fyri at kunna halda áfram við virkseminum er harumframt, at reglurnar í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap um útlendskan ognarlut framhaldandi eru loknar. Hesar reglur eru, at eigarar av í minsta lagi 2/3 av eginpeninginum, harundir partapeninginum, umframt ábyrgdarpeninginum, sum somuleiðis eiga í minsta lagi 2/3 av atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, lúka treytirnar fyri at vera heimahoyrandi í Føroyum í § 11, stk. 3.

Treytin frá løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, um, at skal felagið luta út vinningsbýti, skal føroyski parturin í minsta lagi fáa útlutað 2/3, fevnir sambært hesi áseting eisini um feløg, fevnd av hesi skiftisreglu. Verandi eigarar kunnu sostatt ikki luta út vinningsbýti til útlendskar eigarar við meira enn tí, sum samsvarar við ognarlutin hjá útlendska partaeigaranum. Eigur útlendski partaeigarin t.d. 27% av einum felagi, kann felagið í mesta lagi luta útlendska partaeigaranum 27% av vinningsbýtinum.

Nýggj avtala um lán ella skuld, sum ikki lýkur treytirnar í § 11, stk. 4, nr. 5, kann ikki gerast eftir, at lógin er komin í gildi. Hetta merkir, at eftir at lógin er komin í gildi, kann ikki gerast avtala um, at kravánari stendur aftan fyri aðrar kravánarar, um kravánarin er útlendingur, heldur ikki kann takast lán, har renturnar av láninum, ella tað, sum skal rindast aftur, er knýtt at yvirskotinum í felagnum, um lánveitarin ikki verður mettur, at vera heimahoyrandi í Føroyum. Hetta er sama treyt, sum er í galdandi lóggávu, og treytin er sostatt óbroytt í mun til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.

**Til § 13.**
Greinin ásetir ovara mark fyri, hvussu stóran part av føroysku veiðirættindunum feløg ella einstaklingar kunnu hava ræði á. Greinin er í innihaldi framhald av § 10 í verandi lóg, sum tó ongantíð fekk gildi. Sammett við verandi lóg eru tó onkrar broytingar og tillagingar gjørdar, m.a. fyri at leggja upp fyri, at tað frameftir verður fiskidagaskipan undir Føroyum og ikki ein kvotuskipan, sum galdandi lóg leggur upp til. Ein onnur broyting er, at farið verður burtur frá at seta hámark fyri hvønn høvuðsfiskiskap, sum vanliga fevnir um ymisk fiskasløg við ymiskum marknaðarvirði. Hetta ger, at frameftir er ikki tørvur at hava ásetingar um toskajavnvirði.

Stk. 1 ásetir, hvussu stóran part av samlaðu fiskidøgunum ella kvotunum, innan fyri hvønn av teimum nevndu bólkunum sær, ein persónur ella felag í mesta lagi kann hava ræði á.

Í fiskidagaskipanini í føroyskum sjógvi er ásett, at í hvørjum bólki kann ein persónur ella felag í mesta lagi hava ræði á 20 prosentum av fiskidøgunum í hvørjum bólki. Í fiskiskapinum eftir botnfiski undir Íslandi, sum er kvotuavmarkaður, kann ein persónur ella felag í mesta lagi hava ræði á 35 prosentum av samlaðu føroysku botnfiskakvotuni í íslendskum sjógvi. Samsvarandi tal fyri Barentshavið er eisini 35 prosent. Viðvíkjandi uppsjóvarfiski er skotið upp, at ein persónur ella felag í mesta lagi kann hava ræði á 35 prosentum av heildarkvotuni av hvørjum fiskaslagi sær. Høvuðsfiskasløgini í uppsjóvarfiskiskapinum hjá føroyskum skipum, sum er skipaður við egnum árskvotum, eru makrelur, svartkjaftur og norðhavssild, umframt lodna í íslendskum sjógvi og heystgýtandi sild í føroyskum sjógvi.

Avmarkingin um, hvussu nógv ein kann hava ræði á, kann tó lættliga sleppast undan, um bert verður hugt eftir beinleiðis eigaranum, tí persónur ella felag kann koma uttan um avmarkingina, t.d. við at seta nýtt felag ímillum seg og felagið, sum eigur fiskifarið, ella lata makan standa fyri einum parti av felagnum. Hetta er orsøkin til, at avmarkingin eisini fevnir um nærstandandi og óbeinleiðis ognarviðurskifti. Nærstandandi telja við í uppgerðini yvir støddina á rættinum, sum persónur ella felag í mesta lagi kann ráða yvir.

Fyri at forða fyri, at farið verður uttan um lógarásetingarnar, skulu eisini óbeinleiðis ognarviðurskifti takast við, tá avgerast skal, um ovara markið er rokkið. Óbeinleiðis ognarviðurskifti eru, tá ein persónur ella eitt felag hevur ræðið á rættindum, ella part í rættindum gjøgnum eitt annað felag, ella gjøgnum fleiri feløg. Tað kann t.d. vera ein persónur, sum eigur eitt holdingfelag, sum eigur eitt dótturfelag, sum eigur fiskifar og hevur ræðið á rættindum. Persónurin, sum eigur holdingfelagið, verður mettur óbeinleiðis at hava ræði á rættindunum. Um so er, at tað eru fleiri persónar aftan fyri holdingfelagið, eigur hvør av persónunum ein lutfalsligan part.

Ein persónur ella eitt felag kann eiga part í fleiri feløgum við atgongd til veiðirættindi, og tá eru tað allir ognarlutir hjá viðkomandi, sum skulu leggjast saman. Tað verður soleiðis altíð hugt eftir, hvørjir persónar standa aftan fyri feløgini, og hvussu stóran part hesir eiga samlað í hvørjum bólki sær fyri at tryggja, at endamálið við ásetingini kann røkkast.

Stk. 2. Ásett er, at egin árskvota, sum eigarin av fiskifari flytur millum ár, verður roknað við í egnu árskvoturnar hjá rættindahavarunum tað árið, kvotan upprunaliga hoyrir til. Flutt kvota skal við øðrum orðum ikki telja við í egnu árskvoturnar hjá rættindahavaranum tað árið, kvotan verður flutt til. Verða 10% av egnu árskvotuni t.d. flutt frá 2020 til 2021, verða tey

10%-ini roknað við í egnu árskvotuna í 2020 og ikki í 2021. Verða 10% av kvotuni í 2021 fiskað a conto í 2020, verða tey 10%-ini roknað við í egnu árskvotuna í 2021 og ikki í 2020.

Stk. 3. Egnir fiskidagar ella egnar kvotur, sum reiðarin útvegar sær í einstaka fiskiárinum eftir vanligu reglunum í lógini, verða ikki tald við, tá avgerast skal, um treytirnar í stk. 1 eru loknar. Bert um fiskidagar ella kvotur verða flutt endaliga, verða hesi tikin við í uppgerðina.

Stk. 4 allýsir "nærstandandi". Nærstandandi er at skilja sum hjúnafelagi, skyld í stígandi ella fallandi linju, systkin, hjúnafelagi hjá teimum nevndu persónunum og aðrir persónar, ið hava staðið hvørjum øðrum serliga nær. Orðingin fevnir eisini um aðrar persónar, ið hava staðið hvørjum øðrum serliga nær. Undir hesa orðing koma eisini samlivandi, t.e. persónar sum liva saman ella persónar, sum ætla at gifta seg. Í flestu førum vilja fosturbørn eisini koma inn undir orðingina. Avgerandi fyri, um persónar verða mettir at vera nærstandandi er, um mett verður , at tað hevur verið eitt nøkulunda líka tætt tilknýti millum persónarnar, sum vanligt er millum tey skyldfólk, ið beinleiðis eru nevnd í lógartekstinum.

Stk. 5 er skiftisregla, ið loyvir virksemi at halda fram, men ikki økjast, um so er, at persónar ella feløg hava rokkið ovara markinum, ásett í stk. 1, áðrenn gildiskomu lógarinnar.

Stk. 6. Heimildin hjá landsstýrismanninum, til í serligum førum at geva undantak frá ovara markinum fyri miðsavnan av vinnuni, kann t.d. verða nýtt í sambandi við, at ein vinna er fyri stórari afturgongd. Fyri at fiskiskapurin innan ávísu vinnuna ikki skal detta niðurfyri, kann landsstýrismaðurin loyva, at persónar ella feløg, sum hava rættindini, sum eru eftir í vinnuni, fara upp um ovaru mørkini í hesi grein.

Stk. 7. Fyri at tryggja ásetingarnar í stk. 1, er neyðugt at kunna fylgja við, hvør eigur fiskiførini, ið hava rættindini, og serliga til at krevja, at broytingar í ognarviðurskiftunum í fiskiførum skulu góðkennast av landsstýrismanninum sambært hesi grein um miðsavnan av veiðirættindum. Tað er ofta lættari at góðkenna broytingar, áðrenn tær fara fram, og hesar skulu tí vera til taks til góðkenningar, áðrenn tær verða framdar.

Broytast ognarviðurskiftini í felagi, sum eigur fiskifar við veiðirættindum, soleiðis, at farið verður upp um ovara markið í stk. 1, kann landsstýrismaðurin geva eina ávísa freist, sum verður ásett eftir, hvørji viðurskifti talan er um, til at fáa viðurskiftini í rættlag, annars falla rættindini, sum eru ov nógv, aftur til landið.

Ein slík broyting kann til dømis íkoma, um ein persónur ella felag, sum longu hevur skip við veiðirættindum, keypir seg inn í eitt annað felag við skipi og rættindum. Hetta broytir ikki bara ognarviðurskiftini í hesum felag, men kann eisini gera, at ræðið yvir veiðirættindum í skipanini broytist.

Stk. 8. Fyri at tryggja ovaru mørkini fyri miðsavnan av vinnuni, kann landsstýrismaðurin krevja allar neyðugar upplýsingar, bæði frá eigaranum sjálvum og øðrum, sum kunnu hugsast at hava upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at tryggja ásetingarnar í greinini. Tær upplýsingar, sum kunnu innheintast, eru upplýsingar um ognarviðurskifti og um veiðu. Eitt nú kann hugsast, at Fiskimálaráðið innheintar hesar upplýsingar til viðgerðina av málunum:

- Stovningarsamtykt
- Viðtøkur fyri felagið
- Váttan um innføring í partaeigarayvirlit

• Partaeigarayvirlit
• Tekningarútskrift frá Skráseting Føroya
• Møguligur partaeigarasáttmáli
• Onnur skjøl, sum hava týdning fyri ognarviðurskiftini í felagnum
• Roknskaparupplýsingar

Stk. 9. Ásetingin er ætlað at tryggja gjøgnumskygni við ognarviðurskiftunum í føroyska fiskiflotanum. Tað, sum landsstýrismaðurin kann almannakunngera, eru allir persónar ella feløg, sum hava rættindi til fiskiskap, og hvussu stóran part av rættindunum hesir hava ræði á. Tað eru tó bert upplýsingar um, hvørjir eigarar eru og teirra eigaralutfall, sum verða almannakunngjørdar.

**Kapittul 4. Uppboðssøla í 2020**

**Til § 14.**
Stk. 1 ásetir, at í 2020 verður uppboðssøla av svartkjafti, makreli og norðhavssild. Tað er bert í 2020, at boðið verður út, tí talan er um langtíðarrættindi, sum nærri útgreinað undir § 15.

Boðið verður út sum sølukvota:
- 14,5 % av heildarkvotuni av svartkjafti, tó í mesta lagi 14,5% av 350.000 tonsum.
- 8,7 % av heildarkvotuni av makreli, tó í mesta lagi 8,7 % av 90.000 tonsum.
- 8,7% av heildarkvotuni av norðhavssild, tó í mesta lagi 8,7 % av 65.000 tonsum.

Nøgdirnar í stk. 1 samsvara við tær nøgdir, sum, sambært galdandi lóggávu, høvdu verið bodnar út sum sølukvota í 2020 (frádrigið ta nøgd, sum longu er sett av til 3 og 8 ára rættindi).

Stk. 2 ásetir, at er heildarkvotan í 2020 oman fyri mørkini, kann landsstýrismaðurin, umframt nøgdina sambært stk. 1, bjóða út nøgd oman fyri mørkini sum uppboðsárskvotu, og/ella seta nøgd av til fiskivinnuroyndir og verkætlanir sambært § 49. Talan kann vera um, at nøgdin skal partvíst bjóðast út og partvíst setast av til royndir, men talan kann eisini gerast um, at øll kvotan skal setast av til at bjóða út ella øll latast til vinnuligar royndir. Hvussu býtast skal millum hesi, verður avgjørt av ásetingunum í stk. 3.

Í stk. 3 er ásett, at parturin, sum í 2020 verður boðin út sambært stk. 1 og 2, og parturin, sum verður settur av til vinnuligar royndir og verkætlanir, sum útgangsstøði skulu vera tveir javnt stórir partar. Við í hesa meting skal takast, at 8,5% av tøku føroysku kvotuni av makreli, svartkjafti og norðhavssild, sambært § 49, stk. 2, árliga verða sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Hvørt talan kann blíva um tveir javnt stórar partar, verður tó eisini ávirkað av, at bjóðast kann út samanlagt (stk. 1 og stk. 2 ) í mesta lagi ein nøgd, sum samsvarar við lutfallið av 1 ára kvotum í mun til heildarkvotuna í 2019.

Í 2019 varð t.d. ein nøgd samsvarandi 42% av heildarkvotuni av norðhavssild seld sum 1 ára kvotur. Er heildarkvotan av norðhavssild í 2020 t.d. 95.000 tons, eru tað sostatt í mesta lagi 39.900 tons, sum samanlagt kunnu seljast í 2020.

Sum eitt hugsað dømi verður støðið tikið í, at heildarkvotan av norðhavssild í 2020 er 95.000 tons. Tá verða 5.655 tons boðin út sambært stk. 1 sum sølukvota [(8,7 % av 65.000 tons (markinum)]. Harumframt skal landsstýrismaðurin, sambært stk. 2, bjóða út 30.000 tons sum uppboðsárskvotu ella at seta av til vinnuligar royndir og verkætlanir [95.000 (heildarkvotan)

– 65.000 (markið) = 30.000 tons]. Lógin ásetir, at parturin, sum verður boðin út, og parturin, sum verður settur av til royndir, skal vera tveir javnt stórir partar. Í metingina av, hvussu stór nøgd av uppboðsárskvotuni skal bjóðast út, og hvussu stór nøgd skal til vinnuligar royndir og verkætlanir, skal takast við nøgdin av norðhavssild, sum sambært § 49, stk. 2 er sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir.

Siga vit sum hugsað dømi, at 10.000 tons av norðhavssild er sett av sambært § 49, stk. 2, er samlaða puljan, sum skal lutast í tveir partar, samanlagt 45.655 tons. Lutast skulu sostatt sum útgangsstøði góð 22.800 tons í partin, sum skal bjóðast út, og 22.800 tons til vinnuligar royndir og verkætlanir. Síðani skal eftirkannast, um nøgdin, sum sambært hesum verður sett til at bjóða út, er undir tí nøgd, sum landsstýrismaðurin í mesta lagi kann bjóða út eftir ásetingum í stk. 2. Hendan treytin er uppfylt, tí bjóðast kundi út munandi hægri nøgd við støði í lutfallinum frá 2019. Í hesum dømi høvdu sostatt 5.655 tons verið boðin út sum sølukvota og17.200 tons verið boðin út sum uppboðsárskvota, ímeðan 12.800 tons høvdu verið sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 14 og § 49, stk. 3, og 10.000 tons til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 2. Nevnda dømið er lýst í talvu 4.3 í viðmerkingunum til § 16.

Leggjast kann afturat, at eftir 2020 liggur parturin, sum verður ávikavist boðin út og latin til vinnuligar verkætlanir, fastur. Av tí, at partur av nøgdini, sum verður latin til vinnuligar royndir og verkætlanir, hevur støði í einum lutfalli av tøku føroysku kvotuni, kann munur vera á, hvussu stórar nøgdir verða settar av til ávikavist seldu langtíðarrættindi (§ 14, stk. 1 og 2) og til vinnuligu royndirnar og verkætlanir (§ 49, stk. 2 og 3) eftir 2020. Ein lýsing av hesum sæst í talvu 4.3.

Talva 4.1. niðanfyri vísir eitt hugsað dømi um sølukvotu og uppboðsárskvotu/kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir fyri makrel svartkjaft og norðhavssild í 2020. Fyri makrel og svartkjaft eru heildarkvoturnar undir markinum, tí verður eingin uppboðsárskvota seld á uppboði, og einki sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Bjóðað verða út 8,7% av heildarkvotuni av makreli, sum samsvara við 4.625 tons, og 14,5% av heildarkvotuni av svartkjafti, sum samsvara við 39.552 tons. Fyri norðhavssildina verður talan um bæði sølukvotu og uppboðsárskvotu/kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir, sum lýst omanfyri.

**Talva 4.1: Eitt hugsað dømi um sølukvotu og uppboðsárskvotu/kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir fyri makrel, svartkjaft og norðhavssild í 2020**

| Tons í 2020 | Makrelur | Svartkjaftur | Norðhavssild |
|---|---|---|---|
| Heildarkvota | 53.161 | 272.771 | 95.000 |
| Uppboðsárskvota/kvota til vinnuligar royndir og verkætlanir | 0 | 0 | 30.000 |
| Sølukvota | 4.625 | 39.552 | 5.655 |

Í viðmerkingunum til § 16 er nærri útgreinað, hvussu hesi rættindi síðani flyta seg í mun til hækkingar og lækkingar í heildarkvotum yvir ár.

**Til § 15.**
Stk. 1 ger greitt, at rættindini, sum verða seld sambært § 14, eru langtíðarrættindi við 12 ára gildistíð. Ásett verður tó samstundis, at tá uppboðssølutíðarskeiðið er runnið, verða rættindini

verandi hjá teimum, sum tá ráða yvir teimum, og verða tillutað sum egnar árskvotur. Tey vera tó ikki longur tengd at teimum gjaldstreytum, sum vóru knýtt at rættindum við søluni.

Stk. 2 ásetir, at sølu- og uppboðsárskvotur sambært § 14 kunnu verða bodnar út til persón ella felag, sum lýkur treytirnar viðvíkjandi ognarviðurskiftum og miðsavnan. Øll, sum lúka hesar treytir, kunnu sostatt bjóða seg fram. Krav verður ikki sett til, at keyparin skal hava fiskifar við veiðiloyvi, ella bát við fiskiloyvi í bólki 5, tá bjóðað verður, men hendan treytin er tó galdandi, um keyparin skal kunna gagnnýta rættindini.

Stk. 3 ger greitt, at treytin fyri at fáa fiskiloyvi er, at keyparin innan fyri 3 mánaðir eftir keypið kann vísa á fiskifar, sum hevur veiðiloyvi, ella sum uppfyllir treytirnar fyri at fáa veiðiloyvi, ella á bát í bólki 5, sambært lógini. Talan skal vera um fiskifar, sum hann sjálvur eigur. Er henda treyt ikki uppfylt, falla rættindini, eftir at freistin er úti, aftur til landið, og verða boðin út av nýggjum eftir ásetingunum í § 15.

Í stk. 4 er ásett, at rættindi keypt á uppboði kunnu ikki avhendast í 2020. Hetta er eitt frávik frá teimum reglum, sum annars eru um avhending av kvotum sambært lógini (§ 31). Endamálið er at tryggja, at keyparar ikki bjóða upp á kvotur á uppboði við víðarisølu fyri eyga, men bjóða við tí fyri eyga at brúka kvotuna við tí fiskifari, sum víst verður á, tá bjóðað verður, ella innan fyri 3 mánaða freistina. Lagt er samstundis upp til, at frá 2021 verða hesi rættindi fevnd av somu reglum um avhending sum aðrar kvotur eftir lógini.

Stk. 5 ásetir, at fyri at bjóða á uppboðssøluni krevst, at persónur ella felag skal vera góðkent frammanundan ætlaðum keypi á uppboði. Samstundis er í stk. 6 heimilað landsstýrismanninum at áseta reglur um hesa undangóðkenning og tíðarfreist fyri, nær upplýsingar skulu vera latnar myndugleikanum fyri at fáa undangóðkenning, áðrenn uppboðssølan fer í gongd.

Talan má vera um eina rímiliga freist at lata upplýsingar, bæði fyri myndugleikan at eftirkanna, um viðurskiftini eru í lagi, og fyri møguligan keypara, t.d. 4 vikur.

Stk. 7 ásetir, at landsstýrismaðurin í kunngerð ger nærri reglur um, hvussu uppboðssølan fer fram. Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um, hvussu sjálv sølan skal skipast.
Í kunngerð kunnu m.a. verða gjørdar reglur um at melda til luttøku til uppboðssøluna soleiðis, at tað kann tryggjast, at talan er um persónar ella feløg, sum lúka treytirnar sambært hesum lógaruppskoti. Ásetingar kunnu vera um, hvussu ofta kvota skal bjóðast út, og hvussu stórar nøgdir kunnu bjóðast út í senn. Slíkar treytir verða settar í kunngerðina, sum skipar uppboðssøluna.

Eisini vera ásetingar í kunngerð um, hvussu og nær keypspeningurin skal rindast. Møguleiki verður at krevja, at trygd verður stillað fyri keypspeninginum og um at rinda kostnaðin av uppboðssøluni.

Stk. 8 heimilar landsstýrismanninum at gera avtalu við uttan fyri standandi. Talan er um somu heimild, sum landsstýrismaðurin hevur havt í 2011, 2016 og 2017 og í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.

Stk. 9. Her er ásett, at gjaldið, fyri rættindi keypt á uppboðssølu, fer í landskassan.

**Til § 16.**

Stk. 1 ásetir, hvussu keypt nøgd av kvotu, sambært § 14, stk. 1 (sølukvotan), broytist við heildarkvotuni. Upp til mørkini, sum eru ásett í stk. 1, fylgja keyptu nøgdirnar hækkingum og lækkingum í heildarkvotuni lutfalsliga.

Stk. 2 ásetir, at er støðan í 2020 soleiðis, at heildarkvotan er ájavnt ella undir mørkunum, tá fylgja keyptu kvoturnar hækkingum og lækkingum í heildarkvotuni, eisini tá kvotan eftir 2020 er oman fyri markið.

Talva 4.2 vísir, hvussu ymisku kvoturnar flyta seg yvir ár, har útgangsstøðið verður tikið í, at heildarkvotan av makreli í 2020 er niðan fyri hámarkið, sambært § 14, stk. 1.

Heildarkvotan er tann nøgd, sum er eftir, eftir býtið við onnur lond, og tá kvota er sett av til gransking og hjáveiðu og til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 2.

Sum talvan vísir, verða 8,7% av heildarkvotuni á 53.161 tons, t.v.s. 4.625 tons, seld sum sølukvota. Ein partur verður latin teimum, sum í 2018 og 2019 hava keypt sær 3 og 8 ára rættindi á uppboði, sum eisini ásett í § 9. Talan er um 3.349 tons í 2020 (6,3% av 53.161 tonsum).

Restin av kvotuni undir markinum verður útlutað øðrum rættindahavarum, sum undir løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi hava fingið útlutað kvotur av hesum fiskasløgum. Hesir fáa sambært døminum 45.186 tons.

Eingin nøgd er at bjóða út sum uppboðsárskvota ella at seta av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært ásetingunum í § 14, men 8,5% av tøku føroysku kvotuni verða sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært ásetingum í § 49, stk. 2. Í yvirlitinum er nøgdin øll árini sett til 8,5 % av tøku kvotuni. Hetta kann broytast, um verandi menningarverkætlanir verða lagdar um til egnar kvotur, sambært ásetingunum í § 10, stk. 3 og 4.

Í 2021 hækkar heildarkvotan til 95.000 tons, men hóast hetta er oman fyri markið, nevnt í § 14, stk. 1, verður eingin uppboðsárskvota seld á uppboði, tí heimildin at selja er bert fyri 2020, og heildarkvotan er disponerað yvir, samsvarandi § 16, stk. 2. Í staðin verður kvotan útlutað millum teir aktørar, sum hava lut í kvotuni í 2020, har øll fáa sín lutfalsliga part av hækkingini, sum eisini ásett í § 16, stk. 2. Tá kvotan aftur lækkar, lata eisini øll lutfalsliga, sum lýst við døminum niðanfyri fyri ár 2022, tá kvotan aftur lækkar.

**Talva 4.2: Dømi um, hvussu ymisku makrelkvoturnar broytast, tá heildarkvotan av makreli í 2020 er niðan fyri ásetta hámarkið**

| **Makrelur** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** | **2025** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Mørk í lógini | 90.000 | 90.000 | 90.000 | 90.000 | 90.000 | 90.000 |
| Tøk føroysk kvota | 82.400 | 140.000 | 96.000 | 105.000 | 111.000 | 120.000 |
| Kvota nýtt til býti við onnur lond; sett av til gransking, hjáveiðu. | 22.235 | 33.100 | 23.515 | 25.318 | 23.732 | 24.184 |
| Nøgd til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 2. | 7.004 | 11.900 | 8.160 | 8.925 | 9.435 | 10.200 |
| Heildarkvota | 53.161 | 95.000 | 64.325 | 70.757 | 77.833 | 85.616 |
| Onnur | 45.186 | 80.750 | 54.676 | 60.143 | 66.158 | 72.774 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3 og 8 ára rættindi | 3.349 | 5.985 | 4.055 | 4.458 | 4.905 | 5.394 |
| Sølukvota | 4.625 | 8.265 | 5.596 | 6.156 | 6.770 | 7.448 |
| Onnur, 3 og 8 ára rættindi og sølukvota | 53.161 | 95.000 | 64.325 | 70.757 | 77.833 | 85.616 |
| Nøgd til uppboðsárskvotu/vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 14 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Hækking/lækking í heildarkvotu | 0 | 41.839 | -30.675 | 6.432 | 7.076 | 7.783 |

Stk. 3. Í lógaruppskotinum verður skilt ímillum sølukvotu og uppboðsárskvotu (§ 14, stk. 1 og 2). Hetta verður gjørt, tí munur er á, hvussu kvoturnar flyta seg í mun til broytingarnar í heildarkvotunum. Í § 16, stk. 3 er ásett, at um heildarkvotan í 2020 er oman fyri mørkini, fær tann, sum hevur keypt kvotu sambært § 14, stk. 1, sín lutfalsliga part av kvotuni undir markinum, og hann fær eisini part av tí kvotu, sum er oman fyri heildarkvotuna í 2020. Parturin av kvotuni oman fyri heildarkvotuna í 2020, er lutfallið av heildarkvotuni í 2020. Keypir ein persónur t.d. 1.000 tons av norðhavssild, sum sølukvotu í 2020, og heildarkvotan í 2020 er 100.000 tons, ímeðan heildarkvotan í 2021 er 110.000 tons, fær hesin persónur í 2021 tillutað 1.100 tons av norðhavssild (1.000 tons + 1/100 av 10.000 tonsum).

Stk. 4 ásetir, hvussu uppboðsárskvotan flytur seg. Tá heildarkvotan er hægri enn heildarkvotan í 2020, fáa hesar kvotur sín lutfalsliga part av hækkingini og gjalda lutfalsliga, tá kvotan lækkar aftur. Lutfallið er kvotan í 2020 samanborið við heildarkvotuna. Um heildarkvotan lækkar og gerst lægri enn heildarkvotan í 2020, er tað uppboðsárskvotan/kvotan til vinnuligar royndir og verkætlanir, sum lækkar samsvarandi lækkingunum í heildarkvotuni, inntil einki er eftir. Økist heildarkvotan aftur, er tað eisini bert uppboðsárskvotan/kvota til vinnuligar royndir og verkætlanir, sum fær lut í hækkingini frá markinum, inntil heildarkvotan aftur er á støði við 2020-kvotuna.

**Talva 4.3: Dømi um, hvussu ymisku kvoturnar av norðhavssild broytast, tá heildarkvotan av norðhavssild í 2020 er oman fyri ásetta hámarkið**

| **Norðhavssild** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** | **2025** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Mørk í lógini | 65.000 | 65.000 | 65.000 | 65.000 | 65.000 | 65.000 |
| Tøk føroysk kvota | 117.647 | 138.000 | 150.000 | 98.000 | 80.000 | 105.000 |
| Kvota nýtt til býti við onnur lond; sett av til gransking, hjáveiðu. | 12.647 | 13.730 | 13.456 | 10.442 | 9.818 | 11.075 |
| Nøgd til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 2. | 10.000 | 11.730 | 12.750 | 8.330 | 6.800 | 8.925 |
| Heildarkvota | 95.000 | 112.540 | 123.794 | 79.228 | 63.382 | 85.000 |
| Onnur | 55.250 | 65.451 | 71.996 | 55.250 | 53.875 | 55.250 |
| 3 og 8 ára rættindi | 4.095 | 4.851 | 5.336 | 4.095 | 3.993 | 4.095 |
| Sølukvota | 5.655 | 6.699 | 7.369 | 5.655 | 5.514 | 5.655 |
| Nøgd til uppboðsárskvotu/vinnuligar royndir og verkætlanir | 30.000 | 35.539 | 39.093 | 14.228 | 0 | 20.000 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| - harav at bjóða út sum uppboðsárskvota | 17.173 | 20.343 | 22.377 | 8.144 | 0 | 11.448 |
| - harav at lata til vinnuligar royndir og verkætlanir | 12.828 | 15.196 | 16.715 | 6.084 | 0 | 8.552 |
| Øking/minking í heildarkvotu millum ár | 0 | 17.540 | 11.254 | -44.566 | -15.846 | 21.618 |

Viðmerking: Býtið í talvuni, til ávikavist at bjóða út sum uppboðsárskvota og at lata til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært ásetingum í § 14, er nærri útgreinað undir viðmerkingunum til § 14. Gjørt verður eisini vart við, at í yvirlitinum er nøgdin til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, stk. 2, øll árini sett til 8,5% av tøku kvotuni. Hetta kann broytast, um verandi menningarverkætlanir verða lagdar um til egnar kvotur, sambært ásetingunum í § 10, stk. 3 og 4.

Talva 4.3 vísir, hvussu ymisku kvoturnar flyta seg yvir ár, tá støðan er sum lýst í § 16, stk. 3 og 4. Útgangsstøði verður tikið í, at heildarkvotan av norðhavssild í 2020 er oman fyri hámarkið sambært § 14, stk. 1.

Heildarkvotan er tann nøgd, sum er eftir, eftir býtið við onnur lond, og tá kvota er sett av til gransking og hjáveiðu og til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 2.

Sum yvirlitið vísir, verða 8,7% av heildarkvotuni upp til 65.000 tons seld sum sølukvota í 2020. Restin av kvotuni, undir markinum, verður latin teimum persónum ella feløgum, sum í 2018 og 2019 hava keypt sær 3 og 8 ára rættindi av norðhavssild og øðrum (t.e. tey, sum søguliga hava havt lut í hesum kvotum).

Tann partur av heildarkvotuni, sum er oman fyri markið, verður settur av til uppboðsárskvotu/kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir, t.e. samanlagt 30.000 tons. Við støði í ásetingunum í § 14, stk. 3 er síðani gjørt eitt býti av nøgdini til ávikavist tann part, sum skal bjóðast út sum uppboðsárskvota, og tann partin, sum skal latast til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49. Nærri frágreiðing, um hvussu komið verður fram til tølini, er at finna í viðmerkingunum til § 14, stk. 3, har støðið verður tikið í júst sama taldømi sum í talvu 4.3.

Eftir 2020 vera ikki fleiri sølur, og møguligar hækkingar í heildarkvotuni verða tí lutaðar út millum tey, sum longu hava part av heildarkvotuni. Í 2021 hækkar heildarkvotan til 112.540 tons. Yvirlitið vísir, at allar kvotur fáa lutfalsligan lut í teimum 15.196 tonsunum, sum kvotan hækkar frá 2020 til 2021, við støði í lutinum av 2020-kvotuni. Hetta sama ger seg galdandi í 2022, tá heildarkvotan áhaldandi hækkar og er oman fyri heildarkvotuna í 2020.

Í 2023 lækkar heildarkvotan og er undir nøgdini av heildarkvotuni í 2020. Sum yvirlitið vísir, lækka allar kvotur lutfalsliga niður til markið, sum er heildarkvotan í 2020. Síðani er tað bert uppboðsárskvotan/kvotan, sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir, sum lækkar tey 15.772 tonsini, sum heildarkvotan í 2023 er lægri enn heildarkvotan í 2020.

Í 2024 er ein nýggj støða, tí heildarkvotan lækkar nú niður um markið í lógini sambært § 14, stk. 1. Lækkingin frá 2024 til 2025 er 15.846 tons. Tey fyrstu 14.228 tonsini verða, sambært ásetingum í § 16, stk. 4, "tikin" frá uppboðsárskvotuni/kvotuni til vinnuligar royndir og verkætlanir, til hon er heilt burtur. Eftir er ein lækking á 1.618 tons, sum allar kvotur, sum eru eftir, t.e. 3 og 8 ára rættindi, sølukvotan og onnur, lata lutfalsliga til.

At enda er eitt dømi um, hvussu farið verður fram, um heildarkvotan síðani hækkar aftur upp um mørkini í § 14, stk. 1. Í 2025 hækkar heildarkvota upp á 85.000 tons, og allar kvotur

hækka lutfalsliga upp til markið, til tær eru á tí støði, sum tær vóru í 2020. Síðani er tað bert uppboðsárskvotan, sum hækkar við teirri nøgd av heildarkvotuni, sum er eftir, t.e. til 20.000 tons.

**Til § 17.**
Hendan greinin heimilar landsstýrismanninum at seta av til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, ella seta av til royndarfiskiskap o.a., sambært § 50, tey veiðirættindi, ið falla aftur til landið eftir ásetingunum í lógini. Her kann t.d. vera talan um rættindi, sum falla aftur til landið, orsakað av brúksskylduni.

**Kapittul 5. Skipan í fiskiskapinum hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi í føroyskum sjógvi**

**Til § 18.**
Stk. 1 ásetir fiskidagaskipan í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi í 2020.

Stk. 2. Ásett er, at persónur ella felag, sum í 2019 hevði og framvegis hevur rætt at fiska undir fiskidagaskipanini, varðveitir hendan rættin í 2020 og kann halda fram at virka í skipanini undir teimum treytum, sum lógin annars ásetir. Grundleggjandi rættarstøðan við rættinum at fiska í fiskidagaskipanini verður ikki broytt. Tað sum við hesum lógaruppskotinum verður broytt er, at farið verður frá eini skipan, har veiðirættindini eru knýtt at persóni ella felag, til eina skipan, har rættindini eru knýtt at ávísum fiskifari, sum skal hava veiðiloyvi. Fiskiloyvi til fiskidagaskipanina verður enn sum áður latið eigara av ávísum fiskifari, og í hvørjum fiskiloyvi verður ásett, hvussu nógvar fiskidagar viðkomandi fiskifar hevur.

Eins og fyri øll onnur veiðirættindi fær rættindahavari í fiskidagaskipanini, samsvarandi grein 8, eisini eina tíð at laga seg til, at nú skulu rættindini knýtast at ávísum fiskifari. Hettar merkir í stuttum, at fyrstu tíðina er ikki krav, at fiskifarið hevur veiðiloyvi, ella at rættindini beinanvegin skulu knýtast at ávísum fiskifari. Í tillagingartíðini kann rættindahavarin – eins og í galdandi lóg – velja, hvørjum fiskifari hann brúkar sína fiskidagar við. Fiskifarið skal tó lúka somu treytir, sum eru fyri at fáa veiðiloyvi.

Men rættindahavarin skal í seinasta lagi 1. januar 2022 hava gjørt av, hvørjum fiskifari fiskidagarættindini frameftir skulu knýtast at. Rættindini eru tá knýtt at ávísum fiskifari, sum fær veiðiloyvi, og sum fer at virka undir vanligu reglunum í lógini, m.a. soleiðis, at um rættindahavarin ætlar, at fiskidagarnir skulu brúkast við øðrum fiskifari hjá sær, kunnu dagarnir flytast eftir reglunum um at flyta veiðiloyvi ella reglunum um at flyta fiskidagar. Fiskidagar kunnu eisini avhendast øðrum rættindahavara, sum hevur fiskifar við veiðiloyvi.

Stk. 3. Fiskidagatalið í 2020 verður við hesum uppskotinum ásett við løgtingslóg, men ætlanin er, at frá og við fiskiárinum 2021 verða regluverkið og mannagongdin broytt soleiðis, at tað verður landsstýrismaðurin, sum við kunngerð ásetir fiskidagar við heimild frá Løgtinginum. Tá verður eisini ásett nærri, hvussu farið verður fram, tá fiskidagar skulu ásetast, og hvussu vísindalig ráðgeving, vinnulig ráðgeving, ráðførsla o.tíl. verða partar av skipanini. Ætlanin er somuleiðis, at fyrisitingin av fiskidagaskipanini verður skipað við eini veiðireglu og umsitingarætlan, sum er ein politisk langtíðarsemja um, hvussu fiskidagaskipanin skal umsitast yvir longri áramál. Endamálið við slíkari ætlan er ikki bara at stuðla undir góða stovnsrøkt og lívfrøðiliga burðardygd; umsitingarætlanin skal eisini taka vinnulig atlit, til dømis at tryggja vinnuni ávísan stabilitet í fiskimøguleikunum, við at

fiskidagatalið ikki sveiggjar ov nógv frá ári til ár, ella at fiskidagatalið verður ásett fyri meira enn eitt ár í senn

**Til § 19.**
Stk. 1. Henda grein ásetir bólkar av fiskiførum í fiskidagaskipanini og fiskidagatal fyri hvønn bólkin, tíðarskeiðið 1. januar 2020 til 31. desember 2020. Fiskidagatølini fyri hvønn bólk eru tey somu, sum í fiskiárinum 2019. Sammett við galdandi lóg er ein broyting, at heitini á hvørjum bólki verða umorðað, samstundis sum ásett er neyvari, hvørji fiskifør eru í hvørjum bólki, antin eftir skipastødd ella framtøkumegi (sí eisini viðmerking til stk. 3 í hesi grein). Hetta ber í sær, at fiskidagar bert kunnu brúkast við fiskiførum, ið eru innan fyri mark fyri stødd ella framtøkumegi.

Stk. 2. Ásetta fiskidagatalið fyri hvønn skipabólk sær er, eins og í verandi lóg, galdandi fyri fiskiskap á innaru fiskidagaleið, tó so, at fiskidagar, tillutaðir bólki 2 á ytru fiskidagaleið, bert kunnu brúkast til fiskiskap á ytru fiskidagaleið.

Stk. 3. Skotið er upp at seta inn nýggjar reglur um, at ásetta fiskidagatalið í hvørjum bólki bert kann brúkast við fiskiførum, sum eru innan fyri tey støddarmát ella framtøkumegi, og við tí reiðskapi, sum skilmarkar bólkin. Fyri allar bólkar verður sett eitt ovara mark og eitt niðara mark fyri stødd ella framtøkumegi. Fyri línuskip er tó einki ovara støddarmark. Hugsanin er so, at fiskidagarnir í hvørjum bólki bert kunnu brúkast við fiskiførum, ið eru innan fyri hesar avmarkingar. Hetta verður gjørt, tí at í hesum lógaruppskoti eru heilt nýggjar reglur fyri avhending av fiskidøgum. Frameftir verður loyvt at avhenda fiskidagar til øll føroysk fiskifør við veiðiloyvi, eisini til tey, ið framman undan ikki eru í fiskidagaskipanini. Regluverkið skal sjálvsagt leggja upp fyri, at fiskiorkan ikki gerst størri við slíkum avhendingum. Men fyri at umsetiligheitin ikki skal skeikla fiskidagaskipanina og tað bólkauppbýtið og flotabygnað, skipanin byggir á, verður mett neyðugt at hava reglur, sum neyvari skilmarka bólkarnar, og reglur, sum áseta, at fiskidagar í hvørjum bólki bert kunnu brúkast við fiskiførum, sum eru innan fyri ásettu mátini fyri stødd ella framtøku.

Endamálið við nýggju ásetingini er eisini at tryggja, at tillutaðir dagar í hvørjum bólki verða brúktir við teimum sløgum av fiskiførum og til tann fiskiskap, sum teir eru ætlaðir til. Ásetingin skal tryggja, at t.d. fiskidagar og veiðiorka á djúpum vatni ikki verður flutt inn á grynri vatn. Eftir nýggju regluni fer tað t.d. ikki at vera møguligt at avhenda fiskidagar, tillutaðir trolarum í bólki 2, til at verða brúktir við trolbátum í bólki 4 T. Heldur ikki fer at bera til at flyta fiskidagar í bólki 2 á trolara, sum hevur størri framtøkumegi enn 3000 HK.

Ásett er, at fiskidagarnir bert verða brúktir til fiskiskap á leiðum, har fiskifør, við teimum tilskilaðu avmarkingunum fyri stødd ella framtøkumegi, hava loyvi at royna. Hetta merkir, at um so er, at fiskidagar í t.d. bólki 3, línuskip, við gildiskomu lógarinnar eru á fiskifari minni enn 90 tons, kann hetta fiskifar ikki brúka bólk 3-dagarnar til veiðu við línu innan fyri 6 fjórðingar. Reglurnar um 90 tons og 6 fjórðingar eru ásettar í kunngerð um fiskiskapin í føroyskum sjógvi við fiskiførum, sum eru skrásett í Føroyum.

Stk. 4. Í bólki 2, 3, 4 A, 4 B og 4 T verða fiskidagar eins og nú tillutaðir hvørjum fiskifari sum egnir fiskidagar.

Stk. 5. Smærru útróðrarbátarnir (bólkur 5) fáa fiskidagar sum felags fiskidagar. Eins og í verandi lóg er heimilað landsstýrismanninum at gera nærri reglur fyri, hvør er at meta sum fult rikin og ikki fult rikin útróðrarbátur, og reglur um inntøkumark og veiðinøgdir. Nýtt í

hesum uppskoti er, at sagt verður neyvari, at landsstýrismaðurin kann gera reglur um, hvussu ásetta fiskidagatalið hjá bólkinum verður býtt millum fult riknu og ikki fult riknu útróðrarbátarnar. Endamálið við hesi áseting er at hava eina umsitingarliga smidliga skipan fyri, hvussu ásetta dagatalið í bólki 5 verður brúkt og býtt millum fult riknar og ikki fult riknar, sum m.a. leggur upp fyri, at driftin í bólkinum er rættiliga ymisk frá einum tíðarskeiði til annað, og eisini millum fiskiár. Í umsitingini av hesum verður dentur framhaldandi lagdur á, at eitt hóskandi fiskidagatal verður sett av til fult riknu útróðrarbátarnar í bólkinum.

Stk. 6. Eins og í galdandi lóg er ásett, at landsstýrismaðurin kann gera nærri reglur um, at útróðrarbátar í bólki 4 A og bólki 4 B kunnu býta tillutaðar dagar um í lutfallinum 1:2, um fiskað verður við snellu.

Stk. 7. Skotið er upp, at skipanin við sonevndum "livradøgum" heldur fram. Landsstýrismanninum er heimilað at tilluta eyka fiskidagar til fiskifør, sum avreiða livur. Í kunngerð verða ásettar nærri treytir um, hvussu avsettu fiskidagarnir kunnu tillutast fiskiførum, ið avreiða livur.

Stk. 8. Fyri tíðarskeiðið 1. oktober 2020 og árið út verður fiskidagatal ásett fyri bólkarnar 2, 3, 4 A, 4 B og 4 T fyri fiskiárið 2020, umframt tað dagatalið, sum er ásett í stk. 1. Fyri hvønn bólkin sær verður hetta fiskidagatalið javnt við tað talið av fiskidøgum, sum munurin millum fiskidagarnar, ið hvør bólkur sær sambært § 74, stk. 1, nr. 1-5 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, fekk tillutað fyri 2019 og talið av fiskidøgum í 2019, sum bólkurin sambært skrásetingum hjá Vørn tilsamans hevur brúkt fiskiárið 2019.

Stk. 9. Fiskifar, sum hevur nýtt allar sínar egnu fiskidagar, ið eru tillutaðir fiskifarinum í fiskiloyvi, kann, eftir 1. oktober 2020, halda fram við fiskiskapinum við støði í felags fiskidøgunum, ið eru ásettir hvørjum bólki sær sambært stk. 8. Brúktir fiskidagar verða tá fyri hvønn bólk sær avroknaðir felags fiskidøgunum, sum eru ásettir sambært § 19, stk. 8.

Stk. 10. Til tess at forða fyri møguligari misnýtslu, verður ásett, at fiskidagar, ið eru avhendir sambært § 30, stk. 1, ikki verða roknaðir sum brúktir fiskidagar, tá gjørt verður upp, um fiskidagar, tillutaðir við støði í § 19, stk. 1, eru brúktir.

Stk. 11. Ásett er, at eftir at fiskifar hevur fingið fiskiloyvi í ávísum bólki, verður tað verandi í bólkinum og kann ikki flyta bólk, hóast tað verður mált upp av nýggjum, ella broytingar verða gjørdar, sum ávirka stødd ella framtøkumegi. Ásetingin er ætlað at leggja upp fyri, at tað framvegis kunnu vera fiskifør, ið eru mátað upp eftir gomlu uppmátingini, t.e. í bruttoregistartonsum, BRT, og at um hesi verða mátað upp av nýggjum í bruttotons, BT, sum kann vera eitt annað tal, skulu tey framhaldandi hoyra til í sama bólki, sum tey frammanundan hava hoyrt til. Fiskifør flyta heldur ikki bólk, um broytingar verða gjørdar, sum ávirka støddarmát ella framtøkumegi, t.e. um skip verða longd ella umbygd ella skifta motor.

**Til § 20.**
Við tað, at fiskidagatalið í 2020 verður ásett við løgtingslóg, er tørvur á at áseta í lógini, hvat innara og ytra fiskidagaleið er. Hetta verður gjørt, tí hesi hugtøk hava týdning í sambandi við áseting og uppgerð av fiskidøgunum í § 19. Innara og ytra fiskidagaleið verður ásett sum økið innan fyri nevndu knattstøður í sambandi við at áseta fiskidagar og nýtslu og uppgerð av fiskidøgum. Hetta eru somu knattstøður, sum hava verið í undanfarnum lógum.

**Til § 21.**
Stk. 1. Grundleggjandi í allari fiskidagaskipanini er fiskiorkan ella veiðievnini hjá einstaka skipinum ella bátinum. Skal dagaskipanin stuðla undir góða stovnsrøkt, er umráðandi, at ein hevur tamarhald á fiskiorkuni. Fiskiorkan broytist oftani í lopum, t.d. um nýggjur reiðskapur ella tøkni verður brúkt (nýtt húkaslag, nýtt slag av troli o.tíl.), men eisini støðugt við betri tólum, dugnaligari manning og tílíkt. Fiskiorkan kann eisini broytast, tá skip verða skift út, og nýggj fiskifør koma inn, fiskifør verða umbygd ella fáa nýggjan motor, ella tá ið loyvi/fiskidagar verða fluttir av einum fiskifari á eitt annað effektivari fiskifar. Meginreglan í hesum uppskotinum er, eins og í undanfarnum lógum, at í hesum fiskiskapi, sum í 2020 og frameftir er skipaður við fiskidøgum, má samlaða fiskiorkan ikki økjast.

Stk. 2. Skotið er upp, at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvussu fiskiorka verður roknað út og ásett, grundað á veiðievni.

Stk. 3. Ásett er, at eisini í tíðarskeiðinum fram til 1. januar 2022, har rættindahavari í fiskidagaskipanini fær møguleika at tillaga seg til nýggju treytirnar, um at rættindini skulu knýtast at fiskifarinum, er grundreglan um, at fiskiorkan ikki skal gerast størri eisini galdandi. Í hesum tíðarskeiði hevur rættindahavarin møguleika at velja, hvat fiskifar skal gagnnýta fiskidagarnar, men í seinasta lagi 1. januar 2022, skal hann hava gjørt av, hvørjum fiskifari fiskidagarættindini endaliga skulu knýtast at. Grundarlagið undir møguligari stilling av fiskidøgunum, fyri at leggja upp fyri fiskiorkuni, er fiskiorkan hjá fiskifarinum, ið fiskidagarnir verða fluttir frá ella fiskifarinum, dagarnir seinast vóru á. Hetta merkir, at um t.d. rættindahavarin fyrst í tillagingartíðini hevur valt at knýta dagarnar at ávísum fiskifari, men seinni – áðrenn 1. januar 2022 - ger av, at brúka teir við øðrum fiskifari, skal leggjast upp fyri, at slík flyting ikki ger, at fiskiorkan verður størri. Tá verður støðið tikið í fiskiorkuni hjá fiskifarinum, dagarnir verða fluttir av.

Í teimum førum, har rættindahavarin velur at brúka sama fiskifar, sum hann hevur brúkt undir lógini um fyrisiting av sjófeingi, kann hann – alt annað óbroytt – halda fram við sama fiskidagatali.

Í øðrum førum kann hugsast, at fiskidagarnir als ikki hava verið virknir ella knýttir at ávísum fiskifari, síðani lógin um fyrisiting av sjófeingi tók við 1. januar 2018. Tá verður støðið tikið í fiskiorkuni, fiskidagarnir seinast vóru á undir lógini um vinnuligan fiskiskap.

**Til § 22.**
Stk. 1. Her er ásett, at landsstýrismaðurin kann gera nærri reglur fyri fiskiskapi, ið er eftir fiskasløgum og djórasløgum, ið ikki eru fevnd av fiskidagaskipanini, ella sum vanliga ikki eru høvuðsfiskasløg hjá teimum skipum og bátum, ið fiska undir fiskidagaskipanini – toskur, hýsa og upsi. Her kann vera talan um fiskiskap eftir øðrum botnfiski, uppsjóvarfiski ella øðrum djórasløgum, so sum skeljar, hummari, krabbi o.a.

Ásetingin gevur landsstýrismanninum heimild at áseta heildarkvotu, reglur um atgongd, býti av heildarkvotum millum bólkar av fiskiførum, einstøk fiskifør, veiðihættir, og hvussu fiskiskapurin annars skal fara fram. Harumframt kann talan vera um reglur, sum avmarka talið av fiskiloyvum og reglur um loyvdar fiskileiðir, reiðskap og hjáveiðireglur.

Talan er í høvuðsheitum um somu heimildir, ið landsstýrismaðurin hevur í verandi sjófeingislóg.

Stk. 2. Her fær landsstýrismaðurin heimild at áseta skipan fyri fiskiskapi eftir botnfiski á Føroyabanka og at áseta reglur um, hvørjir bólkar av fiskiførum ella veiðihættir kunnu gerast partur av skipanini. Lógarkarmarnir fyri at skipa fiskiskap eftir botnfiski á Føroyabanka eru teir somu sum í verandi lóg um fyrisiting av sjófeingi.

**Kapittul 6. Fiskiskapur við føroyskum skipum uttan fyri føroyskan sjógv**

**Til § 23.**
Hendan greinin snýr seg um fiskiskap hjá føroyskum skipum uttan fyri føroyskan sjógv – t.e. í altjóða sjógvi ella í fiskiveiðiløgdøminum hjá øðrum londum. Hon er í innihaldi óbroytt, sammett við galdandi lóg.

Stk. 1. Treytir fyri fiskiskapi hjá føroyskum fiskiførum inni hjá øðrum londum verða vanliga ásettar í sínámillum fiskiveiðiavtalum millum føroyskar myndugleikar og myndugleikan í avvarðandi landi. Í altjóða sjógvi verða treytirnar sum oftast ásettar við samtyktum í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum, sum t.d. NEAFC og NAFO. Er eingin samtykt, ella Føroyar ikki eru partur av samtykt, ásetir landsstýrismaðurin treytirnar í altjóða sjógvi.

Veiðinøgdir og aðrar treytir í fiskiskapi eftir ferðandi fiskastovnum, sum vanliga fer fram í fleiri fiskiveiðiløgdømum, verða ásettar í strandarlandaavtalum ella samtyktum í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum. Er eingin avtala ella samtykt, kann landsstýrismaðurin skipa fiskiskapin eftir ferðandi ella felags fiskastovnum í føroyskum og altjóða sjógvi.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um býtið av tøkum fiskimøguleikum, og hvussu fiskiskapurin skal fara fram á leiðum uttan fyri føroyskan sjógv. Við hesum lógaruppskotinum eru umsitingarligu og skipanarligu karmarnir í høvuðsheitum teir somu sum í galdandi lóg.

Tá gerast skal av, hvussu rættindi skulu útlutast og býtast millum fiskifør, er søguligur fiskiskapur ofta tað, ið telur mest, t.v.s., at hugt verður at, hvussu fiskiskapurin søguliga hevur verið, hvørji skip hava fiskað, og hvussu nógv tey hava fiskað.

Fyritreytirnar kunnu vera ymiskar. Til dømis kann vera talan um at umskipa fiskiskap frá felagskvotu, sum hevur verið í skipanini í nøkur ár, til egnar kvotur. Her er høvuðsfyrilitið oftast “søguligur fiskiskapur”, sum er eitt vanligt og góðtikið metingarstøði, tá býtast skal.

Í øðrum førum er talan um kvoturættindi, sum eru nýggj, t.e. rættindi, ið ikki áður hava verið tøk hjá føroyskum skipum. Í slíkum førum er støðan vanliga, at einki skip ella skipabólkur kann vísa til meira søgulig rættindi enn nakar annar bólkur.

Stk. 3. Reglur og treytir fyri fiskiskapi hjá føroyskum fiskiførum inni hjá øðrum londum verða vanliga ásettar í sínámillum fiskiveiðiavtalum millum føroyskar myndugleikar og myndugleikan í avvarðandi landi. Ein grundregla undir hesum avtalum er, at føroysk fiskifør skulu halda seg til reglurnar, sum galda fyri fiskiskap í sjóøkinum hjá viðkomandi landi.

Stk. 4. Eftir hesi áseting kann fiskifar undir føroyskum flaggi ikki fara til fiskiskap inni hjá londum, ið Føroyar ikki hava fiskiveiðiavtalu við, ella fiska av rættindum, ið ikki eru fevnd

av slíkari avtalu, uttan góðkenning frá landsstýrismanninum. Hetta verður gjørt fyri at staðfesta tær ábyrgdir og skyldur, Føroyar hava sum flaggland. Talan kann t.d. vera um føroyskt reiðarí, sum í privatum vinnuligum samstarvi útvegar sær fiskimøguleikar inni hjá øðrum landi. Eftir hesi ásetingini kann fiskifar undir føroyskum flaggi bert luttaka í slíkum fiskiskapi, um tey hava góðkenning frá føroyskum myndugleikum, og at føroyskir myndugleikar hava fingið váttan frá myndugleikunum í strandarlandinum um, at talan er um lógligan og skipaðan fiskiskap. Lagt kann vera afturat, at Føroyar eftir ST-avtaluni um ferðandi fiskastovnar hava skyldu at tryggja, at skip undir føroyskum flaggi ikki fiska inni hjá øðrum, uttan at hetta er góðkent av føroyskum myndugleikum. (sí grein 18.3, (a), (iv).) Henda áseting er útgreinað í sjálvbodnu leiðreglunum hjá FAO um ábyrgd flagglanda, sum Føroyar høvdu ein virknan leiklut í at orða.

Stk. 5. Føroyskt fiskifar kann ikki fara til fiskiskap í altjóða sjógvi uttan loyvi frá føroyskum myndugleikum. Hetta verður eisini gjørt fyri at staðfesta tær ábyrgdir og skyldur, Føroyar hava sum flaggland og í altjóða avtalum og millumtjóða semjum um fiskiskap í altjóða sjógvi.

Stk. 6. Onnur før enn fiskifør skulu eisini hava loyvi frá føroyskum myndugleikum at fáast við slíkt, ið knýtt er at fiskiskapi, so sum at umskipa veiðu, uppskipa veiðu, virka umborð, pakka ella á annan hátt handfara veiðu ella úrdrátt úr veiðu, umskipa útgerð ella ankra við tí í hyggju at taka lut í umskiping av veiðu ella taka inn útgerð. Her kann vera talan um t.d. flutningsskip ella veitingarskip.

**Til § 24.**
Hesar ásetingar eru óbroyttar í innihaldi sammett við løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Greinin heimilar landsstýrismanninum at gera reglur, sum loyva sonevnda “kvotatransfer” millum eigarar av fiskiførum undir føroyskum flaggi og eigarar av fiskiførum undir fremmandum flaggi. Heimildin er avmarkað til rættindi til fiskiskap í altjóða sjógvi, og har rættindini at fiska eru tillutað sum egin rættindi. Umbýti av rættindum kann bert fara fram, har slíkt er skipað við sáttmála hjá t.d. økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum, sum Føroyar eru partur av, og góðkenning frá myndugleikunum í Føroyum og viðkomandi landi. Ásetingar um slík “kvotatransfer” eru partar av skipanini í t.d. NAFO og SPRFMO.

Í stk. 2 er ásett, at veiðirættindi, sum eru partar av slíkum umbýti, talan er bæði um tey rættindi, sum verða latin øðrum landi, og tey rættindi, sum verða fingin afturfyri, verða ikki tikin við í eina uppgerð av brúksskylduni sambært § 36.

Í stk. 3 er tilskilað, at slík kvotatranfer verður hildin uttan fyri føroysku heildarkvotuna. Slík umbýti eru ofta avmarkað í nøgd og kunnu vera gjørd ymiskar tíðir í einum fiskiári, samstundis sum hesi rættindi vanliga bert eru í skipanini tað eina árið. Mett verður, at slík rættindi eiga ikki at ávirka føroyskar heildarkvotur og harvið eisini ávirka tað býtið, sum verður gjørt av kvotuni sambært øðrum ásetingum í lógini.

**Kapittul 7. Fiskiskapur í føroyskum sjógvi við fiskiførum undir fremmandum flaggi**

**Til § 25.**
Stk. 1. Høvuðsreglan er, at fremmand før ikki kunnu reka fiskiskap í føroyskum sjógvi. Hetta kann bert gerast við loyvi frá landsstýrismanninum.

Stk. 2. Greinin ásetir karmarnar fyri, nær fiskiskapur kann fara fram við fiskiførum, sum ikki eru undir føroyskum flaggi. Treyt er, at talan er um fiskiskap sambært sínámillum fiskiveiðiavtalur ella millumtjóða avtalur, sum Føroyar eru partur av og bert tær nøgdir, sum eru avtalaðar.

Stk. 3. Treytin fyri at fáa loyvi at fiska í føroyskum sjógvi er, at myndugleikarnir í Føroyum og í viðkomandi landi eru samd um, hvørji fiskifør kunnu luttaka í fiskiskapinum. Hetta verður vanliga gjørt soleiðis, at viðkomandi land, sum Føroyar hava gjørt avtalu við, sendir ein lista yvir før, ið tey hava givið loyvi at fiska í føroyskum sjógvi.

Fiskiveiðieftirlitið skal góðkenna ein slíkan lista.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur við somu heimildum í § 34.

**Til § 26.**
Stk. 1. Eins og fremmand før ikki kunnu reka fiskiskap í føroyskum sjógvi, kunnu fremmand før heldur ikki fáast við slíkt, sum hevur samband við fiskiskap, eitt nú at umskipa veiðu, uppskipa veiðu, virka, pakka ella á annan hátt handfara veiðu, umskipa útgerð ella ankra upp við tí í hyggju at taka lut í umskiping av veiðu ella taka inn útgerð o.tíl.

Stk. 2. Landsstýrismanninum er heimilað at geva undantak frá hesum banni og at gera nærri reglur hesum viðvíkjandi. Um landsstýrismaðurin velur at geva loyvi til ávíst virksemi í føroyskum sjógvi við førum undir fremmandum flaggi, kunnu treytir setast við.

Tað er neyðugt at seta treytir, sum eru tillagaðar ítøkiliga virkseminum. Um t.d. loyvi verður givið til umskiping av veiðu, kunnu m.a. setast treytir, sum eru neyðugar fyri at tryggja eftirlitið við veiðuni og rætta skráseting av veiðuni. Treytir kunnu eitt nú verða settar um, hvar umskiping skal fara fram, at umskiping bert kann fara fram við bryggju. Treytir kunnu somuleiðis setast um serligar fráboðanir og onnur krøv, sum eru neyðug fyri at tryggja tey fyrilit, sum skulu takast sambært lógini, og fyri at tryggja eftirlit við reglum, sum eru ásettar í lógini ella við heimild í lógini.

Ásetingin hevur eisini til endamáls at forða fyri, at fiskifør, ið reka ólógligan fiskiskap, koma í føroyskan sjógv ella í føroyska havn at fáast við slíkt, sum nevnt í hesi grein. Áðrenn loyvi verður givið til umskiping o.a., verður t.d. altíð eftirkannað, um skipið er á ÓÓÓ-listum hjá økisfelagsskapum.

**Til § 27.**
Henda áseting er í innihaldi tann sama, sum er í § 38 í verandi lóg, og var eisini partur av gomlu lógini um vinnuligan fiskiskap. Føroyska sjóumveldið er økið út á 12 fjórðingar úr grundlinjunum, soleiðis sum lýst í kongligari fyriskipan nr. 240 frá 30. apríl 2002 lov om afgrænsning af søterritoriet og í bekendtgørelse nr. 306 frá 16. mai 2002 afgrænsningen af søterritoriet ved Færøerne. Í sjóumveldinum hava føroyskir myndugleikar fult ræði í øllum viðurskiftum, og føroyskur rættur er galdandi.

Greinin ásetir, at skip undir fremmandum flaggi ikki kann koma í føroyskt sjóumveldi ella føroyska havn, um staðfest verður, at skipið hevur luttikið í ÓÓÓ-fiskiskapi ella stuðlað slíkum fiskiskapi.

Endamálið við hesi grein er at seta í verk tiltøk móti fiskiførum, sum luttaka í ÓÓÓ-fiskiskapi, og førum, sum veita tænastur til hesi skip, eitt nú olju, útgerð, flutning av veiðu, manningarskifti, vistir og viðlíkahald.

Før undir fremmandum flaggi, sum bróta reglur um fiskiskap uttan fyri føroyskan sjógv, eru bannað at koma í føroyska sjóumveldið og í føroyska havn.

Talan kann vera um brot á millumlanda avtalur, t.d. avtalur, ið verða gjørdar í sambandi við áseting av kvotum av ferðandi fiskastovnum og avtalur, ið verða gjørdar í millumtjóða fiskiveiðifelagsskapum, so sum NEAFC og NAFO. ÓÓÓ-fiskiskapur er ein hóttan móti burðardyggari gagnnýtslu av tilfeinginum, serliga av stovnum, sum ferðast um fiskimark ella í altjóða sjógvi, og ávirkar veiðimøguleikarnar og búskaparligu viðurskiftini eisini hjá føroyskum fiskiførum.

Í 2009 var gjørd ein altjóða avtala "Agreement on Port State Measures to Prevent, Deter and Eliminate Illegal, Unreported and Unregulated Fishing" har tey lond, sum taka undir við avtaluni, binda seg til at fremja tiltøk fyri at basa veiðu, sum er ólóglig, ófráboðað og óskipað. Við avtaluni binda luttakandi londini seg til at hava eftirlit við skipum undir fremmandum flaggi við tí endamáli at basa ÓÓÓ-fiskiskapi. Við avtaluni verður tryggjað, at veiða frá ÓÓÓ-fiskiskapi ikki kemur á marknaðin, og at skip, sum hava framt ÓÓÓ-fiskiskap ella hava stuðlað slíkum fiskiskapi, ikki sleppa at havnum ella fáa tænastur í havnum. Soleiðis verður trupult hjá ÓÓÓ-skipum at virka yvirhøvur. Sambært avtaluni skulu limalondini eitt nú eftirkanna, um skip undir fremmandum flaggi eru á ÓÓÓ-listum hjá økisfelagsskapum ella altjóða felagsskapum, áðrenn tey koma í havn. Hava skipini luttikið ella stuðlað ÓÓÓ-fiskiskapi, skal vera bannað teimum at koma í havn.

Løgtingið hevur tikið undir við, at Føroyar gerast partar av sáttmálanum. Formligt staðfestingskjal er sent FAO. Føroyar eru tí bundnar at skyldunum í ÓÓÓ-sáttmálanum. Økisbundnu fiskiveiðifelagsskapirnir NEAFC, NAFO og SPRFMO gera listar yvir skip, sum eru fráboðað at reka ÓÓÓ-fiskiskap og skip, sum veita tænastur til slík fiskiskip. Henda grein setir bann fyri, at skip á hesum listum koma í føroyska sjóumveldið ella í føroyska havn uttan í skaðaleysari gjøgnumsigling. Sostatt kunnu hesi skip ikki koma í føroyska havn ella í sjóumveldið. NEAFC hevur eisini sett í verk herdar reglur fyri havnareftirliti (Port State Control), ið skal forða fyri landingum av ÓÓÓ-veiðu.

Um so er, at skip av einihvørji orsøk longu eru komin í havn, skal vera bannað teimum at fáa tænastur í havn, so sum landing, umskiping, pakking og virking av fiski og aðrar tænastur, so sum olju, útgerð og viðlíkahald. Skip kunnu fáa loyvi at koma í havn, sjálvt um tey hava framt ÓÓÓ-fiskiskap, ella stuðlað slíkum fiskiskapi, men bert, um hetta er fyri at gera eftirlit, harundir at tryggja prógv ella aðrar tílíkar atgerðir.

Sambært Havrættarsáttmálanum hava øll skip rætt til skaðaleysa gjøgnumsigling í uttara sjóumveldinum, t.v.s. úr grundlinjunum og út á 12 fjórðingar. Fremmand skip hava ikki krav uppá at koma í havn ella í innara sjóumveldið, t.v.s. innan fyri grundlinjurnar, uttan í neyðstøðu. Orðingin "Skaðaleys gjøgnumsigling" er lýst í greinunum 17-19 í Havrættarsáttmálanum, og gjøgnumsiglingin skal vera uttan steðg og hóskandi skjót. Steðgur kann góðtakast, um hetta er neyðugt fyri vanliga sigling ella í neyðstøðu.

Stk. 2 gevur heimild fyri at áseta reglur í kunngerð um, hvussu forboðið í stk. 1 skal umsitast. Eitt nú kunnu treytir setast um, at skip undir fremmandum flaggi skulu boða frá, áðrenn tey

koma í føroyskt sjóumveldi, soleiðis at myndugleikarnir kunnu eftirkanna upplýsingar um førini og um fiskiskapin, áðrenn tey koma. Krøv kunnu t.d. eisini verða sett til at skjalprógva, at veiða, sum er umborð, er veidd sambært galdandi reglum o.a.

**Kapittul 8. Flyting og avhending av veiðirættindum**

**Til § 28.**
Stk. 1. Ein nýskipan í hesum lógaruppskotinum er, at frameftir vera veiðirættindi knýtt at ávísum skipi, og at eigarin av skipinum fær eitt veiðiloyvi. Skotið er upp, at tað skal vera loyvt at flyta veiðiloyvi á fiskifar við ongum veiðiloyvi. Her kann vera talan um, at verandi fiskifar verður skift út, og veiðiloyvið flutt á nýggja fiskifarið. Hetta merkir, at veiðiloyvið verður flutt á annað fiskifar við sama eigara, sum átti fiskifarið, veiðiloyvið var á. Fiskifarið, ið kemur inn, skal lúka treytirnar um, at skipið skal hava siglingarloyvi, skal vera skrásett í skipaskránni og ikki hava tikið lut í ólógligum, óskipaðum og ófráboðaðum fiskiskapi.

Somuleiðis ber til at leggja veiðiloyvi saman við fiskifari, sum frammanundan hevur veiðiloyvi. Í slíkum førum kann talan vera um, at tvey veiðiloyvi hjá fiskiførum við sama eigara verða løgd saman. Men talan kann eisini vera um, at veiðiloyvið verður lagt saman við øðrum veiðiloyvi á fiskifari við øðrum eigara. Eftir hesum kunnu veiðiloyvi og øll veiðirættindi (fiskiloyvi) skifta hendur.

Veiðiloyvi kunnu eisini skifta hendur, tá tvey ella fleiri veiðiloyvi hjá skipum við ymiskum eigarum verða flutt  á fiskifar við ongum veiðiloyvi. Fiskifarið, ið kemur inn, skal lúka treytirnar um, at skipið skal hava siglingarloyvi, skal vera skrásett í skipaskránni og skal ikki vera skrásett at hava verið partur í ólógligum, óskipaðum og ófráboðanum fiskiskapi.

Tá ið veiðiloyvi verða flutt ella løgd saman, merkir tað samstundis, at annað fiskifar yvirtekur rættindini at fiska. Øll rættindini til fiskiloyvið, egnar kvotur og egnar fiskidagar, ið eru knýtt at fiskifarinum, verða flutt. Fiskifarið, ið loyvini verða flutt á ella løgd saman við, kunnu nýta fluttu veiðirættindini, tó so, at í sambandi við at flyta veiðiloyvið hjá fiskifari í dagaskipanini, verður lagt upp fyri, at fiskiorkan ikki verður størri enn frammanundan.
Ásetingin er galdandi fyri øll veiðiloyvi.

Stk. 2. Her eru ásettar serligar treytir í sambandi við at flyta veiðiloyvi hjá fiskiførum, ið eru undir fiskidagaskipan í føroyskum sjógvi ella fiska botnfisk í føroyskum sjógvi. Tá veiðiloyvi og fiskidagarættindi hjá fiskifari í fiskidagaskipanini verða flutt millum fiskifør, skal fiskiorkan ikki økjast. Eins og í undanfarnum lógum er ikki lagt upp til, at lógin sjálv skal áseta, hvussu fiskiorka verður ásett, ella hvussu umsitingarliga mannagongdin er fyri at leggja upp fyri, at fiskiorkan ikki verður størri, tá veiðiloyvi verða flutt. Hetta hevur landsstýrismaðurin heimild at gera nærri reglur um, sambært stk. 4 í hesi grein.

Stk. 3. Hetta er mest ein kunnandi áseting um, at veiðiloyvi ikki kunnu flytast millum bólkarnar í fiskidagaskipanini. Nýggju ásetingarnar um, at fiskidagar í hvørjum bólki bert kunnu brúkast við fiskifari, ið er innan fyri avmarkingina um stødd ella framtøkumegi, ið er ásett fyri bólkin, forða eisini fyri, at tað ber til at kasta saman rættindi við at flyta veiðiloyvið.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur í sambandi við flyting av veiðiloyvum, harundir reglur um, hvussu fiskiorka verður roknað út.

Stk. 5. Veiðiloyvi verður givið eigara av ávísum fiskifari til eitt ávíst fiskifar. Verður fiskifarið selt, fær nýggi eigarin veiðiloyvið, um hann annars lýkur lógarásettu treytirnar fyri at reka vinnuligan fiskiskap. Somuleiðis fylgja veiðirættindini við sølu av fiskifari uttan mun til, um tað er tvingsilssøla ella vanlig søla.

Sammett við galdandi lóg er hetta ein broyting. Loyvisskipanin er ikki tann sama í galdandi lóg og hesum uppskotinum. Eftir verandi lóg kunnu veiðirættindi ikki skifta hendur varandi á vanligum privatum grundarlagi, men bert umvegis ein almennan marknað, har øll, ið lúka lógarásettar treytir, kunnu bjóða seg fram. Í verandi lóg eru serligar reglur fyri rættindahavara, ið fer undir trotabúsviðgerð. Her fær bústjórin seks mánaðir at avhenda rættindini um almenna marknaðin. Hetta lógaruppskotið leggur upp til nýggjar reglur og mannagongd á økinum, soleiðis, at landsstýrismaðurin kann loyva, at tá fiskifar verður selt, kann keyparin yvirtaka veiðiloyvi og fiskiloyvi, treytað av, at hann lýkur lógarásettu treytirnar fyri at reka vinnuligan fiskiskap. Um allar treytir eru loknar, verður veiðiloyvið endurnýggjað í navninum á keyparanum.

**Til § 29.**
Stk.1. Verður fiskifar tikið úr vinnuligum fiskiskapi, kann landsstýrismaðurin lata eigaranum tilsøgn um veiðiloyvi til annað fiskifar, sum skal lúka treytirnar fyri at fáa veiðiloyvi.

Grundsjónarmiðið er, at veiðiloyvi verður givið eigara við ávísum fiskifari. Um annað av hesum broytist (eigaraskifti, skip gongur burtur, skip verður selt o.a.) fellur veiðiloyvið í prinsippinum aftur til landið.

Skotin verður upp ein skipan, har heimild er hjá landsstýrismanninum at veita eigara av fiskifari, sum verður tikið úr vinnuligan fiskiskapi, tilsøgn um at varðveita veiðiloyvið og veiðirættindini í upp til tvey ár uttan at hava fiskifar.

Endamálið er at geva veiðiloyvishavara eitt rásarúm at skifta skip út ella útvega sær annað fiskifar.

Stk. 2. Persónur ella felag, sum hevur fingið tilsøgn um at varðveita veiðiloyvið, kann sjálvur gera nýtslu av henni við at flyta á skip, sum verður skrásett í navninum hjá hesum persóni ella felag. Tilsøgnin kann eisini latast øðrum at flyta á annað fiskifar við ongum veiðiloyvi. Somuleiðis kann tilsagnarhavarin leggja saman veiðiloyvið við fiskifar við veiðiloyvi ella á fiskifar við ongum veiðiloyvi, eisini um viðkomandi ikki sjálvur er skrásettur eigari av fiskifarinum, veiðiloyvið verður flutt á.

Stk. 3. Í tíðarskeiðinum, tilsøgnin stendur við og tilsagnarhavarin einki fiskifar hevur, er ikki grundarlag fyri at útskriva rættindahavaranum fiskiloyvi. Hetta merkir eisini, at t.d. egnar kvotur ella egnir fiskidagar, sum í fiskiloyvi vóru knýttir at fiskifarinum, ikki kunnu avhendast.

Stk. 4. Ásett er, at tá persónur ella felag við tilsøgn um at flyta veiðiloyvi á annað fiskifar hevur brúkt tilsøgnina og lagt veiðiloyvið á annað skip, skal í minsta lagi eitt ár ganga, til eigarin av skipinum aftur kann fáa tilsøgn um at flyta veiðiloyvið á annað skip. Endamálið við ásetingini er at forða fyri, at veiðiloyvið er leyst av ávísum fiskifari í longri tíð enn tey tvey árini, loyvt er at hava veiðiloyvi uttan at hava skip. Royndirnar við tvey ára freistini undir lógini um vinnuligan fiskiskap vístu, at tað kom fyri, at tá tvey ára skeiðið var úti, varð

veiðiloyvið virkið í stutta tíð, fyri síðani aftur at gerast til eina tilsøgn í tvey ár. Mett verður ikki, at slíkt samsvarar við ætlanina at veita tilsøgn eftir hesi grein.

Stk. 5. Víkjast kann frá tvey ára freistini, um tann, ið hevur tilsøgnina, kann prógva, at hann innan rímiliga tíð fær annað fiskifar, sum lýkur treytirnar. Treyt er, at gongd er í málinum, ella at tilsagnarhavarin arbeiðir við ítøkiligum ætlanum um at flyta veiðiloyvið á annað skip, men at tað tekur longri tíð at fáa øll viðurskifti upp á pláss. Grundreglan er, at freistin bert verður longd, um talan er um umstøður, sum tilsagnarhavarin ikki sjálvur hevur ræðið á og kann gera nakað við. Freistin kann t.d. verða longd, tá t.d. nýbygningur er seinkaður á skipasmiðju. Umsókn, um at leingja tilsøgnina, skal vera latin inn, áðrenn tvey ára freistin er farin.

Stk. 6. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur og mannagongd fyri umsiting av tilsagnum um at varðveita veiðiloyvið.

**Til § 30.**
Stk. 1. Skotið verður upp, at fiskidagar kunnu avhendast øðrum fiskifari við veiðiloyvi fyri eitt ár í senn ella endaliga.

Hetta er ein broyting sammett við verandi lóg. Lutvíst tí, at í fiskidagaskipanini, sum hevur verið í 2018 og 2019, hevur t.d. ikki borið til at avhenda fiskidagar endaliga. Lutvíst tí, at í dagaskipanini, sum eftir verandi lóg skal vera fyri útróðrarflotan frá 1. januar 2020, siga reglurnar fyri avhending, at egnir fiskidagar bert kunnu avhendast øðrum fiskifari í sama bólki, og at fiskidagar, ið skulu avhendast endaliga, skulu bjóðast út alment, har øll, sum lúka settar treytir, kunnu bjóða seg fram.

Eftir hesum lógaruppskotinum kunnu egnir fiskidagar avhendast øllum fiskiførum við veiðiloyvi, fyri eitt ár í senn ella endaliga. Sostatt kunnu fiskidagar eisini avhendast teimum, ið ikki framman undan eru í fiskidagaskipanini.

Gamla grundreglan, um at fiskidagar ikki kunnu avhendast millum bólkarnar, og at tað ikki er loyvt at avhenda dagar frá húki til trol og øvugt, er framvegis galdandi. Ásetingarnar eru tó øðrvísi skipaðar í lógarverkinum. Reglurnar um fiskidagar eru tillagaðar soleiðis, at dagatalið í hvørjum bólki frameftir bert kann brúkast við fiskiførum í bólkinum og til tann fiskiskap, fiskidagarnir eru ásettir til. Hetta er eisini ein avleiðing av, at lagt er upp til nýggjar reglur, at egnir fiskidagar kunnu avhendast øllum føroyskum fiskiførum við veiðiloyvi, og at tað í tí sambandi verður mett neyðugt at skilmarka bólkarnar neyvari viðvíkjandi skipastødd ella framtøkumegi, og at fiskidagar í hvørjum bólki bert kunnu brúkast við teimum støddum av skipum, ið eru innan fyri ásettu støddaravmarkingarnar fyri bólkin.

Endalig avhending merkir, at fiskiloyvini árið eftir, at endalig avhending er farin fram, verða útskrivað við teimum broytingum, avhendingin hevur ført við sær.

Stk. 2. Eins og í verandi lóg er ein brúkstreyt fyri at kunna avhenda fiskidagar. Tann, ið avhendir, skal hava brúkt í minsta lagi 60% av tillutaðu døgunum fiskiárið framman undan við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari. Henda treyt fær virknað í 2022.

Stk. 3. Ásett er, at talið av fiskidøgum, ið verða avhendir, skulu stillast í sama lutfalli, sum felags fiskidagarnir hjá bólkinum verða stillaðir. Tað vil siga, at verður samlaða fiskidagatalið í bólkinum t.d. skorið við 5%, skal flutta dagatalið hjá viðkomandi fiskifari skerjast við 5%.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um, hvussu avhendingin skal fara fram, harundir reglur um umrokning av fiskidøgum. Fyri avhendan millum fiskifør skulu reglurnar áseta tað lutfalsliga virðið á fiskidøgum grundað á veiðievni. Verður avhendað, og fiskiførini ikki eru eins, tá talan er um fiskiorku, skal møgulig umrokning gerast fyri dagarnar at flyta, sum avspeglar munin í fiskiorku/veiðievnum millum fiskiførini. Hesar reglur eiga m.a. at áseta mannagongd og fráboðanarskyldu.

**Til § 31.**
Stk. 1. Skotið verður upp, at egin árskvota og egin kvotupartur kunnu avhendast øðrum fiskifari við veiðiloyvi fyri eitt fiskiár í senn ella endaliga. Undantikin eru tey rættindi, ið eru tillutað útróðrarbátum undir 15 tons, til dømis hummarakvota.

Hetta er ein broyting sammett við verandi lóg, sum fyri tað fyrsta hevur eina avmarking um, at í mesta lagi 20% av egnum kvotuparti ella egnari árskvotu kunnu avhendast fyri eitt ár í senn. Harumframt ásetir verandi lóg, at tað, ið ætlanin er at avhenda endaliga, skal bjóðast út alment, har øll, sum hava áhuga og lúka ásettar treytir, fáa høvi at bjóða.

Hetta uppskotið broytir hesar treytir og avmarkingar. Í staðin er lagt upp til, at egnar kvotur kunnu avhendast øllum føroyskum fiskiførum við veiðiloyvi. Er talan um avhending fyri eitt ár, verður egin árskvota avhendað, men er talan um endaliga avhending, verður egin kvotupartur avhendaður. Avhendast kunnu partar av tillutaðum kvoturættindum ella allur rætturin. Endalig avhending merkir, at fiskiloyvini árið eftir, at endalig avhending er farin fram, verða útskrivað við teimum broytingum, avhendingin hevur ført við sær.

Kvoturættindi kunnu avhendast øllum fiskiførum, sum hava veiðiloyvi, við teimum avmarkingum, ið til einhvørja tíð eru galdandi, eitt nú, at íslandskvotur ikki kunnu fiskast við troli.

Stk. 2. Ásett er ein brúkstreyt fyri at kunna avhenda egna kvotu. Tann, ið avhendir, skal fiskiárið frammanundan hava brúkt í minsta lagi 60% av tillutaðu kvotuni av fiskaslagnum, ætlanin er at avhenda, við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari. Henda treyt fær virknað í 2022.

Stk. 3. Ásett er, at egin kvota, ið verður avhendað, skal stillast í sama lutfalli, sum felags árskvotan broytist. Felags árskvota er tann partur (í tonsum) av ávísum fiskaslagi ella djóraslagi, ið ein bólkur av fiskiførum undir einum hevur rætt til at veiða í einum fiskiári.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur, sum m.a. eiga at hava ásetingar um mannagongd, fráboðanarskyldu til Vørn o.a.

**Til § 32.**
Hendan greinin ásetir serstakar reglur um, hvussu rættindi hjá útróðrarbátum í bólki 5 í fiskidagaskipanini kunnu flytast ella skifta hendur. Talan er í høvuðsheitum um somu reglur, sum eru í verandi sjófeingislóg. Her er at viðmerkja, at bátar í bólki 5 og bátur undir 15 tons yvirhøvur hava ikki veiðiloyvi, men bert fiskiloyvi. Í sambandi við flyting og avhending av rættindum fær fiskiloyvið hjá hesum bátum líknandi støðu sum veiðiloyvi.

Stk. 1. Ásett er, at fiskiloyvi, ið gevur rætt til at fiska av felags fiskidøgum í bólki 5 í fiskidagaskipanini, kann flytast á bát við ongum fiskiloyvi. Her er talan um, at bátur verður skiftur út, uttan at rættindini skifta hendur. Treyt fyri at flyta er, at fiskiorkan ikki verður

størri, og at báturin, loyvið verður flutt av, verður tikin úr vinnuligum fiskiskapi. Eins og undir verandi skipan ber bert til at flyta eitt loyvi. Loyvt er ikki at leggja fiskiloyvi saman og t.d. flyta tvey loyvi á bát við ongum veiðiloyvi, fyri at fáa roknistykkið fyri fiskiorku at ganga upp.

Stk. 2. Rættindahavari kann við hesi áseting selja bát og lata veiðirættindini fylgja við bátinum. Tað, ið fylgir við slíkari sølu, er rætturin at fiska undir fiskidagaskipanini í bólki 5. Tað vil siga, at talan er ikki um rætt til t.d. fiskiloyvi 5 A ella fiskiloyvi 5 B.

Stk. 3. Verður bátur tikin úr vinnuligum fiskiskapi, kann tilsøgn latast eigaranum um fiskiloyvi til annan bát, sum skal vera skrásettur innan tvey ár. Eftir hesum kann eigarin varðveita tey rættindi, ið eru knýtt at fiskiloyvinum í upp til tvey ár, uttan at hava bát. Víkjast kann frá tvey ára freistini, um tann, ið hevur tilsøgnina, kann prógva, at hann innan rímiliga tíð fær annan bát. Treytin er, at gongd er í málinum, ella at tilsagnarhavarin arbeiðir við ítøkiligum ætlanum um at flyta loyvið á annan bát. Grundreglan er, at freistin bert verður longd, tá talan er um umstøður, sum tilsagnarhavarin ikki sjálvur hevur ræðið á og ikki kann gera nakað við, t.d. seinkingar á bátasmiðju. Umsókn, um at leingja tilsøgnina, skal latast myndugleikanum, áðrenn freistin er farin.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur og mannagongd fyri umsiting av flyting av rættindum og tilsagnum um at varðveita rættindini hjá útróðrarbátum i bólki 5 í fiskidagaskipanini.

**Til § 33.**
Í fiskiskapi hjá bátum í bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons, sum er skipaður uttan fyri fiskidagaskipanina, er landsstýrismanninum heimilað at áseta reglur um avhending og flyting av rættindum.

Dømi um fiskiskap, sum í dag er skipaður fyri seg uttan fyri fiskidagaskipanina, er hummaraveiðan á føroyskum sundum og firðum. Her er skipan við mest loyvdu veiðu. Í hummaraøkinum á Tangafirði og har um leiðir er fiskiskapurin skipaður við felagskvotu við hámarki fyri hvønn bátin. Á øðrum hummaraøkjum hevur hvør bátur egna kvotu.

Í hummarafiskiskapinum og øðrum fiskiskapi hjá smærru útróðrarbátunum uttan fyri dagaskipanina er eisini tørvur á at hava reglur um, hvussu hesi rættindi kunnu flytast ella avhendast. Hóast lógarorðingin í sjálvum sær ikki er avmarkandi, hugsar ein sær ikki, at landsstýrismaðurin við heimildini t.d. skal loyva fríari umsetiligheit av hummararættindum, t.d. soleiðis, at egin hummarakvota bert kann avhendast til annan bát, um báturin, avhendað verður til, hevur rætt til sama slag av fiskiloyvi í sama hummaraøki sum báturin, avhendað verður frá. Somuleiðis hugsar ein sær, at í teimum økjum, har felagskvota er, kunnu rættindini bert skifta hendur í sambandi við, at bátur verður seldur og fiskiloyvi til hummara fylgir við.

## Kapittul 9. Almennar ásetingar fyri fiskiskapi

**Til § 34.**
Hendan greinin heimilar landsstýrismanninum at gera reglur, sum mest eru knýttar at sjálvum fiskiskapinum, t.d. reglur um økisfriðingar, minstamát á fiski, reglur um fiskireiðskap og veiðihættir. Somuleiðis er heimild at gera reglur, sum meira hava eitt eftirlitsendamál, t.e. at tryggja, at ásetingar í lógini og ásetingar við heimild í lógini verða

hildnar. Slíkar reglur skulu eisini stuðla undir gott og ómakaleyst fiskiveiðieftirlit, og eru ein týdningarmikil liður í at tryggja burðardyggan fiskiskap.

Talan er í høvuðsheitum um somu orðingar og heimildir, sum eru í galdandi lóg.

Stk. 1, nr. 1: Hendan heimildin snýr seg um at seta nærri reglur um økisfriðingar og friðingartíðir. Friðingarnar kunnu hava ymisk endamál. Í summum førum er høvuðsendamálið stovnsrøkt og at verja fiskastovnar, t.d. veiðibann á gýtingarleiðum og heilársfriðing av smáfiskaleiðum. Í øðrum førum kann ásetast, at loyvt er ikki at royna við troli á ávísum leiðum. Slíkar friðingar kunnu hava sum endamál at halda ymiskan reiðskap atskildan, serliga húk og trol, sum illa fær verið á somu fiskileið samstundis, uttan at vera hvørjum øðrum til ampa. Nógvar av trolfriðingunum, sum vóru settar inn í lógina miðskeiðis í 1990-unum, vóru toska- og hýsuleiðir, sum eru stongdar fyri veiðu við troli fyri at verja húka- og útróðrarflotan, so hesir kunnu virka, uttan at skula kappast við teir størru og effektivaru trolararnar. Við trolfriðingum kann ein eisini røkka málinum um at verja fiskastovnar og vistskipanir á botni – serliga á grynri vatni.

Stk. 1, nr. 2: Við hesi heimild kann landsstýrismaðurin áseta reglur um minstamát á fiski, sum loyvt er at veiða. Grundsjónarmiðið er, at tað í flestu førum gagnar stovnsrøktini ikki at fiska ov nógv av smáum fiski. Slíkar reglur kunnu eisini áseta, hvat fiskifør skulu gera, um tey fáa ov nógva íblanding av undirmálsfiski. Heimildin fevnir eisini um at áseta reglur um vernd av ungfiski og mest loyvt hámark fyri íblanding av ungfiski, og hesar reglur hava eisini sum endamál at forða fyri, at ov nógv verður veitt av smærri fiski. Hetta verður gjørt við at áseta bráðfeingis veiðibann ella at friða leiðir, har tað javnan er nógv íblanding av ungfiski. Hesar reglur hava í nógv ár verið ein partur av fyriskipanini av fiskiskapinum í føroyskum sjógvi.

Stk. 1, nr. 3: Eftir hesi heimild kunnu setast reglur um fiskireiðskap og veiðihættir. Eitt nú meskastøddir í troli ella gørnum og t.d. skyldu at brúka skiljirist í trolinum. Slíkar tekniskar reiðskapsreglur eru ætlaðar at skilja óynskta hjáveiðu frá, áðrenn reiðskapurin kemur at borði. Meskastødd hevur týdning fyri, hvussu trolreiðskapur sílar smærri fisk úr posanum, meðan skiljirist kann brúkast til at skilja smærri fisk frá ella at skilja størri fisk frá undir sjálvum fiskiskapinum.

Stk. 1, nr. 4: Reglur við heimild í hesi áseting kunnu vera at áseta reglur um hjáveiðu í ávísum fiskiskapi. Til dømis er hámark sett fyri, hvussu nógv av toski, hýsu og upsa fiskifør, við loyvi at royna eftir havtasku og svartkalva við gørnum, kunnu hava. Í fiskiskapi við troli innan fyri 12 fjórðingar er somuleiðis avmarking fyri, hvussu nógva hjáveiðu av toski og hýsu trolbátarnir kunnu hava. Í kvotureguleraðum fiskiskapi eftir uppsjóvarfiski eru somuleiðis hjáveiðireglur.

Stk. 1, nr. 5: Tørvur er eisini á at hava heimild at gera fyriskipanir fyri at verja ávís djór, fugl, plantur og vistskipanir. Her kann vera talan um t.d. friðing av korallum, sum hava stóran týdning fyri lívið hjá fiski. Slíkar friðingar eru vorðnar ein alsamt vaksandi partur av millumtjóða átøkum fyri at verja viðbreknar vistskipanir, og at varðveita lívfrøðiliga margfeldið á havbotninum. Løgtingið samtykti í 1993 sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi, sum eisini hevur týdning fyri fyriskipanir í fiskiskapi, livandi tilfeingi í sjónum og umhvørvi tess. Nevnast kann eisini, at í SPRFMO, sum er økisbundni fiskiveiðifelagsskapurin í Suðurstillahavinum, hava tey samtykt skipanir, sum áleggja fiskiførum at hava útgerð, sum forðar fyri, at fuglur kemur í fiskireiðskapin.

Stk. 1, nr. 6: Heimilað er landsstýrismanninum at áseta treytir, sum avmarka, hvat veiðan kann verða brúkt til. Her kann t.d. vera talan um, at veiðan bert kann avreiðast og seljast til virking til matna, og sostatt ikki kann latast til mjøl og lýsi.

Stk. 2. Heimildirnar í hesum stykki hava sum endamál at stuðla góðum eftirliti og sporføri við fiski og fiskaúrdrátti. Heimild er at áleggja teimum, sum fiska, taka ímóti, umskipa, flyta, goyma, virka og selja fisk, eina skyldu at skráseta og at kunna skjalprógva upplýsingar á ein hátt, sum tryggjar sporing av fiski og fiskaúrdrátti. Sporing er eitt týdningarmikið amboð í veiðieftirliti, har veiðan kann sporast allan vegin frá veiðu til endaliga sølu til brúkaran. Gott sporføri er ein av týdningarmestu fyritreytunum fyri úrslitum í millumtjóða arbeiðinum at basa ólógligum, ófráboðanum og óskipaðum fiskiskapi (ÓÓÓ), men hevur eisini týdning í sambandi við marknaðarføring av fiski og fiskaúrdráttum.

Nógvar av reglunum eru við í millumtjóða semjum um eftirlitssamstarv, sum Føroyar eru partur av, og har yvirskipaða endamálið er at basa ÓÓÓ-fiskiskapi. Ætlanin við hesum ásetingum er tí eisini at hava greiða lógarheimild at seta í verk altjóða skyldur, sum Føroyar hava samsvarandi altjóða avtalum og samtyktum í millumtjóða fiskiveiðifelagsskapum.

Stk. 2, nr. 1: Landsstýrismaðurin kann við hesi áseting krevja, at føroysk fiskifør, móttøkuskip, framleiðsluskip o.o. føra veiðidagbók og framleiðslubók, og kann áseta, hvørjar upplýsingar skulu skrásetast.

Stk. 2, nr. 2: Heimilað er landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um skyldu at lata inn veiðitøl, dagbøkur, vektarseðlar, upplýsingar um avreiðingar, uppruna og aðrar upplýsingar um fiskiskap til eftirlitsendamál og hagtalsendamál, og treytir og mannagongd fyri, hvussu hesar skulu sendast myndugleikanum.

Stk. 2, nr. 3: Við hesi heimild kann landsstýrismaðurin seta treytir um, at allur fiskur og øll fiskavøra skal um eina innvigingarskipan, sum er góðkend av Fiskiveiðieftirlitinum, tá landað verður til móttøku á landi í Føroyum ella uttanlands, ella til móttøkuskip í føroyskum sjógvi ella uttan fyri føroyskan sjógv.

Stk. 2, nr. 4: Landsstýrismaðurin kann áleggja fiskiførum at hava eygleiðara umborð. Krav kann eisini setast um eygleiðarar umborð á móttøkuskipum, fiskaflutningsførum og fiskaframleiðsluførum. Farið skal bera útreiðslur til kost og uppihald.

Stk. 2, nr. 5: Kunngerð nr. 45 frá 6. juli 2004 um eftirlit við fiskiførum um fylgisvein setir krav um fylgisveinaeftirlit fyri øll fiskifør, undantikið bólk 5. Fiskiveiðieftirlitið kann tí altíð síggja knattstøðuna hjá hesum fiskiførum. Hetta er ikki bert amboð í sambandi við eftirlit, men stuðlar eisini undir trygd á sjónum. Við hesum uppskotinum verður heimildin á økinum víðkað nakað, so heimild eisini er at krevja, at skip hava umborð og skulu brúka útgerð, sum kann brúkast til elektroniskt samskifti, eitt nú í sambandi við krav um elektroniska veiðidagbók og aðrar elektroniskar fráboðanarskipanir.

Stk. 2, nr. 6: Hetta eru reglur, sum seta treytir til innrætting og útbúnað umborð á skipum. Landsstýrismaðurin kann við hesi heimild áleggja ella banna skipum at hava umborð og brúka útgerð at skilja, mala, sleppa og blaka út veiðu. Slíkar reglur kunnu vera við til at

forða fyri sonevndari high-grading, og at fiskur verður malin ella blakaður útaftur. Slíkar reglur gera tað eisini lættari at hava eftirlit við forboðnum at blaka út, reglum um minstamát o.tíl.

Stk. 2, nr. 7: Landsstýrismaðurin kann við hesi heimild krevja, at skip altíð hava tøkt yvirlit yvir, hvussu veiða er goymd umborð, harundir skráseting um, hvar í lastini veiða er goymd, flokkað á fiskaslag, fiskaúrdrátt, støddir o.s.fr. Áleggjast kunnu eisini treytir um, hvussu veiða skal goymast. Heimildin fevnir eisini um merking av fiski og fiskaúrdrátti. Oftani verður fiskaúrdráttur bert merktur við handilsliga heitinum á vøruni. Hetta ger tað oftani torført fyri eftirlitið, eitt nú, tá samanberingar skulu gerast millum fiskaúrdrátt, og hvat er skrásett í veiðidagbók og veiðifráboðanir. Tí er tørvur á at hava reglur um, hvussu veiða skal merkjast, harundir, hvørji heiti og flokkingar skulu brúkast. Hetta kunnu vera upplýsingar um dagfesting av veiðu og virking, veiðiøki, fiskaslag, vøruslag o.s.fr. Økisbundnu fiskiveiðifelagsskapirnir, NAFO og NEAFC, sum Føroyar eru partur av, hava í sínum eftirlitsreglum krav um, at veiða skal merkjast, og hvørjar upplýsingar skulu fylgja við veiðuni. Hesi krøv kunnu við heimildini setast í verk í virkisøkinum hjá hesi lóg.

Stk. 2, nr. 8: Heimilað er landsstýrismanninum at seta treytir um, hvussu reiðskapur, sum ikki verður brúktur, skal goymast. Eftir hesum kunnu reglur ásetast um forboð fyri at hava umborð ávísan reiðskap ella slag av reiðskapi, tá fiskað verður á ávísum leiðum ella við ávísum slagi av reiðskapi. Somuleiðis kann t.d. bann setast fyri, at skip hava umborð trol við meskastødd, sum ikki stendur mát á ymiskum leiðum. Talan er um reglur, ið hava verið í nógv ár.

Stk. 2, nr. 9: Við hesi heimild kunnu umrokningarvirði ásetast fyri umrokning av fiski og fiskaúrdrátti til runda vekt, t.e. ósløgdur fiskur við høvdi.

Stk. 2, nr. 10: Henda heimild gevur landsstýrismanninum møguleika at áleggja skipum at taka sýni ella stakroyndir av veiðu, fiski og fiskaúrdrátti til vísindalig endamál og til eftirlitsendamál. Slík sýni kunnu brúkast til vanligar vísindaligar kanningar um vekt, longd, búningarstig o.s.fr. Men tey kunnu eisini brúkast til nærri kanningar, t.d. fyri at fáa til vega upplýsingar, sum kunnu staðfesta, hvønn stovn fiskur hoyrir til og aðrar upplýsingar, sum ikki bara eru áhugaverdar í granskingar- og eftirlitsamanhangi, men eisini fyri Føroyar sum strandarland og í sambandi við krøv okkara í strandarlandasamráðingum.

Stk. 3. Við hesi áseting er heimild at krevja, at allar fráboðanir, sum skulu sendast myndugleikunum, verða sendar í elektroniskum sniði.

Stk. 4. Eins og í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi er landsstýrismanninum heimilað at loyva, at kvota kann flytast millum ár, tó avmarkað til 10% av egnu árskvotuni hjá ávísa fiskifarinum. Talan er um allar eginkvotur. Tó kunnu umstøðurnar vera soleiðis háttaðar, at tað kann gerast viðkomandi at loyva flyting av størri parti enn 10% millum ár. Hugsað verður serliga um viðurskifti so sum tekniskt brek, ið gera, at ávíst fiskifar ikki kann fara til fiskiskap, ella har umstøður viðvíkjandi fiskiskapinum hava háttað seg soleiðis, at gagnnýtsla av kvotunum av ávísum fiskaslagi hevur verið trupul. Sostatt verður tað við uppskotinum farið frá treytini um serligar umstøður til eitt linari krav.

Víst verður á, at ásetingin avmarkar ikki, at Føroyar flyta sær størri nøgdir enn 10% av kvotuni frá einum ári til tað næsta. Talan er tá um eitt lið í áseting av tøku føroysku kvotuni fyri árið.

Stk. 5. Endamálið er at geva landsstýrismanninum heimild til at gera nærri ásetingar um fiskiskap í áum, vøtnum, ósum og løkum. Reglurnar, sum verða settar í verk, skulu tryggja, at veiða eftir sílum og laksi fer fram á burðardyggan hátt. T.d. kann landsstýrismaðurin við hesi heimild gera reglur um friðingar av ósum í ávísum tíðarskeiði, hvat slag av reiðskapi, ið skal nýtast o.s.fr. Her er í høvuðsheitum talan um somu heimildir at gera fyriskipanir, sum í undanfarnum lógum á økinum. Nevnast kann, at lógarheimildin á økinum hevur verið brúkt til kunngerð um friðing av ósanum við Leynar (2006) og kunngerð um síla- og laksaveiðu (1990).

**Til § 35.**
Stk. 1. Ásetingin ber í sær, at veiða til húsbrúks ikki kann avreiðast ella á annan hátt seljast. T.d. er ætlanin ikki, at hummaraveiða ella onnur veiða, sum verður seld víðari til t.d. matstovur, skal koma undir hugtakið veiða til húsbrúks. Mett verður, at fiskiskapurin tá fær eitt greitt vinnuligt endamál, og eigur tí ikki at falla inn undir reglurnar um aldargamla rættin at søkja sjógvin.

Stk. 2. Tørvur kann vera á at hava heimild at regulera allan fiskiskap, eisini tá fiskiskapurin ikki er beinleiðis vinnuligur. Her kann eitt nú vera talan um at banna ávísum reiðskapi, seta krøv til reiðskap, at friða ávís øki fyri fiskiskapi í sambandi við, at økið verður gagnnýtt til annað endamál, harundir aling ella til hummarafiskiskap (t.e. ein liður í økisplanlegging ) o.s.fr.

Stk. 3. Heimild er at geva serstøk loyvi til ferðavinnufiskiskap, og at gera nærri reglur og áseta treytir í tí sambandi. Talan kann bæði vera um føroysk og útlendsk skrásett før, sum ikki hava loyvi at reka vinnuligan fiskiskap sum so. Til tess er neyðugt við eini heimild, sum gevur undantak frá høvuðsreglunum í lógini, soleiðis at serstøk loyvi kunnu latast førum til ferðavinnufiskiskap.

Í sambandi við ferðavinnufiskiskap kann eisini vera talan um útlendsk ferðafólk ella ferðaskrivstovur, sum koma higar við egnum fari og ætla sær at fiska. Eftir hesum má heimild eisini vera at geva undantak frá høvuðsregluni í § 25 í hesum lógaruppskoti um, at bannað er fiskiførum undir fremmandum flaggi at reka fiskiskap í føroyskum sjógvi.

Eins og í galdandi lóg hevur landsstýrismaðurin heimild at geva serstøk loyvi í sambandi við ferðavinnu, og at gera nærri reglur og treytir um nøgd av fiski, sum kann veiðast og takast við av landinum, reiðskap, tal av reiðskapi o.tíl.

**Til § 36.**
Stk. 1. Við brúksrættinum at reka vinnuligan fiskiskap fylgir ein skylda at brúka hendan rættin. Tað eigur ikki at vera gjørligt at hava veiðirættindi frá landinum, sum ikki verða gagnnýtt í longri tíð. Rætturin at reka vinnuligan fiskiskap er ein framíhjárættur soleiðis at skilja, at tað ikki eru øll, ið eru sloppin upp í part. Tí er rímiligt, at skylda er at brúka hendan rættin. Um ikki, falla rættindini aftur til landið, og kunnu vera atkomulig hjá øðrum. Lagt verður upp til, at smábátar eru undantiknir brúksskylduni. Undantakið fevnir um øll rættindi, sum verða latin smærru útróðrarbátunum.

Ásett er, at um fiskifarið ikki hevur brúkt sín rætt at reka vinnuligan fiskiskap (veiðiloyvið) ella ávíst fiskiloyvi í tvey ár á rað – t.v.s. ikki er skrásettur at hava avreitt veiðu við tí í loyvinum nevnda fiskifari, fellur rætturin aftur til landið.

Stk. 2. Hevur fiskifar ikki gagnnýtt rættin til egnar fiskidagar ella egnar kvotur við meira enn 30%, fellur munurin millum tað, ið er brúkt, og 30% aftur til landið.

Stk. 3. Heilt serligar umstøður kunnu gera, at fiskifar ikki fær gagnnýtt síni rættindi, t.d. um fiskifar er fyri óhappi og fær brek, ið ger, at fiskifarið má liggja í longri tíð. Í slíkum førum kann landsstýrismaðurin geva undantak frá almennu brúksskylduni. Tað er tó umráðandi, at talan er um umstøður, sum eigarin av fiskifarinum ikki sjálvur hevur ræðið á ella kundi lagt upp fyri við skynsomum rakstri.

Stk. 4 ásetir, hvussu nýtslan verður gjørd upp. Fyrsta tíðarskeiðið fyri uppgerð av brúksprosentinum tekur støði í brúkinum av fiskidøgum ella kvotu 1. januar 2022 til 31. desember 2022.

Dømi – uppgerð av brúksskyldu fyri fiskidagar: Eitt fiskifar, sum í einum fiskiári fær tillutað 100 fiskidagar. Farið brúkar 25 dagar, so gagnnýtt eru 25%. Veiðirættindini hjá hesum fiskifari skulu tí, fiskiárið eftir, skerjast við 5% (t.e. 30% - 25%). Hevur fiskifarið rætt til 100 dagar fiskiárið eftir, sambært ásetta dagatalinum fyri bólkin, fær fiskifarið í fiskiloyvið tó bert tillutað 95 dagar (t.e. 100-(5% av 100)) fiskiárið eftir, tí 5 dagar falla fyri brúksskylduni og falla aftur til landið.

Hevur fiskifar t.d. 80 dagar við fiskiársbyrjan og útvegar sær 30 dagar í fiskiárinum, so er útrokningargrundarlagið 80+30=110 fiskidagar.

Annað dømi er eigari av fiskifari, felag ella persónur, ið við fiskiársbyrjan hevur kvotu á 5.000 tons av einum fiskaslagi og hevur avhendað 1.000 tons av kvotuni í árinum, so tekur útrokningin av brúksskylduni støði í 4.000 tonsum.

Stk. 5. Veiðirættindi, ið eru partar av umbýti, sambært grein 24, sonevnd kvotu-transfers, telja ikki við, tá nýtsla verður uppgjørd.

Stk. 6. Ásett er, at í uppgerðini av brúksskylduni kann síggjast burtur frá proforma-avhendingum av veiðirættindum, t.d. í førum, har avhending er í árinum, men at færri dagar eru eftir av fiskiárinum, enn ætlaða talið av døgum í avhendingini er.

Stk. 7. Eins og í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi er ásett, at rættindi keypt á uppboði, t.e. rættindi sambært § 9 og rættindi, sum sambært hesi lóg verða boðin út sambært § 14, stk. 1 og 2, eru ikki fevnd av brúksskylduni. Undantakið er galdandi fyri uppboðssølutíðarskeiðið, t.v.s. inntil rættindini sambært ásetingum í lógini verða løgd um til egnar árskvotur, t.e., tá 3 og 8 ára tíðarskeiðið er runnið, ella tá 12 ára tíðarskeiðið er runnið fyri rættindini sambært § 14.

**Til § 37.**
Eins og í undanfarnu fiskivinnulóggávu er ásett, at tað er bannað at blaka veiðu fyri borð. Har løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi legði upp til, at landsstýrismaðurin skuldi gera reglur um, hvørji fiskasløg koma undir hetta bann, verður í hesum lógaruppskoti í staðin lagt upp til, at landsstýrismaðurin kann geva undantak frá banninum.

Stk. 1 ásetir grundreglu um, at tað er bannað er at blaka veiðu útaftur.

Stk. 2. Veiða kann vera eitt sera breitt hugtak. Tí fær landsstýrismaðurin heimild at geva undantak frá banninum. Nevnast kann, at í verandi regluverki er beinleiðis álagt at seta veiðu útaftur, t.d. skal hummari, sum er undir minstamát, og hummari við rognum, sleppast útaftur. Heimilað verður tí landsstýrismanninum at geva slík undantøk frá banninum og loyva, at veiða verður slept útaftur.

Stk. 3. Landsstýrismanninum er heimilað at gera reglur, sum áleggja skyldu at føra til lands onnur djór, fugl og plantur, ella skyldu at boða frá ella at skráseta slíka veiðu.

**Til § 38.**
Lógarásetingin um virking umborð er óbroytt í mun til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.

Stk. 1. Ásett er, at tað krevur loyvi frá myndugleikanum at virka veiðu umborð á føroyskum fiskiførum í føroyskum sjógvi. Henda regla stavar upprunaliga frá § 2 í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978, sum helt fram í lógini um vinnuligan fiskiskap frá 1994. Endamálið við ásetingini er at hava møguleika at tryggja rávørutilgongd til virki á landi, og at varðveita arbeiðspláss.

Stk. 2 ásetir, hvørji fyrilitini eru, tá avgerðir um at loyva virking umborð skulu takast. Høvuðsfyrilitini at taka eru, um útlit eru fyri at virka og virðisøkja sama fisk/fiskaúrdrátt á landi í Føroyum.

Stk. 3 ásetir, at nærri reglur kunnu ásetast um, hvat virking umborð fevnir um. Hetta er sama áseting sum í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, men samanborið við lógina um vinnuligan fiskiskap er talan um eina broyting. Í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap varð allýst í sjálvum lógartekstinum, at virking umborð er, tá fiskurin er meira viðgjørdur enn sløgdur ella avhøvdaður, sama hvussu hann er goymdur. Henda áseting hevur í stóran mun verið tillagað vanliga mynstrinum í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi, har veiðan fyri tað mesta hevur verið førd ísað til virkingar á landi. Henda áseting hevur í summum førum verið mett í so avmarkandi og neyv. Tí fær landsstýrismaðurin við hesum lógaruppskotinum, eins og í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, heimild at gera av, hvat virking umborð er, og at betri møguleiki tí er at laga allýsingina eftir fiskaslagi, fiskiskapi o.s.fr.

**Til § 39.**
Lógarásetingin um umskiping er óbroytt í mun til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.

Stk. 1 ásetir, at tað er bannað førum undir føroyskum flaggi at umskipa, og á annan hátt at flyta veiðu millum før, ella úr reiðskapi hjá øðrum fari, uttan við loyvi frá Fiskiveiðieftirlitinum. Loyvi krevst uttan mun til, hvussu veiðan verður flutt, um veiðan verður umskipað á vanligan hátt, ella veiðan verður tikin beinleiðis frá fiskireiðskapi ella líknandi. Loyvi krevst uttan mun til, um talan er um flyting av veiðu til føroysk ella útlendsk før og uttan mun til, um veiðan er virkað ella ikki og uttan mun til, um veiðan er fiskað í føroyskum sjógvi ella ikki.

Fyri at tryggja eitt nøktandi eftirlit, tá veiða verður umskipað á sjónum, verður mett neyðugt at krevja ítøkiligt loyvi til hvørt far, sum skal vera við í hesum virksemi. Við at

geva loyvi í hvørjum einstøkum føri verður tryggjað, at treytir kunnu setast, sum eru tillagaðar ítøkiliga virkseminum.

Fiskiveiðieftirlitið kann, um Fiskiveiðieftirlitið velur at geva loyvi til at flyta veiðu á sjónum, seta tær treytir, sum eru neyðugar fyri at tryggja eftirlitið við veiðuni, og rætta skráseting av veiðuni.

Treytir kunnu eitt nú verða settar, hvussu og hvar uppskipan og móttøka skal fara fram, um serligar fráboðanir og treytir annars, sum eru neyðugar fyri at tryggja eftirlitið við reglum, sum eru ásettar í lógini ella við heimild í lógini.

Eisini fær landsstýrismaðurin í stk. 2 heimild til við kunngerð at skipa viðurskifti viðvíkjandi umskiping o.a.

**Til § 40.**
Hendan ásetingin er broytt í mun til undanfarnu lóggávu. Undanfarna lóggáva ásetti, at innvølur, ryggur, skræða, høvd o.tíl. av fiski skal førast til lands, umframt at í minsta lagi 20% av fiskinum skuldi førast til lands við høvdi. Ásetingin fór tó ongantíð at virka í verki, tí eitt generelt undantak frá ásetingini var galdandi í bæði 2018 og 2019.

Ynski er áhaldandi, at alt av fiski við tíðini verður gagnnýtt, og at slógv og annað lívfrøðiligt burturkast av fiski, sum í dag vanliga verður blakað út aftur, skal førast til lands. Tað er tó ein sannroynd, at slíkar tillagingar taka tíð.

Heldur enn at varðveita orðingarnar frá gomlu lóggávuni, verður við nýggju lógini ístaðin lagt upp til, at landsstýrismanninum verður heimilað at gera reglur, sum áleggja fiskiførunum at føra til lands innvøl, rygg, skræðu, høvd o.tíl. av fiski.

Hugsanin er, at skyldan verður sett í verk so líðandi, soleiðis at vinnan fær eitt rímiligt skotbrá, og soleiðis, at tillagingar kunnu gerast í mun til íløgur, mannagongd, sølu o.s.fr. Til dømis kann hugsast, at tað í fyrsta umfari verður kravt, at ein ávísur prosentpartur, t.d. 30% av livur, høvdum o.tíl. skal verða landaður. Umráðandi er, at talan er um eina smidliga skipan at seta í verk. Lagt verður tí eisini upp til, at reglurnar skulu áseta, hvat skyldan fevnir um, og hava ásetingar um tillagingartíð.

**Til § 41.**
Henda áseting er óbroytt í innihaldi í mun til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Onkrar smávegis tillagingar eru gjørdar í tekstinum, sum eru ætlaðar at gera tekstin greiðari, uttan at broyta innihaldið í mun til gomlu ásetingina.

Lagt verður upp til, at øll veiða hjá føroyskum fiskiskipum skal um føroyskan bryggjukant.

Politiskt er ynskiligt at seta krav um, at øll veiða skal um føroyskan bryggjukant. Endamálið er at tryggja, at sum mest av fiski kemur upp á land í Føroyum og á tann hátt skapa virksemi og arbeiðspláss á landi í Føroyum, og at geva virkjum á landi í Føroyum betri atgongd til rávøru.

Harumframt er endamálið at skapa betri eftirlit, sum er lættast, tá veiðan kemur um føroyskan bryggjukant.

Stk. 2-4. Høvuðsreglan er, at øll veiða hjá føroyskum skipum skal landast um føroyskan bryggjukant. Hetta skal tó gerast við skili, og møguleiki skal vera fyri at geva undantak, har umstøður so sum m.a. sølumøguleikar í Føroyum, møguleikar fyri at virðisøkja fiskin og fjarstøða frá fiskileiðum, tala fyri tí.

Lagt er tí upp til, at landsstýrismaðurin í reglum kann geva undantak frá hesum kravi fyri ávís fiskasløg, fiskaúrdráttir ella fiskiskap. Eisini er lagt upp til, at undantak kann gevast lutvíst ella fyri ávíst tíðarskeið.

Í summum førum kann vera neyðugt at geva undantak frá kravinum, eitt nú tá talan er um fisk ella fiskaúrdrátt, sum ikki kann seljast og virkast á landi í Føroyum. Talan kann vera um støður, har eingin keypari er til ávíst fiskaslag, ella um støður, har móttøkukapasiteturin ikki klárar at fylgja við veiðuni. Dømi um síðstnevnda kann vera svartkjaftur, har tørvur kann vera á at geva undantak vegna vantandi móttøkukapasitet í háárstíð.

Somuleiðis kann vera grundarlag fyri at geva skipum, sum royna á leiðum við fjarstøðu frá føroyskari havn, undantak frá kravinum, har umstøður, so sum góðskan á fiskinum og kostnaður fyri vinnuna, tala fyri tí. Dømi um hetta kunnu vera avbjóðingar hjá húkaflotanum undir Íslandi, har tað ikki í øllum førum er búskaparliga ella vinnuliga skilagott at sigla veiðuna heim.

Havandi í huga, at serligar støður kunnu íkoma, har grundarlag kann vera fyri at geva undantak, hóast fiskaslagið ella fiskiskapurin ikki er fevndur av teimum undantøkum, sum eru sett í kunngerð, er í stk. 3 lagt upp til, at landsstýrismaðurin eisini kann geva undantak í ítøkiligum førum, eftir umsókn.

Stk. 5. Lagt verður upp til, at tá skip avreiða uttanlands í ósamsvari við treytina um føroyskan bryggjukant, skal eigarin av fiskifarinum rinda eitt gjald, sum samsvarar við 30% av søluvirðinum av tí nøgd, sum er avreidd uttanlands. Hetta er óbroytt í mun til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.

Stk. 6. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um uppgerð, gjaldfreist og rentu. Vørn ásetir avgjaldið. Er avgjaldið ikki goldið innan ásettu freistina, ella onnur avtala gjørd um gjaldingina, kann TAKS innheinta gjaldið við rentu og møguligum innheintingarkostnaði við panting.

**Til § 42.**
Hendan ásetingin er broytt í mun til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.

Í galdandi lóg er ásett, at 25% av allari veiðu hjá føroyskum fiskifari skal bjóðast út um góðkenda uppboðssølu, og at landsstýrismanninum er heimilað at geva undantøk frá kravinum.

Nýggja ásetingin tekur burtur lógarásetta kravið um, at veiða skal landast um uppboðssølu, men gevur samstundis landsstýrismanninum eina heimild at gera skipanir hesum viðvíkjandi í kunngerð. Farið verður sostatt aftur til skipanina undir løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, har landsstýrismaðurin var heimilaður í kunngerð at áseta treytir í sambandi við avreiðing av fiski í Føroyum, harundir at gera ásetingar um, hvussu stórur partur av veiðuni skuldi um góðkenda uppboðssølu.

Endamálið við uppboðssølu av veiddum fiski er m.a., at øll føroysk fiskavirki fáa møguleika at bjóða upp á fisk undan Føroyum, at tryggja kapping millum fiskakeyparar, og at stuðla undir, at serliga botnfiskur undan Føroyum verður virkaður á landi í Føroyum.

Við heimildini at skipa kravið í kunngerð, er møguleiki fyri at gera hóskandi og smidligar loysnir, bæði hvat viðvíkur hvørji fiskasløg skulu vera fevnd av kravinum, hvussu stórur partur hóskandi skal krevjast um uppboðssøluna fyri ymisku fiskasløgini, og eisini um serligar ásetingar skulu vera um tíðarskeið.

Stk. 1. Ásett verður, at landsstýrismanninum verður heimilað at gera reglur um, at veiða hjá føroyskum fiskiførum skal um eina góðkenda uppboðssølu. Undantikin er, eins og í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, veiða hjá fiskiførum í bólki 5.

Lagt verður upp til, at bólkur 5 eigur at vera undantikin kravinum um uppboðssølu av veiðuni. Umsitingarliga byrðan av einum slíkum kravi verður ikki mett at vera í samsvari við endamálið. Talan er um eitt stórt tal av bátum og smáar nøgdir av veiðu. Havast skal eisini í huga, at bátar í hesum bólki longu í stóran mun bjóða út størsta partin av síni veiðu um almenna uppboðssølu. Ein onnur grundgeving er, at vinnuligu og rakstrarligu fyritreytirnar hjá smærru útróðrarbátunum eru av slíkum slagi, at teir eisini, í samband við uppboðssølu av veiddum fiski, eiga at virka undir øðrvísi treytum enn størru skipini.

**Til § 43.**
Stk. 1. Skipari og manning á fiskiførum undir føroyskum flaggi, umframt á móttøkuskipum undir føroyskum flaggi, skulu lønast sambært sáttmála, sum er gjørdur við føroysk manningarfeløg. Ásetingin er ætlað at forða fyri sosialari dumping.

Stk. 2. Útskriving av fiskiloyvi krevur váttan um, at tey í ásetingini nevndu viðurskifti eru í lagi. Eigari av fiskifari, sum søkir um fiskiloyvi, skal vátta, at skipari og manning í ávísa fiskiskapinum verða lønt samsvarandi sáttmálum við føroysk manningarfeløg. Eigarin av fiskifarinum skal fáa váttanina til vega og leggja hana fram í sambandi við umsókn um fiskiloyvi.

Um so er, at fiskiskapurin ikki er fevndur av tílíkum sáttmála, skulu lønarviðurskiftini hjá skipara og manning í hvørjum einstøkum føri vera staðfest í skrivligari avtalu millum avvarðandi manningarfeløg og ábyrgdaran av fiskifarinum, sum ávíst í fiskiloyvinum.

Stk. 3. Ásetingin gevur landsstýrismanninum heimild at áseta nærri treytir í fiskiloyvinum um, at skipari og manning á fiskifari undir føroyskum flaggi, sum fiskar av føroyskum veiðirættindum, og manning á móttøkuskipi undir føroyskum flaggi, sum tekur ímóti fiski, skulu hava arbeiðsloyvi og uppihaldsloyvi í Føroyum.

Ásetingin er ætlað at forða fyri sosialari dumping.

Sambært útlendingalóggávuni krevst bert arbeiðsloyvi, um arbeiðið verður framt í sjóumveldinum, t.e. innan fyri 12 fjórðingar, ella um fiskifarið kemur regluliga í føroyska havn. At koma regluliga í føroyska havn hevur verið tulkað sum 10-15 ferðir innan eitt 12 mánaða skeið ella 5-6 ferðir innan fyri eitt 2 mánaða skeið. Tað ber til at skipa viðurskiftini soleiðis, at manningin ikki kemur undir kravið um arbeiðsloyvi. Tá útlendingar fáa arbeiðsloyvi í Føroyum, verður kravt, at teir skulu lønast eftir føroyskum viðurskiftum og

eftir føroyskum sáttmálum. Útlendingar fáa harafturat bert arbeiðsloyvi, um tað hevur víst seg at vera trupult at fáa føroyska arbeiðsmegi.

Tað er eitt krav, um ein útlendingur skal fáa arbeiðsloyvi og uppihaldsloyvi í Føroyum, at umsøkjarin leggur fram ein starvssáttmála ella eitt ítøkiligt tilboð um starvssáttmála, har løn og setanarviðurskifti eisini standa. Hesi lønar- og setanarviðurskifti skulu vera eftir vanligum føroyskum viðurskiftum. Mett verður tí, at eitt krav um arbeiðsloyvi og uppihaldsloyvi kann forða fyri sosialari dumping.

Útlendingaøkið er felags málsøki, og tað eru danskir myndugleikar, ið viðgera umsóknir um arbeiðsloyvi og uppihaldsloyvi. Neyðugt er tí at fara inn í eina tilgongd, har nágreinað verður, hvussu ásetingin skal umsitast.

**Kapittul 10. Annað tilfeingi**

**Til § 44.**
Ásetingarnar í hesum kapitli eru óbroyttar sammett við løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, men talan er um ásetingar, sum tá vóru nýggjar í føroyskari lóggávu.

Áhugin er vaksandi fyri at gagnnýta annað havtilfeingi, t.d. arvatilfar, sum stavar frá livandi verum í havinum. Enn er einki samlað lógarverk á hesum øki í londunum uttan um okkum, men her verður skotið upp at skipa karmar fyri gagnnýtslu av hesum tilfeingi. Umsitingin av hesum havtilfeingi eigur at taka støðu í sáttmálanum um lívfrøðiligt fjølbroytni (Biodiversitetskonventiónin). Í 1993 samtykti Løgtingið at taka undir við donsku staðfestingini av sáttmálanum. (Uppskot til samtyktar, 23. november 1993). Sáttmálin er lýstur fyri Føroyar sum Bekendtgørelse nr. 142 frá 21. november 1996 af konvention af 5. juni om den biologiske mangfoldighed. Umframt ásetingar um varðveitslu av lívfrøðiligum margfeldi inniheldur Biodiversitetskonventiónin ásetingar um gransking og burðardygga gagnnýtslu av hesum tilfeingi. Evnið verður eisini viðgjørt í Noregs offentlige udredning (NOU) 2005/10 við heitinum ”Lov om forvaltning av viltlevende marine ressurcer”. Tá sagt verður, at hesin kapittul er um annað havtilfeingi, skal hetta síggjast í mun til allýsingina av hesum hugtaki. Vanligur fiskiskapur, sum vit kenna hann, er tí ikki fevndur av hesum ásetingum uttan so, at hesin fer fram við tí endamáli at fremja marina bioprospektering.

**Til § 45.**
Í hesi grein vera hugtøk allýst, sum verða nýtt í hesum kapitli. Annað sjófeingi er ein breið orðing, sum fevnir um alt lívfrøðiligt, evnafrøðiligt og fysiskt tilfar, sum stavar frá livandi verum, t.d. djórum, plantum og smáverum, ella frá øðrum uppruna í sjónum – eisini á og í havbotninum.

Arvatilfar frá livandi verum í havinum er partur av sjófeinginum, og fevnir tað um tilfar frá livandi verum, t.d. djórum, plantum og smáverum, ella øðrum uppruna, sum inniheldur arvaeginleikar. Arvatilfarið er ikki einans ílegur, men eisini evnafrøðilig evni, so sum protein og enzym, sum eru avleidd av arvatilfari, og sum kunnu takast út úr tí fysiska tilfeinginum og nýtast serskilt.

Tá talan er um bioprospektering, kann hendan fara fram á ymiskan hátt, men vísast kann á tríggjar megintættir:

1) Útvinning av serligum evnum, so sum fitisýrum, kveikum, gelatini, cithin o.a.

2) Leiting eftir áhugaverdum ílegum ella bioaktivum evnum, grundað á eitt nú grundgransking, heimaráð ella serligan staðbundnan kunnleika.
3) Skipað umfatandi leiting eftir aktivum evnum (Miðvís roynd eftir einum hópi av evnum fyri at finna fram til ávís evni, sum hava júst teir eginleikar ein ynskir).

**Til § 46.**
Grundreglan er, at annað sjófeingi ikki er privat ogn, men ogn Føroya fólk eins og alt annað tilfeingi í føroyskum sjógvi og á føroyska landgrunninum. Gagnnýtsla av hesum tilfeingi kann bara fara fram við góðkenning frá landsstýrismanninum. Neyðugt er við loyvi uttan mun til, um talan er um handilsliga gagnnýtslu ella ikki. Gransking verður í Havrættarsáttmálanum mett at kunna fara fram undir tveimum ymiskum fortreytum: antin vísindalig gransking (pure research) ella gransking við tí endamáli at gagnnýta tilfeingið (applied research).

Fer granskingin fram í sjóumveldinum (innan fyri 12 fjórðingar), hevur strandarlandið løgfrøðiliga myndugleikan í øllum viðurskiftum og kann geva rættindi og seta treytir út frá hesum. Fer granskingin fram uttan fyri sjóumveldið, men innan fyri fiskimarkið, skal strandarlandið framvegis samtykkja, men er møguleikin at nokta beinleiðis vísindaligari gransking avmarkaður. Tó kann m.a. noktast, um granskingin hevur beinleiðis samband við leiting og gagnnýtslu av tilfeingi. Krav um luttøku hjá strandarlandinum, og at fáa hendur á kanningarúrslitum, kann altíð setast. Í hesum sambandi verður víst til kapittul 13 í Havrættarsáttmálanum.

Í teimum førum vanligur fiskireiðskapur verður nýttur at fremja bioprospektering, kemur hetta undir treytirnar, ið annars eru settar í hesi løgtingslóg.

Landsstýrismaðurin kann áseta nærri treytir í slíkum loyvum, eitt nú um tíðarskeið, leiðir og nýtslu av reiðskapi, fyri á henda hátt at tryggja, at altjóða reglur og krøv eru lokin, og at tað kemur landinum til góðar.

**Til § 47.**
Tað er í samsvari við sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi (Biodiversitetskonventiónin), at upprunalandið kann áseta gjøld og aðrar treytir fyri gagnnýtslu av tí tilfeingi, talan er um her.

Tá hetta økið er nýtt og ókent í løtuni, er tó stór óvissa um, hvussu møgulig gjøld, harundir skatting av vinningi, skal fara fram. Tí eru í hesum uppskotinum ongar reglur um, hvussu landið kann fáa part av møguligum vinningi, men verður mælt til, at serstakar skattareglur verða gjørdar á hesum øki, sum taka hædd fyri tí serligu støðu, slík vinna er í, og teimum altjóða sáttmálum og leiðreglum, sum eru á økinum. Talan kann bæði vera um serstakar skattareglur og aðrar reglur, t.d. um, at landið fær lut í nýtslugjøldum (royalties) frá patentum.

Í sambandi við, at loyvir verða givin til bioprospektering, er tað av týdningi, at loyvishavarin bindur seg til at veita nakrar tænastur afturfyri. Tí eigur sáttmáli at verða gjørdur millum partarnar, sum m.a. eigur at innihalda áseting um, at loyvishavarin fær álagt at gera neyvt yvirlit yvir alt, sum verður funnið, og bindur seg at viðurkenna, at tilfarið hevur føroyskan arvafrøðiligan uppruna, um hetta verður nýtt vinnuligt frameftir. Orsøkin til hesa treyt er at sleppa undan torførari prógvførslu um upprunan av nýtta arvafrøðiliga tilfeinginum. Ásetast kunnu eisini treytir um varðveitslu av innsavnaða tilfarinum.

Ásetingin um atgongd til ella lut í framíhjárættindum kann vera atgongd til kanningarúrslit, og hvussu hesi kunnu gagnnýtast. Í loyvum eru bara treytir til umsøkjaran. Um so er, at hesin

avhendar síni rættindi, ella letur onnur fáa lut í teimum, kann hetta tí bara gerast við góðkenning frá landsstýrismanninum.

**Til § 48.**
Henda grein er ætlað at nýta í teimum førum, har loyvi ikki er givið til gagnnýtslu av øðrum føroyskum sjófeingi, tá tilfeingið longu lógliga er fingið til vega við eitt nú vanligum fiskiskapi. Greinin heimilar í slíkum førum landsstýrismanninum at áleggja treytir, sum vera galdandi frameftir fyri viðkomandi gagnnýtslu, eftir somu mannagongd sum í grein omanfyri.

**Kapittul 11. Vinnuligar royndir, royndarfiskiskapur o.a.**

**Til § 49.**
Heimild er at seta ein part av tøku føroysku veiðirættindunum av at brúka til vinnuligar royndir og verkætlanir við svartkjafti, norðhavssild og makreli. Slíkar royndir skulu í mest møguligan mun hava virðisøking við sær t.e., at mest møguligt av samlaðu møguligu virðisøkingini/virðisketuni liggur eftir í Føroyum; hava eitt menningarendamál og nýskapanarmál. Parturin, sambært stk. 2 og 3, av føroysku kvotuni av nevndu fiskasløgum, verður settur av til endamálið, sum er at stuðla undir verkætlanum um virðisøking, nýskapan og menning í gagnnýtsluni av nevndu fiskasløgum, harundir eisini at stuðla royndum at virka veiðuna á virkjum á landi, og á tann hátt fáa t.d. meira fjøltáttaða framleiðslu á landi. Tøk føroysk kvota skal skiljast sum kvotan, ið Føroyar árliga seta sær av nevndu fiskasløgum, áðrenn umbýti er gjørt við onnur lond. Serstakt fiskiloyvi skal vera knýtt at ávísum fiskifari við neyðugum loyvi at fiska, og umsóknin skal vísa á eitt tílíkt fiskifar.

Stk. 2. Við uppskotinum verður farið frá menningarkvotunum, sambært løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, til eina skipan, har tað ikki verður tikið nakað økisrættarligt fyrilit. Talan er heldur um eitt slag av víðkan av verandi skipan við vinnuligum royndum við tað, at landsstýrismaðurin skal seta 8,5% av tøku føroysku kvotuni av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir.

Verandi menningarkvotur, ið eru latnar sambært sjófeingislógini, verða tó partar av hesi nøgd, so leingi tær eru í gildi, samanber skiftisregluna í § 10, stk. 3. Hetta merkir eisini, at um verandi menningarkvotur verða lagdar um til eginkvotur, verður tað tikið av teimum 8,5%.

Stk. 3. Umframt lógarásettu nøgdina kann koma kvota, sum sambært § 14, stk. 2 og 3 verður sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Nøgdin, sum verður sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 14, stk. 2 og 3, fylgir við flytingum í heildarkvotunum, sambært § 16, stk. 4. Hetta merkir, at fer heildarkvotan í einum ári upp um heildarkvotuna í 2020, hækkar eisini tann kvotan, sum er sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir lutfalsliga við hækkingini av heildarkvotuni. Lækkar heildarkvotan hinvegin, verður tað kvota, ið er sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, stk. 3, sum hvørvur fyrst. Í fyrisitingini av kvotu sambært hesi lógaráseting má fyrivarni takast fyri hesum, t.d. soleiðis, at hendan kvotan bert verður lutað út í styttri tíðarskeið.

Stk. 4. Høvuðsreglan er, at bara føroyskt skrásett fiskifør við veiðiloyvi kunnu fáa serstakt loyvi til royndarfiskiskap. Heimild er tó at víkja frá hesum kravi, t.d. um talan er um royndir, sum krevja serlig fiskifør ella tøkni, sum ikki er tøk í fiskiflotanum. Eisini ger serliga frávikið tað møguligt hjá nýggjum aktørum at royna seg í vinnuni uttan treyt um føroyskt skrásett fiskifar og veiðiloyvi.

Stk. 5. Lagt er upp til, at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um mannagongd og treytir í sambandi við umsóknir, og landsstýrismaðurin kann í loyvinum áseta treytir um fiskileiðir, veiðihættir, loyvistíðarskeið o.a. og aðrar treytir samsvarandi § 34.

**Til § 50.**
Stk. 1. Landsstýrismaðurin kann geva loyvi til royndarfiskiskap, sum ikki er fevndur av § 49, ið bert fevnir um makrel, norðhavssild og svartkjaft. Til fiskiroyndir av ymiskum slag er neyðugt við serligum fiskiloyvi, sum t.d. gevur skipinum loyvi at royna við serligum fiskireiðskapi og á leiðum, har ikki er loyvt at veiða eftir vanligu reglunum. Tí er eisini neyðugt við eini heimild, sum gevur undantak frá teimum avmarkingum, sum eru í lógini og kunngerðum, eitt nú reglur um stongdar leiðir, meskastødd, minstamát á fiski o.tíl. Serstakt fiskiloyvi skal vera knýtt at ávísum skipi við veiðiloyvi.

Til kanningar og royndir, sum Havstovan sjálv stendur fyri, við heimild í § 51, krevst ikki serligt loyvi frá Fiskimálaráðnum.

Fiskimálaráðið fær javnan umsóknir um royndarloyvi til ymiskar verkætlanir, sum kunnu vera rættiliga ymiskar í evni, vavi og tíð.

Nógvar av hesum snúgva seg um praktiskan royndarfiskiskap, sum at royna eftir fiskasløgum, ið ikki verða troytt, royna nýggjan reiðskap ella royna nýggjar fiskileiðir. Hildið verður, at tað er sera umráðandi, at fiskiroyndir í mest møguligan mun eru samskipaðar av og fara fram eftir leiðbeining frá Havstovuni.

Fiskiskapur, sum liður í undirvísingar- ella menningarætlanum, er ætlaður skúlum, har fiskiveiða, virking av fiski o.tíl. er ein partur av undirvísingini, umframt verkætlanum, sum ikki beinleiðis eru tengdar at praktiskum fiskiroyndum, og sum so ikki hava vinnuligan fiskiskap sum endamál.

Stk. 2. Høvuðsreglan er, at bara føroyskt skrásett fiskifør við veiðiloyvi kunnu fáa serstakt loyvi til royndarfiskiskap. Heimild er tó at víkja frá hesum kravi, t.d. tá talan er um royndir, sum krevja serlig fiskifør ella tøkni, sum ikki er tøk í fiskiflotanum. Vísast kann eisini á, at sambært § 11, stk. 5 kann gevast undantak frá treytunum um føroyskt skrásett fiskifar og ognarviðurskifti, tá talan er um royndarfiskiskap ella fiskiskap, sum er liður í eini undirvísingar- ella menningarætlan.

Stk. 3. Allar fiskiroyndir eiga at hava eitt menningar- og nýskapanarmál. Royndir skulu vera við til at útvega okkum lívfrøðiliga, vistfrøðiliga og tekniska vitan, sum vit ikki hava frammanundan, og sum kann vera grundarlag undir menning av vinnuligum fiskiskapi. Royndarloyvi eiga at vera avmarkað í tíð, soleiðis at royndarloyvi kann latast til kanningar og royndir í trý fylgjandi ár. Loyvið skal vera galdandi í mesta lagi eitt ár í senn, og verður bert endurnýggjað, um treytirnar í loyvinum eru loknar. Ein treyt kann vera, at skrivlig frágreiðing frá royndunum er latin og góðkend. Endamálið við áramálsavmarkingini er eisini at tryggja, at royndarloyvi ikki ár eftir ár verða brúkt til fiskiskap, sum í roynd og veru er vinnuligur fiskiskapur og eigur at skipast samsvarandi.

Stk. 4. Hevur loyvi verður givið til royndarveiðu eftir ávísum fiskaslagi í samanhangandi tíðarskeiði í minsta lagi 5 ár, kann landsstýrismaðurin eftir umsókn lata fiskiloyvi til ávísa fiskaslagið, tá mett verður, at grundarlag er fyri varandi og burðardyggum fiskiskapi, og

treytirnar í royndarloyvinum annars hava verið loknar. Hetta er eitt slag av skiftisreglu til teirra, ið hava havt royndarloyvi í longri tíð sambært áður galdandi reglum.

Stk. 5. Lagt er upp til, at landsstýrismaðurin fær heimild í kunngerð at áseta nærri reglur um mannagongd og treytir fyri umsiting av royndarloyvum og skipanina við serligum loyvum til fiskiskap. Mett verður, at tað eisini á hesum øki er umráðandi at hava reglur og mannagongd, m.a. so, at royndirnar fara fram á ein skipaðan hátt. Ansast eigur tó eftir, at reglurnar ikki eru so avmarkandi, at tær virka forðandi fyri nýhugsan og nýskapan.

**Kapittul 12. Fiskirannsóknir og havrannsóknir**

**Til § 51.**
Greinin staðfestir Havstovuna sum tann vísindaliga stovnin, ið stendur fyri kanningum og ráðgeving í sambandi við gagnnýtslu av tí sjófeingi og umhvørvi, sum føroysk fiskiveiða er grundað á, umframt at hava skyldu at leggja fram granskingarúrslit frá hesum arbeiði.

Stk. 2. Havstovan skal hava heimild at gera vísindaligar fiskirannsóknir og aðrar rannsóknir í sambandi við livandi tilfeingið og umhvørvið í føroyskum sjógvi. Hetta fevnir eisini um, at Havstovan kann standa fyri vísindaligum royndum á leiðum, hóast allur, ella ávísur reiðskapur, er bannaður. Havstovan kann standa fyri fiskirannsóknum við egnum havrannsóknarskipi, ella kann gera avtalu við onnur, eitt nú privat reiðaravirki, soleiðis at fiskirannsóknir kunnu verða gjørdar við øðrum førum.

Stk. 3. Heimilað verður landsstýrismanninum at lata eigara av fiskifari kvotu sum samsýning fyri, at fiskifar ger vísindaligar fiskirannsóknir fyri Havstovuna. Havstovan kann gera vísindaligar fiskirannsóknir við egnum ella leigaðum fiskiførum. Við hesum er tað møguligt at lata fiskifari kvotu sum samsýning, í staðin fyri at rinda pening fyri, at skipið ger vísindaligar fiskirannsóknir fyri Havstovuna. Hetta ger eisini, at fíggjarligi tørvurin hjá Havstovuni, til at leiga fiskifør til at gera fiskirannsóknir, verður minni.

Verða kvotur latnar eigara av fiskiførum sum samsýning fyri vísindaligar fiskirannsóknir, skal hetta gerast á ein hátt, sum leggur upp fyri, at eitt rímiligt samsvar er millum eitt mett virði á kvotuni og tað, tað kostar at gera fiskirannsóknir fyri Havstovuna. Havstovan má, tá hon leggur til rættis fiskirannsóknirnar, og í tilgongdini at fáa skip at gera fiskirannsóknirnar, tryggja, at hædd verður tikin fyri, at samsýningin er rímilig. Hetta má gerast í samstarvi við Fiskimálaráðið.

Landsstýrismaðurin fær heimild til at lata kvoturnar sum egnar árskvotur. Egnar kvotur, sum verða latnar fyri at gera fiskirannsóknir, verða latnar fyri eitt ár.

Stk. 4. Stovnsmetingar av fiskastovnunum er ein týdningarmikil partur av grundarlagnum fyri stýringini av fiskiskapinum. Dyggar stovnsmetingar eru tó treytaðar av, at tann, sum hesar ger, hevur atgongd uttan forðingar at gera kanningar av landingunum eftir egnum ynski. Havstovan fær tí heimild at gera kanningar av landingunum. Hetta verður gjørt fyri at tryggja stovninum atgongd til landingar, har mett verður, at tørvur er.

**Kapittul 13. Avgreiðslugjøld**

**Til § 52.**

Stk. 1. Ásetingin er framhald av reglunum í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Landsstýrismaðurin hevur heimild at gera reglur um tey gjøld, sum eru nevnd í ásetingini.

Stk. 2. Ásetingin gevur heimild at áseta gjald fyri tænastur, sum verða veittar eftir áheitan. Talan er um tænastur, sum liggja uttan fyri tær vanligu eftirlitsuppgávurnar, sum myndugleikin hevur av at ansa eftir, at reglurnar í lógini, og reglur ásettar við heimild í lógini, verða hildnar.

Eftirlitsmyndugleikin verður til tíðir biðin um at veita borgarum tænastur, serliga kann talan vera um váttanir av ymsum sløgum, sum krevja ávíst eftirkanningararbeiði. Mett verður, at heimild eigur at vera fyri at krevja gjald fyri tær útreiðslur, sum standast av slíkum arbeiði. Eitt nú kann heimildin verða nýtt til at krevja avgreiðslugjald fyri tær veiðiváttanir, sum ES krevur skulu fylgja við allari fiskavøru, sum verður flutt á ES marknaðin. Talan er um eina váttan, sum útflytarin av vøruni biður um frá Vørn, at veiðan ikki er partur av ÓÓÓ-fiskiskapi (ólógligari, ófráboðaðari og óskipaðari veiðu). Í sambandi við, at Fiskiveiðieftirlitið skal vátta fyri vøruna, skal ávíst arbeiði gerast fyri at eftirkanna upplýsingarnar á skjalinum, eitt nú skal eftirkannast, um fiskifarið, sum hevur veitt fiskin, hevur fiskiloyvi, um rætt fiskiloyvisnummar er uppgivið, og um røtt skráseting er av veiðuni o.a.

Talan kann eisini vera um at áseta gjald fyri aðrar váttanir ella tænastur, sum borgari biður um. Áðrenn gjøld kunnu krevjast, skal landsstýrismaðurin hava ásett reglur í kunngerð.

**Kapittul 14. Fiskiveiðieftirlit**

**Til § 53.**
Greinin ásetir, at tað er Fiskiveiðieftirlitið, sum hevur eftirlit við, at reglurnar í lógini, og reglur ásettar við heimild í hesi lóg, verða hildnar. Vørn er stovnur undir landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, og hevur allar fiskiveiðieftirlitsuppgávur um hendi, harundir eisini annað, sum kann hava árin á fiskiveiðu.

Fiskiveiðieftirlitið hevur tó ikki eftirlit við reglunum ásettar í § 43. Sambært stk. 1 skulu skipari og manning á fiskiførum undir føroyskum flaggi, umframt á móttøkuskipum undir føroyskum flaggi,  lønast sambært sáttmála, sum er gjørdur við føroysk manningarfeløg. Eingin myndugleiki skal hava eftirlit við hýruútgjaldingunum. Manningarnar mugu sjálvar, møguliga saman við manningarfeløgunum, tryggja, at hýruútgjaldingarnar eru í samsvari við lógarásetingarnar. Sambært stk. 2 skal tann, sum søkir um fiskiloyvi, vátta, at skipari og manning á fiskifari í tí ávísa fiskiskapinum verða lønt samsvarandi sáttmálum við føroysk manningarfeløg. Er ávísur fiskiskapur ikki fevndur av sáttmálum við føroysk manningarfeløg, skal tann, sum søkir fiskiloyvi, í hvørjum einstøkum føri vátta, at lønarviðurskiftini hjá skipara og manning eru staðfest í skrivligari avtalu millum avvarðandi manningarfeløg og ábyrgdaran av fiskifarinum, sum ávíst í fiskiloyvinum. Áðrenn fiskiloyvi verður útskrivað, skal Vørn sostatt krevja, at váttan um oman fyri nevndu viðurskifti verður løgd fram. Vørn skal tó ikki kanna, um veruligu viðurskiftini eru í samsvari við váttanina.

Greinin heimilar harafturat Fiskiveiðieftirlitinum at gera samstarvsavtalur við aðrar myndugleikar um at útinna eftirlitsuppgávur og at samskipa allar eftirlitsuppgávur á sjógvi og landi, um hetta er neyðugt.

Fiskiveiðieftirlit verður, sum er, framt av Vørn og av donsku sjóverjuni. Samstarvið er skipað í serligari samstarvsavtalu. Eisini hevur Fiskimálaráðið sáttmála við Atlantsflog um tyrluflúgving, sum eisini fevnir um eftirlitsflúgving í samband við fiskiveiðieftirlit.
Henda lóg áleggur tó ikki uppgávur o.a. á donsku sjóverjuna. Har Fiskiveiðieftirlitið er nevnt í lógini, er talan um Vørn.

**Til § 54.**
Stk. 1. Greinin heimilar eftirlitsmyndugleikanum at gera neyðugar kanningar, til tess at kunna útinna eftirlitið sambært lógini. Fyri at eftirlitið skal fremjast á nøktandi hátt, skal myndugleikin hava greiða heimild til at krevja reiðskap inn, fara umborð, kanna skjøl, last, reiðskap o.tíl. Hesar kanningar verða oftani gjørdar á sjónum, meðan fiskiførini eru til fiskiskap. Í framhaldi av hesum fær eftirlitsmyndugleikin heimild at krevja fiskifar í havn til nærri kanningar av tólum, reiðskapi og veiðu, umframt av elektroniskari útgerð. Tørvur kann eitt nú vera at taka plottarar, GPS-arar og aðra elektroniska útgerð til nærri kanningar.

Stk. 2. Myndugleikin skal eisini hava greiða heimild at fara inn á øki og krevja atgongd til høli o.s.fr. at gera tænastukanningar og krevja, at skjøl, data, útgerð og rávøra verða tikin til nærri kanningar.

Stk. 3. Verður fiskifar kravt í havn, og eftirlitsmyndugleikin staðfestir lógarbrot, og eigari ella skipari á fiskifari verður dømdur ella góðtekur uttanrættarliga avgerð, skal eigarin av fiskifarinum gjalda allar útreiðslur av kanningini, so sum landing av veiðuni o.a. Verður einki lógarbrot staðfest, má eftirlitsmyndugleikin rinda fyri útreiðslurnar av kanningini.

Stk. 4 og 5. Eftirlitsmyndugleikin skal til einhvørja tíð kunna senda fólk umborð á fiskifør ella fiskaflutningsfør, sum eru í føroyskum sjógvi, og gera kanningar av lastini (farminum), reiðskapi og skipaskjølum o.a. Umframt hevur myndugleikin rætt, við samleikaprógvi, at gera kanningar á fiskavirkjum, fiskagoymslum o.a.

**Til § 55.**
Stk. 1. Álagt verður skipara og eigara av fiskifarinum at tryggja atkomumøguleikar til fólk frá eftirlitinum, soleiðis at hesi altíð kunnu koma trygt umborð, harundir eisini, tá skip liggja síð um síð. Krøvini til leytarar og aðra útgerð eru tey, sum verða sett sambært lóg um trygd á sjónum. Henda skylda at tryggja atkomumøguleikar hjá eftirlitsmyndugleika er eisini galdandi, tá eftirlitsmyndugleikar úr øðrum londum koma umborð at gera eftirlit.

Stk. 2. Ætlanin er ikki við hesi heimild at seta alment galdandi reglur um atkomumøguleikar fyri øll føroysk fiskifør. Hesi viðurskifti eru regulerað í fráboðanum sambært lóg um trygd á sjónum, har reglur eru um útgerðina, viðlíkahald og goymslu av slíkari útgerð. Mett verður, at hesar reglur eru nøktandi eisini fyri atkomumøguleikarnar hjá eftirlitsmyndugleikanum.
Aðrar ásetingar um atkomuviðurskifti kunnu tó vera í sáttmálum, sum Føroyar eru partur í. Slíkar ásetingar eru m.a. í NEAFC og NAFO reglum. Tað skal tí vera gjørligt við kunngerð at áseta ítøkiligar treytir til atkomuviðurskiftini í samband við fiskiskap á hesum leiðum.

**Til § 56.**
Stk. 1. Tá eftirlitsmyndugleikin ger kanningar, hava tey, ið hava ábyrgd av tí, ið kannað verður, skyldu at vera myndugleikanum til hjálpar. Her verður hugsað um skiparar, virkisleiðarar, goymsluleiðarar ella líknandi. Hesi hava øll skyldu at vera til hjálpar.

Stk. 2. Ásetingin áleggur skiparum á fiskiførum undir føroyskum flaggi skyldu at samstarva við eftirlitsmyndugleikar í øðrum londum, tá eftirlit verður framt uttan fyri føroyskan sjógv. Talan kann vera um eftirlit, sum verður framt í altjóða sjógvi sambært avtalum ella sáttmálum, sum Føroyar eru partur av, eitt nú í NEAFC. Eisini kann talan vera um eftirlit í sjógvi hjá øðrum londum, har fiskifør undir føroyskum flaggi hava fingið loyvi at veiða, tað kann vera sambært avtalu, Føroyar hava gjørt, ella eigarar av fiskiførum sjálvir hava útvegað sær loyvi at fiska í sjógvi hjá øðrum londum, sum Føroyar ikki hava avtalu við.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin fær heimild at áleggja skiparum ítøkiligar skyldur í sambandi við, at eftirlit verður framt av eftirlitsmyndugleikum í øðrum londum. Vísast kann á, at í eitt nú NEAFC og NAFO eru serligar reglur um skyldur hjá skiparum, tá eftirlit verður framt í sambandi við fiskiskap á leiðum fevndar av hesum sáttmálum. Eisini kunnu reglur verða gjørdar í øðrum felagsskapum, sum Føroyar eru partur av ella samstarva við.

**Til § 57.**
Stk. 1. Ólóglig veiða má hvørki goymast, flytast, viðgerast ella annað. Tað er umráðandi at hava eina greiða heimild fyri hesum, tí hetta eru samstundis viðurskifti, sum Føroyar hava bundið seg til í altjóða høpi.

Stk. 2. Keyparar ella móttakarar av ólógligari veiðu kunnu sleppa undan ábyrgd við at boða eftirlitsmyndugleikanum frá.

Stk. 3 ásetir aðalregluna um, at øll veiða verður mett sum ólóglig veiða uttan so, at tað verður prógvað, hvussu stór tann ólógliga veiðan er. Her er talan um eina sokallaða umvenda próvbyrðu.

**Til § 58.**
Eftirlitsmyndugleikin kann krevja, at fiskifør, fiskaflutningsfør og fiskaframleiðslufør vera á ávísari leið, til eftirlitsskip kann koma á staðið at gera kanningar. Talan kann eitt nú vera um at gera kanningar, um veiðisamansetingin í lastini á útlendskum førum samsvarar við fráboðanir, og fyri at staðfesta, um ov nógv av ungfiski er uppií.

**Til § 59.**
Stk. 1. Greinin heimilar Fiskiveiðieftirlitinum at áseta bráðfeingis veiðibann. Bráðfeingis veiðibann kann ásetast, um íbland av ungfiski ella hjáveiðu er meir enn loyvda markið. Veiðibannið verður ásett fyri 4 vikur hvørja ferð. Hetta er ein broyting í mun til lógina um vinnuligan fiskiskap, sum ásetti, at bráðfeingis veiðibann kundi lýsast upp til 2 vikur hvørja ferð. Mett verður, at 2 vikur er ov lítið, og er hetta broytt til 4 vikur hvørja ferð.

Stk. 2. Fiskiveiðieftirlitið kann loyva einstøkum fiskiførum at gera royndir á bráðfeingis stongdari leið við tí endamáli at fáa staðfest, um grundarlag framvegis er fyri veiðibanninum.

Stk. 3. Bráðfeingis veiðibann kemur í gildi eftir, at Fiskiveiðieftirlitið hevur lýst veiðibannið alment. Henda lýsing av veiðibanni kann t.d. fara fram í útvarpinum hjá Kringvarpi Føroya, á Rás 2 ella veiðibannið kann lýsast um Tórshavn Radio. Umráðandi er, at veiðibannið verður lýst soleiðis, at tað er gjørligt hjá fiskiførum at verða kunnað um veiðibannið.

**Til § 60.**

Greinin er ætlað fiskiførum, sum eftir t.d. umvælingar, umbygging ella líknandi, hava tørv á at vita, um reiðskapur, spøl og annar útbúnaður virkar, sum tað skal, áðrenn farið verður til fiskiskap. Vørn kann í slíkum førum geva stutt serloyvi til endamálið.

**Til § 61.**
Fiskifør skulu hava allan fiskireiðskap burturstúgvaðan innanborða á sínum natúrliga staði, tá tey eru stødd á eini leið, har tað ikki er loyvt fiskifarinum at fiska. Tað sama er galdandi, tá fiskifarið liggur í havn. Ásetingin hevur eftirlitsendamál. Er t.d. ein trolari inni á eini leið, har tað bert er loyvt at brúka eitt serligt slag av troli (meskar o.a.), skal allur annar trolreiðskapur, ið ikki lýkur treytirnar fyri fiskiskapi við troli á viðkomandi leið, verða burturstúgvaður, tað vil siga, ikki t.d. liggja á troldekkinum, klárur at skjóta.

**Til § 62.**
Greinin heimilar føroyskum myndugleikum at útflýggja myndugleikum í øðrum londum upplýsingar, eisini trúnaðarupplýsingar, sum hava týdning fyri eftirlitið við fiskiskapi og veiðu, tó treytað av, at galdandi reglur um trygd og trúnað kunnu haldast. Eitt nú kunnu upplýsingar latast, sum hava týdning fyri møgulig revsimál í øðrum londum. Hetta kunnu vera upplýsingar, sum annars verða mettar at vera trúnaðarupplýsingar, eitt nú upplýsingar um rakstrar- og vinnuviðurskifti hjá privatum feløgum ella einstaklingum, harundir upplýsingar um knattstøður, sum kunnu prógva, hvar førini hava verið og møguliga fiskað, upplýsingar um, hvørjar fráboðanir skipið hevur latið føroyskum myndugleikum, upplýsingar, sum eyðmerkja, hvør er skipari og eigari av farinum. Eftirlitsfrágreiðingar, gjørdar av føroyskum myndugleikum, kunnu sendast flagglandinum hjá førum undir fremmandum flaggi, umframt strandarlondum, har tað er viðkomandi. Soleiðis kunnu Føroyar samstarva um eftirlit við onnur lond, so at ólógligur, óskipaður og ófráboðaður fiskiskapur kann basast. Heimildin er neyðug fyri at kunna seta í verk ÓÓÓ-sáttmálan. Upplýsingar kunnu eisini útflýggjast økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum, so sum NEAFC ella NAFO, umframt altjóða felagsskapum, so sum FAO. Yvirskipað er ætlanin við heimildini, at Føroyar kunnu samstarva um eftirlit við onnur lond í tví- og fleirpartaskipanum.

Tá upplýsingar verða sendar til útlond, skal fyrilit havast til trygdina, soleiðis at upplýsingar bert verða sendar øðrum londum ella felagsskapum, um upplýsingarnar verða goymdar og tryggjaðar av móttakaranum.

Viðmerkjast skal, at sambært persónsupplýsingarlógini skal fráboðan sendast Dátueftirlitinum, tá persónsupplýsingar verða sendar til útlond. Hetta er galdandi fyri allar upplýsingar, og ikki bert viðkvæmar og trúnaðarupplýsingar. Tí skal mannagongd setast í verk, soleiðis at fráboðan verður send Dátueftirlitinum, um tað kemur fyri, at upplýsingar verða sendar til útlond.

Er talan um upplýsingar um revsiverd viðurskifti hjá likamligum persónum, so er talan um viðkvæmar upplýsingar sambært persónsupplýsingarlógini. Viðvíkjandi § 62 skal vísast á, at tá ið myndugleikar við heimild í lóg flyta persónsupplýsingar til útlond, sum eru nevnd í skjali 1 í kunngerð nr. 31 frá 21. mars 2019 um flutning av persónsupplýsingum til útlond, skal flutningurin fráboðast Dátueftirlitinum, áðrenn flutningurin kann fara lógliga fram, sambært § 1 í kunngerðini.

**Kapittul 15. Reglur um kærur**

**Til § 63.**
Stk. 1. Greinin ásetir, at avgerðir, sum Fiskiveiðieftirlitið tekur eftir lógini, kunnu kærast til landsstýrismannin. Kærufreistin er sett til 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin fær heimild til at leggja kærur til viðgerð hjá eini kærunevnd, soleiðis at avgerðirnar hjá nevndini eru endaligar innan fyrisitingina, og tí ikki eisini kunnu kærast til landsstýrismannin. Tað er tó altíð eisini møguligt at leggja avgerðir fyri dómsvaldið.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann gera nærri reglur um kærunevnd og kæruviðgerðina. Hetta kunnu vera reglur um, hvussu nevndin skal vera samansett, so fakligi førleikin verður tryggjaður. Eisini kann talan vera um mannagongd fyri, hvussu nevndin virkar, um nevndin bert kann taka avgerðir, um hon er fullmannað o.a.

**Kapittul 16. Revsireglur o.a.**

**Til § 64.**
Stk.1. Ásetingin er bæði í innihaldi og bygnaði gjørd á sama hátt, sum ásetingin í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi frá 2017.

Høvuðsreglan er, at brot á fiskivinnulógina verður revsað við sekt.

Við løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi var revsingin fyri brot á fiskivinnulóggávuna herd, og hildið verður fast í hesum reglum.

Rættindi til fiskiskap verða latin undir ásettum treytum. Treytir verða settar fyri at verja fiskatilfeingið, sum er ogn Føroya fólks. Treytir verða settar, bæði fyri at verja tey fiskasløg, sum beinleiðis fiskiskapur verður loyvdur eftir, umframt at verja sambandið millum ymisku dýra- og plantustovnarnar í havinum. Tað er sera umráðandi at verja tilfeingið fyri at varðveita tilfeingið, men eisini, so hetta fyri framtíðina kann geva eitt íkast til samfelagið. Her skal eisini havast í huga tann stóra týdning, fiskivinnan hevur fyri føroyska samfelagið. Brot á treytir fyri fiskiskapi verða mett sera álvarslig. Tað hevur tí stóran týdning, at revsingin verður sett soleiðis, at treytir verða hildnar, og at tað eisini stimbrar onnur til at fylgja treytum fyri fiskiskapi.

Útrokning av sekt:

- Fiskiskapur í fiskidagaskipan: avreiðingarvirðið fyri bólkin í undanfarna fiskiári býtt við samlaða fiskidagatalinum fyri bólkin.

- Kvotuskipan: avreiðingarvirðið fyri bólkin (ídnaðar- og nótaskip samlað) býtt við tal av fiskiførum í bólkinum býtt við 200 (mett fiskidagatal).

T.d. avreiddi bólkur 2 fyri 532.257.790 kr. í 2016. Tá sektin verður roknað fyri eitt far í bólki 2, verður tað árliga avreiðingarvirðið býtt við samlaða dagatalinum hjá bólkinum, t.v.s. 532.257.790 kr. / 5.916 dagar = 89.969 kr., rundað upp til 90.000 kr. Standardsektin fyri eitthvørt brot hjá fari í bólki 2 er sostatt í útgangsstøðinum 90.000 kr. So kunnu vera antin herðandi ella linnandi umstøður.

At reiðskapur ikki er merktur, soleiðis at tað ikki er gjørligt beinanvegin at staðfesta, hvør eigur reiðskapin, eigur at føra til eina sekt, sum er uml. 10.000 kr. Er reiðskapurin annars settur í samsvari við reglurnar, verður ikki onnur sekt løgd afturat, men er talan um at fiska ólógliga, verður sekt eisini ásett í mun til avreiðingarvirðið.

Sum álvarslig brot eru at meta øll brot, sum viðvíkja ólógligari veiðu, t.v.s. veiða á leiðum, har ikki loyvt er at fiska, fiskiskapur við ólógligum reiðskapi, fiskiskapur, sum er ófráboðaður/skrásettur skeivt ella, har kvotan er rokkin, men hildið verður áfram at fiska, hóast viðkomandi visti ella átti at vitað, at kvotan var uppfiskað. Hesar sektir eru indekseraðar í mun til avreiðingarvirðið í viðkomandi skipabólki.

Herðandi umstøður eru t.d. endurtøkur ella grov brot. Sektin verður tá í útgangsstøðinum herd við 150%.
Er talan um linnandi umstøður, verður sektin minni, t.d. 50% ella minni. Hetta verður mett ítøkiliga í hvørjum einstøkum máli.

Stk. 1, nr. 1 vísir til ítøkiligu brotini í lógini, sum kunnu revsast við sekt, um persónur – likamligur ella løgfrøðiligur – brýtur ásetingarnar.

Henda áseting fevnir eisini um brot á § 43 um manningarviðurskifti. Fiskiveiðieftirlitið eftirkannar tó ikki, um ásetingin í § 43, stk. 1 er hildin. Um rættarúrskurður er gjørdur, ella avgerð er frá gerðarrættinum, sum staðfestir, at brot er á § 43, stk. 1, skal støða takast til, um hetta skal revsast sambært løgtingslóg um sjófeingi.

Stk. 1, nr. 2 ásetir, at um fiskiskapur ikki steðgar, tá kvota er uppfiskað, hámark er rokkið, ella fiskidagar hjá fiskifari ella bólki eru nýttir, verður brotið revsað við sekt.

Stk. 1, nr. 3 ásetir, at revsað verður við sekt, um fiskað verður á leiðum, har bráðfeingis veiðibann er ásett við heimild í § 59.

Stk. 1, nr. 4 ásetir, at brot á treytir, knýttar at loyvum, latin sambært fiskivinnulóggávuni, kunnu revsast við sekt.

Stk. 1, nr. 5 ásetir, at um persónur – likamligur ella løgfrøðiligur – ikki ger eftir boðum ella forboðum sambært fiskivinnulógini, kann hann revsast við sekt. Henda áseting fevnir eisini um ta støðu, at Fiskiveiðieftirlitið verður forðað í sínum arbeiði, t.d. um umbidnar upplýsingar ikki verða útflýggjaðar, ella atgongd verður sýtt til skip ella høli í samband við eftirlit.

Stk. 1, nr. 6 ásetir, at um persónur – likamligur ella løgfrøðiligur – letur ósannar ella villleiðandi upplýsingar, sum skylda er at lata sambært fiskivinnulógini, kann tað revsast við sekt. Tað sama er galdandi, um upplýsingar verða hildnar aftur.

Stk. 2 heimilar at áseta revsing í kunngerðum við heimild í lógini um vinnuligan fiskiskap fyri brot á reglur í kunngerðini.

Stk. 3 heimilar at revsa løgfrøðiligar persónar fyri brot á fiskivinnulógina eftir reglunum í revsilógini, kapittul 5. Greinin er umorðað við hesi løgtingslóg, tó uttan at innihaldið verður broytt.

Stk. 4. Sambært hesi áseting kunnu mál, sum verða viðgjørd eftir revsiásetingunum í hesi lóg, ella eftir revsiásetingunum í einari kunngerð, sum hevur heimild í hesi lóg, verða viðgjørd sum løgreglumál. Hetta merkir m.a., at løgreglan kann avgreiða mál við fyrisitingarligum sektaruppskoti (da: bødeforlæg) og á tann hátt sleppa undan at fara í rættin við hvørjum einstakum broti. Fortreytin er tó m.a., at hin skuldsetti - uttanrættarliga - játtar seg sekan í brotinum og góðtekur ásettu sektina. Eisini kunnu reglurnar í rættargangslógini - lovbekendtgørelse nr. 148 af 9. marts 2004 om lov for Færøerne om rettens pleje, sum seinast broytt við lóg nr. 428 frá 3. mai 2017 - um at leggja hald á, og um rannsókn, nýtast sum í statsadvokatmálum.

Stk. 5. Skotið verður upp, at sektin, tá talan er um ólógliga veiðu, sum heild skal ásetast við støði í avreiðingarvirðinum í viðkomandi skipabólki.
Orsøkin til, at mett verður neyðugt at gera mun á sektunum er, at stórur munur er á fíggjarliga vinninginum av at fremja somu brot í ymisku bólkunum, og at skipanin ikki skal gera slík brot til eitt kappingarparametur, so at feløg og persónar, sum bróta lógina, fáa vinning, mótvegis, at feløg og persónar, ið halda lógina, ikki gerast kappingarfør. Hinvegin hevur sektin fyri sama brot í smærru bólkunum verið mett at verið størri enn neyðugt, og kunnu slík brot nú revsast við meiri hóskandi sekt.

Sektin verður at áseta við støði í, um peningaligur fyrimunur er fingin, ella tílíkur fyrimunur hevur verið tilætlaður fyri viðkomandi sjálvan ella onnur, eitt nú við sparingum. Eisini eigur at verða mett sum herðandi umstøða, at skaði er voldur á umhvørvið, ella elvt er til vanda fyri slíkum skaða, t.d. brot á verndarreglur fyri ungfisk.

Stk. 6. Ásett verður, at er brotið, sambært. stk. 1, nr. 6, framt fyri at sleppa undan uppboðssølugjaldi ella øðrum gjaldi sambært løgtingslógini, skal sektin taka støði í virðinum á gjøldunum, sum roynt er at sleppa undan. Talan er í slíkum førum um brot, sum eru at meta javnt við brot innan skatta- og avgjaldsløggávuna, har landskassin verður fyri beinleiðis fíggjarligum missi av brotinum. Slík brot eiga tí at verða revsa sum ríkilsisbrotsverk.
Ásett verður, at Fiskiveiðieftirlitið við einum sektaruppskoti kann boða frá, at málið kann verða avgjørt við at góðtaka sektaruppskot, sambært § 66 í lógini.

***Sektir viðvíkjandi gjøldum***
Fyri brot á reglur um fráboðanarskyldu, sum má metast at vera framt við tí fyri eyga at sleppa undan gjaldi, verður fyrisitingarligt sektaruppskot gjørt – tó ikki, tá málið verður latið ákæruvaldinum til viðgerðar.

Sektaruppskotini taka støði í, um brotið er framt við vilja ella av grovum ósketni. Vanligt ósketni verður ikki revsað, eins og ivin um við vilja ella ósketni skal koma ákærda til góðar.

**1. Lógarbrot framt við vilja:**
Er lógarbrot framt við vilja, er sektin vanliga tvær ferðir gjaldið.

**2. Lógarbrot framt av grovum ósketni:**
Er lógarbrot framt av grovum ósketni, er sektin eina ferð gjaldið.

**3. Størri lógarbrot, dómstólsviðgerð:**
Stór ella torfør sektarmál skulu latast Fútanum til støðutakan.

**Til § 65.**
Stk. 1. Í førum, har fiskifar hevur fiskað meir enn loyvt er sambært fiskiloyvinum, verður givið eigara 3 dagar freist at fáa viðurskiftini í rættlag, um tað er gjørligt at umseta rættindini. Í øðrum førum er ikki møguligt hjá eigara at fáa viðurskiftini í rættlag.
Víst verður til viðmerkingarnar til § 70.

**Til § 66.**
Stk. 1. Heimilað verður eftirlitsmyndugleikanum at viðgera mál við fyrisitingarligum sektaruppskoti, um so er, at sekt verður góðtikin. Reglurnar í rættargangslógini, um at framleggja sektaruppskot, skulu fylgjast, tá ið sektaruppskot verða løgd fram við heimild í hesi lóg.

Fiskiveiðieftirlitið hevur sostatt heimild til sjálvstøðugt at seta fram sektaruppskot. Treyt er tó framhaldandi, fyri at avgreiða eitt mál við fyrisitingarligum sektaruppskoti, at tann, sum hevur framt brotið, góðtekur sektina. Tað verður bert givin Fiskiveiðieftirlitinum heimild at avgera ávís nevnd brot á lóggávuna við fyrisitingarligum sektaruppskoti. Onnur brot verða framhaldandi latin Fútanum til víðari viðgerð og ikki viðgjørd við fyrisitingarligum sektaruppskoti. Mett verður, at tørvur er á, at Fiskiveiðieftirlitið kann avgreiða ávís mál við fyrisitingarligum sektaruppskoti. Talan er serliga um mál, sum eru einføld og greið og ikki krevja nakað serstakt, tá talan er um próvførslu o.a. Tey mál, sum kunnu avgerast við fyrisitingarligum sektaruppskoti, eru mál um, at fiskifar hevur fiskað meir enn loyvt er, fiskiskapur á stongdum leiðum, harundir leiðir, sum eru stongdar fyri ávísum fiskireiðskapi ella eru stongdar ávís tíðarskeið, ella har Fiskiveiðieftirlitið hevur ásett bráðfeingis veiðibann o.a., veiða við ólógligum reiðskapi, at reiðskapur ikki er merktur, at fiskifarið ikki hevur reiðskap burturstúgvaðan sambært galdandi reglum, brot á fráboðanarskyldu – t.v.s. brot á reglur um at boða frá, at siglt verður inn til landingar, at siglt verður úr einum øki, fráboðan um dagliga veiðu ella fráboðan um, at fiskiskapur steðgar. Eisini fyri virkir, sum hava skyldu at senda inn vektarseðlar, verður skotið upp, at heimilað verður at geva sekt sambært reglunum, um virkið ikki sendir vektarseðil til Fiskiveiðieftirlitið, ella um vektarseðlar ikki verða sendir rættstundis. Eisini kann Fiskiveiðieftirlitið t.d. avgreiða mál við sektaruppskoti, um reiðskapur ikki er merktur sambært galdandi krøvum, umframt, at tað ikki verður gjørt eftir boðum ella banni sambært lógini.

Stk. 2. Skotið verður eisini upp, at Fiskiveiðieftirlitið, umframt sektaruppskot, kann fremja inndrátt í ólógligan fiskireiðskap, sum hevur verið nýttur til fiskiskap, ella sum ikki lógliga kann nýtast til fiskiskap – eitt nú trol við ov smáum meskum.

Sambært § 70 hevur Fiskiveiðieftirlitið heimild til at taka aftur rættin til at reka vinnuligan fiskiskap í upp til 4 vikur. Hetta kann gerast beinanvegin, tá eigari ella skipari á fiskifari, av Fiskiveiðieftirlitinum er staðfestur at hava framt brot á lóggávuna.

At rætturin at reka vinnuligan fiskiskap verður tikin aftur, forðar ikki fyri, at sekt somuleiðis kann verða áløgd, og at hald verður lagt á veiðu og reiðskap sambært reglunum í hesi lóg. Loyvið kann sostatt takast aftur beint eftir, at brotið er staðfest, og eftirfylgjandi kunnu fyrisitingarlig ella rættarlig stig takast viðvíkjandi sekt og inndrátti. Bæði í sambandi við fyrisitingarligt sektaruppskot og í sambandi við dómsviðgerð er møguleiki at taka hædd fyri, at rættindi eru tikin aftur, og at revsingin tí kann linkast, samanber § 83 í revsilógini.

Stk. 3. Reglurnar í rættargangslógini, lovbekendtgørelse nr. 148 af 9. marts 2004 om lov for Færøerne om rettens pleje, sum seinast broytt við lóg nr. 428 frá 3. mai 2017, um innihald í

ákæruriti í løgreglumálum, og at ákærdi ikki hevur skyldu at geva frágreiðing, verða brúktar í sambandi við sektaruppskot.

Stk. 4. Ásett verður, at verður sektaruppskot góðtikið, so er málið at rokna sum endaliga avgreitt og rættarsóknin liðug.

Stk. 5. Ásetingarnar í § 66 eru eisini galdandi fyri tey, sum hava verið við til at fremja brot.

**Til § 67.**
Ásetingin er framhald av ásetingini í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Galdandi avtala frá 1. januar 1981 millum Føroyar og Danmark ásetir, at býtið av sektarpeningi og inndrátti, ið stava frá brotum á fiskivinnulóggávuna, er helvt um helvt millum Føroyar og Danmark.

**Til § 68.**
Stk. 1-3. Ásetingin er framhald av reglunum í lógini um fyrisiting av sjófeingi fyri inndrátt av veiðu og reiðskapi. Inndráttur verður bert framdur í ólógligan reiðskap. Tað merkir, at reiðskapurin í sær sjálvum er at meta ólógligur, tá meskar eru ov smáir, ella ov nógv gørn eru nýtt, ella at reiðskapurin er ólógligur í mun til slagið av fiskiskapi, ið hann hevur verið nýttur til. Hetta verður mett hóskandi, eftirsum sektirnar taka fyrilit fyri, at revsingin skal kunna merkjast, og at tað ikki er nógvur samfelagsligur áhugi í at fremja inndrátt í reiðskap, sum annars er lógligur (pønal konfiskatión). Reglurnar í revsilógini um inndrátt verða nýttar, tó er serligt galdandi eftir hesi lóg, at øll veiðan kann inndragast, hóast tað ikki er staðfest, at øll veiðan er fiskað ólógliga, umframt at allur reiðskapur kann inndragast, hóast tað ikki er staðfest, at allur reiðskapurin er nýttur í ólógligum fiskiskapi, og uttan mun til, hvør eigur reiðskapin.

Soleiðis skal øll veiðan og allur reiðskapurin ikki altíð dragast inn, men tað verður álagt ein presumptiónsábyrgd. Hetta merkir, at tað út frá frágreiðing reiðarans, skiparans og/ella umstøðunum annars má kunna prógvast ella metast vera meiri enn rímiliga sannlíkt, at ein partur av veiðuni er lógligur, og hvør reiðskapur, sum er umborð, ikki er ella kundi verið nýttur í sambandi við ólógliga fiskiskapin. Annars verður øll veiðan, og allur reiðskapurin, drigin inn. Hetta er ein sokallað umvend próvbyrða, sum er herðandi í mun til vanligar revsireglur. Ásetingin er tó ikki ein herðing í mun til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.

Stk. 4. Eisini er heimild hjá eftirlitsmyndugleikanum at inndraga reiðskap, sum er ólógligur, ikki er merktur, er settur, stendur ella latin eftir, har fiskiskapur við hesum reiðskapi ikki er loyvdur ella tílíkt, og har eigarin ikki er kendur.

Fiskiveiðieftirlitið kann lata reiðskapin taka inn fyri eigarans rokning. Fiskiveiðieftirlitið kann taka inn fiskireiðskapin við egnum skipum ella kann biðja onnur hóskandi skip taka reiðskapin inn, alt fyri eigarans rokning

**Til § 69.**
Stk. 1. Greinin ásetir, at er revsiábyrgd staðfest fyri brot á lógina, kann farið haldast aftur, til sektin ella málskostnaðurin er goldin. Ásetingin er galdandi fyri bæði føroysk og útlendsk fiskifør.

Stk. 2. Víst er til rættargangslógina, lovbekendtgørelse nr. 148 af 9. marts 2004 om lov for Færøerne om rettens pleje, sum seinast broytt við lóg nr. 428 frá 3. mai 2017.

**Til § 70.**
Stk. 1. Ásetingin nøktar tørvin á at kunna taka stig mótvegis førum, sum ikki halda seg til treytir ásettar í fiskivinnulóggávuni og í fiskiloyvum. Fyri slík brot kann Fiskiveiðieftirlitið taka aftur rættin at reka vinnuligan fiskiskap upp til 4 vikur í senn.
Møguleikin fyri umsitingarliga at taka loyvið aftur er eitt týdningarmikið amboð, sum kann setast í verk beinanvegin, brotið er staðfest, og at tað í ávísum førum er serligur tørvur á skjótum atburði frá myndugleikanum. Hetta stimbrar eisini øðrum til at fylgja reglunum, tí brot fær avleiðingar beinanvegin.

Stk. 2. Tað er rætturin at reka vinnuligan fiskiskap, sum verður tikin frá skipinum upp til 4 vikur. Fiskiveiðieftirlitið fær heimild at avgera, nær á árinum fiskifarið ikki kann fara til fiskiskap. Hetta fyri at tryggja, at brot á lóggávuna fáa veruligar avleiðingar. Tað er umráðandi, at brot á lóggávuna veruliga merkist fyri eigaran av fiskifarinum. Um veiðirættindi eins væl kunnu gagnnýtast annað tíðarskeið á árinum, merkist avleiðingin av brotinum ikki stórvegis. Tí verður lagt upp til, at Fiskiveiðieftirlitið kann leggja tíðarskeiðið, har tað veruliga merkist fyri eigaran av fiskifarinum. Soleiðis nýtist tíðarskeiðið ikki at vera í framhaldi av brotinum, men kann verða lagt eitt annað tíðarskeið á árinum.

Í tíðarskeiðinum rætturin at reka vinnuligan fiskiskap verður tikin aftur, kann fiskifarið sostatt ikki reka vinnuligan fiskiskap.

Fiskifarið, ið brotið er framt við, kann heldur ikki reka vinnuligan fiskiskap eftir øðrum rættindum, og heldur ikki, um skipið verður selt øðrum eigara, og veiðirættindi, latin skipi í fiskiloyvi, kunnu ikki latast øðrum til fiskiskap í hesum tíðarskeiði.

At rætturin at reka vinnuligan fiskiskap verður tikin aftur, forðar ikki fyri, at sekt somuleiðis kann verða áløgd, og at hald verður lagt á veiðu og reiðskap sambært reglunum í hesi lóg. Reglan, um at taka loyvið aftur fyrisitingarliga, er eitt frávik frá vanligu reglunum um afturtøku sambært revsilógini, sum merkir, at loyvi kunnu takast aftur, áðrenn møguligt rættarmál hevur avgjørt revsimálið.

Skjóta atgongdin, til at leggja avgerðina um at taka veiðirættindini aftur fyri rættin sambært § 89, tryggjar tó borgaran. Loyvið kann sostatt takast aftur beint eftir, at brotið er staðfest, og eftirfylgjandi kunnu fyrisitingarlig (fyrisitingarligt sektaruppskot) ella rættarlig stig takast viðvíkjandi sekt og inndrátti. Bæði í sambandi við fyrisitingarligt sektaruppskot og í sambandi við dómsviðgerð er møguleiki at taka hædd fyri, at rættindi eru tikin aftur, og at revsingin tí kann linkast ella detta burtur, samanber § 83 í revsilógini.

**Til § 71.**
Ásetingin heimilar landsstýrismanninum at taka loyvið aftur í sambandi við grov brot og endurtøku av brotum. Hesar afturtøkur eru ikki tíðaravmarkaðar eins og tær, sum Vørn ger sambært § 70. Talan kann vera um at taka aftur rættin til at reka vinnuligan fiskiskap fyri eitt longri tíðarskeið enn tær 4 vikurnar, sum heimildin í § 70 fevnir um. Talan kann eisini vera um endaliga at taka aftur rættin til at reka vinnuligan fiskiskap. Eisini kann vera talan um at taka aftur onnur loyvir, latin sambært lógini, endaliga ella fyri eitt ásett tíðarskeið. Sí annars viðmerkingarnar til § 70 um fyrisitingarliga afturtøku.

**Til § 72.**
Avgerðin, um at taka loyvið aftur fyrisitingarliga, kann ikki kærast til landsstýrismannin ella til eina kærunevnd, men avgerðin kann leggjast fyri rættin. Hetta er framhald av reglunum í

lógini um vinnuligan fiskiskap. Tað er tann, sum avgerðin er rættað ímóti, sum, yvir fyri myndugleikanum, kann krevja, at avgerðin, um at taka aftur rættin til at reka vinnuligan fiskiskap ella onnur loyvi, verður løgd fyri dómsvaldið. Málið verður tá lagt fyri dómsvaldið eftir reglunum í § 78, stk. 3 í revsilógini. Tað er tá Fútin, sum leggur málið fyri dómsvaldið, og ikki eigarin sjálvur. Slík áheitan, um at málið skal leggjast fyri dómsvaldið eftir serligu skipanini, skal vera fráboðað innan 2 vikur eftir, at loyvishavarin hevur fingið boð um avgerðina. Mett verður, at rættartrygdin fyri borgaran verður tryggjað við serligu skipanini at leggja slík mál fyri dómsvaldið, og mett verður, at kærur um slík mál best verða viðgjørdar í rættarskipanini, har eisini onnur mál av revsirættarligum slag verða viðgjørd, vanliga uttan aðrar fyrisitingarligar kærumøguleikar.

Áheitan um at leggja málið fyri dómsvaldið fær ikki uppsetandi virknað.

**Kapittul 17. Gildiskoma og skiftisreglur**

**Til § 73.**
Áseting um gildiskomu.

Stk. 2. Orsakað av, at ein tillagingartíð er, har veiðirættindini vera knýtt at fiskiførunum, er ásett, at brúksskyldan, sum er treyt í samband við avhending av egnum fiskidøgum og avhending av egnum árskvotum, og generella brúksskyldan fyri veiðirættindi, fær gildi 1. januar 2022.

Stk. 3. Allar kunngerðir við heimild í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, vera verandi í gildi.

Løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 við seinni broytingum heimilar:

Kunngerð nr. 124 frá 25. juli 2019 um áseting og útrokning av fiskiorku í sambandi við avhending og flyting av fiskidøgum og broyting av fiskifari.
Kunngerð nr. 76 frá 22. mai 2019 um treytir fyri fiskiloyvi 5 A og 5 B og reglur um býtið av fiskidagatalinum hjá bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons
Kunngerð nr. 75 frá 22. mai 2019 um fiskiskapin eftir botnfiski og krabba við fiskiførum undir føroyskum flaggi í grønlendskum sjógvi í 2019.
Kunngerð nr. 74 frá 20. mai 2019 um skipan av fiskiskapinum eftir kongafiski í altjóða sjógvi í Norðurhavi í 2019.
Kunngerð nr. 73 frá 16. mai 2019 um at skipa fiskiskapin eftir norðhavssild við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2019, sum broytt við kunngerð nr. 86 frá 14. juni 2019 Galdandi.
Kunngerð nr. 39 frá 15. apríl 2019 um at skipa fiskiskapin eftir havtasku og svartkalva við gørnum í føroyskum sjógvi.
Kunngerð nr. 32 frá 1. apríl 2019 um skipan av fiskiskapinum eftir heystgýtandi sild við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2019.
Kunngerð nr. 27 frá 20. mars 2019 um fiskiskapin eftir rækjum við fiskiførum undir føroyskum flaggi í grønlendskum sjógvi í 2019.
Kunngerð nr. 26 frá 20. mars 2019 um at skipa fiskiskapin eftir gulllaksi í føroyskum sjógvi í 2019 .
Kunngerð nr. 25 frá 20. mars 2019 um fiskiskapin hjá skipum undir íslendskum flaggi í føroyskum sjógvi í 2019.
Kunngerð nr. 20 frá 20. mars 2019 um veiðu eftir botnfiski við fiskiførum undir føroyskum flaggi í íslendskum sjógvi í 2019.

Kunngerð nr. 28 frá 19. mars 2019 um avhending av kvotum í 2019.
Kunngerð nr. 10 frá 12. februar 2019 um skipan av fiskiskapinum eftir kongafiski í Irmingerhavinum í 2019.
Kunngerð nr. 7 frá 7. februar 2019 um menningarkvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til menningarætlanir í ávísum økjum í 2019, sum broytt við kunngerð nr. 30 frá 19. mars 2019.
Kunngerð nr. 5 frá 17. januar 2019 um at bjóða út rættindi á uppboðssølu í 2019, sum seinast broytt við kunngerð nr. 85 frá 14. juni 2019.
Kunngerð nr. 177 frá 21. desember 2018 um at skipa fiskiskapin eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2019, sum seinast broytt við kunngerð nr. 84 frá 14. juni 2019.
Kunngerð nr. 176 frá 21. desember 2018 um at skipa fiskiskapin eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2019, sum broytt við kunngerð nr. 93 frá 1. juli 2019.
Kunngerð nr. 175 frá 21. desember 2018 um veiðu eftir botnfiski o.ø. við fiskiførum undir føroyskum flaggi í NAFO skipanarøkinum í 2019, sum broytt við kunngerð nr. 112 frá 15. juli 2019.
Kunngerð nr. 173 frá 21. desember 2018 um veiðu eftir botnfiski og rækjum við fiskiførum undir føroyskum flaggi við Svalbard í 2019, sum broytt við kunngerð nr. 114 frá 15. juli 2019.
Kunngerð nr. 172 frá 21. desember 2018 um veiðu eftir botnfiski við fiskiførum undir føroyskum flaggi í norskum sjógvi í 2019.
Kunngerð nr. 171 frá 21. desember 2018 um veiðu eftir botnfiski og øðrum fiski við fiskiførum undir føroyskum flaggi í ES-sjógvi í 2019.
Kunngerð nr. 170 frá 21. desember 2018 um fiskiskapin hjá skipum undir russiskum flaggi í føroyskum sjógvi í 2019.
Kunngerð nr. 169 frá 21. desember 2018 um veiðu eftir botnfiski og rækjum við fiskiførum undir føroyskum flaggi í russiskum sjógvi í 2019, sum broytt við kunngerð nr. 115 frá 15. juli 2019.
Kunngerð nr. 168 frá 21. desember 2018 fiskiskapin hjá skipum úr ES-londum í føroyskum sjógvi í 2019.
Kunngerð nr. 167 frá 21. desember 2018 um fiskiskapin hjá skipum undir grønlendskum flaggi í føroyskum sjógvi í 2019.
Kunngerð nr. 166 frá 21. desember 2018 um fiskiskapin hjá skipum undir norskum flaggi í føroyskum sjógvi í 2019.
Kunngerð nr. 163 frá 18. desember 2018 um at skipa fiskiskapin eftir djúphavsfiski, rækjum og øðrum fiski í altjóða sjógvi í NEAFC í 2019, sum broytt við kunngerð nr. 113 frá 15. juli 2019.
Kunngerð nr. 149 frá 22. november 2018 um loyvi til royndarfiskiskap.
Kunngerð nr. 74 frá 9. mai 2018 um menningarkvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til menningarætlanir í ávísum økjum 2018.
Kunngerð nr. 32 frá 17. apríl 2018 um at bjóða út rættindi til at veiða svartkjaft, norðhavssild og makrel og botnfisk í Barentshavinum á uppboðssølu í 2018.
Kunngerð nr. 30 frá 11. apríl 2018 um at friða ávísar leiðir í føroyskum sjógvi fyri veiðu við troli og øðrum reiðskapi.
Kunngerð nr. 28 frá 23. mars 2018 um treytir fyri landing í Føroyum og uppboðssøla av veiddum fiski, sum seinast broytt við kunngerð nr. 40 frá 16. apríl 2019.
Kunngerð nr. 193 frá 29. desember 2017 um fiskiskapin í føroyskum sjógvi við fiskiførum, sum eru skrásett í Føroyum, sum seinast broytt við kunngerð nr. 132 frá 28. september 2018.
Kunngerð nr. 183 frá 29. desember 2017 um undantak frá at føra alt av fiski til lands.

Ásett er, at kunngerðir fara úr gildi sambært ásetingum um gildistíð í hesum kunngerðum ella við kunngerðum, sum koma í staðin fyri verandi kunngerðir.

Flestu kunngerðir hava eina áseting um tíðaravmarkaða gildistíð, og fara tær úr gildi 31. desember 2019. Kunngerðir, sum ikki eru tíðaravmarkaðar, fara úr gildi við nýggjum kunngerðum, sum koma ístaðin.

Stk. 4. Kunngerðir við heimild í lógum, sum vóru settar úr gildi við lógini um fyrisiting av sjófeingi ella løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, men sum hava verið galdandi, vera framhaldandi í gildi. Hesar eru:

Kunngerð nr. 29 frá 28. mars 2017 um elektroniskar fráboðanir fyri fiskifør undir norskum og íslendskum flaggi í føroyskum sjógvi.
Kunngerð nr. 134 frá 22. desember 2016 um økisfriðingar í NAFO skipanarøkinum, sum seinast broytt við kunngerð nr. 165 frá 21. desember 2018.
Kunngerð nr. 64 frá 6. juni 2016 um avreiðing av livur og treytir fyri tillutan av eyka fiskidøgum.
Kunngerð nr. 113 frá 11. desember 2014 um økisfriðingar í altjóða sjógvi í NEAFC.
Kunngerð nr. 112 frá 11. desember 2014 um kæru, tá fiskiloyvi verða tikin aftur
Kunngerð nr. 85 frá 16. juli 2014 um skipan av fiskiskapinum eftir hummara á føroysku landleiðunum.
Kunngerð nr. 67 frá 16. mai 2012 um landingar og avreiðingar av fiski og fiskavørum.
Kunngerð nr. 2 frá 12. januar 2011 um umbýti av fiskidøgum millum innaru og ytru fiskidagaleiðirnar, sum broytt við kunngerð nr. 133 frá 26. september 2011.
Kunngerð nr. 65 frá 3. juni 2010 um trolveiði innan fyri 12 fjórðingar, sum seinast broytt við kunngerð nr. 101 frá 17. juli 2018.
Kunngerð nr. 77 frá 25. august 2008 um gjald fyri avgreiðslu av fiskiloyvi og váttan um avhending av fiskidøgum og kvotum.
Kunngerð nr. 77 frá 3. juli 2006 um friðing av ósanum við Leynar.
Kunngerð nr. 4 frá 9. februar 2006 um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum, sum broytt við kunngerð nr. 1 frá 10. januar 2012.
Kunngerð nr. 104 frá 14. september 2005 um flyting av fiskiloyvum millum útróðrarbátar undir 15 tons.
Kunngerð nr. 95 frá 27. juni 2005 um treytir fyri avreiðing í Føroyum og uttanlands, sum seinast broytt við kunngerð nr. 111 frá 11. desember 2014.
Kunngerð nr. 23 frá 16. mars 2005 um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum fyri skip úr Noregi og ES-londum.
Kunngerð nr. 6 frá 20. januar 2005 um avreiðing av feskum uppsjóvarfiski at frysta ella meirvirka í Føroyum, sum seinast broytt við kunngerð nr. 69 frá 16. mai 2012.
Kunngerð nr. 54 frá 31. august 2004 um veiðidagbøkur fyri føroysk fiskifør.
Kunngerð nr. 45 frá 6. juli 2004 um eftirlit við fiskiførum um fylgisvein.
Kunngerð nr. 44 frá 9. apríl 2003 um umrokningarfaktorar.
Kunngerð nr. 101 frá 26. juni 1996 um umbýti av fiskidøgum til línuveiðu til fiskiskap við snellu.
Kunngerð nr. 125 frá 17. august 1995 um Fiskiveiðieftirlitið.
Kunngerð nr. 56 frá 26. mars 1993 um serlig tiltøk til vernd av ungfiski.
Kunngerð nr. 55 frá 26. mars 1993 um heiti ungfiskur av ávísum fiskasløgum og hámark fyri blanding av ungfiski.
Kunngerð nr. 92 frá 26. juni 1990 um síla- og laksaveiðu.
Kunngerð nr. 21 frá 16. mars 1984 um bann móti laksaveiðu uttanfyri landleiðina.

Kunngerð nr. 108 frá 4. november 1982 um laksaveiðu á landleiðini.

Hesar kunngerðir hava framvegis gildi í tann mun, tær ikki eru í ósamsvari við ásetingarnar í hesi løgtingslóg.

Ásett er, at kunngerðir fara úr gildi við kunngerðum, sum koma í staðin fyri verandi kunngerðir.

Tær kunngerðir, sum eru fevndar av stk. 3, eru ikki tíðaravmarkaðar og fara tí ikki úr gildi sjálvvirkandi. Hesar kunngerðir fara úr gildi, tá nýggjar kunngerðir koma ístaðin.

**Til § 74.**
Stk. 1-2. Skiftisreglur viðvíkjandi revsimálum. Brot, sum eru framd, áðrenn hendan løgtingslógin um sjófeingi er komin í gildi, verða revsað eftir løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi ella løgtingslógini um vinnuligan fiskiskap. Hugsað verður um ta støðu, at eitt brot er framt, áðrenn løgtingslógin um fyrisiting av sjófeingi er komin í gildi, men er uppdagað aftaná. Er hinvegin talan um leypandi/framhaldandi brot, sum eru framd, áðrenn løgtingslógin um fyrisiting av sjófeingi kemur í gildi, og brotini halda áfram aftaná, verða hesi brot revsað eftir løgtingslógini um fyrisiting av sjófeingi.

Fiskimálaráðið, 1. november 2019

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Ummæli frá Hummarafelagnum
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Føroya Fiskimannafelag
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Vørn
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Felagnum Nótaskip
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Havstovuni
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Reiðarínum hjá Sandshavinum
Fylgiskjal 7: Ummæli frá Eivind Jacobsen
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 9: Ummæli frá Føroya Reiðarafelag
Fylgiskjal 10: Ummæli frá Jógvan Elias Winther Poulsen
Fylgiskjal 11: Ummæli frá Spf. ANRU
Fylgiskjal 12: Ummæli frá Fiskivinnuráðnum
Fylgiskjal 13: Ummæli frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag
Fylgiskjal 14: Ummæli frá Sjóvinnustýrinum
Fylgiskjal 15: Ummæli frá Maskinmeistarafelagnum
Fylgiskjal 16: Ummæli frá P/F Enniberg
Fylgiskjal 17: Ummæli frá Búskaparráðnum
Fylgiskjal 18: Ummæli frá Umhvørvisstovuni
Fylgiskjal 19: Ummæli frá Felagnum Garnaskip
Fylgiskjal 20: Ummæli frá P/F Thor
Fylgiskjal 21: Ummæli frá Dátueftirlitinum